

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12

LØGTINGS-TIDINDI

1961

Lögtingstíðindi

1961

TÓRSHAVN 1963
DAGPRENT

INNIHALD

ÓLAVSÓKUTINGIÐ 1961

bls.
Tingsetingin VII
Tingmenninir VIII
Frágreiðing frá lögmanni 1
Tingnevndir 19

LÖGTINGIÐ

Lögtingshús 344

LANDSFYRISÆTI

Landsstýrismál 110

ALMENN MÁL

Broyting í lög um fólkapensión 38
Avlamispensión 40
Broyting í lög um almenna forsorg 41
Broyting í lög um barnatilskot 43
Býti av Föroya parti í avlamispensión 103
Studningur til samkomuhús 311
44 tíma arbeiðsvika 350

DÓMSMÁL

Landsrætturin 192
Broyting í borg. straffilóg 222
Broyting í lög um rættarstöði hjá börnum 226
Broyting í rættargangslógini (faðirskapssök) 228
Broyting í rættargangslógini 229
Djóravernd 258

FÍGGJARMÁL

Fíggjarlögtingslög 1962/63 21
Uppkrevjing av posttolli 101
Býti av avlopi hjá happadráttinum 107
Broyting í toll-lógini 191
Rentan av láni við panti í fastari ogn 195
Frígoymslur 206
Landsskattur og kommunuskattur 259
Skattur til landskassan 273
Góðkenning av almennum rokuskapum 311
Broyting í lóg um happadrátt 257
Húsið á skansanum 319
Flutningsstuðningur til kolaframleiðarar 336
Endurgjald fyri grund undir oljugoymslum 345

HEILSUMÁL

Dronning Alexandrines hospital 96
Broyting í læknaskipanini 340
Röntgentól til læknadömir 343
Sjúkhússtýrir 351

KIRKJUMÁL

Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 1962/63 173

KOMMUNAL MÁL

Tinglýsingarlóg 120
Matrikuleringarlóg 121
Broyting í lóg um Tórshavnar býarstýri 269

LANDBÚNAÐARMÁL

Djóralæknalön 52
Eftirlön til fyrrv. djóralækna 56
Djóralækni 111
Innflutningur av eplum 218
Mjólkastudningur 220
Heimagjördar ullvörur 256
Lán til keyp av seyði at sleppa 270
Útflyting av ull 280

LÁNSÁBYRGDIR OG LÁN

Veðhald av láni til agnkeyp 32
Eykalán og eykastudningur til nýggj fiskiför 41

Veðhald av láni til S.E.V. 65
Veðhald av lánum til smærri idnaðarvirkir 198
Lán til húsabygging 203
Stuðling av vinnuligum framburði 209
Veð í veiðu 212
Kurslán 221
Ábyrgd av útgerðarlánum til útróður í Grönlandi 272
Ábyrgd av láni til Sumbiar kommunu 278
Veðhald av lánum til smærri idnaðarvirkir 296
Lántöka (studning S.E.V. og elfelagið Suðuroy) 299
Ábyrgd og studningsveiting tit elfelögini S.E.V. og Suðuroy 300
Ábyrgd til Fuglafjarðar kommunu 310
Lán til umvæling av fiska- og turkivirki 346
Ábyrgd av láni til Tórshavnar kommunu 348

NAVNAMÁL

Navnalóggávan 181
Föroysk navnalóggáva 191

SAMFERÐSLUMÁL

Projektering av tunnel í Norðoyum 59
Nýtt strandfaraskip 72
Umbygging av Smirli 78
Nýggj ferðslulóg 106
Lóg um vegamál 123
Havnargerð á Sandi 127
Dýping av Streyminum 169
Vegurin Fútaklett-Oyragjógv 214
Vegurin Hvalba — Sandvík 217
Vegurin Oyndarfjörð — Hellurnar 237
Nýtt strandfaraskip (Vágarnar) 238
Nýtt strandfaraskip (Mykines) 239
Vegasamband Bötur — Gásadal 253
Vegir til Sunds og Kaldbaks 254
Skip til strandfarasiglingina 261
Projektering av vegabygging 286
Vegir og lendingar 313

SJÓVERJUMÁL

Sjómanslóg 29
Broyting í lóg um endurnýgging av skipaflotanum 50

Minstalön og viðbót til útróður í Grönlandi 75
Broyting í lóg um fiskavraking 79
Vaktarskip 91
Vaktar- og bjargingarskip 93
Broyting í lógini um endurnýgging av skipaflotanum 94
Uppskot til avgerðar um endurnýgging av skipaflotanum 95
Vaktar- og bjargingarskip 125
Minstalön, prísviðbót og frítíðarlön 129
Kanning viðv. fiskirakstrinum 138
Broyting í lóg um endurnýgging av fiskiskipaflotanum 143
Skeið á sjómansskúlanum í radar 168
Föroyskt mál í skipaeftirlitinum 168
Uppskot til samtyktar um «Leiv Óssursson» 171
Yvirföka av trolaranum «Leiv Óssursson» 175
Maskinskúlin 199
Hækking av viðbót til útróðrarfisk 231
Fiskimarkið 236
Bygging og rakstur av fiskiídnaðvirkjum 241
Studul til royn við kraftblokki 250
Kokkaskúli 258
Leivur Óssursson 276
Minstalön og prísviðbót 282
Broyting í fiskivinnulógini 1893 309
Sunnudagshvíld á föroyskum skipum 317
Millumtinganevnd í fiskimarks- og felagsmarknaðmálinum 352

SKÚLAMÁL

Studentaskúlalærararlönir 33
Studentaskúlabygningin í Hoydölum 74
Fyriskipan um gymnasieskúlar 149
Skúlabókasövn 338

TELEFONMÁL

Frágreiðing frá nevndini í telefonmálum 60
Telefonsamband millum Sandoy og Skúvoy 151
Telefonsamband við Suðuroy 171
Telefonsamband í Suðuroy, Sandoy og Skúvoy 186

TRYGGINGARMÁL

Broyting í vanlukkutryggingarlógini 155
Sjúkatryggingarmál 266
Lívstryggingarvirki 320

TÆNASTUMENN

Broyting í dænastumannalógini 274

VAL AV NEVNDUM OG MONNUM

Val av nevndum og monnum 233

VERJUMÁL

Kjarnorkuspreingingarnar 92

VINNUMÁL

Vörumerkir v. m. 30
Felagsmarknaðurin 81
Landshandil 161
Studling av föroyskum arbeið 223

Tingið var inni í 67 dagar og hevði 94 fundir.

Ólavsökutingið 1961.

Ár 1961, ólavsökudag kl. 13 var Föroya lögting sett. Tingformaðurin frá seinasta tingi, J. F. Øregaard lýsti Ólavsökutingið at vera sett sambart skriv frá lögmanni d. 17. juli 1961.

Tingmenninir vóru:

Hákun Djurhuus, Klaksvík, ff.
Johan Simonsen, Klaksvík, tf.
Poul Jacob Olsen, Klaksvík, jv.
Samuel Petersen, Klaksvík, sj.
Johan Poulsen, Strendur, sh.
Jens Chr. Olsen, Toftir, sb.
Frederik Hansen, Söldarfirði, tf.
Jógvan Högnesen, Fuglafirði, tf.
J. Fr. Øregaard, Gölu, jv.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Hans Iversen, Kvívík, sh.
Sigurd Joensen, Tórshavn, tf.

Leon Joensen, Sörvági, sb.
Haldor Hansen, Sörvági, jv.
Vilhelm Nielsen, Sandavági, ff.
Trygve Samuelsen, Tórshavn, sb.
Marius Johannesen, Tórshavn, sj.
Hanus við Högadalsá, Tórshavn, tf.
Kjartan Mohr, Tórshavn, fb.
Jacob Lindenskov, Tórshavn, jv.
Knút Wang, Tórshavn, ff.
Erlendur Paturssson, Tórshavn, tf.
Johan P. Davidsen, Sandi, jv.
Johan Danbjörg, Porkeri, jv.
Peter Mohr Dam, Tvöroyri, jv.
Dion Nolsöe, Vági, jv.
Hemming Jespersen, Tvöroyri, tf.
Kr. Djurhuus, Tvöroyri, sb.
Andreas Djurhuus, Vági, sb.
Niels Holm Jacobsen, Hvalba, ff.

Sum tingformaður var J. Fr. Öregaard valdur og sum næstformaður Johan Poulsen eftir lutakasti við Sigurd Joensen.

Sum tingskrivarar vóru Jacob Lindenskov og Frederik Hansen eftir lutakasti við Jens Chr. Olsen.

Tingformaðurin bað tingmenn rópa eitt 9 falt hurra fyri kongi og eitt 3 falt fyri Föroyum.

3. november 1961 og 8. mars 1962 tók Hilmar Petersen sess á tingi fyri Johan Poulsen og 2. april sum varamaður fyri Jens Chr. Olsen, 9. november Reinhold Thomsen fyri Jens Chr. Olsen, 8. mars var Simun Pauli Poulsen í Vestmanna góðtikin sum varamaður fyri Sigurð Joensen, men bað um friloyvi og 10. s. m. var Poul Jacob Djurhuus í Kollafirði góðtikin sum varamaður, og 8. mars var Hans Jacob Ellingsgaard á Eiði góðtikin sum varamaður fyri Frederik Hansen.

Lögmansröðan á Ólavsöku 1961

Onnur tingsetan av hesum valskeiði er komin at enda og vit taka upp tríðju.

Hin seinasta var tann longsta, ið hevur verið. Men eg hugsi, at vit av sonnum kunnu siga, at hon var ein hin gróðurríkasta.

FISKISKAPURIN SVEJK

Alt bar tó ikki so væl í band, sum ynskiligt hevði verið.

Tað fall soleiðis meint, at fiskiskapurin á okkara gomlu leiðum stóreliga sveik eins og árið frammanundan.

Men tilíkum hendingum ráða vit ikki fyri.

HITT MEINASTA HÖGGIÐ

Aftrat hesum kom so hitt meinasta höggið, vit hava verið fyri, nevniliga skerjingin av veiðirætti okkara á fjarökjunum undir Íslandi og við Noregi.

Henda skerjingin hevur likasum gjört kravið um viðkan av okkara veiðirættindum í Grönlandi týdningarmiklari enn á nökrum sinni.

GRÖNLAND SUM ENDURBÓT

Landsstýrið legði eisini árar í sjógv fyri störri rætti í Grönlandi við tað sama, ið tað var sett.

Útbyggingin av Föroyingahavnini og stórviðkan av virkjunum har eru farin fram.

Tað var mikil broyting og mikið framstig, ið vóru vunnin í samráðingunum við ríkisstýrið og grönlendska landsráðið um grönlandsmálið. Grönlendskar havnir við nýggjum veiðiöki aftrat teimum, vit hövdu

frammanundan, rætt fyri ávísl bátatal at avreiða til kongaliga grönlendska handilin og fyri hesar bátar rætt til at veiða alla staðni, har ið grönlendingar veiða, öki, ið hava verið stongd áður.

Undir samarbeiðsstevnna viðvíkjandi Grönlandi fellur ætlanin at byggja stórvirki í Godthaabsfirðinum við KGH, föroyingum og dönum sum parlnarum, stórvirki, sum í leiðslu og handilsskapi skal standa óbundið av KGH og tí franíhjárætti, hetta virki hevur.

Fyrsta hurðin til samarbeiði við grönlendingar er skipanin viðvíkjandi föroyinga útróðri við avreiðing til tann grönlendska kongiliga handilin.

Væl hava föroysku útróðramennirnir til KGH fingið somu minstalönartrygging og prisviðbót frá lönjavningargrunninum sum fiskimenninir, ið arbeiði fyri egnu rokning haruppi. Men so hevur KGH sum viðurgjald ímóti hesum goldið vanligt avgjald til lönjavningargunnin og landskassans fyri tann fisk, sum hann hevur latið turkað í Föroyum. Talan hevur verið um eini 1400 fons. Hetta hevur givið nógv hundrað túsund í turkilön.

Ræsurnar eru sostatt viðkaðar munandi í Grönlandi, men mátið er at föroyingar og grönlendingar skulu hava sama rætt hvör hjá öðrum.

NORSKA SJÓÖKI

Viðvíkjandi fiskiskapinum á norska sjóökinum hevur landsstýrið eftir samráðing við teir könastu menn, ið hava fiskað haruppi, heitt á norsku stjórnina at vera okkum lagalig. Her er serliga talan um fiskiskap við Finnmörkina. Sleppa vit ikki at royna herímillum 6 og 12 verður snökt ómöguligt at royna har. Tað av fiskileiðum, sum er uttanfyri 12 mil har, er ov litið at vága eina so langa leið sum hagar upp.

Vit hava vónina um, at norðmenn vera okkum lagaligir.

Í ÍSLANDI

Skerjingin við teimum 12 milunum av okkara veiðirætti har uppi neit sum sagt okkum meinast.

Landsstýrið hevur tí haft í huga at fáa eina serstöðu í Íslandi. Her var serliga hugsað um fiskiskapin við snöri og snellu.

Men einki kundi gerast fyrrenn drátturin við bretar var vorðin greiddur.

So brátt sum stríðið millum íslendingar og bretar var lokið, vendi landsstýrið sær til uttanríkisráðið dauska at fáa samráðingar við Is-

lendingar í lag. Sama varð gjört beinleiðis yvirfyri Íslandi, við áheitan á íslendska sendiharran í Danmark harra Steffan Johun Steffansson um at fáa skipað fyri samráðingum um serlig veiðirættindi í Íslandi fyri föroyingar. Landsstýrið hevur eisini havt beinleiðis brevaskifti við íslendskan ráðharra um samráðingar og troðkað á at fingið tær í lag so skjótt sum mögulígt.

Seinast,ið tingið var saman samtykti tað at taka upp samráðingar við Ísland um munandi störri fiskirættindi har uppi.

So kom endaligt svar frá íslendsku stjórnini, at hon var fús at byrja samráðingar tann 17. juli.

Hesar samráðingar hava so verið við tí úrsliti, at föroyingar hava fingið fastan rætt at veiða við snöri og snellu alt árið á stórum ökjum kring Ísland innan fyri sjómarkið uttan á einum strekki í Vesturlandinum, har ið íslendingar vunnu minst við útflattninginum av fiskimarkinum. Summa staðni er veiðirætturin tíðarmarkaður í árinum. Men so væl er vunnið, at menn halda, at föroyingar nú kunnu reka vanliga snöris- og snelluveiðu haruppi, við Steinin, Grímsoy og á öðrum víðum ökjum norðan fyri, á Suðurlandinum, Austurlandinum og Vesturlandinum sum fiskilíkindini nú eru.

Rætturin fyri snöris- og snelluveiðu er ikki avmarkaður til ávist áramál, men er leypandi víðari og ætlaður at verða varandi, um tað so er 6 mánaðar uppsögn hjá báðum pörtum.

NEW FOUNDLAND

New Foundland liggur fjarast. Men har verður drivin störur fiskiskapur av öllum fiskivinnutjóðum á hesari hálvu. Vónandi verður fiskimarksspurningurin ikki at koma okkum tvörari har, enn tilfellið er í dag.

SJÓMARKSSTÖÐA

Sjómarksstöða landsstýrisins er óbroylilig 12 mil út frá heinum linjum. Hövuðsálitið hjá okkum er sjógvurin við Föroyar og uppi í Grönlandi.

NÝGGI FISKISKIP Í HÓPATALI

Men til at reka fiskiskap á so fjarum leiðum sum á fiskigrunnunum við Noreg, Bjarnoynna, Grönland og New Foundland krevjast stór skip og nógv skip.

Tað er tí betri eydnast at fáa til vega eina ilegginngarskipan til keyp og bygging av hesum skipum.

Og nógv skip eru komin.

Nógv eru við at koma.

Og hugur tykist stöðugt at vera at fáa nýggj skip.

Av stórum góðum skipum hava vit:

Línubátar: 24; aftrat hesum er 12 kontraheraðir, og eru fleiri felög í umbúna at kontrakta nýbyggingar.

Trolarar: 6 bræmnýggjar; av stórum hövdu vit frammanundan 6 og av gomlum nútímansgjördum 2 til fiskiskap og 1 til farmaflyting. Umfram tey línuskip, ið komin eru og sum menn eru við at kontrakta, verða onnur, sum væntandi vilja koma aftrat, og vilja vit av nýbyggningum og keyptum nýggjum skipum í 1962/63 soleiðis hava fingið til landi millum 50 og 60 og innan 5-ára skeiði eini 70-80.

Einstak av hesum sum Bakur, tað seinasta hjá Skipafelagnum, og Hoyvikingur eru útgjörd serliga sum frystiskip. Öll hava frystigreiðir til agn- og kalvafrysting og goymslu í störri og minni mun.

Summir trolarar hava fiskamjölsvirki umborð.

Við hjálp av realkredittstovnum, lán frá fiskaribankanum og studninginum, sum landskassin við lutvís peningi frá lánum, sum landsstýrið hevur tryggjað og lutvís við peningi á fíggjarlógini skuldu vit verið förir at tikið takið at veitt okkum nóg nógv skip til landið, um fiskimenn og aðrir, ið hava hug at fáa sær skip, kunnu veita til vega eginpeningin.

Tessvegna gluppu tey 30 belgisku skipini okkum av hondum, hóast alt eftir rættum skuldi verið í lagi at fingið tey. Frá belgisku síðu verður sagt, at tað var vanlukkan, ið við Kongostríðnum hálvdi seg yvir Belgiu, sum forðaði hesum stóra byggipláni at ganga út.

Men enn hevur sum sagt ikki staðist á hjá fiskimonnum og öðrum at fingið lán til skipabygglug, tá teir kundu greiða sín part.

Hóast talið av teimum nýggju skipunum er stórt, er vöksturin ikki so munandi, sum ein annars kundi hitdið, tí ein so stórur partur av teimum gomlu skipunum er lagdur vegna aldur ella dygdarloysi. Men tá ið tað er farið burtur av við upplegging, sum ikki kann ella ikki fær loyvi at halda fram við fiskiskapi, verður tann stöðugt vaksandi fiskiflotin at muna til lítar, so tann dagur kortini ikki er fjarur, tá ið vit hava nóg mikið av nýggjum skipum til okkara fiskimenn.

Tað hevur verið stuttligt at fylgja við, hvussu okkara nýggju skip hava kunna drivið lönandi fiskiskap við Föroyar allan veturin, ta tíðina tá ið okkara skip annars í gomlum dögum lógu fyri teymi.

SKIPABYGGING Í FÖROYUM

Spell bara, at vit ikki eru fyrireikaðir at byggja skipini sjálvir. Öðrvísi hevði verið, um teir menn, ikki á sinni í blaðgreinum og á annan hátt lögdu seg í buktina at forða, tá ið skipabyggningaspurningurin straks aftaná seinasta heimsbardaga var reistur á dyggum grundarlagi.

Spónur er kortini nú settur í greytin.

Hitt fyrsta stálskipið er liðugt frá föroyskari skipasmiðju og farið til fiskiskaps.

Og kjölurin er lagdur til tað næsta.

Talan er um at fara undir stórfikna skipasmiðju á Skála og at viðka og nútímansgera skipasmiðjurnar í Havn, Tvöroyri og kanska aðrastaðni við.

STUDNINGUR TIL SKIPABYGGING

Til frama fyri skipabygging her á landi er í gildi lög, sum veitir 80 % av farmagjaldinum fyri tilfar til skipabygging sum tilskot til avvarandi skipasmiðju. Haraftrat fær hvör skipasmiðja 6 % av skipsvirðinum í studningi til bygging av fyrsta skipinum og 3 % í studningi fyri komandi skip, hon byggir. Hesi 3 % endurrinda gott og væl 4 %'s umsetingarskattin.

Nevnd arbeiðir við spurninginum, um ráð eru til at veita beinleiðis studning til skipabygging út yvir 6 % studningin til fyrsta skipið og tann nevnda 80 %studningin fyri farmagjald.

Uppskot er ætlað at koma fram í hesu tingsetu, skipabyggingarstudninginum viðvíkjandi.

Um vit komu so langt, at skip vóru bygd á öllum okkara skipasmiðjum, vildi tað verið stórtakið mikla og bast arbeiðsloysinum millum skipstimburmenn okkara.

Skipasmið gevur eisini hópin av arbeiði til aðrar enn skipstimburmenn.

At byggja skip okkara sjálvir er ein so týdningarmikil spurningur at hann má verða lýstur út í æsir, og alt má vera gjört fyri at fremja hann, sum nationalökonomiskt er forsvarligt.

Men helst skuldu vit verið kappingarförir eisini á hesum öki.

«EGNSUDVIKLINGS»-LÓGIN

Hin stóra figgjanin av hesum stórtiltökum er möguliggjörd av Egnsudviklings-laanefonden.

Skipasmiðjan á Skála hevur tilsögn um 1,8 mill. Eisini er givin tilsögn um 2,7 millióna lán til frysti- og flakavirki her í Havn. Fleiri aðrar umsóknir um lán til frysti- og onnur idnaðarvirki eru inni hjá hesum lánigrunni.

Tað er ikki at ivast í, at lán verða játtað, um annars rakstrarlíkindi eru tilstødis á avvarandi plássum.

Erhvervslaanefonden av donsku marshallpeninginum, sum eisini varð settur í gildi fyri Föroyar, fór úr gildi, hevur lent til turkihúsabyggingina, ísvirkini og mong onnur virki, ið eru komin í lag, síðani kriggið hasaði av, nógvar milliónir. Fyri tveimum árum síðani lá hesin peningur um stívar 11 mill. og er vel størri nú.

Nú kemur Egnsudviklingslaanefonden hövuðssakliga at virka ístaðin fyri Erhvervslaanefonden.

Tingið hevur samtykt at sela serliga nevnd, ið er vald at vera landsstýrinum til hjálpar við planleggingini av virkjum og uppbygging av landi okkara við hjálp av «Egnsudviklings-laanefondens». Landsstýrið og henda nevndin í samarbeiði við «Egnsudviklingsraadet», ið hevur skipað fyri stórfingnu fyritökum í teimum sokallaðu arbeiðsleysnoyggjunum í Danmark, verða at loysa uppgávuna at gera ein landsplan til landsuppbyggingar og basan av arbeiðsloysinum hjá okkum.

IDNAÐARLÁN

Aftrat «Egnsudviklings-laanefonden», ið sum sagt er ætlaður fyrst og fremst at taka sær av teimum stóru landsuppgávum er möguleiki frá landskassanum at fáa veðhald fyri láni til smærri idnaðarvirki. Hesi veðhald kunnu til samans ganga uppí 200.000 um árið, og eiga at verða at halda fram í komandi tíðum.

Snörisvirki og húkavirki og onnur idnaðarvirki eru sett á stovn við veðhald frá landskassanum sambært hesa lóg.

Tað er ikki at ivast í, at markið fyri hæddini á hesum veðhaldum eigur at verða hækkað eftirhondini, sum törvurin til hesi lán veksur.

Nóg nógv skip til okkara arbeiðsföra sjófólk — her er ikki minst hugsað um farma- og ferðafólkaskip — og hin störst möguliga heimaidnað til fullfilvirkan av okkara fiskiframleiðslu, so hon kann verða seld til brúkarar líka at koma í kökin til húsmóðirina at nýta undir matgerð sini — tað er ein hövuðsuppgáva, ein av teimum mongu, sum landsstýrið fegið vil vera við til at loysa.

BÚNAÐARMÁL

Búnaðurin stendur í stað ella fer heldur aftur sum innlögulið í búsarhaldinum.

Hettar er stórt spell.

Tað er övugt og stórt landstap, at vit t. d. ikki dyrka so frægt av eplum og grönmeti og kjöti, sum vit brúka sjálvir.

Her má umskipan fáast í lag.

At vit skulu brúka okkara egnu framleiðslu, okkara egnu vöru, áðrenn vit fara út av landinum við dýrabarari valutu at keypa tað, sum vit annars makliga kunna gera sjálvi, er övugt. Hetta skuldi verið eyðsæð.

Ein landsandeilsskipan av söluni og keypinum av búnaðarframleiðsluni og tí, ið má verða flutt inn av búnaðararbeiðstólum, frø, löðum og öðrum, vildi gjört tað möguligt at brúkt okkara vörur fyrst, áðrenn innflutt verður. Við tollbyrgingum, sum onkur hevur skotið uppá, gerst tað ikki, bara av teirri grund, at verjitollur ikki er loyvdur sambæt avtalurnar í GAT og teimum 6 «og teimum 7».

Henda skipan skuldi sjálvandi ikki borið við sær, at tann stóra fjöldin, sum ikki er framleiðari, men bara keypari av landbúnaðarvörum, verður fyri tí, at vörurnar komu at verða dýrari, enn tær kunnu fáast við frium handli sum nú.

Framleiðsla okkara eigur at vera kappingarför. Men annars er í so mongum londum talan um prísjavnara annaðhvört við tilskoti til framleiðarin ella við prísviðbót til brúkarin.

Mest mögulig framleiðsla í landinum er gott hevróp hjá fólki, har ið inntöku trot ella ov lítil inntöka er.

Ein treytin fyri, at vit kunnu verða prískappingarförir, er at okkara landbúnaður verður mekaniseraður í so stóran mun, sum gjörligt er. Okkara land er meiri heyggjut og grýtngt enn flestu aðrastaðni. Tað krevjast kanska serlig mekanist amboð. Tað megu so okkara klóku búnaðarmenn leggja seg eftir at «konstruera», sjálvir ella at fáa sær kynstrigar kreftir at gera tað.

Tað kann ikki eita, at vit ikki duga ella kunnu.

Trupulleikarnir eru til fyri at vinna á.

HAVNA- OG VEGAMÁL

Lika undan valinum var hin stóri havnabyggingarplanurin upp á 36 milliónir samtyktur at gera soleiðis, at helmingurin skuldi rindast í 10 ár, og hin helmingurin í 20 ár, atvíkavíst við 1/10 og 1/20 um árið. Men

tað var ikki nóg nógvur peningur fyri ikki at siga eingin peningur settur á fíggjarlógini til hetta endamál.

Í landsstýrisins og samgonguflokkanna stóra pláni er peningur tryggjaður til hesa veldugu havnaætlan.

Summi av havnaarbeiðunum eru í gerð. Onnur eru undir fyrireikan at fara í gerð. Tessverri stendur á tí tekniska fyrireikingararbeiðinum. Okkara verkfröðingsskrivstova er ov illa mannað, serliga hevur hetta verið tilfelli seinastu árini, nú ið so nógv arbeiði, stórarbeiði, hava verið í gerð undir leiðslu av landsverkfröðingsskrivstovuni.

Vit megu so vitt möguligt royna at fáa arbeiðini detailprojekteraði og so útlisiterað, hvarvið vit kanska fáa arbeiðini gjörd biligari, og hvarvið vit ið hvussu er kunnu fáa fleiri verkfröðingar í arbeiði upp á tey ymsu projektini.

Enn eru stór strekki eftiri at gera av nýggjum vegi, til tess vit av sonnum kunnu siga, at vit hava eitt fullfíggjað vegasambaud bygdanna millum. Men tað er útí við at hava gjört hesar nýggju vegirnar, íroknaðar fjallasmogurnar í Norðoyggjum og Suðuroy og kanska aðrastaðni við. Mesti parturin av teimum gomlu vegunum eru tíðaróhóskandi og í veruliga ónýtiligum standi, ov smalir, fullur av holum, hyljum og knortlitum undirlendi.

Hesir vegir megu umafturgerast, breiðkast, slættast og gerast sterkir og helst asfalterast.

Hetta kostar alstóran pening.

Okkara verkfröðingsskrivstova talar um 70 -75 milliónir.

Tað er hvörjum manni eyðsæð, at hetta lakið kunnu vit ikki taka uttan við biligum og helst rentufrium lánum.

Vegagerðin vildi mangastaðni, har ið einki heimaarbeiði er, komið sum ein vælsignað hjálpandi hond í arbeiðsloysinum.

Státurin gevur milliónur í arbeiðsloysisstudningi niðri, meðan hann einki letur her.

Íleggingarhjálp til uppbyggiug av okkara landi er ein státsuppgáva, og arbeiðsloysisstudningsmál er ein social uppgáva.

Landsstýrið hevur reist spurningin yvir fyri státsministaranum um státslán til vegabyggingina og vegna umstöðurnar at veita renturnar sum eina eyka eingangshjálp at ajourföra vegabyggingina við hin partin av ríkinum og sum eina eykahjálp móti arbeiðsloysinum.

Tað er í umbúna at seta fram eitt fullfíggjað uppskot um fimmára vegaætlanir til fullfíggjan av vegagerðini, og at sökja státin um rentufrí ella heilt bilig lán at lúka hesa uppgávu. Fyri at eingin skal misskilja, verður at viðmerkja, at eingin endalig avgerð liggur tó fyri frá ríkisstýrisins síðu.

Sum praktisk upplýsing kann vera sagt, at fjallasmogan í Hvalbe-

Tvöroyri er farin í gerð. Fjallasnogan í Norðoyggjum er skitsuprojekterað. Skitsuprojektið metir arbeið at koma at liggja um 6,3 milliónir.

Oyggjarvegurin stendur uppá, at kommunurnar vera samdar um tann partin, ið tilkemur teimum at rinda. Men hetta verður vónandi nú at koma í lag. Landsstýrið kallaði avvarandi kommunur saman, og vóru teir frammöttu umboðsmenn kommunanna samdir um at viðmæla eitt uppskot til samtyktar á einum löggildum kommunufundi. Tílíkar samtyktir liggja fyri frá avvarandi kommunum uttan Havnar kommunu.

Ímeðan biðað hevur verið eftir eini endaligari samtykt frá kommununum, hevur landsverkfröðingurin skipað fyri, at tann partur av Oyggjarvegnum, ið gongur frá Kollafirði til Hósvíkar hevur verið í arbeiði við greiðum, ið vóru fluttar oman úr Mjörkudali til Kollafjarðar.

Um tað nú, sum vónað, gongur í lag við semju millum avvarandi kommunur, ið talan er um skulu vera um kommunanna partin av vegum frá Kollafirði til Mjörkadals, verður hetta oyggjarvegararbeiði byrjað nú á heysti komandi.

Játtað vórðu jú veðhald fyri láni at byggja Oyndarfjarðarvegin og Oyrargjáar-Fútaklettsvegin. Hesir vegir eru so at projektera og at fáa lán til. Tá ið tað er í lagi, verður arbeiðið at fara í gongd.

Frá landsstýrisins síðu verður gjört tað, ið möguligt er, fyri hesi vegarbeiði og onnur koma til veruleika.

Men peningaspurningurin og tann tekniska síðan av vegagerðini er alt annað enn sum fótur í hosu, so stór sum krövini eru í allar ættir eftir peningi.

STUDENTASKÚLIN

Frá studentaskúlamálinum er at siga, at ætlanin er at fara niðan í Hoydalar at halda skúla í sanatoriihúsinum. Fyrireikingar verða gjördar at byrja við eini kostardeild, so langt sum pláss er til tess. Kóki- og matgerðargreiðir eru falar. Talan verður at byrja við um einar 30 kostdeildarnæmingar. Har verður fyrst og fremst talan um bygdaskúlanæmingar, sjálvandi.

Tá ið skúlin við leikfimishöll er liðugur, leikvöllur gjördur — sprongt er niður gjögnum hamarin niðan fyri, so nú verður möguligt at drena flötuna, og verður tá möguligt at fáa har ein hin besta leikvöll, vit hava í Föroyum.

LESNAÐARSTUDNINGUR

Lesnaðarstudningur til studentar og onnur, ið lesa, er hesi hæði árini

hækkaður munandi. Meðan studenturin fekk at kalla ongan studning áður og mátti gjalda fyri skúlan sjálvan, er friur skúli nú, og næmingarnir koma summir, nú síðani Ungdommens uddannelsesfond eftir tilmæli frá landsstýrinum varð gjört galdandi eisini fyri Føroyar, upp í hálvtriðja túsund í lesnaðastuðningi. Her er stórbroyting hend, um ein tó enn ikki kann siga, at tryggjað er, at barnanna atstöður til lesnað ikki skal verða treytaður av peningapunginum, men einans av evnunum, ið barninum er givin. Viðari fíggjarlig ábót til lærlingar og lesandi er í landsstýrisins umhugsan.

SKÚLABYGGING

Bygging av skúlum er farin fram sum ongatíð áður í Føroya sögu. Tann eini stásiligi skúlin er tikin í brúk eftir annan, hæði í smærri og störri bygdum kring oyggjarnar. Og hópur av skúlum eru projekteraðir og við at fara til byggingar. Men eingin bygging er neyðugari enn hetta, tí góður skúli er hollasta grundarlagi hjá teirri uppvaksandi slektini at byggja og menmast á. Hildið verður fram við skúlabyggingini.

NÝGGJ SKÚLALÓG

Hin nýggja skúlalógin skal nú roynast. Vit, sum vóru við til at greiða atkvöðu fyri henni, hava góðar vónir um, at hon verður okkara börnum og skúlaskapi at hollasta gagni.

Einaferð var talan um centralisering av okkara skúlaundirvísing, serliga viðvíkjandi teimum hægri skúlunum.

Hetta er ikki hent. Tvörturímóti eru settir real- ella preliminerskúlar á stovn víða um landi. Her eru ymsar meiningar. Men eitt kunnu vit kortini verða samd um, at tað er eitt framstig, at so nógvir realskúlar eru settir á stovn, heldur enn ongar uttan realskúlin í Havn at hava. Tað er dýrur gripur fyri foreldrini at kunna hava börnini hjá sær longst möguligt.

LÆRARASKÚLIN

Læraraskúlaundirvísingin er við lóg umskipað, og er roynt at fáa hana á hædd við læraraundirvísingina í Danmark. Men okkum trýtur stöðugt hús til undirvísingina eins og ein venjingarskúla upp á einar 9 klassar.

Um beint í lötuni ikki kann sigast við vissu, at bygging fer í gongd nú

við tað fyrsta, liggur landið tó soleiðis, at vónir eru fyri, at vit innan stutta tíð hava hampiligan læraraskúlabygning við leikfimishöll og «övilsisskúla».

KVÖLDSKÚLI OG TEKNISKUR SKÚLI

Kvöldskúli og tekniski skúlin hava tikið rötur undir seg í slörri mun, enn flestir hövdu væntað. Á hesum ökinum eru hendar stórar broytingar og eru við at henda fleiri.

SKIPARASKÚLIN

Um stutta tíð hava vit skiparaskúlabyggningin lidnan við maskinhöll og öllum nútímans undirvísingarhentleikum, og hava vit so skipað okkum at kunna lúka alla navigatiónarundirvising og maskinmeistaraundirvising, sum menn kunnu geva í öðrum londum. Tá ið vit innan stutta tíð eru fult fyrireikaðir, kunnu vit lata úr navigatiónar- og maskinskúla okkara menn við öllum stigum av læru.

Her er talan um ein yvirtiknan part av okkara undirvising. Hann er vorðin dýrur. Men hann hevur so stóran týðning, at tað má verða goldið fyri hann tað, ið tað kostar, fyri at fáa menn full út á hædd við, hvat ið menn á hesum ökinum hava í hinum norðanlondunum.

SOCIALU LÓGIRNAR

Stórsta góða, sum er vunnið í seinastu árunum, eru tær socialu lógirnar, ið samtyktar vóru í fjör.

Landsstýrið vil seta fram lógaruppskot í hesi tingsetu um fulla ajourföring við socialu lógirnar í Danmörk.

Sambært hesi lógaruppskot vil pensjónarpeningurin til gomul og sjúk hækka mánandi, fyrst komandi 1. apríl 1962 og síðan ta seinastu hækkingina 1. apríl 1963.

Við fullari hækking vilja

hjón fáa	kr. 177,00 um mánaðin	— kr. 5.724,00	árliga
hjón, hvørt annað fær ..	kr. 368,00 um mánaðin	— kr. 4.116,00	árliga
stök	kr. 316,00 um mánaðin	— kr. 3.692,00	árliga
avlamisfólk, gift	kr. 428,00 um mánaðin	— kr. 5.736,00	árliga
avlamisfólk, ógift	kr. 376,00 um mánaðin	— kr. 4.512,00	árliga
einkja	kr. 316,00 um mánaðin	— kr. 3.692,00	árliga
+ fyri hvört barnið	kr. 80,00 um mánaðin	kr. 960,00	árliga

Hjálpin til treingjandi sambært forsorgarlógina vil verða um mánaðin upp til 85 % av pensjónarpeninginum.

Hjálpina til sinnisveik og onnur, sum eru í serforsorg rindar staturin alla, meðan pensjónin verður rindað av tí eina procentinum og restini við 4/7 frá stati og 3/7 frá föroyskari síðu, lögting og kommunum. Hinar socialu útreiðslurnar verða rindaðar við helmingi til hvönn teirra statin og Föroyar.

SJÚKRAHÚSBYGGINGIN

Tey sjúku og gomlu í Hoydölum verða at flyta omau í tann nýggja bygningin við Dr. Alexandrines Hospital.

Hesin bygningurin hoyrir til landssjúkrahúsið.

Ein kann sostatt siga, at landssjúkrahúsið verulíga longu er byrjað at byggjast.

Planirnir til hesa stóru sjúkrahúsbygging eru nú við at verða liðugl gjördir, og farið verður so av álvara at byggja. Sambært samráðingarnar niðri nú seinast um sjúkrahúsbyggingina vil statsministarin seta fram uppskot fyri dansku fíggjarnevndina, at staturin skal leggja allan byggipeningin út. Tá ið so bygt er, verður at avgera, hvussu ið afturgjaldingin skal fara fram av tí peningi, sum Föroyar skulu rinda av sjúkrahúskostnaðinum.

Menn arbeiða av harða hendi uppá detailtekningarnar til byggingina av sinnissjúkrahúsinum. Tá ið tær eru liðnar, verður arbeiðið útboðið og byrjað, so brátt tilboð er tikið.

Landssjúkrahúsið er mett til at koma at kosta um kr. 14 mill. og sinnissjúkrahúsið um kr. 36 mill.

Taka vil sjúkrahúsini á Tvöroyri og í Klakksvík við, er talan um eina sjúkrahúsbygging fyri Föroyar upp á einar 60 mill. kr.

Eitt stórt tal!

Ein statsstudningur til tey sjúku, veiku, gomlu, avlamis og onnur treingjandi upp á ca. kr. 7 mill. umfram státsútreiðslurnar, sjúkrahúsviðgerð av öðrum sjúkum aftrat statsstudninginum til sjúkrakassar er av sonnum ein munandi peningatilförsla innan fyri tað sociala öki. Ein peningatilförsla, ið merkist at kalla í hvörjum heimi her á landi. Henda peningatilförsla her eisini umvegis menning til okkara vinnulív við at ökja um keypinegina.

FRÍTÍÐARLÓN TIL FISKIMENN:

Málið at veita okkara fiskimonnum frítíð við löa varð greitt í fyrra-

árið. At byrja við varð samtykt at lata landskassan rinda frítíðarlönina sum ein stuðul til fiskivinnuna fyri at fáa menn at fara undir at fáa sær skip. Men ætlanin var og er, at arbeiðsgevarin á sjónum eins og arbeiðsgevarin á landinum skal rinda alla frítíðarlönina, og varð tí í seinastu tingsetu samtykt at leggja helmingin av frítíðarlön yvir á arbeiðsgevarin á sjónum fyri so, tá ið lógin um 1½ ár skal reviderast, at samtykkja, at arbeiðsgevarin á sjónum skal rinda alla frítíðarlönina.

MINSTALÖNARHÆKKINGIN

Við seinastu samtyktu lönarlóg fyri kvinnur og menn hava arbeiðararnir vunnið ca. 41 oyru um tíman fyri alt vanligt arbeiði og 27 oyru fyri alt fiskaarbeiði. Atójavni var á hækkingini komst av, at roynt varð at halda fiskaturkingararbeiði eitt sindur lægri í lön, fyri at eggja mannum at leggja fisk upp at turka. Men hækkingin var tó munandi, um 7 oyru meiri enn kravt var á sinni undir lönarsamráðingunum.

Kvinnurnar fingu munandi lönarhækking við, um tær ikki á hesum sinni vunnu á mál, altso javnan lönarrætt við mannin. Hin principiella stöðan er jú, at sama lön skal vera fyri sama arbeiði, uttan mun til, um tað er maðnr ella kvinna, sum ger arbeiði.

TÆNASTUMANNALÖNIRNAR

Tænastumenn fingu sína lönarlóg. Men teir eru ikki nögdir við hana. Nú stendur á hjá starvsmonnum at fáa sini lönarviðurskifti at vera í lagi. Men ber rekur hart og tungt. Vandi er fyri at slita burtur. Tann veruleika verður ilt at káva út yvir.

Landsstýrisins stöða hevur verið, at ikki ber til at hava tvinni lönarlög innan fyri sama ríki.

Tað, sum serliga stendur í botni nú, eru lönarspurningurin hjá studentaskúlalærarunum, landsgraunskoðaranum og djóralæknanum.

HÚSALÁNSVIÐURSKIFTINI

Húsalánsviðurskiftini hava verið ring.

Tað hevur verið landsstýrisins og landsstýrisflokkanna uppgáva at fáa hesi viðurskifti bött.

Hetta tykist at fara at eydnast.

Fyrireikað er, at Östifternes kreditforening kemur at lena til húsa-

bygging, 40 % til 1. prioritet, 20 % til 2. prioritet frá sparikössum ella öðrum lánistovni.

Her skuldi so verið 60 %.

Samráðst er um at fáa 3. prioritets lánvirki at víðka sítt virki til Föroyar.

Tað er útlit fyri, at hetta gongur í lag.

Tað er talan um 15 %'s lán fyri 3. prioritet.

Hin samlaði lánimöguleikin fyri húsalánum í Havn at byrja við og seinni úti á bygdum, har ið matrikulerað er, er sostatt tilsamans um 75 % uttan krav um nakað veðhald frá almennari síðu, státi, lögtingi, ella kommunum.

RAVMAGNAN

Ravmagnanin í Föroyum kom í ta stóru ætlanina, sum ríkisstýrið og landsstýrið vórðu samd um, og hon er farin fram eftir plani.

Nú verður farið undir byggingina av elverkinnum fyri Suðuroy eftir sonnu studnings- og ileggingarprincippum sum fyri SEV.

Landsstýrið er fyri eini samlan av allari el-útbygging í Föroyum.

Plánur er gjördur av könum mannum, og verður ætlandi sett fram lógaruppskot um fremjan av landsútbyggingini, ið miðar ímóti, at allar bygdir í Föroyum skulu fáa el-streym fyri sama pris og sonnu gjaldsfreytir.

UMSETINGARSKATTUR

Til at lúka allar hesar stóruppgávur, ið landsstýrið og landsstýrisflokkarnir eru farnir undir at loysa, krevst mikil peningur aftrat státsins lánum og státsins studningi og tí, sum landskassin higartil hevur havt av innlögum.

Samgonguflokkarnir mátta tí eins og okkara bröður í Noregi og Sviaríki undir ein umsetingarskatt.

Hjá okkum er bara talan um 4 %, meðan norðmenn kravdu 10 %. Her er so bara talan um 4 % av innflutningsvirðinum av öllum vörum utan nökrum neyðsynjarvörum. Hjá norðmonnum er talan um umsetingargjald av öllum handli, allari umseting, eisini tí innlendska handlinum.

BARNASTYRKUR OG SKATTALÆTTAN

Tey 4 % av fakturapeninginum svara til 3 % av útsöluprisinum.

Sum viðurgjald móti hesari avgift eru samtyklar ymsir skattalættar eins og barnastyrkur til forsyrgjarar.

Eingin, sum hevur undir 4.000 kr. í skattainntøku, verður soleiðis at rinda lögtingsskatt.

Øll, sum hava eina skattainntøku undir 9.000 kr. fáa ein barnastyrk upp á 80 kr. fyri barnið og tey, sum hava størri skattainntøku enn 9.000 kr., fáa ein barnastyrk upp á kr. 65 fyri barnið.

Fyri forsyrgjarar vil hesin skattalætti og barnastyrkur koma at týða størri lætta enn útreiðslurnar hjá teimum av umsitingarskattinum.

Nógvir forsyrgjarar, sum av ringum umstøðum liggja heilt lágt í skattainntøku, hava fingið barnastyrkin kontant goldnan.

Ístaðin fyri at rinda landsskatt hava teir so fingið pening úr landskassanum.

SKATTAINNTØKAN, INNSETINGIN OG ØTFLUTNINGURIN

Eitt gleðiligt lekin er, at hóast vinnulikindini á sjónum hava verið soltnari við fiski á grunnunum enn árini frammanundan, hevur útflutningurin verið størri í ár enn á nökrum sinni. Sama er við skattainntøkuni og innsetingini í peningastovnarnar.

Lögtingsins inntøka hevur í fíggjarárinum 1960/61 eftir fyribils uppgerð verið umleið kr. 22.783.987,85 og útreiðslurnar eisini eftir fyribils uppgerð umleið kr. 21.565.331,36. Eitt avlop uppá kr. 1.218.656,49. Samstundis má tá verða havt í huga, at landskassin hevur veðhaldsábyrgdir, ið kunnu koma at verða «effektivar».

FYLGJANDI YVIRLIT SÝNIR EIN STØÐUGAN VØKSTUR

Skattainntøkan var í:

1952		kr. 56,4	mill.
1953		kr. 56,3	—
1954		kr. 59,9	—
1955		kr. 70,0	—
1956		kr. 78,5	
1957		kr. 82,6	
1958		kr. 85,8	—
1959		kr. 87,5	—
1960	ca.	kr. 100,0	

Ein vökstur uppá 16 mill. síðani 1958.

INNSKOT UPPÁ SPARITREYTIR HEVUR VERIÐ

1/1 - 1953	kr. 63,5	mill.
1/1 - 1954	kr. 67,5	—
1/1 - 1955	kr. 73,4	—
1/1 - 1956	kr. 81,5	
1/1 - 1957	kr. 90,0	—
1/1 - 1958	kr. 97,3	—
1/1 - 1959	kr. 106,2	
1/1 - 1960	kr. 112,6	—
1/1 - 1961	kr. 123,4	—

Ein vökstur uppá slakar 26 mill. siðani 1958.

Tað athugaliga í hesi peningamynd er, at skattainntöku- og innsetivöksturin er störstur seinasta ár, hóast íleggingin til skipakeyp og aðra bygging aldri áður hevur verið so stór her á landi: Her er talan um næstan tvifalding siðani 1952 og 53.

ÚTFLUTNINGUR FÖROYA VAR SEINASTA ÁR:

isfiskur	21.625 tons fyri	25.530.000,00	kr. netto
saltfiskur ..	17.195 tons fyri	29.873.000,00	kr. netto
klippfiskur	6.250 tons fyri	20.598.000,00	kr. netto
annað		20.192.000,00	kr. netto
		96.193.000,00	kr. netto

um 3 milliónir meira enn 1958, ið var tað hægsta útflutningsár, vit hava havt.

Útflutningurin árið frammanundan — 1959 — var 77.782.000, slakar 19. mill. kr. minni enn ifjör.

NETTO FISKAFRAMLEIÐSLAN

hevur fallið soleiðis:

1957	kr.	90.669.000
1958	kr.	91.271.000
1959	kr.	75.248.000
1960	kr.	93.842.000

Sum tekin eru til, vil hon aftur vaksa í ár, ið hvussu er í tonsatali: Prislagið er ilt at meta um. Tað tykist at rilla og hava lyndi at fara niður eftir.

STUDNINGUR TIL FISKIMENN HEVUR VERIÐ VAKSANDI OG VAR 1

1958/59	kr.	2.451.000
1959/60	kr.	2.717.000
1960/61	kr.	3.417.000

Hann er í trý tey seinastu árini vaksin við slakari millión.

Fiskiskapurin á teim ymsu leiðunum er frá 1929 til 1960 í óslögdari tonsanögd vaksin ella minkaður soleiðis:

Undir Föroyum vaksin	frá	1.833 tons	til	19.684 tons
Undir Íslandi minkaður	frá	51.222 tons	til	14.396 tons
Við Grönland vaksin	frá	10.245 tons	til	50.698 tons
Í Bæringshv. minkaður	frá	8.751 tons	til	3.509 tons
Við New Foundl. vaksin	frá	2.959 tons	til	9.678 tons

Fiskiskapurin undir Íslandi hjá Föroyingum hevur onganlið verið so lítil sum í ár.

Ökingin av fiskinögdini fyri Hnuskipini um veturin undir Föroyum og fiskiskapurin við Grönland og New Foundland hevur givið hitt stóru uppískoyti ístaðin fyri hina stóru minkingina av okkara fiskiskapi undir Íslandi. Men vónandi vil Ísland taka seg nakað upp aftur fyri okkum nú aftaná nýggju skipanina við Ísland.

Við teimum mongu nýggju veiðumiklu skipunum, vit hava fingið, og koma at fáa afturat í ár, skuldi veiðinögdin í ár farið at hyldnast betri enn í fjör, hóast nógv av okkara gomlu skipum eru farin burtur úr fiskivinnuni.

MARKNAÐARLÍKINDINI

er tann stóri spurningurin, nú ið europalondini hava býtt seg í tvíningar teir «6» og teir «7».

Talan hevur verið um, at hesir bólkar skulu ganga saman.

Vit standa uttan fyri báðar bólkarnar enn.

Men tað fer ikki at bera til í longdini.

Verður farið saman við teimum «6» — tað kunnu vit bara, um samgonga verður millum marknaðarbólkarnar — má vera ansað eftir, at vit ikki koma illa fyri av rettindunum hjá londunum innanfyri hendu bólk at arbeiða og «etablera» seg hvör hjá öðrum.

Her er fyrst og fremst fiskiskapur við Föroyar at hava í huga.

Trolingin er ikki vandi fyri, tí vit sýta okkum sjálvum at trola innan fyri sjómarkið.

So er fiskiskapur við öðrum greiðum sum snöri, snellu, garni og línu. Við línu og snellu eru tað fyrst norðmenn, sum talan er um, men so fáa vit afturímóti loyvi at veiða við Noreg á öllum leiðum og við öllum greiðum sum norðmenn sjálvir sökja og nýta.

Skotar nýta eisini línu, men ikki snörið og snellunna.

Samgongan hevði marknaðarliga gjört resurnar rúmari og uttan höft fyri okkum, tí her hjá okkum verður eingin fremmandur at hava loyvi at fiska aðra staðir og við öðrum greiðum enn vit við okkara lóggávu loyva okkum sjálvum.

ÚTLITIÐ FYRI SALTFISKASÖLUNI

Sambært meting teirra, ið fáast við saltfiskasölu er prísútlitið ikki hitt versta.

Seldur er pakkaður fiskur til Grikkalands fyri 106 £ tonsið fyri smáan fisk og kravd eru 110 £ fyri góðan millumfisk. Í Italiu er seldur bólkfiskur fyri 92 £ og pakkaður 99 £ tonsið.

Í Brasiliu er úllit fyri, at klippfiskaprísurin verður nakað sum í fjör.

Í Spanin er selt ca. 600 tons av klippfiski fyri sama pris sum í fjör.

SILDASÖLUPRÍSURIN

Í Svöriki sigast at vera seldar um 60.000 tunnur og í Danmark 20.000 tunnur fyri hægri pris enn í fjör. Hetta er stór sild. Hvussu verður við at selja smásildina í Eystrtýsklandi er ikki greitt. Men vónandi verður henda söla eisini at ganga í lag, hóast at Ísland kann koma í vegin við sínum ævintýra stóru veiðu í ár.

Stór kölihús til goymslu av okkara salt- og klippfiski og stór frystivirki, ið kunnu taka miklar fuemar, törva, fyri at vit kunnu verða förir at selja fisk til hægsta pris.

Fastar nevndir og aðrar

FIGGJARNEVNDIN: J. Fr. Øregaard, Samuel Petersen, Andr. Djurhuus, Joh. M. Fr. Poulsen, Erlendur Paturssson, Hemming Jespersen og Poul Petersen.
Tiltaksmenn: J. P. Davidsen, Poul J. Olsen, Hans Iversen, Tr. Samuelsen, Frederik Hansen, Johan Simonsen og H. Djurhuus.

UMSÓKNARNEVNDIN: Jacob Lindenskov, Leon Joensen og Frederik Hansen.

LANDSSTÝRISMÁLANEVNDIN: J. Fr. Øregaard, Hans Iversen og Erlendur Paturssson.

HAVNA- OG VEGANEVNDIN: Haldor Hansen, J. P. Davidsen, Frederik Hansen, Johan Simonsen, Hans Iversen, Andr. Djurhuus og H. Djurhuus.

STUDENTASKÚLANEVNDIN: Haldor Hansen, Marius Johannesen, Tr. Samuelsen, Sigurð Joensen og H. Djurhuus.

SOCIALA NEVNDIN: Jacob Lindenskov, Dion Nolsöe, Joh. M. Fr. Poulsen, Hemming Jespersen og Knút Wang.

BÚNAÐARNEVNDIN: Haldor Hansen, J. P. Davidsen, Hans Iversen, Sigurð Joensen og Vilhelm Nielsen.

MARKNAÐARNEVNDIN: J. Fr. Øregaard, Samuel Petersen, Erlendur Paturssson, Jógvan Högnesen, Andr. Djurhuus, Jens Chr. Olsen og H. Djurhuus.

LÖGARNEVNDIN: J. Fr. Øregaard, Samuel Petersen, Sigurð Joensen, Tr. Samuelsen og Poul Petersen.

GYMNASIESKÚLANEVNDIN: J. H. Danbjörg, M. Johannesen, Joh. M. Fr. Poulsen, Knút Wang og Hanus við Högadalsá.

NEVNDIN VIÐV. VAKTARSKIPI: Poul J. Olsen, Samuel Petersen, Johan Simonsen, Leon Joensen og Hákun Djurhuus.

LANDSHANDILSNEVNDIN: J. H. Danbjörg, J. P. Davidsen, Hans Iversen, Hemming Jespersen og Vilhelm Nielsen.

KIRKJUNEVNDIN: Poul J. Olsen, Jacob Lindenskov, Hilmar Petersen, Johan Simonsen og Vilhelm Nielsen.

SKATTANEVNDIN: Trygve Samuelsen, Erlendur Paturssen, Hákun Djurhuus, Samuel Petersen og Poul J. Olsen.

KOMMUNALANEVNDIN: Andr. Djurhuus, Fr. Hansen, Vilh. Nielsen, Poul J. Olsen og Samuel Petersen.

FISKIVINNUNEVNDIN: P. M. Dam, Jens Chr. Olsen, Poul J. Olsen, Jógvan Högnesen og Niels Holm Jacobsen.

MARKNAÐ- OG FISKIMARKSNEVND: Haldor Hansen, J. F. Öregaard, S. Joensen, E. Paturssen, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus og H. Djurhuus.

Tiltaksmenn: D. Nolsöe, Poul J. Olsen, J. Högnesen, H. v. Högadalsá, H. Iversen, L. Joensen og K. Wang.

NEVND VIÐV. TINGHÚSINUM: J. F. Öregaard, J. Lindenskov, J. P. Gregoriussen, Hilmar Petersen og K. Wang.

SKATTANEVNDIN: J. P. Henriksen, Daniel Nielsen, Klaksvík, Erlendur Paturssen, Tr. Samuelsen og H. Djurhuus.

I. Fíggjarlögtingslóg 1962/63

Ár 1961, 3. august legði varalögmaður fram uppskot til fíggjarlögtingslóg 1962/63 (smbr. skjal 2).

1. viðgerð 14. mars 1962 og 29. s. m. legði fíggjarnevndin fram soljóðandi uppskot (smbr. skjal 2) við soljóðandi minnilutaálitum:

Minnilutin (Poul Petersen) loyvir sær fólkaflokksins vegna at gera nakrar viðmerkingar til fyriliggjandi uppskot.

Fíggjarlógin veksur alsamt. Í hesi í árini frá 1958/59 til 1962/63 hevur hon vaksið frá 144 mill. kr. til einar 29 mill. kr., meðan skattainntökan í landinum hevur vaksið frá 85 mill. kr. í 1958 til 99.5 mill. kr. í 1961, ella ein vökstur uppá 15 mill. kr.

Sum fyrr sagt (smbr. m.a. tingmál nr. 1/1960 — tingtíðindi 1960, bls. 37) hevur vöksturin hesi árini farið til lönir o.t. ella til konsum sum tað eitur og ovlitið eftir okkara tykki til vinnuligar ílaggingar, og so statt eigur landsins fíggjarpolitikkur sín stóra part í tí inflatión ella dýrtíð sum eyðkent hevur hesi árini.

Tað hevur alla tíðina verið okkum ímóti at rökt ein skattapolitikk, sum ökir livikostnaðin og skerjir kappingarförleikan úteftir.

Nökur töl sum vísa vöksturin á fíggjarlógini frá 1958/59 til 1962/63:

Lögtingið:	226.400,—	483.600,—	munur:	257.200,—
Landsfyrisæti:	1.267.780,—	2.078.113,—		810.333,—
Heilsumál:	1.813.500,—	2.926.815,—	—	1.113.315,—
Samferðslumál:	2.522.500,—	4.651.200,—	—	2.128.700,—
Skúlamál:	1.953.953,—	3.632.170,—	—	1.678.517,—
Fiskivinnumál:	3.341.850,—	6.427.425,—	—	3.085.575,—
Jarðarbrúk:	615.800,—	781.338,—		168.530,—
Handil og idnað:	257.695,—	320.700,—	—	63.005,—
Social mál:	2.612.668,—	6.164.000,—	—	3.351.332,—
Rentur:	72.000,—	300.000,—	—	228.000,—

Til hesa konto er tað eisini at siga, at öll rentuútreiðsla hjá landskassanum fer ikki um hesa konto, eftirsum rentur eru uppi í öðrum konti á fíggjarlógini, soleiðis gevur henda konto ikki rætta mynd av úlreiðslunum.

Soleiðis sær vöksturin til hesi árini í stórum tíkið og av teimum fram-

gongur, at ov lítil dentur hevur verið lagdur á tær vinnuligu íleggingarnar afturímóti öðrum hækkingum á figgjarlógini.

Teprir tykjast eisini summir av postunum eftir okkara tykki at vera mettir eftir teim tölum sum liggja fyri frá hesum figgjarárinum, so stimbring tykist lítil og ongin at vera eftir fyriliggjandi uppskoti og teim innlökulógum sum verið hava figgjarnevndini fyri hond. Tað er eftir okkara tykki ein veikleiki í einari lið sum hesari, tí ábyrgdirnar hevur landskassin nógvar og hartil stórar og fer dag og dagliga inn í fleiri og tapsrisiko tykist nærka og veksa í hvörjum.

At landið leggur ivaleyst til í sínum vinnuligu íleggingum bæði í skipaflota og vinnuligar íleggingar uppi á landi, fiskavirking, iðnað, jarðarbrúki o. t. er bert ein hjálp til sjálvhjálp, sum kemur aftur í seinna enda í skatti, lönum o. t. ella í öktum landsinntökum.

Hin vegin at leggja ovstóran dentin á forbrúkið gevur bert stokkutan varman. Tað hevur við sær ein hægri livikostnað, tekur sparihugin, so hvör viðbótin, sum legst til, fer útaftur sum hon kemur, og livilíkindini hjá teim mongu sum hava ikki fast arbeið ella vist arbeið at fara til ringast í hvörjum, tí er tann vinnuligi vöksturin ikki so mikið stórur afturímóti, og arbeið til hvönn fingur bæði í bygd og bý, so mangu tey sum fáa, rinda sínar viðbötur aftur í dýrari vörum og avgjöldum av mongum slögum. Bert í livikostnaðinum undir prístalinum er livikostnaðurin farin 10 % upp frá 1. oktober 1958 til 1. oktober 1961, og tá er skattur ikki við, og fylgjan av 4 % gjaldinum uttanfyri livikostnaðin undir prístalinum heldur ikki við.

Til tess at javna eitt sindur av her nevndu missmunum, setur minnilutin (Poul Petersen) fram fylgjandi

Broytingarupptskot.

1) § 19.8.4: (lærlingastuðningur) í báðum tekstum:
«100.000» verður broytt til «120.000».

2) § 20.7: (sömdarpeningur) í báðum tekstum:
«11.800» verður broytt til 13.800».
Til viðmerkingar:
Til anmærkninger til § 20.7 í báðum tekstum verður sett:
«Rikard Long ..... 1200 kr.»
«Robert Joensen..... 800 kr.»
Raðtölini verða broytt hareftir.

3) § 22.5.1: (mjólkastudningur) í báðum tekstum:
«150.000» verður broytt til «250.000».

V i ð m e r k i n g a r:
«Studninguriu verður latin í 5 ár við 250.000 kr. um árið eftir landsstýrisins avgerð í samráð við Föroya búnaðarfelag.»

A n m æ r k n i n g e r:
«Tilskudet bevilges for 5 aar med kr. 250.000,— om aaret i henhold til landsstyrets beslemmelse i samraad med Föroya búnaðarfelag».

4) Undir § 22 verður sett sum nýtt p. 6 í báðum tekstum:
«Studningur til jarðargrunnin (viðm.) ..... 200.000»
«Tilskud til jordfonden (anm.) ..... 200.000».

V i ð m e r k i n g a r:
Studninguriu verður latin í 5 ár við 200.000 kr. um árið.»

A n m æ r k n i n g e r:
«Tilskudet bevilges for 5 aar med kr. 200.000, - om aaret.»

5) § 23.1.3: (studningur til elverk á bygd) í báðum tekstum:
«20.000» verður broytt til «100.000».

V i ð m e r k i n g a r:
«Studningurin verður latin í 5 ár við 100.000 kr. um árið til elverk á bygd sum lið í heildarætlanini.»

6) § 23.6: (kolagrevstur) í báðum tekstum:
«100.000» verður broytt til «150.000».

V i ð m e r k i n g a r:
«Av játtanini verða 50.000,— kr. at nýta til innslög.»

A n m æ r k n i n g e r:
«Af bevillingen anvendes kr. 50.000, til indslag.»

7) § 23.10: (lærlingaheim) í báðum tekstum:
«10.000» verður broytt til «25.000».

8) Undir § 23 (idnað v. m.) verður sett sum nýtt p. 11:
«Lán til smærri idnaðvirkir (viðm.) ..... 50.000»
«Laan til mindre industrivirksomheder (anm.) 50.000».

Viðmerkingar:
«Játtanin verður givin í 5 ár við 50.000,— kr. um árið at nýta sum útlán til smærri idnaðvirkir, og peningurin fer í grunnin: Föroysk yrkismál».

Anmærkninger:
«Bevillingen ydes over 5 aar med kr. 50.000,— om aaret og anvendes til udlaan til mindre industrivirksomheder, og pengene indgaar i fond Föroysk yrkismál».

9) § 24.8.1: (frálaldsfelögini) í báðum tekstum:
«5.000» verður broytt til «10.000».

Samtiðis sum minnihlutin (Henning Jespersen og Erlendur Patursson) vísir á tær atfinningar viðvíkjandi fíggjarlógaruppskoti landsstýrisins og fíggjar- og vinnulívspolitikki tess yvirhövur, tá fíggjarlógaruppskotið var til fyrsta viðgerðar, skal hetta verða skoytt upp í:

Fíggjarlógin, sum 1958-59 var uppá 15,5 milj. kr., er nú fyri 1962-63 og eftir uppskoti landsstýrisins og meirilutans í fíggjarnevndini komin uppí 29 milj. kr. — t. e. tætt við tvífaldað eftir hesum fáu árum.

Fíggjarpolitikkurin hevur fyrst og fremst verið at laða skatt og toll oman á landsins almenning, utlan at hugsað hevur verið um at fremja framleiðslu- og innlökuskapandi tiltök, so fólkið var ment at bera hesar byrðir. Sjónligasta prógvið fyri hesum er öðru megin hin mikli vökstur í skatti og tolli og hinu megin í ti vinnuloysi, sum stórur partur av fólkinum gongur í viða hvar í landinum.

Tað er alsamt triðjungur av landsins fiskimonnum, ið ikki hevur tiðarhóskandi fiskifar at fara um borð í, og tó kunnli endurnýggingarspurningur fiskiflotans langt síðani hava verið loystur til fulnaðar.

Hetta ovurtýdningarmikla mál hevur núverandi landsstýri forsömt (samanber byggi- og lánimöguleikar í Belgiu, Fraklandi og aðrar staðir).

Uppi á landi hevur hin almenna uppbygging og uppbygging vinnulívsins ligið á láni, og gongur tí stór fjöld av fólkinum í vinnuloysi.

Vegabyggingarmálið er óloyst enn, tó at möguleikar vóru til at loysa tað í fjör.

Sama er um uppbygging vinnulívsins at siga, samanber at tingið aftur í fjör feldi uppskotið um at lata byggja frysti- og flakavirki.

Figgjarlóg, ið ikki byggir á vinnu- og inntökufremjandi politikki, hevur ikki grundarlag at byggja á.

Har næst er at vísa á hitt samfelagsliga býti. Landsins fólk hevði væntað sær störri javnað í inntökum og korum, men tað hevur verið øvugt. Misjavnin er störri enn nakra tíð.

Figgjarpolitikkur landsstýrisins hevur birt undir og beinleiðis ískunnið henda misjavnað. Hann hevur t. d. sýtt fiskimonnum rímiliga hækking í uninstulönini og eisini verkamonnum rímiliga lönarhækking eftir prístalshækkingini.

Hin vegin hava aðrar stættir fingið rívligar lönarhækkingar. Hesar lönarhækkingar skal fólkið, sum starvar í framleiðslunni: fiskimenn, verkamenn, handverkarar, bera við öktum tolli og skatti.

Longu 1959 framdi hetta landsstýri nunnandi tollahækking — tollahækking, ið varð nýtt til at gjalda útgerðarmonnum tá fritiðarviðbót, sum hesir við sáttmála høvdu bundið seg til at gjalda — og seinni eisini vórðu dömdir til at gjalda.

Skattalógin er at kalla óbroytt, og sviðir hetta hart at öllum lönarfólkinum og fólkinum við tungum búsi.

Í fjör varð umsetingargjald lagt á flest allar neyðsynjar fólksins og vinnulívsins.

Hin vegin hevur tingið endurnýggjað hina órimiligu og órettvísu lög um skattafríar eykanvskrivingar.

Meðan tað hevur eydnast at fáa loyst málið um ellistrygging (fólkapensjón), avlanistrygging og aðrar sosialar lógir, liggja alsamt lýðningarmikil sosialmál á lani, sum t. d. vanlukku- og sjúkatryggingin.

Við hesum grundum, har víst hevur verið á, at figgjarpolitikkur núverandi landsstýris ikki hevur framt vinnu- og inntökuskapandi tiltök fyri landsins vinnandi fólk og ikki bölt um misjavnan í korum fólksins, men heldur ökt um hann, kann minnilutin ikki mæla fingnum til at samtykkja figgjarlógaruppskot landsstýrisins og meirilutans í figgjarnevndini.

Her skal verða bent á, at ein av teim flokkum, sum núverandi landsstýri skipar, á seinasta lögtingsvali í stevnu sini segðist hava mátahald í almennum útreiðslum, skattum og tollum, meðan hin gekk upp aftur longur og lýsti stevnu sína at vera at hekka bæði toll og skatt — í hvussu er á lí minna mannunum, meðan skattar og tollar á teim stóru inntökunum skuldu hækkast.

Tá nú hesir flokkar heilt eru gingnir burtur frá stevnum sínum — við at tvífalda hinar almennu útreiðslur, við at leggja tyngri og tyngri

skatta- og tollabyrðir á hin minna mentu, við at hetta upp aftur meir um byrðirnar á leim meira mentu — má minnilutin halda, at hetta figgjarlógaruppskot ikki bert figgjarliga, men eisini politiskt hongur í leysum lofti.

At enda skal verða skilað til, at meðan nevndarviðgerðin í figgjarnevndini fór fram, ynskti minnilutin at fáa at siggja seinasta landskassarokn skap — ella seinast tóka. Hetta helt minnilutin vera neyðugt til less at tryggja sakliga og forsvarliga viðgerð av figgjarlógaruppskotinum.

Men hetta ynski minnilutans varð ikki eftirlíkað.

2. og 3. viðgerð 29. mars 1962.

Formaðurin legði fram:

Broytingaruppskot til § 21 frá Jógvan Högnesen.

Broytingaruppskot:

Í 21. §, 8.1. verður 1.800.000 kr. broytt til 3.800.000 kr.

Broytingaruppskot til § 20 frá Erlendi Paturssen.

Broytingaruppskot:

Í viðmerkingum til 20. §, 7 verða 1.200 kr. í hvörjum staði broytt til 2.400 kr. og 800 kr. í hvörjum staði broytt til 1.600 kr.

Sum nýtt nr. 14 kemur:

Robert Joensen ..... 1.600 kr.

Broytingaruppskot til § 23 frá Hemming Jespersen.

Broytingaruppskot:

Í 23. §, 6 verða 100.000 kr. broyttar til 250.000 kr.

§§ 15, 16, 17 og 18 samtyktar 22—0.

Broytingaruppskot (P. Petersen) til § 19.8.1 fall 13—0.
§ 19 samtykt 18—0.
Broytingaruppskot (P. Petersen) til § 20.7 afturtikið.
— (E. Patursson) til § 20.7 fall 7—0.
§ 20 samtykt 21—0.

Broytingaruppskot (J. Högnesen) til § 21.8.1 var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, H. J. Ellingsgaard, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Paturssen, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, Haldor Hansen og J. Fr. Öregaard.

Burturstaddur: Jens Chr. Olsen.

Uppskotið fall 12—0.
§ 21. samtykt 28—0.
Broytingaruppskot til § 22.5.1 fall 13—0.
Broytingaruppskot til § 22.2 fall 13—0.
§ 22 samtykt 23—0.
Broytingaruppskot til § 23.1.3 fall 13—0.

Broytingaruppskot til § 23.6 var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, H. J. Ellingsgaard, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Paturssen, H. v. Högadalsá.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, Dion Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, Haldor Hansen og J. Fr. Öregaard.

Burturstaddur: Jens Chr. Olsen.

Uppskotið fall 13—0.

Broytingaruppskot (P. Petersen) til § 23.6 var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, H. J. Ellingsgaard, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Paturssen, H. v. Högadalsá, H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, Andr. Djurhuus, H.

Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Kr. Djurhuus, P. M. Dam, Haldor Hansen, J. Fr. Öregaard.

Burturstaddur: Jens Chr. Olsen.

Uppskotið fall 13—0.

Broytingaruppskot til § 23.10: var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, H. J. Elfingsgaard, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Paturssen og H. v. Högadalsá.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, S. Petersen, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, Haldor Hansen, J. F. Öregaard.

Burturstaddur: Jens Chr. Olsen.

Uppskotið fall 13—0.

Broytingaruppskot til § 23 nýtt p. 12 fall 13—0.
§ 23 samtykt 28—0.

Broytingaruppskot til § 24.8.1 var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, V. Nielsen, Kj. Mohr, H. J. Elfingsgaard, P. J. Djurhuus, E. Paturssen, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Kr. Djurhuus, P. M. Dam, Haldor Hansen, J. Fr. Öregaard.

Burturstaddur: Jens Chr. Olsen:

Uppskotið fall 11—0.

§§ 25, 26, 28, 34, 35, 36 og 37 samtyktar 20—0.
§ 1.1.1-2 samtykt 21—0.
§ 1.1.2-6 samtykt 16—0.
§§ 2-14 samtyktar 16—0.

Undir 3. viðgerð var uppskotið í sínari heild sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvödd.u: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, Kj. Mohr, H. J. Ellingsgaard, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, Poul J. Djurhuus, Haldor Hansen og J. F. Öregaard.

Nei atkvödd.u: Johan Simonsen, J. Högnesen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Burturstaddur: Jens Chr. Olsen.

Uppskotið samtykt 24 5.

---

2. Sjómanslóg

Ár 1961, 1. august legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv:

Landsstýrið loyvir sær at heita á tingið at taka til viðgerðar uppskot til sjómanslöglingslóg og loyvir sær at vísa til tingmál nr. 38/1956, tingtíðindi 1956 bls. 111 og skjal 3, tingmál nr. 1/1957, tingtíðindi 1957, bls. 16 og tingmál nr. 18/ 1958, tingtíðindi 1958 bls. 151.

---

3. Vörumerkir og felagsvörumerkir

Ár 1961, 1. august legði lögmaður fram soljóðandi frandöguskriv:

Eftir heimild í § 48 stk. 3 í lóg nr. 211 frá 11. juni 1959 (varemærkelov) verður henda lóg at seta í gildi í Föroyum við kgl. fyriskipan við hesum broytingum:

1) Í § 14, verður skotið inn aftaná «statskendetegn» «færöske landskendetegn» og istaðin fyri «danske kommunale kendetegn» verður sett «færöske kommunale kendetegn».
2) Í § 18, stk. 1, verður skotið inn millum «handelsministeren» og «godkendt» «eller landsstyret» og istaðin fyri «her i landet» verður sett «i Danmark eller paa Færöerne».
3) § 48, stk. 2, verður orðað soleiðis:
«Denne anordning træder i kraft .....»
§ 48, stk. 3 fer út.

Uppskot

Eftir heimild í § 9, stk. 3 í lóg nr. 212 frá 11. juni 1959 (fællesmærkelov) verður henda lóg at seta í gildi í Föroyum við hesum broytingum:
§ 9, stk. 1, verður orðað soleiðis:

«Denne anordning træder i kraft .....»
§ 9, stk. 3 fer út.

Viðmerking:

Galdandi lóg um vörumerkir er lóg nr. 101 frá 7. april 1936 (smbr. lóg nr. 35 frá 4. mars 1953) og galdandi lóg um felagsvörumerkir er lóg nr. 102 frá 7. april 1936.

Fyriliggjandi lógir nr. 211 (varemærkelov) og nr. 212 (fællesvaremærkelov) frá 11. juni 1959 eru úrslit av áliti og uppskoti frá einari nevnd, sum handilsmálaráðið setti 8. december 1949 í samarbeiði við tilsvarandi finska, norska og svenska nevnd.

Landsstýrið loyvir sær at vísa til nevnda álit, sum fylgdi við sum skjal.

Landsstýrið hevur hildið tað verið neyðugt at framt tilsvarandi lóggávu og loyvir sær at leggja uppskot inn á ting at seta hesar lógir í gildi við kgl. fyriskipan sum heimilt í lógunum við einstökum broytingum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið inn aftur á ting og vísir til lögtingsmál nr. 4 1960, tingtíðindi 1960, bls. 44.

1. viðgerð 22. februar og málið beint í lógarnevndina, 9. mars legði nevndin fram soljóðandi

Nevndarátit

Lóg nr. 211 frá 11. juni 1959 (Varemærkelov) og lóg nr. 212 frá 11. juni 1959 (Fællesmærkelov) kunnu við heimild í nevndu lógum setast í gildi í Föroyum við neyðugum broytingum við kgl. fyriskipan. Hesar lógir eru gjördar eftir uppskoti frá nevnd, sum saman við nevndum frá hinum norðanlondum hevur viðgjört málið.

Landsstýrið hevur lagt málið fyri lögtingið við uppskoti um, at hesar lógir verða at seta í gildi í Föroyum við teimum í uppskotinum nevndu broytingum.

1. viðgerð av málinum fór fram tann 22. februar 1962 og varð málið beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla lögtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teimum í uppskotinum nevndu broytingum.

2. viðgerð 12. apríl 1962.
Uppskotini samtykt 28—0.

4. Veðhald av láni til agnkeyp

Ár 1961, 1. august legði varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

Lögtingslóg
um ábyrgd av láni til keyp
av agni.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt í fíggjarárinum 1962/63 og 1963/64 landskassans vegna at taka ábyrgd av lánum til keyp av agni uppá kr. 300.000,— tilsamans hvört fíggjarár.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov
om garanti for laan til köb
af agn.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne i finansaaret 1962/63 og 1963/64 at garantere for laan til köb af agn op til kr. 300.000,— tilsammen for hvert finansaar.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerking.

Landsstýrið loyvir sær at mæla tingionum til at endurnýggja ta heimild, landsstýrið hevur havt nú nökur ár, at taka ábyrgd landskassans vegna av lánum til keyp av agni og leggur inn lógarúppskot samsvarandi (smbr. lögtingsmál nr. 3/1960, tingtíðindi 1960 bls. 43).

1. viðgerð 27. februar, 2. viðgerð 2. mars og 3. viðgerð 14. mars 1962.
Uppskotið samtykt 24—0.

5. Studentaskúlalæraralönir

Ár, 1961, 23. august legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

broyting í lögtingslóg nr. 31, 18. mai 1961, um tænastumenn landsins.

§ 1.

Í § 46 undir 7 verður aftaná (5) sett: Aftaná 15 ár verða adjunktar tilnevndir lektorar.

§ 2.

Í § 46 ganga út orðini undir 9 «Lektorar á studentaskúlanum (3)» og undir 11 «Rektor á studentaskúlanum (1)».

Í staðin verður sett:
undir 11: «Lektorar á studentaskúlanum (3)» og undir 12 sum nýtt punktum: «Rektor á studentaskúlanum (1). Fyri at hava yvirleiðsluna av skúlans kostdeild fær rektor 6.000 kr. árliga í viðbót.»

§ 3.

Henda lóg fær gildi frá 1. august 1961.

ændring i lagtingslov nr. 31 af 18. mai 1961 om landets tjenestemænd.

§ 1.

I § 46 under 7 tilföjes efter (5): Efter 15 aar udnævnes adjunkter til lektorer.

§ 2.

I § 46 udgaar ordene under 9 «Lektorer ved studenterskolen (3)» og under 11 «Rektor ved studenterskolen (1)».

I stedet sættes:
under 11: «Lektorer ved studenterskolen (3)» og under 12 som nyt punktum: «Rektor ved studenterskolen (1). For at have overledelsen af skolens kostafdeling faar rektor et tillæg paa 6.000 kr. aarlig.»

§ 3.

Denne lov træder i kraft fra 1. august 1961.

Viðmerkingar:

Í juni mánað í ár varð lýst eftir einum adjunkti ella lektori í matematikk og fysikk og einum adjunkti, ið skuldi vera ársvikarur í fronskum og latíni.

Gymnasieskolernes Lærerforening skrivaði beinan vegin, aftaná at störvini vóru lýst, at felagið vildi mæla limum sínum frá at sökja.

Samróðingar fóru so fram millum landsstýrið og felagið og úrslitið av hesum var tað, at landsstýrið játtaði at leggja frammanfyri nevnda

lógaruppskot fyri tingið á Ólavsöku; hetta kom av ymiskum orsökum ikki at bera til.

Síðani er tað hent, at landsstýrið setti ein verkfröðing til fyri fyrst at læra í matematikk, fysikk og kemi, men Dansk Ingeniör Forening noktar nú limum sínum at taka starv við skúlan, so leingi lönarspurningurin ikki er loystur.

1. viðgerð 23. august og 29. s. m. legði nevndin fram soljóðandi (broytt)

Alit

Málið varð av landsstýrinum lagt fram á ting 23. august 1961, og sama dag kom tað til 1. viðgerð, har tað eftir drúgvan orðadrátt varð beint í serliga 5-mannanevnd.

Friggjadagin 25. august kl. 10 hevði nevndin fund har Chr. Haraldsen og Erik Petersen vóru hodnir at möta. Hesir greiddu frá, at til hetta skúlaárið eru 168 næmingar í 10 flokkum á skúlanum.

Í 1. real a og b eru	45	næmingar.
„ 2. real	16	—
„ 3. real	12	—
„ 1. g. mat.	21	—
„ 1. g. ným.	22	—
„ 2. g. mat.	7	—
„ 2. g. ným	12	
„ 3. g. mat.	17	—
„ 3. g. ným.	16	—

Tað eru 4 lærarar, sum eru fastir við skúlan í löluni. Teir eru Chr. Haraldsen, Erik Petersen, Th. Nygaard og Arnbjörn Mortensen. Hesir eru settir sum tænastumenn, teir triggir fyrstu sum lektorar og Arnbjörn Mortensen sum adjunktur. Andreas Höjgaard og Sofus Joensen hava hetta seinasta árið arbeitt við skúlan eftir einum serligum sáttmála við tímalön sum grundarlag, men 1. juni sögdu teir seg leysar av hesum sáttmála, og teir sigu seg ikki at vilja binda seg við skúlan, so leingi viðurskiftini, sum nú eru í ólagi, ikki eru komin í rætt lag.

Meirilutin í nevndini við undantak av Tr. Samuelsen er samdur um at kalla hetta, at Gymnasieskolernes Lærerforening sýlir sínum limum at sökja starv við studentaskúlan sjálvt um teimum varð boðin lön, ið lá á hædd við ta, felagsins limir hava niðri í Danmark, fyri eina óvinarliga

gerð, sum er hesum felag til líttan heiður. Tá ið so onnur felög sum verkfröðingsfelagið í Danmark eins og eisini í Noreg sýta sínum limum at sökja, verður úrslitið tað, at skúlin liggur púra lamin og fær ikki tær lærarakreftir, honum törvar.

Tað sýnast tí ongir möguleikar at vera fyri at fáa skúlan aftur í gongd uttan teir at gera yvsar broytingar í lönarlagnum hjá læraranum við skúlan. Hetta kann, sum landsstýrið skjýtur upp, gerast innan fyri teir lönarrammar, sum gjördar vóru í nýggju lönarlógini, soleiðis at summi av störvunum verða flokkað av nýggjum. Hetta verður ikki til stóra meirútreiðslu fyri landskassan, tí dýrasta og nógv óhollasta leiðin er tann, at störvini verða rökt av leysum tímalöntum lærarakreftum.

Undir viðgerðini av málinum varð havt frammi, at tað bar ikki til at fara at viðgera lönirnar hjá studentaskúlalærarunum fyri seg uttan so, at öll lönarflokkingin varð tikin til nýggja viðgerð. Nevndin ásamnar, at hetta er hættisligt, men kortini heldur meirlutin onki annað vera at gera, nú studentaskúlin er í so trongum skóm, at hann fær ikki byrjað arbeiði sítt. Meirilutin vísir tó í hesum sambandi til samtykta minnilutauppskotið í lögtingsmáli nr. 77/1960: Lönir hjá landsins tænastumonnum og mælir landsstýri og lönarráð til at fáa arbeiðið gjört.

Studentaskúlin má fáa hjálp beinan vegin, so má hitt takast til viðgerðar, tá ið hetta við skúlanum er fingið frá hondini.

Viðvíkjandi síðsta punktum í 2. § í uppskoti landsstýrisins er at siga, at studentaskúlin enn onga kostdeild hevur og er tí óneyðugt í löluni at taka stöðu til henda spurning. Meirilutin er tí samdur um, at hetta punktum fellur burtur.

Meirilutin (Marius Johannesen, Haldor Hansen, Tr. Samuelsen og Hákun Djurhuus) mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot við niðanfyri standandi broyting.

Minnilutin (Haldur Hansen) er samdur við meiralutan um, at sum stöðan nú er blivin er einki annað at gera enn at umplasera lektorar og rektor á studentaskúlanum, tá skúliu annars ikki fær teir lærarar, honum manglar og setur uppskot saman við meiralutanum hesum viðvíkjandi.

Men tað kann ikki verða rætt, at preliminerskúlarnir á bygd, sum nú eru 8 í tali eru undir aðrari skipan enn preliminerskúlin í Havn. Fyri bygdirnar hevur tað verið eitt risatak at reisa hesar skúlar, meðan skúlin í Havn heilt verður bygdur og rikin fyri landskassans rokning. Ein annar skeivleiki er, at lönarmunurin millum lærarar sum undervísa við havnarskúlan og teir sum undirvísa við preliminerskúlarnar á bygd verður fleiri túsund krónur um árið. Tingið hevur fyri langt síðan samtykt, at í öllum förum skal lönin fyri sama arbeiði um allar Föroyar verða tann sama.

Minnilutin mælir tí til, at landsstýrið tekur upp samráðingar við skúlastjórnina og Havnar býráð um at loysa preliminerskúlan frá studentaskúlanum, so at lögtingið í framtíðini ikki hevur aðra skyldu honum viðvikjandi enn øðrum preliminerskúlum í Föroyum.

Minnilutin (Sigurð Joensen) fer at viðmerkja:

Tó at Föroya lögting, síðan studentaskúlin var stovnaður fyri seinasta heimsstríð, hevur ríkið og goldið hann, hevur skúlin aldri verið annað enn ein danskur skúli við eykalærugreinini föroyskt, sum annars stöðugt hevur fingið alt ov fáar tímar.

Tó vóru prógvini lögd til rættis í Föroyum í stríðsárunum og föroyskir prövdómarar.

Tað gongur sjón fyri sögn, at úrslitið av hesum danska studentaskúla í Föroyum er ein eintáttað donsk mentan, meðan tað eftir minnilutans áskoðan var hollari fyri tjóðina, um skúlin vandi studentar sínar upp í föroyskari og europeiskari menning.

Tann djúpasta orsökin til ta kreppu, sum studentaskúlin nú er komin í, man júst vera tann, at vit ikki sjálvir stjórna hesum skúla.

Hvörki landsstýrið, stjórn skúlans ella berararnir við skúlan hava verið förir at greitt frá, hví skúlin ikki byrjaði 21. august, sum hann skuldi.

Tað eigur at vera tilskilað, at táið Andreas Höjgaard og Sofus Joensen 1. juni sögdu seg leysan, so var tað til tess at gerast tænastumenn eftir teirri föroysku tænastumannalógini, ið annars gevur teimum störri lön, enn teir hövdu fingið, um teir vórðu settir við samsvarandi skúla í Danmörk eftir donsku tænastumannalógini. Ei heldur hava hesir menn sagt seg misnögdar við ta föroysku tænastumannalógina ella lönirnar eftir henni. Av tilvild var tænastumannabrævið hjá hesum monnum ikki skrivað, táið Gymnasieskolernes lærerforening lýsti blokadu. Tó at hvörki Andreas Höjgaard ella Sofus Joensen eru limir í tí nevnda danska felagnum, hava teir bert orsakað av teirri nevndu uttanífrá komandi blokadu noktað at byrja skúlastarvið aftur.

Minnilutin kennir seg fullvissan um, at táið lærarar skúlans og við teimum landsstýrið hava steðga studentaskúlanum, so er hetta ikki tí, at tað ikki fáast lærarar til skúlans, men tí at tað fáast ikki lærarar til skúlans frá Gymnasieskolernes lærerforening í Danmark, og hevur tó landsstýrið í sumar í tí almenna kunngerðarblaðnum í Föroyum sökt eftir lærarum við tilskilan, at tað vóru fólkaskúlalærarar (semenaristar), ið sóknast varð eftir.

Tað er framvegis áskoðan minnilutans, at ov lítið er gjört av rætta viðkomandi til at útvega lærarar. Hendu lögtingsnevnd hevur heldur ikki fingist til at biðja lærarar til skúlans, hóast tað er upplýst fyri henni, at heima í Föroyum eru kvalifiseraðar lærarakreftir tökar.

Eingi hevur stjórn studentaskúlans annars upplýst um, at ávísir danir eru fáandi, utlan hvat stjórin nevndi um ein, Skaarup at navni, sum tó ikki verður liðugur við universitetsstudium sítt fyrr enn um eitt ár.

Minnilutin heldur tað vera skeivt, um lögtingið letur seg kúga av Dansk Gymnasielærerforening, og onga grund til tess, táið teir 6 lærararnir, sum eru við skúlan, ikki eru limir í hesum felag og ikki krevja lönhækking, og táið tað ikki er bráðneyðugt at útvega lærarakreftir uttanlands.

Uppskot

frá

meirilutanum (Marius Johannesen, Haldor Hansen, Tr. Samuelsen og Håkun Djurhuus):

Lögtingið samtykkir uppskot landsstýrisins við teirri broyting, at síðsta punktum í 2. § í föroyska og danska tekstinum fellur burtur.

Uppskot

frá

minnilutanum (Haldor Hansen):

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við Havnar býráð og skúlastjórnina um at loysa preliminerskúlan frá studentaskúlanum, so at lögtingið í framtíðini ikki hevur aðra skyldu honum viðvíkjandi enn öðrum preliminerskúlum í Föroyum.

Uppskot

frá

minnilutanum (Sigurð Joensen):

1) Lögtingið samtykkir, at studentaskúlin byrjar beinanvegin við teimum lærarakreftum, sum eru.
2) Lögtingið velur eina millumtinga 7-maunanevnd, ið ikki nýtist at hava lögtingsmenn til limir. Henda nevnd skal beinanvegin í samráð við stjórn skúlans biðja lærarar til skúlans aftrat teimum, sum eru, og so nógvar, sum törvur er á. Harnæst skal henda nevnd gera uppskot til reglugerð fyri ein föroyskan studentaskúla viðvíkjandi rakstri skúlans, lærugreinum skúlans, prógvtökum skúlans og annars öllum fyriskipanum skúlanum viðvíkjandi, ið törvur er á.

Minnilutauppskot (Sigurð Joensen) 1) fall 11—0.
Minnilutauppskot (Sigurð Joensen) 2) fall 10—0.
Minnilutauppskot (Haldor Hansen) fall 9—0.
Uppskot frá meiralutanum í nevndini til § 2 samtykt 18—0.
§§ 1 og 3 samtyktar 17—0.
§ 2 samtykt 18—0.

---

6. Broytingaruppskot í Fólkapensjónslógini

Ár 1961, 3. august legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot

Löglingið samtykkir viðlagda uppskot frá socialministeriinum dagfest 4. juli 1961 til broyting í lög nr. 208 frá 11. juni 1959 fyri Föroyar um fólkapensión.

Viðmerkingar:

Sum boðað frá í lögtingsmáli nr. 45/1960: Broyting í fólkapensiónslógini — tingtíðindi 1960, bls. 198 — loyvir landsstýrið sær at leggja fram uppskot til lög um ajourførslu av fólkapensiónslógini við tilmæli sínum og loyvir sær at vísa til viðmerkingarnar til lógaruppskotið og til lögtingsmál nr. 45/1960.

1. viðgerð 1. september og 16. s. m. legði socialu nevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uppskot til broytingar í fólkapensjónslógini, soleiðis sum fraboðað varð í tingmál nr. 45/60: Broyting í fólkapensjónslógini, varð til viðgerðar í seinastu tingsetu. Málið varð við 1. viðgerð 31. august 1961 beint í socialu nevndina til viðgerðar.

Nevndin hevur viðgjört málið á fleiri fundum og eisini á fundi saman við H. Loiborg, skrivstovustjóra og Clausen-Koch, fulltrúa á sosialu deild ríkisumboðsins.

Umframt tær broytingar, sum vist er til í lógini um avlamispensjón - lögtingsmál nr. 7/1961 — verður í uppskotinum mælt til at reglurnar um ávísa bútíð í ríkinum fyri at fáa fólkapensjón verða broyttar frá 5 til 1 ár og at lummapeningur, ið pensjonistar á ellisheimum fáa verður hækkaður og at henda hækking verður framd 1. apríl 1962.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, soleiðis sum tað er sett fram.

Minnilutin (Knút Wang og H. Jespersen) er samdur við meirilutanum hvat viðvíkir broytingunum í lógini, men vísir til tey broytingaruppskot sum minnilutin í fyrru tingsetunum hevur sett til lógina viðvíkjandi umsitingini. Minnilutin heldur, at sosiala forsorgin yvirhövur er vorðin ein so týðandi táttur figgjarliga og samfelagsliga, at tað er ikki beint, at föroyska heimastýrið sleppur sær undan síni ábyrgd av umsitingini av sosialu lógunum bara við at gjalda eina ávísa peningahædd yvir árligu figgjarlógina. Skulu vit byggja upp samfelag okkara, mega vit eisini hava nakað at siga yvir einum so stórum parti av árligu útreiðslum landskassans og so at vit eisini hava fulla vissu fyri at sosialu lógirnar verða umsitnar eftir lögtingsins ætlan. Eftir galdandi skipan er öll umsitingin undir ríkisumboðnum, ið ikki stendur föroyskum politiskum valdi til svars fyri sínar avgerðir. Sum eitt dömi kann verða nevnt, at í uppskotinum til lög um avlamispensjón kunnu klagur um avgerð ríkisumboðsmannsins hvörki leggjast fyri rættin ella föroyskt vald, men einans fyri danska socialmálaráðharran.

Ístaðin fyri hesaferð at seta broytingaruppskot til hvört einstakt uppskot til broytingar í teim sosialu lógunum, sum er á tingborði í hesi lögtingssetu, setur minnilutin uppskot um at heimila landsstýrinum at samráðast við ríkisstýrið um yvirtöku av umsitingini av sosialu lógunum og at taka við hesi umsiting.

Uppskot frá minnilutanum (Knút Wang og H. Jespersen):

Landsstýrið verður heimlað at samráðast við ríkisstýrið um og at taka við umsitingini av teim sosialu lógunum.

2. viðgerð 18. september 1961.
Uppskot minnilutans (K. Wang) fall 15—0.
Uppskot landsstýrisins samtykt 28—0.

7. Avlamispensjón

Ár 1961, 3. august legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot

Lögtingið samtykkir viðlagda uppskot frá socialministeriinum dagfest 5. juli 1961 til lög fyri Föroyar um avlamispensión.

Viðmerkingar:

Sum boðað frá í lögtingsmáli nr. 45/1960: Broyting í fólkapensiónslógini — tingtíðindi 1960, bls. 198 — loyvir landsstýrið sær at leggja fram uppskot til lög um ajourføslu av lög fyri Föroyar um avlamispensión, við tilmælum sínum og loyvir sær at vísa til viðmerkingarnar til lógaruppskotið og til lögtingsmál nr. 45/1960.

1. viðgerð 1. september og 16. s. m. legði sociala nevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið 3. august 1961 og varð tað við 1. viðgerð 31. august 1961 beint í sosialu nevndina til viðgerðar.

Nevndin hevur havt málið til viðgerðar á fleiri fundum og hevur somuleiðis fingið sær kunnleika um málið á fundi saman við serkönum monnum.

Viðvíkjandi hesum uppskoti og uppskotinum um broyting í fólkapensjónslógini — sambært tingmál nr. 6/1961 — eru tær felagsbroytingar, at somu satsir verða at galda fyri avlamis- og fólkapensjón, og eisini einkjupensjón, sum í Danmark, soleiðis at föroyska lóggávan á hesum øki verður jøvn við ta dansku, tó soleiðis, at hækkingarnar fara fram í trimum stigum, nevnliga 1. april 1962, 1. oktober 1962 og 1. april 1963.

Reglurnar at fáa pensjón verða gjördar lagaligari viðvíkjandi persónum, ið hava hækkaða pensjón vegna egna inntöku og treytirnar fyri at sýta persónum, ið hava livað í oyslusemi, pensjón, verða avtiknar.

Peningastuðul — eykastuðul — til persónar, ið eru serliga illa fyri verður hækkaður frá 4½ til 5 % av tí goldna grundpeninginum.

Uppskotið um lög fyri avlamispensjón víkir í summum förum frá galdandi lög um avlamispensjón og miðar hetta uppskotið ímóti at möguleiki fyri at fáa avlamispensjón ikki verður avmarkaður bert sum peningahjálp, men heldur ímóti at gera tað möguligt at veita hjálp, so-

leiðis at avlamispensjonistar aftur kunnu koma í vinnu, ella at fáa tilíka hjálp, sum kann gera tað lættari hjá avlamintum at klára seg í tí dagliga, somuleiðis sum hjálp eisini kann latast til at úthúgva seg til okkurt starv, ella at taka uppaftur starv. Heldur ikki verður tað við hesum uppskoti ein treyt, at ein skal vera sjúkrakassalimur fyri at fáa avlamispensjón, av hesi orsök fellur avlamisgjaldið til sjúkrakassa burtur og verður ístaðin skotið upp, at kravt verður avlamisgjald ½ % av skattainntökuni.

Nevndin mælir tinginum til at samtykkja uppskoti frá landsstýrinum.

Minnilutin (Knút Wang og H. Jespersen) tekur undir við uppskoti meirilutans, men vísir til serligt uppskot og álit í lögtingsmáli nr. 6/1961: Broyting í fólkapensjónslógini.

2. viðgerð 18. september 1961.

Uppskot landsstýrisins samtykt 29—0.

---

8. Almenn forsorg

Ár 1961, 3. august legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot

Lögtingið samtykkir viðlagda uppskot frá socialministeriinum dagfest 4. juli 1961 til lóg um broyting í lóg fyri Føroyar um almenna forsorg.

Viðmerkingar:

Sum boðað frá í lögtingsmáli nr. 45/1960: Broyting í fólkapensjónslógini — tingtíðindi 1960, bls. 198 — loyvir landsstýrið sær at leggja fram uppskot til lóg um ajourførslu av lóg fyri Føroyar um almenna

forsorg við tilmæli sínum og loyvir sær at vísa til viðmerkingarnar til lógaruppskotið og til lögtingsmál nr. 45/1960.

1. viðgerð 1. september og 16. s. m. legði sociala nevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið 3. august 1961 og varð tað við 1. viðgerð 31. august 1961 beint í sosialu nevndina til viðgerðar.

Broytingarnar viðvíkja serliga einkjupensjón og einkjuhjálp, hjálp til kronisk sjúk og so at tann partur, sum foreldur hava skyldu at gjalda fyri börn, ið eru undir serforsorg, verður at falla burtur.

Eftir galdandi lóg fáa einkjur, sum hava börn, einkjupensjón, tá tær eru fyltar 15 ár tá maðurin doyr, men fellur henda pensjón burtur, tá börnini eru 18 ár. Skotið verður nú upp, at hesar einkjur fáa rætt til pensjón, tá tær eru fyltar 55 ár, eins og aðrar sum eru vorðnar einkjur aftaná at tær vóru fyltar 55 ár, somuleiðis verður skotið upp at aldursmarkið hjá barnleysum kvinnum at fáa einkjupensjón, verður lækkað frá 50 árum til 45 ár.

Nevndin hevur viðgjört málið á fleiri fundum og saman við serkönnum mannum og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Knút Wang og H. Jespersen) tekur undir við uppskotí meirilutans, men vísir til serligt uppskot og álit í lögtingsmáli nr. 6/1961: Broyting í fólkapensjónslógini.

2. viðgerð 18. september 1961.

Uppskot landsstýrisins samtykt 29—0.

9. Barnatilskot til einligar forsyrgjarar

Ár 1961, 3. august legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot

Lögtingið samtykkir viðlagda uppskot frá socialministeriinum dagfest 5. juli 1961 til lög um broyting í lög fyri Föroyar um barnatilskot til einligar forsyrgjarar v. m.

Viðmerkingar:

Sum boðað frá í lögtingsmáli nr. 45/1960: Broyting í fólkapensjónslögini — tingtíðindi 1960, bls. 198 — loyvir landsstýrið sær at leggja fram uppskot til lög um ajourførslu av lög fyri Föroyar um barnatilskot til einligar forsyrgjarar v. m. við tilmæli sínum og loyvir sær at vísa til viðmerkingarnar til lógaruppskotið og til lögtingsmál nr. 45/1960.

1. viðgerð 1. september og 16. s. m. legði socinla nevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði mállð fyri tingið 3. august 1961 og var tað við 1. viðgerð 31. august 1961 beint sosialu nevndini til viðgerðar.

Eins og í lögtingsmálunum nr. 6 og nr. 7/1961, verður skotið upp at broyta barnatilleggini, sommleiðis sum barnapeningurin til börn hjá einkjum og einkjumonnum, og peningur, sum verður goldin av politimeistaranum forskotsliga, verður hækkaður við 50 %.

Inntökumarkið fyri rættin til at fáa barnapening verður hækkaður og peningurin, ið latin verður til einkjumannabörn verður hin sami, sum hjá einkjubörnum. Eftir galdandi lög varð latið lægri til einkjumannabörn.

Nevndin hevur havt málið til viðgerðar og mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Knút Wang og H. Jespersen) tekur undir við uppskoti meirilutans, men vísir til serligt uppskot og álit í lögtingsmáli nr. 6/1961: Broyting í fólkapensjónslögini.

2. viðgerð 18. september 1961.

Uppskot landsstýrisins samtykt 29 0.

10. Eykalán og eykastudningur til nýggj fiskiför

Ár 1961, 28. august legði Kj. Mohr, lögtingsmaður fram soljóðandi:

Síðani Danmarks Nationalbank hin 23. mai í ár hækkaði diskontoina til 6½ % eru obligatiónskursirnir í Danmark lækkaðir munandi. Hetta hevur havt ta ávirkan á okkara viðurskifti í Föroyum, at kursurin á obligatiónunum hjá Færøernes Realkreditsinstitut, sum verða noteraðar á Börsen í Keypmannahavn, lækkaði niður í 93¾ fyri obligatiónir við áljóðandi rentu uppá 5½ %. Fyri obligatiónirnar hjá Danmarks Fiskeribank hevur kursminkanin eisini verið munandi. Meðan kursurin áðrenn diskontobækkingina var 91½ fyri 5½ % obligatiónir, er hann nú 87¾ fyri 6 % obligatiónir.

Fyri teir menn og tey felög, sum hava gjört sáttmáli um nýbygging av fiskiskipum og fyri teir, sum hava í umbúna at gera byggisáttmála um fiskiskip, hevur hetta havt ta ávirkan, at lánn eginpeningur uppá 10 %, sum higartil hevur verið kravdur fyri at fara undir nýbygging, ikki longur slær til.

Sambart viðlögdu skjöl við uppstilling yvir finansiering má roknast við, at tann peningahædd, sum er neyðug fyri at fáa endarnar at rökka saman, táið prioritering og studningslán frá lögtinginum er í lagi, liggur um 20 % av byggikostnaði plus vanligar útreiðslur fyri at fáa skipið heim til Föroyar o. a.

I löturi eru trý skip komin til Föroya, men ikki prioriteraði, og harumfram eru byggisáttmálar gjördir fyri 11 onnur. Fyri öll hesi skip er tað so, at eginpeningurin bert er ætlaður til 10 %. Tey flestu av felögunum mugu tí rokna við at skula útvega 10 % aftarat í eginpeningi, og vil hetta vera ógjörligt hjá fleiri av teimum.

Föroya Framburðsflokkur vil tí halda, at tað er neyðugt, at Föroya Lögting nú beinanvegin í hesi tingsetu ger tillök at veita felögum og mannum antin eykastudningslán ella lögtingsábyrgd til lánupptöku, samstundis sum tað verður roynt at gera útvegir fyri at broyta ta munnagongd, sum í löturi er galdandi fyri sölu av obligatiónum hjá Færøernes Realkreditinstitut á opnum marknaði, ella at gera eykatiltök fyri, at kursurin á hesum obligatiónum verður hildin í eini legu, sum hóskar til ta ætlan, sum lögd er fyri endurnýggjan av fiskiflotanum í Föroyum.

Föroya Framburðsflokkur loyvir sær tí at seta fram hetta

Uppskot
til

samtyktar

Álagt verður Føroya Landsstýri í samráð við Figgjarnevnd Føroya Lögtings í hesi tingsetu at seta fram uppskot til lögtingslóg í sambend við galdandi löggávu til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, sum heimilar Føroya Landsstýri at veðhalda fyri eykalán upp til 10 % av byggikostnaðinum fyri nýggj fiskiför til Føroya. Samstundis verður Føroya Landsstýri biðið um at kanna möguleikarnar fyri at hækka studningslánini upp í 30 % av byggikostnaðinum ella at seta tiltök í verk, sum miða ímóti at halda kursin á obligatiónunum hjá Færøernes Realkreditinstitut á eini hædd, sum samsvarar tí upprunaligu studningsskipanini.

1. viðgerð 30. august og 16. september legði figgjarnevndin fram suljóðandi

Álit

Føroya Frambursflokkur hevur lagt fram uppskot til samtyktar, hareftir álagt verður landsstýrinum í samráð við figgjarnevndina at seta fram uppskot til lögtingslóg, sum heimilar landsstýrinum at veðhalda fyri eykaláni upp í 10 % av byggikostnaðinum fyri nýggj fiskiför til Føroyar og samstundis verður landsstýrið biðið um at kanna möguleikan fyri at hækka studningslánið upp í 30 % av byggikostnaðinum, alt at viga upp ímóti tí kurstapi, lánini frá realkreditstovninum eru komin undir.

Tjóðveldisflokkurin hevur sett uppskot fram til lögtingslóg til broyting í lögtingslóg um studning til endurnýgging av skipaflotanum soleiðis, at hesi studningslán kunnu veitast upp í 30 % og soleiðis at tey kunnu tryggjast við veðrætti í skipunum innanfyri 100 % av virðinum.

Undir 1. viðgerð av hesum báðum málum vórðu tey beind í figgjarnevndina og hevur figgjarnevndin viðgjört tey undir einum. Landsstýrið hevur 15. september 1961 sent figgjarnevndini soljóðandi skriv:

«Sum kunnugt er henda prioriteringsætlan lögd undir endurnýgging fiskiskipaflotans:

Frá realkreditstovninum 50 % lán við 1. prioritets veðrætti.
Frá Kongeriget Danmarks Fiskeribank 20 % lán við 2. prioritets veðrætti.
Frá landskassanum 20 % studningslán við 3. prioritetsrætti.

Hesi lán tilsamans 90 % saman við eginpeninginum 10 % verð ætlað at vera tað, ið förvaði fyri at kunna gjalda byggipeningin.

Realkreditstovnurin fyri mesta partin og fiskaribankin fáa sín útlánspening við sölu av lánsbrövum, og verða hesi noteraði í Köbenhavnar Börs. Kursurin hevur ongantið verið pari, serliga ikki fyri lánsbrövini frá fiskaríbankanum, men hevur kurstapið inntil mai 1961 ikki verið störri, enn at lántakararnir hava greitt byggipeningin, m. a. við at hækka eginpeningin, so kursmunurin varð javnaður.

So hendi tað, at Nationalbankin 23. mai 1961 hækkaði diskonloina frá 5½ til 6½. Meðan kursurin frammanundan fyri lánsbrövini frá realkreditstovninum og fiskaríbankanum vanliga hevði ligið um ávikavist 98 og 93, er hann pr. 8 í hesum ávikavist 93¾ og 87¼.

Hvörja ávirkan henda broyting hevur á finansieringina verður helst best lýst við einum dömi. Roknað er við einum skipi, ið kostar 1,300.000 kr. at byggja.

	1	2	3
	kurs 100	kurs 98	kurs 93¾
Realkreditstovnurin ..	650.000,— kr.	637.000,— kr	609.375,— kr.
	kurs 100	kurs 93	kurs 87¼
Fiskaríbankin	260.000,— kr	241.800,— kr.	226.850,— kr.
	910.000,— kr.	879.800, kr.	836.225,— kr.

Kurstapið 1 - 2	31.200,— kr. ella 2,4 % av byggipeninginum.
Kurstapið 1 3	73.775, kr. ella 5,7 % av byggipeninginum.
Kurstapið 2 3	42.575,— kr. ella 3,3 % av byggipeninginum.

Meðan alt tapið eftir dagskursi er 5,7 %, t.v.s. at viðkomandi um ikki annar útvegur er, má ökja eginpeningin til skipakeypið til 15,7 %, so er munurin millum «vanligan» kurs og dagskurs 3,3 % ella kravið til eginpeningin 13,3 %.

At útvega henda eykaeginpeningin fellur óivað mongum forfört, og hjá summum er tað helst ógjörligt. Skipakeyparar hava eisini vent sær til landsstýrið um stuðul.

Landsstýrið hevur havt samráðingar við báðar bankarnar um tann loysningin, at teir, har ið neyðugt er, veita lán svarandi til um ikki allan so tó ein part av kurstapinum. Lánið skuldi veitast viðkomandi skipakeypara móti landskassaveðhaldi og 4. prioritets veðretti í skipinum. Ætlanin var við hesum lánum at stuðla teir, ið hava gjört byggisáttmála, og sum ikki enn hava fingið skipini prioriteraði, eisini tey sum eru komin til landið. Herumframt var hugsað um tey, sum kontraktaði verða.

Föroya Banki hevur í skrivi 14. í hesum, jbr. viðlagda fotokopi, givið principiella tilsögn at veita uppí um 40.000 kr. í eykaláni uppá hvört skipið móti landskassaveðhaldi at gjalda aftur yvir 3 ár, til teir, ið hava gjört sáttmála, men ikki enn hava fingið skipið prioriterað, um so er, at viðkomandi ikki kann útvega peningin sjálvur. Bankin upplýsir, at av teim 11 skipakeyparum, bankin hevur, eru bert 2, ið helst ikki kunnu hetta. Viðvíkjandi sáttmálum, ið koma, heldur bankin seg ikki í forhond kunna geva somu tilsögn, men vil hann taka stöðu, hvört málið sær.

Sjóvinnubankin hevur ikki svarað enn, men er útlit til, at stöða hansara er hin sama sum hjá Föroya Banka.

Landsstýrið hevur saman við fíggjarnevndini eftir löglingslóg nr. 17, 25. apríl 1960 «heimild landskassans vegna til fíggjarárið 1964/65 er endað at læna og/ella veðhalda fyri lánum uppí 40 mill. kr. til skipabygging.»

Vísandi til tað, ið her er flutt fram, heitir landsstýrið á fíggjarnevndina um samráðingar um spurningin.»

Landsstýrið og fíggjarnevndin hava síðani samráðst um málið.

Meirilutin (J. F. Øregaard, S. Petersen, Joh. M. Fr. Poulsen, Andr. Djurhuus og Poul Petersen) er samdur við landsstýrið um at veita mannum veðhald av láni við heimild í löglingslóg nr. 17 frá 25. apríl 1960 at javna út munin millum kursin, ið var áðrenn nationalbankin setti diskontoina upp og dagskursin, tó hægst 5 % av byggipeningimum.

Meirilutin heitir tó á landsstýrið um at taka uppaftur samráðingarnar við bankarnar um at fáa lánitíðina longda, tó helst í 10 ár, men letur hetta seg ikki gera, er meirilutin samdur um, at landsstýrið veðheldur fyri lánum undir teimum treytum, sum tað og bankarnir verða samdir um.

Tá ið nevndi veðhaldsmöguleiki er, er ikki neyðugt at leggja málið fyri löglingið og setur meirilutin tí onki uppskot fram.

Poul Petersen fólkaflokksins vegna heldur fyri sum sínu principalu stöðu, at það er rímuligt, at ríkiskassin rindar mannum og felögum það kurstap, sum stendst av diskontobækkingini við tað, at ein tílík diskontobækking og harav fylgjandi kurstap rakar föroyskar, vinnuligar peningalleggingar ólika meinari enn tilsvarandi fleggingar í einum landi, sum er so vinnuliga frankomið, sum Danmark er tað.

Í fyrstu syftu verður tí landsstýrinum álagt at taka upp tingingar við ríkisstýrið um tað, sum er fört fram og uppskot verður sett fram samsvarandi.

Annars tekur Poul Petersen undir við landsstýrisins uppskoti til fíggjarnevndina, men við tí broyting, at avdráttarlíðin verður minst 5 ár.

Hemming Jespersen og Erlendur Patursson vísa á uppskot tjóðveldisflokksins frá 25. august 1961 um at veita möguleika fyri í vissum föroum

at hækka studningslánini upp í 30 % og finnast at, at hetta uppskot ið varð beint í figgjarnevndina 30. august 1961, ikki hevur verið avgreitt úr nevndini enn.

Hemming Jespersen og Erlendur Patursson halda hesa leið, ið tjóðveldisflokkurin hevur víst á, vera betri enn uppskot landsstýrisins og mæla til at uppskot tjóðveldisfloksins verður samtykt.

Uppskot

frá

minnilutanum Poul Petersen:

Landsstýrinum verður álagt at taka upp tingingar við ríkisstýrið samsvarandi tí sum fört er fram í málinum.

og 18. soljóðandi

Uppískoytisálit:

Fyri p/f J. F. Kjölbro í Klakksvík hevur L. Lützen landsrættarsakförari heitt á landsstýrið at leggja inn á ting uppskot til broytingar í lóg um endurnýgging av skipaflotanum, soleiðis at studningur kann veitast eisini til keyp av skipum. Partafelagið hevur árs gamlan trolara uppá hondina úr Íslandi. Trolarin eitur FREYR, er 987 brutto registar tons og 341 netto, 237' 11" langur, 34' 1' breiður, 16' 10¾" djúpur, hevur 2300 hk dieselmotor, lastin er av aluminium og köld niður, manningarrúm til 48 og hevur kostað um kr. 7.400.000.— at byggja. Trolarin er bygdur í Týsklandi, kann ætlandi fáast fyri um kr. 6.500.000.— soleiðis, at tánið sum í honum stendur kann yvirtakast at gjalda í 10-12 ár til 6 % í rentu.

Trolarin tekur um 700 tons av saltfiski.

Um so verður, at studningur verður veittur til keypið, kann hann t.d. verða veittur yvir eitt áramál uppá 3-4 ár.

Figgjarnevndin hevur viðgjört spurningin um rúmking av lógini um endurnýgging av skipaflotanum og samdist um at mæla tinginum at broyta lógina soleiðis, at studningur kann veitast í serstökum förum til keyp av fiskiskipum sum eru yngri enn 2 ár, men eftir avgerð landsstýrisins saman við figgjarnevndini og setur fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 8 frá 6. marts 1958 (smbr. nr. 32 frá 13. mai 1959) um endurnýggjing av fiskiskipaflotanum við seinni broytingum.	lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 8 af 6. marts 1958 (jfr. nr. 32 af 13. maj 1959) om fornyelse af fiskerflaaden med senere ændringer.
§ 1.	§ 1.
Í löglingslóg nr. 8 frá 6. marts 1958 § 1, punkt 1. og § 2 verður skotið inn aftaná «nýbygging av» «í serfökum föri saman við figgjarnevndini til keyp av fiskiskipi yngri enn 2 ár.»	I lagtingslov nr. 8 af 6. marts 1958 § 1, punkt 1. og § 2 indskydes efter «nybygning af» «i særlige tilfælde sammen med finansudvalget til köb af fiskerskib yngre end 2 aar.»
§ 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 18. september og 3. viðgerð 19. september.

Uppskotið frá Kj. Mohr fall 1—0.

Uppskot frá P. Petersen fall 7—0.

Lógaruppskotið frá nevndini var setl undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, A. Djurhuus, Joh. M. Fr. Poulsen, Johan Simonsen, Dion Nolsöe, V. Nielsen, Frederik Hansen, P. M. Dam, Poul J. Olsen, J. Högnesen, E. Paturssun, H. v. Högadalsá, H. Jespersen, Haldor Hansen, J. F. Öregaard.

Atkvöddu ikki: Tr. Samuelsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, Kj. Mohr, K. Djurhuus.

Burtursladdir: Jens Chr. Olsen, J. H. Danbjörg, L. Joensen og S. Joensen.

Uppskotið samlykt 21 - 0.

11. Broyting í lóg um endurnýgging av skipaflotanum

Ár 1961, 28. august legði Erlendur Patursson lögtingsmaður fram sóljóðandi

Uppskot
til

lóg um broytingar í lóg nr. 8 frá 6. mars 1958
um endurnýgging av skipaflotanum.

1. §

2. § fær hetta uppískoyti:

Í vissum förum og eftir tilmæli frá nevndini, sum nevnd er í 19. § í hesi lóg, kunna tó studningslán veitast við upp í 30 % av virði skipsins við maskinu og öðrum tilhoyri.

2. §

4. §, 1. pkt., verður orðað soleiðis:

Studningsláu verða tryggjað við veðrætti í viðkomandi skipi innan fyri 90-100 % av virðinum, smb. 2. §.

3. §

Henda lóg kemur beinan vegin í gildi.

Greinargerð

Frá tí at skipaloysið av álvara fór at gera vart við seg fyri um leið 10 árum síðan, hevur tjóðveldisflokkurin á tingi nærum á hvörjum ári borið fram uppskot og tilmæli um endurnýgging fiskiskipaflotans. Tá tær fyrstu lánilógirnar loksins komu í gildi, krevdust 20 % í eginpeningi hjá teimum fyritökum, ið fóru undir skipabygging. Eftir áskoðan tjóðveldisflokksins var hetta krav um eginpening ov högt, og seinni fekkst so tann skipan, at tað bert kravdust 10 % í eginpeningi.

Henda broyting var almikið framstig, men hjá mongum nýggjum fyritökum vóru peningaligu viðurskiftini tey, at tá hin kravdi eginpeningur var útvegaður og goldin, var eingin tökur peningur eftir til rekstur. Meiriluti fekkst tó ikki í tinginum fyri at hækka lánini meir enn longu var gjört.

Nú er so tað heut, at kursurin á brævlánum realkreditstovnsins er

fallin niður í 92.5 % av navnvirðinum. Hvat lánum frá fiskivinnubankanum viðvikir, er kursmunurin verðin væl størri enn hetta.

Hetta merkir í veruleikanum tað, at tær fyritøkur, sum aftan á at hava fingið lánjáttan frá realkredittstovninum og fiskivinnubankanum, hava latið skip byggja ella hava skip í gerð, standa hjálparleys, av tí at tær — alt eftir stødd skipsins — fáa einar 30-50.000 kr. minni at ráða yvir, enn tær høvdu roknað við.

Hesar fyritøkur hava heldur ikki tann útveg at útvega sær lán aðrar staðir, av tí at tilboð um finansiering, eitt nú í Noregi, bert viðvikja framtíðarbygging. Her eru so stall nakrar fyritøkur, sum viðvikjandi finansiering eru illa komnar, uttan egna skuld, bæði samanborið við tær fyritøkur, sum longu hava bygt og ætlandi tær sum koma aftan á.

Hetta lógaruppskot er í fyrstu syftu í hvussu er ætlað at hjálpa teimum nevndu fyritøkum. Sjálvsagt ber ikki til at siga nakað við vissu um hvussu finansieringsvónirnar verða í framtíðini, men hvat skipabygging í Noregi viðvíkir, er í løtuni møguligt at fáa 70 % í bankaláni við 6 % í rentu p.a. at gjalda aftur eftir 10 árum og við 103 % útgjalding.

1. viðgerð 30. august og 19. september lógdu Hemming Jespersen og E. Patursson fram soljóðandi

Minnilutaálit

Fellur uppskot tjóðveldisflokksins um at broyta studningslánslógina soleiðis, at studningslán til skipabygging í vissum førum kann verða veitt við upp í 30 % av byggikostnaðinum, og ikki onnur tiltök verða gjørd í hesum máli, uttan tey, at landsstýrið veðheldur fyri 4. veðrættarláni, soleiðis sum frá er greitt í skrivi landsstýrisins, er vandi fyri at føroysk skipabygging kemur at stødga, í hvussu er hjá teimum nýggju fyritøkum, ið fiskimenn og aðrir við teimum hava tikið seg saman í.

Møguliga kemur tó skipabyggingin hjá teim gomlu stórfyritøkunum at halda fram m.a. studlað av lógini um skattafrían eykaavskrivingar — men vit halda tað vera bæði skaða og spell, fara nú skipa- og útgerðarfyritøkur fiskimanna og annara, ið ikki teljast í hópi stórútgerðarmanna, at detta niður fyri.

Vit mæla tí eina ferð enn lingtinum til at samtykkja uppskot tjóðveldisflokksins.

2. viðgerð 18. og 3. viðgerð 19. september 1961.
Uppskotið frá tjóðveldisflokkinum fall 11-- 0.
(smbr. tingmál nr. 10/1961).

12. Djóralæknalönin

Ár 1961, 1. september legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um broytingar í lögtingslóg um tænastumenn landsins.

§ 1.

Í lögtingslóg nr. 31, 18. mai 1961, 46. §, 8. lönarflokkur, um tænastumenn landsins verða gjördar hesar broytingar:

1) Orðið «Djóralækni» verður broytt til «Landsdjóralækni».
2) Aftaná orðini «um árið» í 2. stk. verður sett:

   Landsstýrinum verður uttan mun til lönaraldur, og um hann hevur verið aspirantur, heimilað at löna landsdjóralæknanum við endalön. Fyri at hava eftirlit við reinföri í matframleiðslu og matsölu og haraftura laboratorieftirlit við mjólkaframleiðsluni fær landsdjóralæknin í sumsýning kr. 10.000,-- um árið, fyri fyrst fyri at leggja hetta eftirlit til rætlis. Bæði á veruligum tænastuferðum og í praksis fær landsdjóralæknin frí ferð og tima- og dagpening eftir vanligum reglum fyri tænastumenn.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landets tjenestemænd.

§ 1.

I lagtingslov nr. 31 af 18. maj 1961, § 46, 8. lönningsklasse om landets tjenestemænd foreslages følgende ændringer:

1) Ordet «Dyrelæge» ændres til «Landsdyrelæge».
2) Efter ordet «aarlig» i 2. stk. tilföjes:

   Landsstyret bemyndiges til at aflönne landsdyrelægen med slutlön uden hensyn til lönningsanciennitet, og om han har været aspirant. For at have tilsyn med levnedsmiddelhygiejnen, baade produktion og salg og kontrol med mælkeproduktionen faar landsdyrelægen et aarligt vederlag paa kr. 10.000,-, i förste omgang for at tilrettelægge dette tilsyn. Baade under egentlige tjenesterejser og i praksis faar landsdyrelægen fri befordring og time- og dagpenge efter de for tjenestemænd gældende almindelige regler.

§ 2.

Henda lög fær gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir umsókn varð C. J. Beck vegna aldur loystur úr embætinum sum djóralæknir við eftirlön frá 1. juni í ár.

Embætið varð lýst leyst í mai í fylgjandi blöðum:

Medlemsblad for den danske dyrelægeforening.

Nordisk veterinærmedicin.

Statstidende.

Eftir lönarlög tænastumanna er djóralæknin löntur í 8. löunarflokki við byrjunarlön kr. 19.800.— um árið, hækkandi 3. hvört ár við kr. 1.080.— til kr. 21.120.—. Haraftrat hevur djóralæknin frian praksisrætt eftir takstum, ið eru fyriskipaðir av landsstýrinum, smbr. reglugerð nr. 1 frá 3. januar 1959.

Den danske dyrelægeforening segði seg ikki kunna virka fyri, at embætið varð sett, uttan so at tryggjað varð djóralæknanum ein árlig samlað inntöka í minsta lagi uppá kr. 40.000.—, og helt felagið aftrat, at tað var neyðugt frammanundan at tryggja djóralæknanum eini hóskandi hús til rimiliga leigu. Eisini segði felagið, at tað var forboðið limunum at sökja ella taka við veterinærum störvum, ið ikki frammanundan og við góðkenning frá stjórnini hava verið lýst leys í limablað felagsins við tilskilaðum lönartreytum.

Ongin djóralækni hevur sökt embætið.

Fyri at landið ikki skuldi liggja í djóralæknaloysi og eisini eftir áheitan frá Föroya Búnaðarfelag, heitti landsstýrið so á C. J. Beck, um hann ikki kundi halda fram fyri fyrst til somja var funnin millum landsstýrið og djóralæknafelagið. Hesum eftirlíkaði C. J. Beck, og lovaði hann at virka til 10. august 1961. Útlit var tó til at framlongja hesa skipan, um bert reelt útlit var til, at somja fekst millum landsstýrið og felagið.

Fyrst í august mánað 1961 hava so samráðingar verið millum landsstýrið og umboðsmann fyri djóralæknafelagið. Úrslitið av hesum samráðingum er fylgjandi:

1) Djóralæknin verður, beinanvegin hann verður tilnevndur, löntur við endalön í 8. lönarflokki ella við kr. 21.120.— um árið.
2) Fyri at hava eftirlit við reinföri í matframleiðslu og matsöln og haraftrat laboratorieftirlit við mjólkaframleiðsluni fær djóralæknin í samsýning kr. 10.000.— um árið, fyri fyrst fyri at leggja hetta eftir-

lit til rættis. Landskassin rindar í fyrsta umfari hesa samsýning, til nærri reglur eru gjördar fyri hetta eftirlit, og verður tá stöða tikin til, hvör í framtíðini skal gjalda, t.d. kommuna ella viðkomandi framleiðari ella handilsmaður sjálvur.

3) Galdandi takstir verða bækkaðir, soleiðis at praksisinntökan verður ökt við umleið 100 %.

4) Landskassin veitir djóralæknanum fría ferð og tima- og dagpening bæði á tænastuferðum og í praksisferðum, tó so at djóralæknin mest möguligt nýtir vanliga innanoyggja ferðasambandið.

Haraftrat gav landsstýrið felagnum tilsögn um, at um ein generel broyting í normeringini eftir tænastumannalógini verður tikin upp til viðgerðar, verður eisini spurningurin um lön djóralæknans tikin til umhugsunar.

Síðan málið hevði skund, legði landsstýrið semjuna fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

Fíggjarnevndin hevði so fund 9. august 1961. har fylgjandi varð samtykt:

Fíggjarnevndin heldur ikki heimild er fyri at loysa henda spurning uttan tingviðgerð, men at möguleiki skuldi verið fyri at framt fyriliggjandi uppskot, tá tingið kemur saman 12. september í ár.

Serliga viðvíkjandi uppskotinum frammanfyri pkt. 1 er at viðmerkja, at tað eru fleiri embætir eftir tænastumannalógini, ið hava fingið heitið «lands-», t.d. landsverkfröðingur og landsbókavörður, sum frámerki at vísa, at viðkomandi er tænastumaður landsins.

Vísandi til tað, sum her er flutt fram og serliga til fíggjarnevndarsamtyktina, verður málið við hesum lagt fyri lögtingið; viðmerkt verður, at tað hevur verið hjá lönarráðnum til ummælis, men eru har hugsaninar ymiskar um, hvussu málið skal fremjast.

1. viðgerð 14. september og 16. september legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

1. september í ár var málið lagt fram á ting av landsstýrinum. Við 1. viðgerð, sum fór fram 14. september var málið beint til viðgerðar í fíggjarnevndini.

Í viðmerkingum landsstýrisins verður upplýst, at djóralæknaembætið, ið er normerað í 8. lönarflokki við eini byrjunarlön uppá kr. 19.800. og slutlön uppá kr. 24.120. – og aftarat föstu lönini skal so djóralæknin hava frían praksisrætt — í donskum blöðum hevur verið lýst leyst í mai mánað í ár, men at ongin hevur sökt embætið.

Í Föroyum er ongin leysur djóralækni og felagið «Dansk Dyrelæge-

forcuing» hevur sagt seg ikki kunna virka fyri, at djóralækni úr leirna felag sökir starvið uttan so, at honum verður tryggjað ein lön, sum í minsta lagi má vera einar kr. 10.000,— og harumfram hús til rímiliga leigu.

Fyri at eftirlika hesum skjýtur landsstýrið upp, at djóralæknin

1) verður löntur við slutlön kr. 24.120,—,
2) fær 10.000 kr. eyka fyri eftirlit við söluhúðum, sum selja mjólk og kjötvörur,
3) at lönin fyri praksis verður hækkað við 100 % og
4) at landskassin betalir allar ferðir djóralæknans bæði tá hann ger tænastuferðir, og tá hann fer burtur í praksisferðum, haraftrat mælir landsstýrið til, at landskassin betalir djóralæknanum dagpening eisini á praksisferðum hansara, hesin dagpeningur er í löluni kr. 38,—.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, P. Petersen, A. Djurhuus, Joh. Poulsen, Henning Jespersen, Erlendur Patursson) heldur sum málið liggur fyri í löluni, at hann kann ikki mæla tinginum at taka undir við uppskoti landsstýrisins, men at landsstýrið eigur at taka upp samráðing við föroying, sum er djóralækni í Danmark og frá honum fáa at vita hvörji kröv, hann setur fyri at taka við hesum starvi, og setur meirilutin uppskot samsvarandi.

Uppskot

frá

meirilutanum:

Landsstýrið verður biðið um at taka upp samráðing við föroyskan djóralækna í Danmark og leggja úrslitið av hesum samráðingum fyri tingið.

Uppskot

frá

minnilutanum (S. Petersen):

Djóralæknin verður löntur sambæri lög nr. 31 frá 18. mai 1961 í 8. lönarflokki, men um hann er ein reyndur maður, fær hann slutlön beinan vegin.

Landsstýrinum verður latið upp í hendi at gera reglur fyri arbeiðisviðurskiftir djóralæknans og at ásetta samsýning fyri arbeiði hansara.

2. viðgerð 18. september.
Minnihlutauppskot frá S. Petersen fall 3—0.
Uppskot landsstýrisins § 1 fall 5—0.
Uppskot meirihlutans samtykt 25—0.

13. Eftirlönarspurningur hjá fyrrv. djóralækna

Ár 1961, 1. september legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður framfram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um eftirlön fyrrverandi djóralæknans.	lagtingslov om pension til den forhenværende dyrlæge
§ 1.	§ 1.
Tilskitað verður Carl Johan Bech, fyrrverandi djóralækna, hægsta eftirlönaraldur, ella 12/60 av eftirlönarinntökuni, eftir teimum reglum, ið galdandi vóru áðrenn 1. apríl 1960.	Der tildeles den forhenværende dyrlæge Carl Johan Bech höjeste pensionsanciennitet eller 12/60 af den pensionsgivende lönningsindtægt efter de regler, der var gældende inden 1. april 1960.
§ 2.	§ 2.
Henda lög fær gildi frá 1. juni 1961.	Denne lov faar gyldighed fra 1. juni 1961.

Viðmerkingar:

Tá Carl Johan Bech eftir umsókn varð loystur úr embætinum sum djóralækni 1. juni 1961 vegna aldur, og síðani Dansk Dyrelægeforening aftaná lýsing ikki helt seg kunna mæla linum sínum til at sökja embætið undir teimum lönartreytum, ið eru, heitli landsstýrið á C. J. Bech,

djóralækna, um ið hvussu er fyri fyrst, at taka starvið upp aftur, smbr. eisini viðlögglu áheitan frá Föroya Búnaðarfelag.

Samráðingar vórðu so, og endaðu tær í semju millum landsstýrið og djóralæknan, har djóralæknin bant seg til at virka til 10. august í ár, treytað m.a. av, at landsstýrið leggur fyri lögtingið uppskot um, at eftirlön hansara verður roknað eftir hægsta eftirlönaraldri. Eftir samráðing av nýggjum við djóralæknan, hevur hann sagt seg vilja virka til lögtingið, nú tað er saman í hesum dögum, hevur tíkið stöðu til eftirlönarspurningin.

Carl Johan Bech er föddur 25. november 1895. Hann hevur virkað sum djóralækni í Föroyum síðani 1918, frá 1. april 1920 (kanska 1. november 1919) í almennari tænastu. Við lögtingslóg nr. 76, 22. december 1951 varð djóralæknastarvið skipað sum tænastumannaembætti, og varð Carl Johan Bech tilnevndur við lönaraldri frá 1. april 1948 og við eftirlönaraldri frá 1. januar 1947, smbr. lögtingslóg nr. 3, 9. marts 1954 § 1 nr. 4.

Eftir galdandi reglum fær Carl Johan Bech í eftirlön við 14 ára eftirlönaraldri 33/60 av eftirlöngevandi lönini, meðan uppskotið frammanfyri gevur honum 42/60 við 28 ára lönaraldri. Munurin er um kr. 300,— um mánaðin.

At veita tænastumanni eftirlönaraldur aftanum tann dagin, hann er settur sum tænastumaður, eru dömi um, smbr. nevndu lögingslóg nr. 3, 9. marts 1954, har fleiri tænastumenn hava fingið eftirlönaraldur sín roknaðan, sum um teir frá fyrstu tilnevning í starv vórðu settir í embætti við eftirlönarrætti. Tað at lönarlóg og eftirlönarlóg eru komnar aftanó fyrstu tilnevning er ikki at skylda teimum fyri, og er tí skipað so fyri, at stöða teirra verður eins og hjá teimum, ið settir verða, eftir at lóggávan er framd.

Lönarráðið er móti at fremja fyriliggjandi uppskot.

Föroya Búnaðarfelag.
Tórshavn, 19. juni 1961.

Vit eru komnir í eina sera álvarsama stöðu av tí, at tað er ongin djóralækni í landinum. Hetta kann koma mongum jarðabrúkara dýrt at standa, tí tað er ofta so, at fey bestu djórini eru fey, ið tola minst av og eru fey eymastu, tá ið sjúka kemur á.

Vit loyva okkum at biðja landsstýrið gera alt fyri beinanvegin at fáa greitt hetta soleiðis, at djóralæknin C. J. Bech kemur at kunna hjálpa

monnum við sjúkum djórum, til ein annar er komin í hansara stað, og leggja soleiðis til rættis, at vit skjótast kunnu vóna at fáa ein nýggjan djóralækna.

1. viðgerð 14. september og 16. s. m. legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er av landsstýrinum lagt fram á ting 1. september og var við 2. viðgerð 14. september beint til viðgerðar í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður upplýst, at djóralæknin Carl J. Bech eftir umsókn var loystur úr embætinum frá 1. juni 1961. Orsakað av, at ongin djóralækni hevur sökt starvið, hóast tað hevur verið lýst leyst, bað so landsstýrið djóralæknan C. J. Bech um fyribils at taka aftur við starvinum. Hesum játtaði djóralæknin, treytað av, at landsstýrið legði fyri tingið uppskot um eftirlön hansara verður roknað eftir hægsta eftirlönaraldri. Hetta er ein löuarmunur uppá umleið kr. 300.— um mánaðin.

Málið hevur verið lagt fyri lönarráðið til ummælis, men hevur ráðið mælt frá at samtykkja nevnda uppskot.

Fíggjarnevndin hevur viðgjört málið og heldur, at um djóralæknin var farin úr starvinum 1. juni og ikki var heilt á hann um fyribils at taka aftur við starvinum, vildi ikki spurningurin um lækkan av eftirlön verið komin fram og er sostatt samd við lönarráðið, at tað ikki er orsök at broyta reglurnar um eftirlön djóralæknans, og setur sostatt onki uppskot fram.

2. viðgerð 18. september.

Uppskot landsstýrisins fall 4—0.

14. Detailprojektering av tunnell v. m. í Norðoyum

Ár 1961, 15. september legði Poul J. Olsen lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um detailprojektering av tunnell í Norðoyum og skitsuprojektering av brúgv um Hvannasund.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað at skipa fyri, at fjallaholini, ið eru ætlað at gera í Norðoyum, til sambindingar av Klakksvík, Árnafirði og Norðdepli verður detailprojekterað og brúgv um Hvannasund verður skitsuprojekterað.

§ 2.

Útreiðslurnar av tí undir § 1. nevnda projekteringsarbeiði verða goldnar úr landskassanum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om detailprojektering af tunnel paa Norderöerne og skitseprojektering af bro over Hvannasund.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at sörge for, at tunnellerne, som man har til hensigt at lave paa Norderöerne til at forbinde Klakksvík, Árnafjörð og Norðdepli bliver detailprojekteret, samt at bro over Hvannasund bliver skitseprojekteret.

§ 2.

Udgifterne til af det i § 1 nævnte projekteringsarbejde afholdes af landskassen.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Menn eru samdir um tunnellgerð í Norðoyum til sambindingar av Klakksvík, Árnafjörð og Norðdepli og er til tess gjört eitt skitsuprojekt. Men fyri at arbeiðið kann verða útboðið eins og tilfellið var við tunnellgerðini í Suðuroy, má detailprojektering fara fram, og loyvir undirritaði sær at seta fram uppskot um hesa projektering.

Sum lið í teirri sambindingarætlan, ið nevnd er, má brúgv verða gjörd um Hvannasund! Kostnaðurin av eini tilíkari brúgv er ikki ætlaður, og projekteringsarbeiðið er heldur ikki gjört. Tá ið tað er náttúrligt, at

hetta arbeiði eisini verður útboðið og helst saman við tunnelgerðini, er tað rímligt at kostnaðarætlan og fyri fyrst skilstuprojektering fara fram samstundis, sum projekteringin av tunnellunum verður gjörd.

---

15. Frágreiðing frá millumtinganevndini í telefonmálum

Ár 1961, 15. september legði M. Johannesen lögtingsmaður fyri nevndina fram soljóðandi

Frágreiðing

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 21. februar 1961, og 27. februar var tað til 1. viðgerðar, har tað varð beint í serliga 7-mannanevnd.

Nevndin hevur býtt seg í eina meiriluta (P. M. Dam, Marius Johannesen, Vilhelm Nielsen, Hans Iversen og Joh. M. Fr. Poulsen) og ein minniluta (Frederik Hansen og Hemming Jespersen).

Tað gekk rúm tið, áðrenn nevndin fekk skipað seg og farið til arbeiðis, og lá ið hetta so umsiðir var gjört, vísti tað seg, at tilfarið, sum nevndin fekk at seta seg inn í, var so ógvuliga rúgvisnikið, at vónleyst var at hugsa um at fáa arbeiðið frá hondini í tingsetuni 1960. Tað var tí skofið upp og samtykt, at nevndin skuldi halda fram við arbeiðinum sum millumtinganevnd, á ólavsöku 1961 hevði hon enn ikki lokið arbeiði sítt, og tí skjeyt tingformaðurin upp, at hon skuldi halda fram við arbeiðinum, til tað var avgreitt.

Av tí tilfari, sum nevndin hevur arbeitt við, er fyrst at nevna frágreiðingina frá tí kanningarnevnd frá Kjöbenhavns Telefon Aktieselskab, sum eftir áheitan frá Föroya landsstýri var her í oktober mánaði 1960 fyri at kanna viðurskiftini hjá Telefonverki Föroya Lögtings, bæði tey umsitingarligu, figgjarligu og teknisku viðurskiftini. Henda frágreiðing, sum var rætliliga drúgv, varð fingin í so nógv eintök, at hvör nevndarlimur hell á sínum, og tað samu varð gjört við onnur skjöl, sum komu fram í málinum, eitt nit viðmerkingar til frágreiðingina frá stjóranum, rokskapir o. a.

Nevndin hevur eisini samráðst við telefonstjóran, Eskild Christiansen, og gav hann fyrst skrivligar viðmerkingar til frágreiðingina frá kanningarnevndini, eins og hann fleiri ferðir gav nevndini munnligar upplýsingar, sum hon yuskti.

Somuleiðis hevur eisini Jógvan Sundsstein, geamskoðari, Poul Poulsen, telefonmeistari, og Poul Engberg Poulsen, yvirmekanikari, verið á fundi saman við nevndini.

Burtur úr hesum skrivligu og munnligu frágreiðingum heldur nevndin seg hava fingið eina vissa hylling á teim ymsu viðurskiftunum við telefonverkið.

Eftir rokuskapinum at döma tykist figgjarstöða telefonverksins at vera betri, enn nevndin hevði væntað. Rokuskapurin fyri 1. april 1961 vísir ein beinleiðis vinning uppá 139.000 kr., meðan vil at döma eftir frágreiðingini frá kanningarnevndini hövdu roknað við halli. Tað tykjast tí ongar grundir vera til at ganga landsstýrinum á möti um at hækka tey ymsu telefongjöldini stórvegis fyri at greiða dagliga rakstur telefonverksins.

Meirilutin förir fram, at hann heldur tað vera rætt, fyri at verkið skal fáa tað eitt sindur rúmari peningaliga, at hækka fylgjandi gjöld soleiðis:

Telefontelegram frá 12 oyrum upp í 15 oyrur orðið, so minsti takstur fyri eitt telefontelegram verður 150 oyrur. Hetta skuldi givið o. u. 19.500.— kr. og innanbiggja samtalugjaldið frá 7 til 8 oyrur skuldi givið o. u. 35.000.— kr. Hetta verður tilsamans ein meirinntöka uppá o. u. 54.500.— kr.

Vágarnar hava stutt síðan fingið nýggja radiotelefon, sum er ein störur bati aftur í móti ti,ið var, og Sandoyggin má fáa hana fyrsta dagin, eins og aðrar törvandi ábölur mugu gerast so hvört, sum ráðini eru til less. Men hetta fer at gera, at telefonnýtslan verður störri, og rímligt verður so intökan hjá telefonverkinum at veksa har eftir.

Eitt, sum eigur at vera fingið í rættlag, er skuldin, sum telefonverkið stendur í til yvsar útlendskar stovnar.

1. april 1961 var skuldin henda:

Til L. M. Ericsson A/S	519.230,39 kr.
Til Nordiske Kabel- og Traadfabriker	373.790,25 kr.
Til Store Nordiske Telegrafselskab	239.973,07 kr.
Til K. T. A. S.	55.147,20 kr.
Til Storno	238.310,05 kr.
tilsamans	1.456.150,96 kr.

Her til er at siga, at skuldin til Store Nordiske og K.T. A.S. tilsamans 295,120,27 kr. verður goldin av rakstrinum, og skuldina til Storno hevur telefonverkið heimild til at taka lán fyri at greiða.

So er tað skuldin til L. M. Ericsson og Nordiske Kabel- og Traadfabrikker, tilsamans 923.020,64 kr. Henda skuld má verða greidd skjótast gjörligt, tí bæði er rentan dýr, og so er tað eisini óhóskandi, at verkið stendur í so stórari gamlari skuld til hesar stovnar.

Fyri at fáa hesa skuld greidda, og fyri at telefonverkið skal hava nakað av pengum at arbeiða við til nýgerð, skjýtur nevndin upp at samtykkja uppskot landsstýrisins um at geva tí heimild til veðhald fyri einum láni upp á 1,6 milliónir.

Hvatið viðvíkir arbeiðsviðurskiftunum og dagliga rakstrinum av verkinum, so heldur nevndin seg hava fingið varhugan av, at har átti ymist at verið öðrvísi. Tað er bæði frágreiðingin frá kanningarnevndini og okkara egnu kanningar, sum hava styrkt okkum í hesari áskoðan.

Telefonverkið er nú vorðið ein so stórur og umfatandi stovnur við stórfingnum og dýrum tólum, sum tað er ikki hvörs mans föri at vita skil á. Við henda stovn arbeiðir eisini hópur av fólki bæði innan- og utlaudura, og tað er av alra största lýdnaingi, at samarbeiðið millum tey fólk, sum her starvast bæði millum tey, sum eru yvir og tey, sum eru undir, er hitt besta.

Í gomlum dögum, táið verkið var lítið og einfalt aftur móti tí, tað er nú, var stjórin verkfröðingur. Hetta hevur ikki verið hildið at verið neyðugt hesa seinnu tíðina, og so hevur verið lítið meir á tekniska hjálp uttan í frá. Tað er vitiligt, at nú, táið so nógv ymiskt tekniskt er at hava skil á á verkinum, verður neyðugt viðhvört at sökja sær hjálp uttanífrá. Men kortini er nevndin av teirri áskoðan, at ein verkfröðingur átti at verið knýttur at verkinum.

Ein spurningur er, sum veldir meira trupulleikar nú enn áður, og tað er at fáa telefonini innivist í teim ymsu bygdunum.

Telefonverkið eigur og rökir stöðirnar í Tórshavn og Klaksvík, utlan nakra útreiðslu fyri hesar kommununar. I Hvalba, á Tvöroyri og í Porkeri eigur verkið húsini, meðan kommununar hava raksturin av teimum, og í öllum hinum bygdunum í Föroyum er tað kommunan, sum hevur ábyrgdina og útreiðslurnar av at fáa telefonini innivist. Hetta er nú á dögum mangan torfört og í summum förum stór peningalig byrða, sum verður borin við ringum tannabiti, táið tað veitst, at summar kommunur sleppa undan öllum útreiðslum. Her ber til at nevna Nes sókónar kommunu, sum man vera hon, ið eina ringast er fyri í so máta, við tað at hon umframl at eiga og halda sjálva stöðina eisini noyðist at hava 12 aðrar hoðslöðir.

Hetta eigur umsitingin at hava í huga og royna at fáa eina aðra betri hóskandi skipan.

Meirilutin setur fram uppskot samsvarandi ti í álitinum framförda.

Minnilutin (Frederik Hansen og Hemming Jespersen) heldur ikki, at tiðin er hjá ti almenna at ganga á odda í prishækkingum. Heldur ikki meinar minnilutin, at hvör úthúgviog í telefonverkinum eigur at föra hækking í gjaldinum, men líkligari at tað var övut.

Innleggingargjaldið, sum nú er 300 kr., má verða avtikið, við tað at tað virkar sum ein forðan fyri nýggjum telefonfelögum. Endamálið má vera at fáa so nógvar telefonfelagar sum möguligt.

Hækkan av telefongjöldunum hevur verið til viðgerðar í marts 1960. Ein mænandi hækking fór fram tá. Tjóðveldisflokkurin mótmælti eini slíkari hækking og visti til, at trupulleikarnir máttu liggja hjá sjálvari fyrisitingini, og ynskti hann at fáa eina kanoing og saneering framda.

Landsstýrið fekk so í lag at fáa eina serfröðisligu nevnd frá K.T.A.S. til at kanna tey umsitingarligu og figgjarligu og teknisku viðurskiftini. Kanningarnevndin varð liðug við sítt arbeiði 1. november 1960. Síðan tá hevur landsstýrið einki gjört við málið uttan at biðja lögtingið hækka gjöldini eina ferð aftrat. Hóast kanningarnevndin vísir til stór brek innan fyri leiðslunna bæði umsitingarliga og teknisk, má tað álatast harðliga, at landsstýrið hevur ikki tikið stig til at rætta hesi stóru brek. Eftir frágreiðing frá kanningarnevndini hava stöðir á bygd verið komnar til aftaurs við avrokning við upp til 36.000 kr. og hava ikki fult avroknað enn. Her er talan um tríggjar stöðir, har fyristöðumenninir eru farnir frá. Tann eina av hesum er komin í eftirstöðu av nýggjum.

Tá ið líkur óregluligur atburður kemur fram, so eigur ákæruvaldið at laka sær av hesum, men tað er ikki gjört.

Minnilutin er samdur við meirilutan í hesum, at landsstýrið veðheldur fyri 1.500.000 kr. í láni til telefonverkið fyri at viðari útbygging kann fara fram.

Útbygging av Sandoynni eigur at fara fram beinanvegin.

Viðvíkjandi stöðunum úti á bygd so er at nevna Nes sókn, sum er okmin eina ringast fyri, og eigur at verða royut at fáa eina betri og meiri hóskandi skipan.

Uppskot

frá

meirilutanum:

Lögtingið samtykkir uppskot landsstýrisins við fylgjandi broytingum:

Í § 1 falla rætölini 1) til og við 6), 8) til og við 10) burtur í danska og föroyska tekstinum og í 7) verður «0,10» í danska og föroyska tekstinum broytt til "0,08».

Í § 2 verður í báðum tekstum 'apríl 1961» broytt til «januar 1962».

I § 3 verður í báðum tekstum «1.500.000.—» broytt til «1.600.000.—» og punktum sett aftaná «íleggingar» «investeringer, meðan í figgjarárinum 1961/62» «i finansaaret 1961/62» fellur burtur.

Sum nýggj § 4 verður sett:

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1962.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1962.

Uppskot

frá

minnilutanum:

§ 1.

Föroya landsstýri verður álagt at gera nýggja reglugerð fyri Telefonverk Föroya lögtings. Henda reglugerð verður lögd fyri tingið seinast í februar 1962.

§ 1.

Der paalægges Færöernes landsstyre at foretage nyt reglement for Telefonverk Föroya lögtings. Dette reglement vil blive forelagt tinget senest i februar maaned 1962.

§ 2.

Starvið sum stjóri fyri telefonverkinum verður lýst leyst beinanvegin. — Treytirnar eru, at maðurin er verkfröðingur og samstundis förur at hava hægstu administrativu leiðsluna.

§ 2.

Embedet som direktör for telefonværket bliver lyst ledigt straks. Betingelserne er, at manden er ingeniör og samtidig i stand til at forestaa den höjeste administrative ledelse.

1. og 2. viðgerð 18. september.

Formaðurin legði fram soljóðandi

broytingaruppskot frá millumtinganevndini:

I § 1 í uppskoti landsstýrisins fellur raðtalið nr. 12 burtur í danska og föroyska tekstinum.

Uppskot frá minnilutanum (Fr. Hansen og H. Jespersen) 1) fall 8—0.

Uppskot frá minnilutanum (Fr. Hansen og H. Jespersen) 2) var sett undir atkvöðn við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, Tr. Samuelsen, Johan Simonsen, J. P. Davidsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, Poul J. Olsen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá, H. Jespersen, Haldor Hansen og J. F. Öregaard.

Atkvöddu ikki: J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, K. Djurhuus, P. M. Dam.
Burturstaddur: Jens Chr. Olsen.

Uppskotið fall 14—0.
3. viðgerð 19. september 1961.
Uppskot landsstýrisins sum broytt í 2. viðgerð samtykt 16—0.

---

16. Veðhald av láni til S.E.V.

Ár 1961, 16. september legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um veðhald fyri láni 2 mill. kr. til S.E.V. til útbygging av Mýru- og Heljarverkinum og 60 kV linju.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað til landskassans vegna at veðhalda fyri cykaláni til S.E.V upp í 2 mill. kr. til útbygging av verkunum á Mýrunum og Heljareyga og 60 kV linju.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for laan 2 mill. kr. til S.E.V. til udbygning af Mýru- og Heljarverkinum og 60 kV linie.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for tillægslaan til S.E.V. optil 2 mill. kr. til udbygning af kraftanlæggene á Mýrunum og Heljareyga og 60 kV linie.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Við löglingslóg nr. 27 frá 12. mai 1959 veitti landskassin S.E.V. veðhald fyri láni upp í 17 mill. kr. til bygging av Mýru- og Heljarverkinum og 60 kV linju.

Felagið sigur nú frá, at hesin peningur orsakað av diskontohækking, 4 % gjaldinum eftir löglingslóg nr. 4 frá 27. apríl 1961 og prístalsviðbótarbroytingini eftir löglingslóg nr. 21 frá 16. mai 1961 saman við broyting í byggiætlan felagsins ikki rökkur til ta ætlaðu byggingina, men at neyðugt verður at læna 2 mill. kr. aftrat.

Viðlagt verður skriv felagsins frá 31. august í ár við nærri frágreiðing um málið.

Felagið hevur tilsögn frá Föroya Banka, sum vil átaka sær at emittera obligasjónir fyri hetta lán til rentu 7 % og kurs 98,12 yvir 25 ár um landskassaveðhald fæst fyri lánimum soleiðis, at 1 mill. kr. verður emitteræð í 1961 og 1 mill. kr. í 1962.

Við teim treytum, bankin bjóðar, verður effektiva rentan 7,25 %.

Felagið sökir tí um landskassaábyrgd fyri hesum láni aftrat til nevndu útbygging.

Lagt verður aftrat, at landskassin frammanundan veðheldur fyri lánum hjá S.E.V. fyri tilsamans um 30 mill. kr.

S. E. V.

Vestmanna, tann 31.8.1961.

INTERKOMMUNALT ELEKTRICITETSFELAG

Föroya landsstýri,
Tinganes,
Tórshavn.

Um veðhald fyri láni stórt 2,0 mill. kr. til Mýru- og Heljarverkini og til 60 kV anlegg.

Við skrivum df. 21.3.59 og 13.1.59 sökti elfelagið um veðhald fyri lánum upp til 17 mill. kr. til byggingar av ummevndu anleggum, og varð hetta játtað við löglingslóg nr. 27 df. 12.5.59.

Hin ökti byggikostnaður vegna diskontohækking, 4 % gjald og prístalsviðbótarbroyting hevur saman við broytan í byggiætlan elfelagsins gjört tað neyðugt at lána 2 mill. kr. aftrat, um byggiætlanin skal verða framd.

Sbr. hjálagda fotokopi hevur Föroya Banki átikið sær at emittera obligatiónir fyri nevndu upphædd við hesum treytum:

2 mill. kr., 25 ár, 7 %, kurs 98,12.

um lögtingsveðhald kann fáast.

Sostatt loyvir elfelagið sær at sökja um lögtingsveðhald fyri einum obligatiónsláni uppá 2 mill. kr., ið Föroya Banki vil átaka sær at emittera við 1 mill. kr. í 1961 og 1 mill. kr. í 1962.

Umsóknin verður nærri grundað í eftirfylgjandi frágreiðing.

Sum kannugt gjördi elfelagið í oktober 1957 eina byggiætlan fyri tíðarskeiðið 1957 65.

Sbr. nevndu byggiætlan skuldu hesi anlegg gerast:

Primær anlegg:

Dalá veitast til Fossá, ...	4,5 mill. kWh/ár,	2,7 mill. kr.
Mýrnverkið, 2500 HK, ...	8,0 mill. kWh/ár,	7,4 mill. kr.
Heljarverkið, 4000 HK, ...	8,4 mill. kWh/ár,	7,4 mill. kr.
60 kV leiðingar, 45 km, dupultsteyrar 50 mm2 ekvivalent kopar		1,9 mill. kr.
		19,4 mill. kr.

Sekundær anlegg:

20- og 0,4 kV leiðingar o. a. m.	4,6 mill. kr.
	24,0 mill. kr.

Í hjálagda yvirliti df. 30.8.61 sæst, hvussu peningurin býtir seg sundur millum tey ymisku anleggini.

Skilað verður til, at tölini eru bruttotöl, t.v.s. at íroknað er byggirenta, kurstap, provisión o.a.m.

Á umboðsfundi hin 8.5.61 varð sýrinum heimilað at taka upp eitt 2,0 mill. kr. obligatiónslán til framhald av byggingini, og vóna vil at landsstýrið tilmælir lögtinginum, at neyðugt veðhald verður givið.

Við hávirðing
Elfelagið S. E. V.

Til bygging av sekundærum anleggum varð í juni 1957 fingið eitt lán frá tryggingarfelaginum Hafnia við hesum treytum: 30 ár, 4 % p. a. og kurs 73,23.

Dalá projektið.

Í skrivi til landsstýrið df. 21.4.58 sökti SEV um veðhald fyri lánum upp til 3,0 mill. kr. at nýta til veitan av Dalánni yvir í Fossánna, og varð hetta játtað við lögtingslóg nr. 30 df. 14.5.58.

Hesi anleggslán vóru fingin:

Kommunernes Kreditforening	2,0 mill. kr.
F. A. Sparekasse	0,5 mill. kr.
Norðoya Sparikassi	0,1 mill. kr.
tilsamans	2,6 mill. kr.

Umframt varð fingið eitt stutt freista lán uppá 0,2 mill. kr. frá Sjóvinnubankanum.

Arbeiðið byrjaði í juni 1958, og varð anleggið liðugt í oktober 1959.

Sbr. byggirokniskapin fyri 1959/60 varð

kostnaðurin	2.860.389,00 kr.
+ ov nógv roknað í kurstapi	126.215,00 kr.
tilsamans	2.734.174,00 kr.

Munurin millum anleggskostnaðin og lán, kr. 134.174,00 varð í fyrsta umfari goldin við Sjóvinnubankaláninum. Seinni er upphæddin latin frá avskrivingargrunni elfelagsins.

Mýrarnar, Heljareyga, 60 kV leiðingar o. a. m.

Í skrivum til landsstýrið df. 24.3.59 og 13.4.59 varð sökt um lögtingsveðhald fyri lánum uppá tilsamans 11,0 + 6,0 = 17,0 mill. kr. at nýta til umnevnda anlegg, og við lóg nr. 27 df. 12. mai 1959 varð veðhaldið játtað.

Sbr. umsóknirnar vóru hesar broytingar gjördar viðv. bygging og anleggskostnaði:

Mýruverkið, 3500 HK, ... 9,0 mill. kWh/ár,	8,1	mill. kr.
Heljarverkið, 4000 HK, ... 8,0 mill. kWh/ár,	7,8	mill. kr.
60 kV leiðingar, 45 km, stálmastrar		
70 mm² ækvivolent kopar	2,9	mill. kr.
	18,8	mill. kr.
÷ tilskot frá NATO	1,8	mill. kr.
tilsamans	17,0	mill. kr.

Seinni játtaði staturin at veita 100 % veðhald fyri lánum til byggingina, og varð hendan finaniering fingin:

Sparekassen f. København og Omegn.		
30 ár, 5 % p.a., kurs 90,60	2,5	mill. kr.
Den Danske Landmandsbank.		
Kassekredit, franco provision, 1 % yvir lægstu útlánsrentu nationalbankans	11,5	mill. kr.
tilsamans	17,0	mill. kr

Sbr. avtalu við stat og landmandsbanka skal kassakrediturin í 1963 avloysast av einum obligatiónsláni emuiterað av bankanum.

Broytingar í byggiætlanini eins og óvæntaðar útreiðslur hava seinni dýrka anleggini so mikið, at lað, sum áður sagt, verður neyðugt at fáa 2,0 mill. kr. aftrat, um byggiætlanin skal verða framd.

Síðani 1957 eru hesar broytingar gjördar í byggiætlanini:

Mýruverkið:

Byrging hækkað 1 m, reservoir ökt frá 3,4 til 4,2 mill. tons.
Tunnel ístaðin fyri veit gjögnum Barnarnar.
Veit verður frá Hvannagjógv til Knúksgil.
Turbinan ökt frá 2500 til 3500 HK.
Ársframleiðslan ökt frá 8,0 til 12,0 mill. kWh.

Heljarverkið:

Tunnel lougd frá Breiðánni til Gassadal.
Turbinan ökt frá 4000 til 7000 HK.
Ársframleiðslan ökt frá 8,4 til 14,0 mill. kWh.

60 kV leiðingar:

Stálmastrar í staðin fyri dupullar timbursteyrar.
Leiðingstvörskurðurin verður øktur frá 50 til 70 mm², ækvivalent kopar, og gjørdur av 112 mm² copperweld.

Koblingsstøðin:

Í 1957 varð roknað við, at 60 kV leiðingarnir so leingi koyrt varð við 20 kV bert skuldi íbindast 20 kV leiðingarnar. Tá farið varð yvir til 60 kV skuldi so neyðugar koblingsstøðir gerast. Fyri at tryggja raksturin mest møguligt, hevur seinni verið hildið, at best varð um hesar støðir vóru gjørdar beinanvegin.

Av óvæntaðum útreiðslum kunnu verða nevndar:

1. Broytan av pristalsviðbótini
2. 4 % gjald av innflutningi
3. Diskontohækkingin uppá 1 %

ið tilsamans kunnu ætlast at kosta elfelagnum millum 1 og 1½ milt. kr.

Hin seinasta ætlan verður hendan:

Mýruverkið, 3500 HK, 12 mill. kwh/ár, ...		9,0 mill. kr.
Heljaverkið, 7000 HK, 11 mill. kwh/ár, ...		9,1 mill. kr.
60 kV leiðingar, stálmastrar, 70 mm² ækv.eu, ...		3,0 mill. kr.
Koblingstøðin í Vestm., Tórsh. og Skálnb., ...		1,5 mill. kr.
		22,6 mill. kr.
÷ tilskot frá NATO	1,8	
innskot, avskrivingargrunnur o.a.m	1,8	3,6 mill. kr.
		19,0 mill. kr.
Veðhald og lán, fingin		17,0 mill. kr.
Neyðugt at læna aftrat		2,0 mill. kr.

Samanbersla:	1957		1961	
Primær anlegg,	20,9 mill. kwh,	19,4 mill. kr.	27,5 mill. kwh,	25,3 mill kr.
Sekundær anlegg,		4,6 mill. kr.		4,7 mill kr.
Tilsamans	20,9 mill. kwh,	24,0 mill. kr.	27,5 mill. kwh,	30,0 mill kr.

Í hjálagda yvirliti dí. 30.8.61 sæst, hvussu peningurin býtir seg sundur millum tey ymisku anleggini.

Skilað verður til, at tölini eru bruttotøl, t.v.s. at íroknað er byggirenta, kurstap, provisión o.a.m.

Á umboðsfundi hin 8.5.61 varð stýrinum heimilað at taka upp eitt 2,0 mill. kr. obligatiónslán til framhald av byggingini, og vóna vil at landsstýrið tilmælir lögtinginum, at neyðugt veðhald verður givið.

Við hávirðing
Elfelagið S.E.V.

1. viðgerð 18. september og sama dag legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Alit

Málið sum er frandlagt av landsstýrinum var við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört máli, har eisini stjórin fyri S.E.V. var á fundi og upplýsti, at tað lán her verður sökt um ábyrgd fyri skal nýtast til útbyggjan av ti öki S.E.V. nú arbeiðir á, men at S.E.V. hevur planir um at fáa elektrificera allar Norðoyar, Sandoynna, Skúvoy, Dímun, Hestur, Koltur, Mykines og Nólsoy. Longu meðan tingið var saman seinasta vár, segði Hjalgrim Winther, að lögmaður hann koma við uppskoti um nevndu elektrificering, men hevði aðalfundurin tá ikki viðgjört máli, og síðan tá hevði hann verði bundin av öðrum uppgávum hjá S.E.V., so samráðingar millum landsstýri og S.E.V. enn ikki vóru komnar í lag, men til tingið kemur saman aftur í vár vil málið ætlandi liggja greitt.

Nevndin mælir til annars at samtykkja uppskot landsstýrisins.

og soljóðandi minnilutaálit frá E. Paturssen og J. Simonsen:

Erlendur Paturssen og Jóhann Simonsen mæla til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teirri viðmerking, at landsstýrið beinan vegin tekur upp samráðingar við S.E.V.-stjórnina um, hvussu fram skal farast við at tær bygdir norðanfjörðs, ið enn eru uttan fyri S.E.V.-ökið, koma upp í henda felagsskap, annað hvört við kaðalsambandi ella við vatns- og motorverki í viðkomandi oggj, og fáa streym við sama prístreytum, sum eru og verða galdandi fyri núverandi SEV-limir.

Tað snýr seg her um bygdirnar í Norðuroyum, Mykines, Koltur, Hest, Nólsoy, bygdirnar á Sandoyuni, Skúvoy og Stóra Dímun.

Úrslitið av hesum samráðingum eigur at verða lagt fyri lögtingið í vetrarsetuni 1962.

2. viðgerð 18. og 3. viðgerð 19. september 1961.

Uppskot landsstýrisins samtykt 25- 0.

17. Nýtt strandfaraskip

Ár 1961, 16. september legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

löglingslóg um bygging av strandfaraskipi.	lagtingslov om bygning af kystfartöj.
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað fyri landskassans rokning at byggja strandfaraskip og at taka tey lán, ið eru neyðug til hesa bygging.	Landsstyret bemyndiges til for landskassens regning at bygge et kystfartöj og i denne forbindelse at optage de nödvendige laan.
Byggiætlan og byggisáttmáli verður at leggja fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.	Byggeprojekt og byggekontrakt skal forelægges for finansudvalget til godkendelse.
§ 2.	§ 2.
Henda löglingslóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lagtingslov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í löglingssetuni 1958, smbr. Löglingstíðindi 1958, s. 249, legði landsstýrið uppskot fram um at byggja strandfaraskip fyri Suðuril, uppskotið varð ikki samtykt. Eisini í tingsetuni 1960, Löglingstíðindi 1960, s. 230, var sama uppskot lagt fram, hesa ferð av löglingsmanni, men fall uppskotið.

Tá ið landsstýrið nú aftur leggur málið fyri, so er tað sum eisini framhildið fyrr, tí at Suðuril, ið nú hevur rökt strandfarasigling í 30 ár, ikki longur er tíðarhóskandi skip.

Lagt verður afturat, at í byggigrunni strandferðslu landsins eru 793.385,18 kr.

1. viðgerð 28. februar 1962 og 29. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fyri tingið 16. september 1961 og varð tað við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört múlið og er samd við landsstýrið, at Smiril ikki longur er tíðarhóskandi ferðaskip millum Suðuroy og Havnina, og at tað tí verður neyðugt at fáa bygt nýtt far. Tá hetta skip ikki er bygt fyrr, er orsökin ikki tann, at lögtingið ikki hevur ásannað, at tað er neyðugt við nýggjum skipi, men meira tað, at somja ikki hevur fingist um, hvörja farleið skipið skal hava og so statt um stödd og útbúna.

Nevndin heldur tí, at rættasti máti má vera, at landsstýrið og fíggjarnevndin koma ásamt um, hvörja uppgávu, stödd og útbúna nevnda strandfaraskip skal hava, áðrenn teknningar og planir verða gjördar, og vil mæla tinginum til at góðtaka uppskot landsstýrisins við tí í álitinum framförda.

2. viðgerð 2. apríl.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Kj. Mohr o. fl.

Sum uppiskoyti til grein 1 í uppskotinum verður sett:

Sonnuleiðis verður landsstýrið at kanna eina umbyggjan við kostnaðarætlan av «Smiril» við at aptern skipið annarsleiðis eftir uppskotinum,ið er lagt fyri fíggjarnevndina frá föroyskari skipasmiðju.

3. viðgerð 13. april 1962.

Broytingaruppskot frá Kj. Mohr o. fl. fall 9—0.
Uppskot landsstýrisins samtykt 22—0.

---

18. Studentaskúlabyggingin í Hoydölum

1961, 18. september legði formaðurin fram uppskot til samtyktar viðv. studentaskúlabyggingini í Hoydölum frá Kj. Mohr o. fl. um at steðga studentaskúlabyggingini uppi í Hoydölum og samráðast við Poul Müller um at keypa tröð hansara, millum bókasavnið og skiparaskúlan, at seta skúlan á.

1. viðgerð 18. og 3. viðgerð 19. september 1961.

Uppskotið var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: K. Wang, Kj. Mohr, E. Patursson, H. Jespersen og Haldor Hansen.

Nei atkvöddu: J. H. Danbjörg og M. Johannesen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, P. Petersen, S. Petersen, N. Holm Jacobsen, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. Simonsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, Fr. Hansen, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, J. Högnesen, H. v. Högadalsá og J. F. Öregaard.

Burturstaddir: Jens Chr. Olsen, L. Joensen, S. Joensen.

Uppskotið fall 5 2.

19. Minstalön og fiskaprísir til útróðrarmenn í Föroyum

Ár. 1961, 19. september legði Poul J. Olsen lögtingsmaður fram soljóðandi

Álit

fyri fiskivinnunevndina:

Útróðrarfelagið á Tvöroyri vendi sær ifjör til lögtingið um hjálp at fáa prísin á útróðrarfiski hækkaðan, og útróðrarfelagið í Klakksvík hevur í skrivi, beint til nevndina, biðið um minstulön til útróðrarmenn.

Nevndin hevur havt hesar áheitanir til gjölla viðgerðar og er samd við umsökjararnar, at neyðugt er at fáa kor útróðrarmanna bött.

Ymsir möguleikar hava verið á lofti.

Viðvikjandi spurninginum um minstulön til allar föroyskar útróðrarmenn, er at siga, at tað má ásaunast, at útróðrarmanna innlögurnar eru ótryggar og ávirkiligar av skiftandi umstöðum, veðurlikindum, fiskalikindum og av at sleppa av við fiskin til hampuligan pris, ið kann verða ógvuliga trupult hjá útróðrarmonnum á fjarlögdum stöðum.

Tað er tí slörsti törvur á eini skipan, ið kann vissa útróðrarmonnum eina minstulön, eins og tað er tryggjað fiskimonnum á langfaraleiðum. Men soleiðis sum útróðurin háttar sær, hevur nevndin ikki dugað at funnið eina nýtiliga skipan. Men har aftur imóti er nevndin steðgað við spurninginum um möguleika at skipa fyri einum hægri fiskaprísi, sum kundi verið kappingarföran við hin bretska marknaðin. Um ein tílik skipan av prislagnum fyri avreiddan fisk í Föroyum kundi fingist í lag, vildi tað ikki bara verið ein sera góður fyrimunur hjá okkara útróðrarmonnum, serstakliga hjá teimum, sum ikki hava höví at fara niður við fiski, men tað vildi eisini verið ófört fyri okkara heimafólk, ið fáast við flakaskering. Ein tílik skipan er beinanvegin neyðugt grundarlag fyri at úlbúgva okkum við flakavirkjum. Ein kann ikki hugsa sær möguleikan at fáa nóg nógvan fisk til flakavirkini, uttan at teir stóru linubátarnir fara at avreiða til tey, og tað gera teir ikki, uttan at teir standa seg við tað, fáa kappingarföran pris við vinningin, teir fáa við at sigla til bretska marknaðin. Nú eru menn við at fara undir stór flakavirki. Hesum eru allir föroyingar hugaðir fyri og glaðir við. Tað er tí, samstundis, sum tað liggur nógv á hjá fiskimanninum at fáa mesta pris fyri veiðu sína, beinanvegin ein samfelags uppgáva, at leggja eitt trygt stöði undir flaka-

virkini, sum m.a. hava til uppgávu at veita arbeiði til heimafólkið, sum manga staðni tey seinastu árini hevur verið í arbeiðsloysi.

Men spurningurin er nú, hvussu kann verða skipað, so flakavirkini og fiskakeyparnir verða förir at geva henda kappingarföra prísin?

Prísurin á feskfiski í Föroyum er í dag 60 oyru fyri tosk og 65 oyru fyri hýsu. Hetta er tann besti prísurin á plássi, har flakaskering kann fara fram. Alfrat hesum er at leggja studning úr landskassanum 6 oyrur fyri deksför og 9 oyru fyri opnar bátar. Her er sostatt talan um ein netto hýsupris fyri útróðrarmenn uppi 71 oyrur fyri teir, ið rógva við deksförum og 74 oyrur fyri teir, ið rógva við opnum bátum. Prísurin er 5 oyrur minni fyri tosk.

Vit hava sæð frá monnum, ið ætla sær at fara undir bygging av flakavirkjum, at teir rokna við einum farmagjaldsletta uppá 30 oyru pr. kilo fyri flaka, um hann kann verða fluttur í stórum farmi beinleiðis til Ameriku. Hetta týðir umleið 10 oyru kilo í vinningi av óviðgjördum fiski.

Tá ið flakavirkini eru bygd við nóg stórum goymslum til stórri farmar, kunna tey so statt verða för fyri undir sonu príslikindum sum nú at rinda 10 oyru meira fyri kilo av ráfiski.

Á henda hátt eru vit komnir til ein pris, sum fyri tosk liggur um 70 oyrur og fyri hýsu 75 oyrur. Var prísurin við tilskoti 85 oyrur pr. kilo halda menn, at hann var kappingarfærur við ein meðalfiskapris á bretska marknaðinum, tá ein tekur frá söluútreiðslurnar og ta tíð, ið menn missa við at sigla niður.

Spurningurin er so, hvussu hesin studningsprísur kann verða veittur til vega?

Var ein tílíkur fiskaprísur tryggjaður okkara feskfiskamonnum, var ikki órímiligt, at minstalönin fyri feskfiskasigling varð avfikin.

Snubr. upplýsingar frá löntjavningargrunninum hava útreiðslurnar í minstalön fyri feskfiskasigling verið hesar seinasta árið:

Til gomul skip og bátar	kr. 544,000.–
Nýggj linuskip	kr. 12,800.
Trolarar	kr. 2,500.
ella tilsamans	kr. 558,300.

Tað ívingarsama við eini fastsetan av prísinum á fiski til feskfiskasölu í flaka ella öðrum líki er keyparin. Ein kann neyvan binda menn ella felög at keypa fisk, og verður ikki vissa fyri, at menn og felög vera, sum vilja keypa fiskin fyri ásetta minstaprísin, dugir minstiprísurin ikki. Tað vil tí, áðrenn nökur föst skipan verður gjörd í hesa ætlina, verða neyðugt at hava samráðing við umboð fyri fiskakeyparar, lön-

javningargrunnin, fiskimannafelagið, og av ti at útróðrarfelagið á Tvöroyri og útróðrarfelagið í Klakksvík hava veut sær til tingið, eigur eisini at vera samráðst við hesi felög. Skotið verður tí upp at seta eina 5-mannanevnd, vald av reiðarafelagnum, fiskimannafelagnum, lönjavningargrunninum og útróðrarfelagnum á Tvöroyri og Klaksvík, hvör við sínum manni, til saman við nevndini til kanningar av rakstrarlíkindum fieskivinnunar og öðrum at viðgera her umrödda spurning.

Uppskot

Tingið velur eina 5-mannanevnd til í samráðing við nevndina, ið er sett at kanna rakstralikindini hjá okkara fiskivinnu at viðgera tann í álitinum umrödda spurning.

Lönjavningargrunnur skipsfiskimanna, Föroya fiskimannafelag, Föroya reiðarafelag, Klaksvíkar útróðrarfelag og útróðrarfelagið á Tvöroyri velja hvör sín nevndarlimin.

1. viðgerð 19. september og sama dag legði formaðurin fram soljóðandi

Broytingaruppskot frá H. Djurhuus o. fl.

I. Í staðin fyri nevndarinnar uppskot, ið útihýsir gomlum útróðrarfelögum sum tí í Skopun, tí í Fámjin, Vági og öðrum, verður sett:

Útróðrarfelögini í Föroyum velja ein lim í ta nevnd, ið er sett at kanna rakstrarlíkindini hjá okkara fiskivinnu.

II. Fyri at skapa möguleika fyri hægri fiskaprísi og hervið störri úrtöku hjá útróðramonnum verður hetta lógarbroytingaruppskot sett fram:

Uppskot til lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 26. av 17. mai 1961 um at longja skipanina um studning úr landskassanum til minstulön og viðbót til fiskaprísir.

§ 1.

Í § 2 gongur pkt. b út.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 1.

I § 1 bortfalder pkt. b.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

og soljóðandi broytingaruppskot frá H. Djurhuus o. fl.

«Sum uppískoyti til § 2 í lögtingslóg í lögtingsmáli nr. 53/1961: nevnd til kanningar av föroyskari fiskivinnu verður sett:

§ 1.
1 limur frá útróðrarfelögum.

§ 1.
1 medlem af hjemmefiskeriforeninger.

§ 2.
Henda lög kemur í gildi heinan vegin.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Broytingaruppskot 1) «Í § 2 gongur pkt. b. út» fall 10—0.
Broytingaruppskot 2) «1 limur o.s.fr.» samtykt 17—0.
Uppskotið frá nevndini fall 12—0.

---

20. Umbygging av Smirli

Ár 1961, 19. september legði Kj. Mohr löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Föroya lögting heimilar Föroya landsstýri at kanna möguleikarnar at umbyggja «Smiril», útvega teknigar og kostnaðarætlan í samband við klassaeftirlit.

Fylgjandi uppskot verða at kanna:

1. Gera nýggja aptering so fleiri kömur, upphaldsrúm og annað tiðarhóskandi til ferðafólkið verður gjört.
2. Forleingja skipið til ta longd, tað veruliga var ætlað av fyrstan tíð.
3. Seta motor í skipið í staðin fyri oljufýring.

Viðmerking:

«Smiril» er eitt gott og hartil sjógott skip, vel bygt av fyrstan tíð, hevur gjögnum hesi 30 árini verið vel röktur, fingið nógvar nýggjar plátur og annað tilíkt, og verður tað neyvan brúkt so gott tilfar til eitt nýlt skip av hansara slag, bygt í dag. Um hann verður umbygdur eftir

klassa, vil klassin lata nýggj klassapappír uppá umbygt skip. Tað kann viðmerkjast, at tað er skipasmiðja í Føroyum, ið er í ferð við at teikna og koma við uppskoti og kostnaðarætlan til omanfyri nevndu uppskot.

1. viðgerð 28. februar 1962 og 29. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Alit

19. september 1961 legði Kjartan Mohr löglingsmaður málið fram á ting og var tað við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjört málið, men setur onki uppskot fram.

2. viðgerð 2. apríl og 3. viðgerð 5. apríl 1962.

Uppskotið fall 3—0.

---

21. Broytingaruppskot í reglunum um fiskavraking

Ár 1961, 19. september legði varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

löglingslóg um broyting í löglingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 um fiskavraking við seinni broytingum.

§ 1.

Í § 1, stk. 4 í löglingslóg nr. 12 frá 12. januar 1950 um fiskavraking sum broytt við löglings-

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 12 af 12. januar 1950 om fiskevragning med senere ændringer.

§ 1.

I § 1, stk. 4 i lagtingslov nr. 12 af 12. januar 1950 om fiskevragning som ændret ved lagtingslov

lóg nr. 17 frá 14. april 1955 verður skotið inn aftaná 2. punktum:

Við hesa metan og flokkan er tað tó nóg mikið, at í minsta lagi 10.inda hvör vekt verða skild eftir góðsku og stödd og úrslitið verð nr at nýta sum mát fyri alla lastina. Fyri at fáa fa sonnu vektina av fiski, verður fiskurin fyrst vigaður við tí salti, sum er uppi á honum. Eftir metan og flokkan verður saltið sligið av fiskinum og verður hann síðan vigaður aftur. Munurin verður at nýta í útrokningini av vektini av öllum fiskinum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

nr. 17 af 14. april 1955 efter 2. punktum indskydes:

Ved omhandlede vurdering og klassifisering er det dog tilstrækkeligt, at i det mindste hver 10. vægt klassificeres efter kvalitet og størrelse og resultatet bliver at anvende som maalestok for hele lasten. For at udfinde den sande vægt af fisken, opvejes fisken med salt, efter grundig vurdering og klassificering bliver den slaaet for salt og derefter bliver fisken vejet igen. Forskellen bliver at anvende i udregningen af hele fiskepartiets vægt.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

3. juli í ár setti landsstýrið niður 5 mannanevnd til kanningar av vrakaraskipanini. Nevndin hevur í skrivi 18. í hesum m. a. sett fram uppskot til broytingar í skipanini viðvíkjandi metan og flokkan við landing av saltfiski. Galdandi reglur viðvíkjandi hesum eru tær somu við útflyting, soleiðis at allur fiskur verður vigaður, mettur og flokkaður.

Vraking við landing er grundarlagið undir útrokning av prísviðbótini og minstulönini og eisini tað tilfar, sum hagdeildin fær viðvíkjandi fiskanögd við landing.

Fyri at úlinna hesi endamál verður ikki hildið neyðugt at viga og handfara hvönn einstakan fisk, men skuldi tað verið ivaleyst at tikið stikk-royndir og ger nevndin uppskot, at hefta verður í minsta lagi 10. hvör vektin.

1., 2. og 3. viðgerð 19. september 1962.

Uppskot landsstýrisins samtykt 18—0.

22. Föroya stöða til tann europeiska vinnuliga felagsskapin

Ár 1961, 3. november legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot til samtyktar.

I. Spurningurin um Föroya stöðu, um so verður, at Danmark fer uppi tann europeiska vinnuliga felagsskapin hevur verið til fyribils viðgerð í lögtinginum. Lögtingið ynskir sum sína principiellu stöðu at úttala, at Föroya áhugamál undir broyttu viðurskiftunum, sum fara at standast av, um so verður, at Danmark og kanska hini norðurlondini eins og Stóra Bretland fara uppi sum limir ella á annan hátt knýtast til tann europeiska vinnuliga felagsskapin, best verða varðveitt innanfyri henda felagsskapin.

Tað verður tó lagt við, at lögtingið væntar, at undir tingingunum við felagsskapin verður lagdur störstur möguligur deatur á tey viðurskiftir, sum so burturav binda Föroyar til fiskivinnuna og á ynskið at varðveita Föroya serstöðu fjóðskaparliga, söguliga og stjórnarliga.

Lögtingið ynskir at strika undir, at föroyska fiskimarkið verður 12 fjórðingar út frá beinum linjum og framt skjótast gjörligt og í seinasta lagi at galda frá 27. apríl 1963.

Eisini verður hildið fram ynski, at Föroyar fáa rætt at velja umboð í nevnd sum talan verður um at seta sum ráðgevandi.

Áðrenn heimastýrið tekur endaliga stöðu, verður spurningurin at leggja fyri tingið aftur.

II. Lögtingið samtykkir at seta niður 7-manna tingnevnd til saman við landsstýrinum og undir fyrisæti tess at viðgera spurningin um Föroya stöðu til tann europeiska vinnuliga felagsskapin. Landsstýri fær umframt heimild at uppnevna triggjar limir til nevndina umboðandi vinnulívið.

Viðmerkingar:

Seinastu árini hava flestu londini í Vestur-Europu (vestan «jarntjaldið») funnið saman í tvær handilssamgongur: fríhandilssamgongan EFTA tey 7 og marknaðarsamgongan CEE tey 6.

Báðar samgongurnar miða ímóti friari handli m. a. við avtöku av tolli og innflutningsrestriktiónum limanna millum. Meðan londini innan tey 7 fritt kunnu föra egnan handils- og herundir tollpolitiki: úteftir, kunnu tey ikki innan tey 6, har tað er felagsskapurin, sum ger av í hesum viðurskiftum. Harafturat kemur, at í marknaðarsamgonguni hava borgararnir í einum limalandi vinnurætt í hinum undir somu treytum sum borgararnir í viðkomandi landi, ið hvussu er, tá talan er um vinnu á landi.

Danmark var millum tey lond, ið stovnaðu felagsmarknaðin. Spurningurin, um Föroyar skuldu koma uppí samgonguna, varð tá tagdur fyri heimastýrið. Lögtingið samtykti í tingsetuni 1959 at seta niður serliga 7-mannanevnd til saman við umboðsmonnum fyri vinnulívið at viðgera málið saman við landsstýrinum, jhr. lögtingsmál nr. 21./1959.

Saltfiska- og klippfiskamarknaðurin var ikki hjá teimum 7, men heldur hjá teimum 6; at standa uttanfyri hesi fördi tí fyrr ella seinri við sær, at tann felagstollur, tey lögdu á henda innflutning, gjördi okkum ikki kappingarförar við t. d. Vestur-Týskaland á italska og nú eisini grikska marknaðinum. Tey ríkisrættarligu viðurskiftini Danmark-Föroyar eru tó so, at Föroyar kundu ikki gerast limur, tá Danmark var limur í hinum felagsskapinum, og er tað eisini ein spurningur, um tey 6 vildu tikið við Föroyum sum lim einsamallar.

Tá ið so var, og tá ið felagsmarknaðurin hevði tann fyrimun, at tollurin uppá fiskaflak, ein framleiðsla sum helst er í öking, skuldi takast av í stigum, helt landsstýrið tað vera rættast, at Föroyar fóru uppí samgonguna, heldur enn at standa uttanfyri báðar og gera sum maðurin, ið datt millum tveir stólar. Afturat hesum kom so tað, sum Föroyar tó vildu fingið fyrimunin av, uttan mun til hvör stöða so varð tikin, at Italia frá samgonguni fekk loyvi til tollfrían innflutning av saltfiski frá öðrum londum, tó avmarkaður í tíð og mongd.

Hesar umstöður gjördu, at landsstýrið í tingsetuni 1960, jhr. lögtingsmál nr. 40/1960, Lögtingstiðindi 1960, bls. 185, legði uppskot fyri lögtingið um, at Föroyar fóru uppí felagsmarknaðin.

Meðan málið var í lögtinginum, kom tað fram, at Bretland umhugsaði at sökja limaskap í teimum 6. Viðgerðin av málinum varð tí útsetl til ólavsökutingið 1961.

Danmark og Bretland hava nú tikið stöðu at sökja um limaskap, og tað lítur út fyri, at lond sum Noreg og Island eisini ynskja at gerast beinleiðis limir, meðan lond sum Svöriki og Eysturriki tala um associatión. EFTA-samgongan sær út til at syndrast, og er tað tí ongin spurningur longur hjá Föroyum at fara uppí her.

Um hesar umsóknir um limaskap verða góðtiknar, er meginparturin

av marknaðarloudum Föroya at finna innan tey 6. Hetla talar so fyri luttöku. Á hin bógvin eru spurningarnir um felags handilspolitikk áteftir, felags búsetingarrætt og felags vinnurætt á landi, möguliga eisini á sjóökinum, saman við teimum nógvu felagsendamálum, samgongan hevur sett sær, torförir gjölla at meta og greiða, eins og ill er at siga, hvönn týðning teir kunnu fáa á viðurskifti landsins.

Landsstýrið heldur tó, at Föroya áhugamál undir broyttu viðurskiftunum, sum fara at standast av, at Danmark og kanska hini norðurlondini eins og Bretland fara uppí sum limir ella á annan hátt knýtast til tann europeiska vinnuliga felagsskapin, best verða varðveitt innanfyri henda.

1. viðgerð 7. og 9. november legði serstök 7 mannanevnd fram soljóðandi

Álit

3. november í ár varð málið lagt fram á ting av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð, sum fór fram 7. november, beint til viðgerðar í eini 7 manna nevnd.

Nevndin, sum hevur viðgjört málið, hevur býtt seg í ein meiralutu og ein minnilutu.

Meiralutin (J. Fr. Øregaard, Sámal Petersen, Andreas Djurhuus, T. Samuelsen, sum mötti fyri Jens Chr. Olsen og Hákun Djurhuus) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teirri broyting, at

I. stk. 2, 4 og 5 í uppskoti landsstýrisins verður orðað soleiðis:

2) «Lögtingið leggur tó við, at undir tingingunum við felagsskapin Föroyum viðvíkjandi verður störstur dentur lagdur á tey viðurskiftir sum geva, at Föroyar vinnuliga so burturav eru bundnar til fiskivinnuna, og á Föroya serstöðu sum fólk, tjóðskaparliga, söguligu og sjórnarliga.»

4) Eisini verður bildið fram yvski, at Föroyar fáa rætt at velja umboð t. d. í teirri nevnd, sum talan verður um at seta sum ráðgevandi (sekretariati) og á aðalfundinum (forsamlingen) samb. Rómsáttmálan art. 4.»

5) «Aðrenn endalig stöða verður likin, verður málið at leggja aftur fyri tingið.»

Í II. í uppskoti landsstýrisins verður «tríggjar» broytt til «fýra».

Minnilutin (Jógvan Högnesen og Erlendur Paturssón) förir fram:

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uppskot um, at tingið samtykkir sum sína principiella stöðu, at áhugamál Föroya best verða varðveitt innan fyri evropeiska ökonomiska felagsskapin (E. E. C.).

Upp í hetta hövuðsuppskot eru knýtt nökur ynski ella fyrivarni viðvíkjandi tí, sum kallað verður serstöða Föroya og viðvíkjandi sjómarkinum, og um at Föroyar fáa umboð í teirri nevnd, «sum talað verður um at sela sum ráðgevandi».

Minnilutin mælir frá at samtykkja hetta uppskotið, men setur fram egið uppskot fyri tingið, bæði viðvíkjandi sjálvum marknaðarmálinum og viðvíkjandi viðgerðini av tí.

Tað má haldast vera vónleyst, at Föroyar innan fyri heuda felagsskap kunna fáa nakra serstöðu, og at ynski okkara og fyrivarni verða tikin til effiektar. Sum kunnugt royndi Bretland nakað tílíkt, men svarið,ið Bretland fekk, var at tað annaðhvört tók Rómsáttmálan frá 25. mars 1957 sum hann var ella ikki. Tað er illa hugsandi, at Föroyar fáa annað og betri svar. Tey ynski og tey fyrivarni, sum nevnd verða í uppskoti landsstýrisins, mugu tí haldast vera uttan veruleikatýðning.

Marknaðarmálið var í fjör til viðgerðar í serstakari marknaðarnevnd, men landsstýrið tók málið úr hondum tess og legði 15. februar 1961 hetta uppskot fyri tingið:

> «Lögtingið samtykkir, at Föroyar fara upp í fríhandilsökið.»
> Sjónarmið tjóðveldisflokksins tá var hetta:
> «Sjónarmið tjóðveldisflokksins er tað, at vit bíða við at taka nakra avgerð í málinum. Vit lissa einki við at bíða, men fara vit fyrst upp í eina av samgongunum — t. e. felagsskapin ella fríhandilsökið — so er læst og fyribundið.»

Meirilutí tingsins tók undir við hesum sjónarmiði. Tað vildi ikki samtykkja uppskot landsstýrisins, men samtykti í staðin:

«Lögtingið útsetur spurningin um Föroya luttöku í fríhandilsökinum til ólavsökutingið.»

Tað vísti seg, at rætt var at bíða tá, og minnilutin heldur tað framvegis vera rætt at bíða við avgerð í málinum.

Rómsáttmálin sjálvur er í 217 greinum. Har aftur at eru fylgiskjöl av ymiskum slagi,ið hava sama gildi sum sáttmálin sjálvur. Sáttmálin er óavmarkaður í tíð, sum týðir, at land,ið fer upp í, sleppur ikki úr aftur.

Endamál felagsskapsins er at reka felags ökonomiskan politikk —

bæði innan fyri sjálvt felagsökið og mótvegis londum, ið uttan fyri eru.

Hesin felags ökonomiski politikkur verður ríkin av teim slovnanum, ið sáttmálin nevnir. Undir tann politikk, ið stjórn felagsskapsins rekur, verða ríkisstjórnirnar og ríkisting felagslandanna at geva seg, soleiðis sum sáttmálin áseur. Tey lond, ið geva seg í felagsskapin, geva frá sær ein part av fullveldi sínum.

Eftir 137. - 209. § í sáttmálanum verður felagsskapurin stjórnaður av: 1. felagstingi, 2. ráði, 3. nevnd. Aftur af hesum eru stovnanir av mongum slagi — og eisini serstakur dómstóltur.

Á felagstinginum eiga londini hetta limatal:

Belgia	14	
Frakland	36	
Italia	36	
Luxembourg	6	
Holland	14	
V-Týskland	36	— í alt 142.

Í ráðnum eiga londini hetta atkvöðutal:

Belgia	2	
Frakland	4	
Italia	4	
Luxembourg	1	
Holland	2	
V-Týskland	4	— í alt 17.

Í nevndini sita 9 limir, ið ríkisstjórnirnar eftir serstökum reglum velja í felagsskapi.

Tá talað verður um «lutföku ella ikki lutföku Föroya» í hesum felagsskapi, so er hetta jú ikki beint. Spurningurin er hesin: Skal hugtakið «Danmörk», tá Danmörk fer upp í, skiljast sum alt Danmarkar ríki ella sum Danmarkar ríki ÷ ríkislutin Föroyar.

Avgerðin um hetta liggur hjá felagsskapinum og hjá donskum ríkismyndugleikum, smb. Rómsáttmálan og donsku grundlógina, ikki hjá Föroya landsstýri ella Föroya lögtingi.

Ei heldur verða Föroyar limir í felagsskapinum, og hvörki so ella so fáa Föroyar nakað sjálvstöðugt umboð har.

Hin vegin hevur danska ríkisstjórnin greitt frá, at danska ríkisstjórnin vil eftirlika ynskjum okkara, soleiðis at vit kunna velja millum: 1. at Föroyar skulu fylgja við, tá Danmörk fer upp í, 2. at Föroyar skulu ikki fylgja við Danmörkini.

Fyrrnevndi ökonomiski politikkur felagsskapsins er m. a. hesin:

I. Innan fyri felagsökið:
   1. at avtaka allan toll og allar mongdaravmarkingar.
   2. at áseta felags bú- og virkisrætt.
   3. at reka felags fiskivinnu- og fiskasölupolitikk.

II. Út eftir, t. e. mótvegis londum utan fyri felagsskapin:
   1. at áseta felags innflutningstoll og felags reglur um mongdaravmarkingar í innflutninginum og útflutninginum.
   2. at reka felags handilspolitikk yvirhövur (föra handilssamráðingar og gera handilssáttmálar).

Tollar innan fyri felagsöki verða umröddir í 12. — 17. § í Rómsáttmálanum.

Verða vit innan fyri felagsskapin, týðir hetta, at eingin tollur verður á föroyskum útflutningsvörum í felagslondunum.

Hin vegin hava vit tá skyldu til at avtaka tollar á vörum úr felagslondunum, samtíðis sum vit binda okkum til ikki at seta nýggjar tollar í gildi.

Undir hetta koma eisini fiskalir tollar, smb. 17. §, men eftir serstökum reglum kunna innlendsk gjöld setast í staðin. Hesi gjöld mega ikki vera hægri á útlendskum vörum enn innlendskum.

Av hesum stendst m. a., at vit verða at data allar ætlanir okkara um föroyskan ídnaða fara, tí sjálvsagt kann föroyskur ídnaður óvardur ikki kappast við útlendskan.

Sama er í royndini um landbúnaðarframleiðsluna at siga.

Mongdaravmarkingar innan fyri felagsökið verða umröddir í 30. 37. §. Tær verða lagdar niður, smb. tó seinni. Hesar greinir mugu haldast koma at hava somu avleiðingar fyri föroyska framleiðslu, sum greinirnar um tollaavtökur.

Eftir 52. — 58. § verður felags bú- og virkisrettur innan fyri felagsökið.

Verða vit innan fyri henda felagsskap, týðir hetta, at fiskiskip og fiskimenn úr öllum hinum felagslondunum fáa sama veiðirætt í föroyskum sjógvi, sum föroysk fiskiskip og föroyskir fiskimenn.

Somuleiðis fáa fyritökur úr hinum felagslondunum rætt til at setja á stovn virki í Föroyum, útgerðarvirki, turkilhús, flakavirki o. s. fr.

ella yvirhövur virki av hvörjum slagi sum helst, bæði í fiskivinnu og öðrum greinum, t. d. ídnaði, handverki og landbúnaði.

Tað er einki til hindur fyri, at slikar útlendskar fyritökur keypa upp stór lendi, heilar havnarbygglngar, virki o. s. fr.

Somuleiðis fáa útlendskir verkamenn og útlendskir handverksmenn somu rætlindi sum landsins egnu.

Eftir 38. — 47. § rekur yvirstjórn felagsskapsins felags fiskivinnu- og fiskasölupolitikk.

Sett verður felags samskipan av marknaðum fyri fiski, ið setur nærri reglur um fiskasöluna, m. a. um, hvussu hon skal býtast millum tey ymisku londini innan fyri felagsskapin. Meðan undirframleiðsla er innan fyri felagsskapin, skuldu totiligir möguleikar verið fyri föroyskari fiskasölu, men so hvört sum fiskaframleiðslan í öðrum felagslondum ökist, koma kvotaskipanir, ið yvirstjórn felagsskapsins setur, til tals. Undir slikari kvotaskipan kemur föroysk fiskasöla innan fyri felagsskapin í vanda.

Vit eru ti als ikki tryggir viðvíkjandi fiskasölu okkara innan fyri henda felagsskap. Um fiskasölu okkara uttan fyri felagslondini, sjá seinni.

Eftir 18. — 29. § skulu fyri öll lond í felagsskapinum gilda somu tollar mótvegis öllum londum uttan fyri felagsskapin.

Standa Föroyar uttan fyri felagsskapin, týðir hetta, at föroyskur fiskur kann koma undir toll í teim londum, sum eru í felagsskapinum.

Avgerð um fiskatollar er tó eingin tikin enn, og verður ikki tikin í bræði, smb. seinni.

Standa Föroyar innan fyri felagsskapin, skuldi sum nevnt hesin tollavandi innan fyri felagsskapin ikki verið til, men tó kunna vit rokna við kvotaskipanum.

Síðan er tað innflutningurin.

Meginparturin av innflutningi okkara kemur frá londum í felagsskapinum.

Ein avleiðing av politikki felagsskapsins verður tann, at alt prislag innan fyri hann hækkar. Menn rokna við 30 % hækking.

Innflutningur okkara frá hesum londum dýrkar tá hesi 30 %. Hesi vörudýrking sleppa vit ikki undan við at umleggja innflutning okkara við at keypa frá londum uttan fyri felagsskapin, tí har mötir tollmúrur felagsskapsins.

Avleiðingin av at vera innan fyri felagsskapin verður tí stóröking í framleiðslu- og livikostnaði okkara so mikil, at mögulig tollsparing vigar ikki upp móti henni.

Eftir 110. — 116. § rekur felagsskapurin felags handilspolitikk mótvegis londum uttan fyri felagsökið. Hetta týðir m. a., at handilssamráð-

inga- og handilssáttmálavætturin verður tikin frá teim einstöku felagslondunum og lagdur undir stjórn felagsskapsins.

Eftir heimastýrislógini hava vit havt vissar avmarkaðar möguleikar til at reka handilspolitikk — og við broytingum í stjórnarlagi landsins kunna hesir möguleikar viðkast, men koma vit upp í henda felagsskap, eru allar vónir um slíkt farnar.

Vit hava í lötuni samhandil við lond utan fyri felagsskapin, m.a. Brasiliu, Sovjetlondini og USA.

Öll likindi eru til, at klippfiska- og saltfiskaframleiðsla landsins lutfallsliga fer at minka, meðan t.d. flakaframleiðslan fer at vaksa.

Hetta týðir, at týdningur handilsins við felagskapslondini upp á seg minkar, meðan týdningur handilsins við londini utan fyri veksur.

Standa vit utan fyri felagsskapin, verða vit at rokna við, at felagsskapurin við fyriskipanum í handilsmálum, bæði innan fyri felagsskapin og utan fyri, fer at skipa fyri fiskaútflutningi okkara, soleiðis at hann verður mettur eftir ti, sum gagnar felagsskapinum sum best, uttan at skeitt verður eftir, hvat ið okkum gagnar serstakligu.

Hyggja vit at allari sammeting felagsins og uppbygging hans, má tað haldast vera vónleyst, at vit kunna fáa nakra sum helst ávirkan á gongdina í hesum fyri okkum so týdningarmiklu málum.

Mangt av ti, sum hevur störstan týdningin fyri okkum föroyingar, er ógreitt og óvist í dag, har í millum hetta:

Grikkaland er ikki limur í felagsskapinum, men er tilknýtt honum («associerað»). Hvussu stöðan hjá Grikkalandi og möguligu öðrum tilknýttum londum er, vita vit ikki gjölla. Spania er í dag hvörki limur ella tilknýtt, og hvör hin endaliga stöða tess verður, vita vit ei heldur.

Bæði hesi lond hava týdning í fiskaútflutningi okkara.

Týdning fyri okkum hevur tað, hvörja stöðu aðrar fiskiveiðiljóðir her í Norður-Atlantshavi taka, fyrst og fremst Noregur og Island, men um endaliga stöðu teirra, vita vit einki.

Síðan er at hava í huga, at enn eru tey mál, ið snúgva seg um fiskivinnu og fiskasölu, ikki fastlögd. Öll hesi mál eru skotin á frest – möguliga til 1968.

Soleiðis sum viðureskiftini eru í dag og enn verða nökur ár, fer fiskaútflutningur okkara til londini í felagsskapinum somu kor sum hingar til.

Málið í sær sjálvum er ógreitt í dag — og hevur ei heldur fingið nóg gjölliga viðgerð.

Í málinum er skriv frá stjórnarlimum í 9 vinnufelögum, har sagt verður:

«So ógreiður sáttmálin frá 25. mars 1957 um Europeiska ökonomiska felagsskapin er, og so ógreiðar avleiðingarnar av möguligari föroyskari luttöku í honum tykjast koma at verða fyri vinnulív okkara og vinnandi

stættir, mæla vit Föroya landsstýri og Föroya lögtingi frá at taka nakra stöðu í hesum máli nú.

Spurningurin um Föroya luttöku í Europeiska ökonomiska felagsskapinum er so álvarligur fyri land okkara og fólk, at vit mugu krevja, at eingin avgerð verður tikin, fyrr enn greitt verður, hvörjar avleiðingarnar verða av möguligari luttöku Föroya ella möguligari ikki luttöku og ei heldur fyrr enn vinnufelög landsins hava havt umstöður til at viðgera málið og taka stöðu í tí.

Eisini eiga at verða kannaðir möguleikarnir fyri seinni luttöku okkara í hesum felagsskapi.»

Minnilutin tekur undir við hesum tilmæli og setur fram hetta

Uppskot

So ógreiður sáttmálin frá 25. mars 1957 um Europeiska ökonomiska felagsskapin er og so ógreiðar avleiðingarnar av mögguligari föroyskari luttöku í honum tykjast koma at verða fyri vinnuliv okkara og vinnandi stættir, tekur Föroya lögting ikki nakra stöðu í hesum máli nú.

Sett verður serstök 9 manna marknaðarnevnd. Landsstýrið útnevnir 1 lim, sum verður formaður, og lögtingið velur 4 limir, meðan hinir 4 limirnir verða útnevndir soleiðis:

Föroya arbeiðarafelag, Havnar arbeiðsmannafelag, Havnar arbeiðskvinnufelag og Föroya handverkarafelag velja 1,

Föroya fiskimannafelag, Föroya skiparafelag, Föroya maskinistfelag, Föroya motorpassarafelag og útróðrarfelögini í Vági, á Tvöroyri, í Fámjin, Skopun og Klaksvík velja 1,

Föroya arbeiðsgevarafelag, Föroya meistarafelag, Föroya útgerðarmannafelag, Föroya keypmannafelag, Föroya idnaðarfelag og Föroya handverksmeistarafelag velja 1,

Föroya búnaðarfelag, Föroya bóndafelag og Föroya traðarmannafelag velja 1.

Henda nevnd skal gjölla kanna hvussu áhugamál Föroya best verða varðveitt — annað hvört tað verður: 1. í tí europeiska ökonomiska felagsskapinum, 2. í tilknýti til hansara («associering») ella 3. uttan fyri henda felagsskap.

Áður enn málið aftur verður lagt fyri tingið, eiga öll avvarandi vinnufelög landsins at hava havt umstöður til at gera seg kunnug við málið og til at taka stöðu í tí.

Formaðurin legði fram soljóðandi skriv d. 31. oktober 1961:

Undirritaðu nevndarlimir í Föroya skipara- og navigatörfelag, Föroya Fiskimannafelag, Föroya Motorpassarafelag, Föroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Skopunar Útróðrarfelag, gera hesa samtykt:

So ógreiður sáttmáli frá 25. mars 1957 um Europeiska ökonomiska felagsskapin er og so ógreiðar avleiðingarnar av möguligari föroyskari luttöku í honum tykjast kanna at verða fyri vinnuliv okkara og vinnandi stettir, mæla vit Föroya landsstýri og Föroya lögtingi frá at taka nakra stöðu í hesum máli nú.

Spurningurin um Föroya luttöku í Europeiska ökonomiska felagsskapinum er so alvarligur fyri land okkara og fólk, at vit mugu krevja, at óngin avgerð verður tikin, fyrr enn greitt verður, hvörjar avleiðingarnar verða av möguligari luttöku Föroya ella möguligari ikki luttöku og ei heldur fyrr enn vinnufelög landsins hava havt umstöður til at viðgera málið og taka stöðu í tí.

Eisini eiga at verða kannaðir möguleikarnir fyri seinni luttöku okkara í hesum felagsskapi.

og skriv d. 3. november frá Föroya Keypmannafelag, skriv d. 1. s.m. frá Föroya Idnaðarfelag og skriv d. 8. november 1961 frá Kj. Mohr fyri Föroya framburðsflokk.

2. viðgerð 9. november.

Uppskot minnilutans (J. Högnesen og E. Paturssón) var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: Johan Simonsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssón, H. v. Högadulsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, R. Thomsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Øregaard.

Uppskotið fall 8 0.

Broytingaruppskot frá nevndini til p. 1 samtykt 22 0.

Uppskot landsstýrisins I so broytt var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Reinhold

Thomsen, J. P. Davidsen, Hans Iversen, Dion Nolsöe, V. Nielsen, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Öregaard.

Nei atkvöddu: Johan Simonsen, Jógvan Högnesen, Sigurð Joensen, Erlendur Paturssson, Hanus við Högadalsá og Henning Jespersen.

Atkvöddu ikki: Kjartan Mohr, Fr. Hansen.

Uppskotið samtykt 22—6.
Broytingaruppskot frá nevndini til p. II samtykt 22—0.
Uppskot landsstýrisins p. II so broytt samtykt 22—0.

---

23. Vaktarskip

Ár 1961, 3. november legði Hákun Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot til samtyktar viðv. vaktarskipi.

Lögtingið átalar og mótmælir leirri mannagongd,ið er vorðin nýtt í sambandi við sölu av «Ternuni», har landsstýrið sigst at hava selt okkara vaktar- og bjargingarskip, uttan loyvi frá tinginum og uttan at hava fingið skip at seta í staðin, samstundis sum öll manningin á Ternuni er uppsögd.

---

24. Kjarnorkuspreingingar

Ár 1961, 3. november legði Hemming Jespersen lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Föroya lögting fordömir tær kjarnorkuspreingingar, ið Sovjetsamveldið hevur gjört í seinastum, og heitir á tað og onnur avvarðandi lond um at steðga öllum slíkum spreingingum í framtíðini.

Samtíðis heitir lögtingið á landsstýrið, at tað letur gera regluligar mátingar av radioaktivitetinum í avfallinum í Föroyum, og at tað gevur fólkinum neyðugar leiðbeiningar til at verja seg móti vandanum.

1. og 2. viðgerð 9. november.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Hemming Jespersen:

Föroya lögting fordömir tær kjarnorkuspreingingar, ið U.S.S.R. hevur gjört í seinastum, heitir á U.S.S.R., U.S.A. í Ameriku, Frakland og mögulig onnur lond um at stöðga öllum sínum spreingingum í framtíðini og biður Föroya landsstýri gera viðkomandi lond kunnug við hesa lögtingssamtykt.

Broytingaruppskotið fall 9—0.

Uppskot til samtyktar frá Hemming Jespersen var sett undir atkvöði við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, H. Petersen, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, L. Joensen, Reinhold Thomsen, Johan Simonsen, J. P. Davidsen, Hans Iversen, Dion Nolsöe, Vilhelm Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Sigurð Joensen, Erlendur Paturssón, H. v. Högadalsá, Hemming Jespersen og J. F. Øregaard.

Burturstaddir: J. H. Danbjörg, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus og J. Högnesen.

Uppskotið samtykt 26—0.

25. Vaktar- og bjargingarskip

Ár 1961, 9. november legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um bygging av vaktar- og bjargingarskipi.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilað saman við fíggjarnevndini at byggja ella keypa vaktar- og bjargingarskip og at taka neyðug lán landskassans vegna til fremjingar av hesum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om bygning af vagt- og bjærgningsfartöj.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til sammen med finansudvalget at lade bygge eller köbe vagt- og bjærgningsfartöj og pan landskassens vegne at optage de nödvendige laan til gennemförelse af denne opgave.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í lögtingssetuni 1957 — jfr. lögtingsmál nr. 28 — verjan av föroyskum fiskiskipum — lögtingstíðindi 1957, síðu 93 — varð m. a. samtykt at geva landsstýrinum upp í hendi at skipa fyri, at nýtt hóskandi föroyskt vaktarskip verður bygt ella keypt.

Eftirsum landsstýrið ikki hevur heimild eftir hesi lögtingssamtykt at læna tann pening, ið er neyðugur til fremjingar av hesari uppgávu, og tað ikki heldur er nökur játtan á fíggjarlógini, má lögtingslóg hesum viðvíkjandi samtykkjast av tinginum.

1., 2. og 3. viðgerð 9. november 1961.
Lógaruppskotið samtykt 28—0.

26. Broyting í lógini um endurnýgging av skipaflotanum

Ár 1961, 9. november legði varalögmaður fram soljóðandi skriv:

Í lögtingsmáli nr. 10/1961: Eykalán og eykastudningur til nýggj fiskiför og lögtingsmáli nr. 11/1961: Uppskot til lóg um broyting í lóg nr. 8 frá 6. marts 1958 um endurnýgging av skipaflotanum samtykti lögtingið vegna umsókn frá Leivi Lützen, landsrettarsakförara, fyri J. F. Kjölbro, Klaksvík, at broyta lógina um endurnýgging av skipaflotanum soleiðis:

Lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 8 frá 6. marts 1958 (smbr. nr. 32 frá 13. mai 1959) um endurnýgging av fiskiskipaflotanum við seinni broytingum.

§ 1.

Í lögtingslóg nr. 8 frá 6. marts 1958 § 1, punkt 1. og § 2 verður skotið inn aftaná «nýbygging av» «í serstökum föri saman við figgjarnevndini til keyp av fiskiskipi yngri enn 2 ár.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Aftaná samtyktina visti tað seg, at umsökjarin ikki hevði ætlað at keypt tað farið, ið nevnt var í umsóknini.

Við tað at lögtingið soleiðis tykist at hava viðgjört hetta mál undir skeivum forútsetningi, má tað haldast at vera beinast, at lögtingið fær höví til at viðgera málið av nýggjum, og verður málið sostatt lagt aftur fyri tingið.

1. og 2. viðgerð 9. november 1961 (smbr. tingmál nr. 27/1961).

27. Uppskot til avgerðar um endurnýgging av skipaflotanum

Ár 1961, 9. november legði lögmaður fram soljóðnudi

Uppskot

til

samtyktar

Løgtingið samtykkir, at løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 8 frá 6. marts 1958 (smbr. nr. 32 frá 13. mai 1959) um endurnýgging av fiskiskipaflotanum við seinni broytingum, samtykt av tinginum 19. september 1961, verður lýst.

1. viðgerð 9. november og sama dag legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málini hava verið til viðgerðar í fíggjarnevndini.

Ein minniluti (J. Fr. Øregaard) mælir til at samtykkja uppskotið til samtyktar í tingmáli nr. 27/1961.

Ein meiriluti (A. Djurhuus, H. Iversen, H. Jespersen og E. Paturssen, P. Petersen og S. Petersen) setur onki uppskot fram.

2. viðgerð 9. november 1961.

Uppskotið í nr. 27/61 fall 10—0.

28. Dronning Alexandrines hospital

Ár 1962, 22. februar legði lögmaðnr fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Lögtingið tekur til eftirtektar, at landsstýrið við heimild í lögtingslóg nr. 18, 7. marts 1957, sókir ríkisstýrið um studning og lán til modernisering og víðkan av Dronning Alexandrines hospital.

Viðmerkingar:

Í lögtingssetuni 1956, lögtingsmál nr. 52, Lögtingstíðindi bls. 140, greiddi landsstýrið frá teimum ætlanum, ið lá lógu fyri um víðkan og modernisering av Dr. Alexandrines hospital. Kostnaðurin var mettur til 4-5 mill. kr. Við lögtingslóg nr. 18, 7. marts 1957, fekk landsstýrið heimild at læna neyðturviliga peningin.

Síðan tá hevur serlig byggineynd, vald av stýrinum fyri sjúkahúsið, viðgjört málið við ymsum arkitektum, seinast arkitektfelagið Carlo Odgaard & Ole Odgaard & Aaby Sörensen, Aalborg. Upprinnaligu ætlaninar eru nógv broyttar. Detailprojekt er gjört, og er kostnaðurin nú mettur til 18.615.696 kr. Sjúkahússtýrið hevur góðkent ætlanina, jbr. viðlagda skriv frá stýrinum dagfest 14. februar 1962.

Projektið er ætlað sum ein tilbygningur til Dronning Alexandrines hospital við eini viðgerðardeild í 3 hæddum og eini sjúklingadeild í 5 hæddum, ímillum hesar báðar deildirnar verður ein verkfröðingahædd til maskinur o.l. Soleiðis víðkað og moderniserað verða 224 seingur á sjúkahúsinum, herafturat m. a. 2 operationsstovur, röntgendeild, fysiurgisk deild, anæstesideild og klinikk fyri eygna- og oyrnalæknan.

Í felag við ríkissjúkahúsið í Tórshavn, sum ætlanin er at fara undir í 1962, er varmamiðstöð, kökur, vaskari, skrivstovur, starvsfólkahús v. m. Kostnaðurin av hesi felagsbygging er ikki uppi í talinum 18.615.696 kr., men ber ríkiskassin allar byggiútreiðsturnar, og skal so Dronning Alexandrines hospital yvir rúkstrin gjalda fyri veitingar.

Av samlaða kostnaðinum 18.615.696 kr. hevur ríkisstýrið játtað til detailprojektering og til bygging av tuberkladeildini og sjúkaheiminum 2.238.000 kr., helvtina sum studning og hina helvtina sum fyribils statslán. Av hesum deildum er tuberkladeildin liðug og likin í nýtslu, meðan sjúkaheimið verður liðugt í marts 1962. Av lánínum verður rentu goldin, men ongin avdráttur í byggitíðini, tó ikki longur enn til 1. apríl 1968, tá samráðast skal við ríkisstýrið um ta endaligu lániskipanina.

Nú er tað landsstýrisins ætlan, aftanú málið er viðgjørt og viðmelt av sjúkahússtýrinum, at sökja ríkisstýrið um, at restpeningurin 16.377.696 kr. verður veittur undir sonu treytum sum frammanfyri. Verður umsóknin góðtikin, verður farið undir byggingina várið 1962, og er byggingin ætlað liðug í 1964. Annars er ætlanin, at tann parturin av ríkissjúkahúsinum, ið er Dronning Alexandrines hospitali neyðugur, varnamiðstöð v. m., er liðugur, samstundis sum sjúkahúsið hevur bygt sín part.

BESTYRELSEN FOR

DRONNING ALEXANDRINES HOSPITAL

Tórshavn, den 14. februar 1962.

I skrivelse af 8. december 1960 fremkom bestyrelsen med en nærmere redegörelse for det da foreliggende skitseprojekt til modernisering og udvidelse af Dronning Alexandrines hospital i tilknytning til opförelsen af et statshospital for sindslidende og aandsvage paa Færöerne.

Skitseprojektet omfattede en tilbygning til det nuværende hospital med en behandlingsafdeling paa 3 etager og en helæguingsafdeling paa 5 etager. Hertil kom ombygning af hospitalets nuværende bygninger samt opförelse af en elementbygning til brug for tuberkulosestation, tuberkuloseafdeling og plejeafdeling.

De fornödne bygninger til kökken, vaskeri, kedelhus, funktionærboliger, administrationslokaler og sygeplejeskole indgik ikke i skitseprojektet, men forudsattes opföret fælles for Dronning Alexandrines hospital og det fornævnte statshospital som et led i projektet vedrörende statshospitalet.

Omkostningerne ved udvidelsen og modernisering af Dronning Alexandrines hospital var ved skitseprojektets udarbejdelse — excl. inventar m. v. — anslaaet til knap 14 mill. kr., der fremkom saaledes:

Ny patient- og behandlingsbygning	ca. 11.630.000	kr.
Ombygning af nuværende bygninger	1.200.000	kr.
Elementbygning til TB og plejeafdeling m. v.	800.000	kr.
ialt	13.630.000	kr.

Paa denne baggrund sögte bestyrelsen i fornævnte skrivelse af 8. december 1960 landsstyrets tilslutning til at afholde udgiften ved detailprojekteringen, anslaaet til 1.138.000 kr. og udgiften ved opförelsen af den nævnte elementbygning, anslaaet til 800.000 kr., ialt 2.238.000 kr.

Efter at der mellem landsstyret og regeringen var ført nærmere forhandlinger om fremgangsmaaden ved projektets finansiering, meddelte folketingets finansudvalg i skrivelse af 12. september 1961 tilslutning til, at de nævnte udgifter paa 2.238.000 kr. til detailprojektering af udvidelsen og ombygningen samt opförelse af elementbygningen blev afholdt med halvdelen som tilskud fra statskassen og halvdelen som et landsstyret ydet midlertidigt, afdragsfrit laan af statskassen, der forfalder, naar byggeriet er afsluttet.

Detailprojekteringen er nu ved at være afsluttet, og de foreliggende tegninger og planer er alle godkendt af sundhedsstyrelsen. Under detailprojekteringen, der knytter sig nöje til skitseprojektet, er foretaget enkelte mindre udvidelser af patient- og behandlingsbygningen. Byggeomkostninger anslaas herved at blive forøget med ca. 657.200 kr. Endvidere er byggeomkostningsindexet siden skitseprojektets udarbejdelse steget ca. 8 %, saaledes at der af denne grund maa regnes med en fordyrelse paa ca. 982.800 kr. Endelig maa til den ved skitseprojektets udarbejdelse anslaaede byggesum lægges udgifter til inventar, vejarbejder, udlæg, konduktör m. v., hvilke udgifter ikke var medregnet i dette overslag.

Opförelsen af elementbygningen er ligeledes ved at være afsluttet, idet tuberkulosestation og -afdeling er taget i brug, medens plejeafdelingen ventes taget i brug i marts maaned. Udgifterne hertil, der var budgetteret til 800.000 kr., maa imidlertid nu anslaas til ialt 1.110.696 kr., hvoraf 119.290 kr. udgör udgifter til inventar og særinstallationer, der ikke var medregnet i overslaget.

De samlede udgifter ved udvidelse, modernisering og ombygningen af Dronning Alexandrines hospital kan herefter anslaas til ialt 18.615.696 kr., der fremkommer saaledes:

Udgifter ifölge tidligere overslag	13.630.000 kr.
Mindre udvidelser af projektet	657.000 kr.
Stigning i byggepriser	982.800 kr.
Inventar	2.262.000 kr.
Vejarbejder	100.000 kr.
Konduktörer	150.000 kr.
Udlæg m. v.	193.000 kr.
Ögede udgifter til elementbygning	310.696 kr.
ialt	18.615.696 kr.

Af dette beløb er bevilget..... 2.238.000 kr.

til rest ..... 16.377.696 kr.

Under henvisning hertil skal bestyrelsen anmode om landsstyrets tilslutning til, at der hos rigsmyndighederne söges en bevilling til projektets gennemförelse paa 16.377.696 kr. saaledes, at halvdelen afholdes som tilskud fra statskassen, medens halvdelen afholdes som et landsstyret ydet midlertidigt, afdragsfrit statslaan, der forfalder til udbetaling, naar byggeriet er gennemfört.

Det tilföjes, at det for at udnytte den kommende sommersæson vil være nödvendigt, at bevillingsmyndighedernes tilsagn foreligger saa betids, at udbydning af entrepriserne kan finde sted omkring 1. april d. aa. Opförelsen af patient- og behandlingsbygningen vil i saa fald kunne være tilendebragt i 1964, hvorefter ombygningen af de eksisterende bygninger kan paabegyndes. Det er endvidere overfor bestyrelsen oplyst, at de fællsanlæg, for Dronning Alexandrines hospital og statshospitalet paa Færöerne, som skal opföres i forbindelse med statshospitalet, under forudsætning af bevillingsmyndighedernes tilslutning vil kunne være færdige paa det tidspunkt, da opförelsen af den nye patient- og behandlingsbygning paa Dronning Alexandrines hospital forventes tilendebragt.

Man tillader sig derfor at henstille, at landsstyret tager stilling til nærværende andragende saa hurtigt, at ansögning til rigsmyndighederne kan fremsendes herfra med «Tjaldur» den 23. februar.

I sæt tegninger vedlægges.

1. viðgerð 26. februar og 1. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Við löglingslóg nr. 18 frá 7. marts 1957 er givin landsstýrinum heimild til landskassans vegna at læna neyðtarviligan pening til modernisering og viðkan av Dronning Alexandrines hospitali og hevur landsstýrið lagt fyri löglingið uppskot til samtyktar viðvíkjandi umsókn til ríkisstýrið um studning og lán til nevnda endamál.

Málið er framlagt 22. februar 1962 og kom til 1. viðgerð 26. februar 1962, har tað varð beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Nevndarlimurin Poul Petersen ger hesar viðmerkingar:

Í löglingsmáli nr. 52/1956 samtykti lingið tann 22. februar 1957 at gøva landsstýrinum heimild at læna törvandi pening til modernisering og viðkan av Dronning Alexandrines hospital (smbr. löglingslóg nr. 18 frá 7. marts 1957) og eisini í einum uppskoti til samtyktar at søkja ríkisstýrið um helvtina av byggiútreiðslunum sum studning úr ríkiskassanum eftir viðmerkingunum frá landsstýrinum út frá tí, at sjúkhúsmálini eru felagsmál (smbr. eisini lingmál nr. 59/1956: Klaksvíkar sjúkhús).

Útreiðslurnar av byggingini aftrat Dronning Alexandrines hospital vóru tá meltar – prishækkingar uppíroknaðar til um 5 mill. sum lið í einari felagsbygging við tað tilætlaða statshospitalið sum var metl at kosta um 15 mill. (smbr. skriv d. 17. november 1956 frá sjúkhússtýrinum).

Nú liggur málið aftur á lingborði, snøgg 5 ár síðani, tað var her seinast, við lidnum projekti, viðroknað inventar, fyri tilsamans 18.615.696 kr. og statshospitalið er nú metl at kosta stívar 40 mill. kr.

Eftir galdandi reglu í lóg nr. 76 frá 15. marts 1939 vera sjúkhúsini í Føroyum drivin fyri landskassans rokning við studningi m. a. úr ríkiskassanum við vist fyri hvönn sjúkadag, men ongin regla er sum sigur annað enn, at tað er landið sum ber útreiðslurnar av sjúkhúsbygging.

So staðt má löglingið kunna krevja av sjúkhússtýrinum at fáa fyrilagt frammanundan tílíkar spurningar, sum hava útreiðslur við sær, sum fara útum galdandi játtanir ella ætlanir, bæði tá ið talan er um rakstur og nýbygging og finnast at, at sjúkhússtýrið í fyriliggjandi föri hevur tikið sær tílíkt ræði til, sum beel lingið hevur.

2. viðgerð 2. mars 1962.
Landsstýrisins uppskot samtykt 24—0.

29. Samsýning til postverkið fyri uppkrevjing av tolli

Ár 1962, 15. februar legði varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjöld o. m.

§ 1.

Í § 13, 2. petti, í lögtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innflutningsgjöld o. m. við seinni broytingum og uppiskoytingum verður «60 oyru» broytt til «1 krónu».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indförelsesafgifter m. v.

§ 1.

I § 13, 2. stk., i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indförselsafgifter m. v. med senere ændringer og tilföjelser ændres «60 öre» til «1 krone».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Postskrivstovan í Tórshavn hevur í skrivi dagfest 30. oktober 1961 sökt um at fingið samsýningina fyri uppkrevjing av tollgjöldum av postpakkum hækkaða úr 60 oyrum upp í 1 krónu fyri pakkan.

Vist verður í umsóknini á, at samsýningin, ið áseti varð við lóg nr. 66 frá 6. oktober 1950, ikki er regulerað síðani og tí ikki longur kann bera útreiðslurnar av uppkrevjingini.

Viðlagt er avrit av umsókn frá postskrivstovuni við ummæli frá Föroya gjaldstovu.

THORSHAVN POSTKONTOR

Thorshavn, den 30. oktober 1961.

Godtgörelsen for post- og telegrafvæsenets medvirken ved afgiftsopkrævningen paa Færöerne.

I forbindelse med ovennævnte godtgörelse har postkontoret fra generaldirektoratet modtaget saalydende:

«I henhold til lagtingslov nr. 66 af 6. oktober 1950 tilkommer der post- og telegrafvæsenet 60 öre i arbejdspenge for hver afgiftspligtig postpakke, der indföres til Færöerne. Det omhandlede beløb er ikke blevet reguleret i overensstemmelse med pris- og lönudviklingen, og beløbet giver ikke mere post- og telegrafvæsenet tilnærmelsesvis dækning for udgifterne til det med afgiftsopkrævningen forbundne arbejde.

Til sammenligning tjener, at porteen for postindkasseringer i öjeblikket udgör:

til 25 kr.		90 öre
fra 25	100 kr.	100 öre
fra 100	300 kr.	110 öre
fra 300	1000 kr.	150 öre

Det bemærkes i denne forbindelse, at arbejdet med postindkasseringer falder naturligt ind i det övrige postale arbejde med opkrævning og pengeforsendelse, hvilket ikke gælder for arbejdet med afgiftsopkrævningen, som naturligvis for den postale behandlings vedkommende besværes af, at de benyttede formularer og systemet i det hele taget ogsaa skal passe ind i Gjaldstovas og toldvæsenets forretningsgang.

Ved beregninger, der er forelaget i generaldirektoratet, er man kommet til det resultat, at en godtgörelse paa 1 kr. pr. afgiftskort formentlig vil kunne dække post- og telegrafvæsenets udgifter i forbindelse med afgiftsopkrævningen i öjeblikket, og man henstiller derfor, at det post- og telegrafvæsenet ved lagtingslov nr. 66 af 6. oktober 1950 tilkommende beløb paa 60 öre for hver afgiftspligtig pakke, der indföres til Færöerne, snarest söges forhöjet til 1 kr.»

Saaledes foranlediget anmodes Landsstyret om at forelage det videre fornödne.

Verður aftursent Föroya landsstýri við viðmerking, at eitt hækkan av gjaldinum til postverkið frá 60 oyrum til 1 kr. fyri hvönn gjaldskyldugan postpakka sum frammanfyri skotið upp, má haldast at vera rímulig samanborið við tær pris- og lönarhækkingar, ið eru farnar fram í tíðarskeiðinum frá oktober 1950 til nú.

Til sammetingar kann nevnast, at föroyska prístalið, ið var 273 pr. 1. oktober 1950, er 384 pr. 1. oktober 1961.

FÖROYA GJALDSTOVA»

1. viðgerð 19. februar og 22. s. m. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram á ting av landsstýrinum og var við 1. viðgerð 19. februar heint í figgjarnevndina.

Tað er postverkið í Havn sum í skrivi til landsstýrið frá 30. oktober 1961 hevur reist spurningin um hækkan av avgreiðslugjöldum fyri tollskyldugar postpakkar frá 0,60 kr. til 1,00 kr.

Landsstýrið mælir til at nevnda hækkan verður samtykt.

Nevndin hevur viðgjört málið og er — við undantak av H. Jespersen og E. Patursson — samd við landsstýrið og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 27. februar og 3. viðgerð 26. april 1962.

Landsstýrisins uppskot samtykt 16—0.

---

30. Býti av Föroya parti av útreiðslum til avlamispensjón

Ár 1962, 15. februar legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 64 frá 20. november 1959 um sundurbýting av Föroya parti av útreiðslunum av avlamis- og fólkapensión, barnastyrki og studningi til aldursheim.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 64 af 20. november 1959 om fordeling af Færöernes andel i udgifterne til invalide- og folkepension samt börnetilskud og tilskud til alderdomshjem.

§ 1.

Í lögtingslóg nr. 61 frá 20. november 1959 um sundurbýting av Föroya parti av útreiðslunum av avlamis- og fólkapensión, barnastyrki og stuðningi til aldursheim verður í § 1, 1. punktum:

«§ 7, 3. stk. í lóg nr. 147 frá 31. marts 1949 um invalideforsikring»

broytt til:

«§ 5, 2. stk. í lóg fyri Föroyar nr. 350 frá 6. december 1961 um invalidepension.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi fyri útreiðslur av avlamispensión, sum goldnar eru aftaná 1. april 1962.

§ 1.

I lagtingslov nr. 61 af 20. november 1959 om fordeling af Færöernes andel i udgifterne til invalides- og folkepension samt börnetilskud og tilskud til alderdomshjem ændres i § 1, 1. punktum:

«§ 7, 3. stk. i lov nr. 147 af 31. marts 1949 om invalideforsikring»

til:

«§ 5, 2. stk. i lov for Færöerne nr. 350 af 6. december 1961 om invalidepension».

§ 2.

Denne lov faar gyldighed for saa vidt angaar udgifterne til invalidepension, som udbetales efter 1. april 1962.

Viðmerkingar:

Nýggja lógin fyri Föroyar um avlamispensión kemur í gildi 1. april 1962 og fer samstundis lin fyrra um avlamistrygging nr. 147 frá 31. marts 1949 úr gildi.

Eftir § 5, 2. stk. í hesari nýggju lógini skal tann parturin av útreiðslunum, sum ikki verður goldin av vanliga avlamisgjaldinum, sum verður kravt við ¼ % av skattskyldugu inntökuni, verða býttur javnt millum Danmark og Föroyar og verður Föroya partur eftir avgerð heimastýrisins býttur millum landskassan og tær föroyskur kommunurnar.

Eftir núgaldandi reglum bera tær föroyskur kommunurnar 1/6 av hesum útreiðslum og vil landsstýrið mæla til, at hetta verður óbroytt framyvir.

1. viðgerð 21. februar og 26. mars legði sociala nevndin fram soljóðandi

Álit

Nevndin hevur havt málið til viðgerðar aftaná at tað við 1. viðgerð varð beint í sosialu nevndina.

Eftir nýggju avlamistryggingarlógini, sum kemur í gildi 1. april 1962 verður avlamisgjald ¼ % at gjalda av skattskyldugu inntøkuni, og restin verður at býta javnt millum statin og lógtingið. Í uppskotinum verður mælt til, at kommununurnar koma at bera 1/6 part av lógtingsins parti.

Samlaðu útreiðslurnar til sosialu lóggávurnar eru annars sambart yvirlit frá ríkisumboðnum 1961/62:

1000 kr.	Ialt	Statskassin	Heimastýrið Ialt	Landskassin	Kommunur.
Fólkapensión (við frádrátti av pensiónsgj.)	7.930	4.530	3.400	2.833	567
Avlamispensj.	2.990	1.495	1.495	1.246	249
Barnatilskot v. m.	294	147	147	123	24
Barnaforsorg ..	130*)	86	44	36	8
Serforsorg	222	222	.		
Einkjupensj. ..	78	39	39	33	6
Kronisk sjúk ..	66	33	33	28	5
Onnur almenn forsorg	272	68	204	170	34
Ialt	11.982	6.620	5.362	4.469	893

*) Hetta tal er hægri enn vanligt, við tað at hetta er ávisingar fyri fleiri ár.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið, sum tað liggur fyri.

2. viðgerð 28. mars og 3. viðgerð 2. april 1962.
Landsstýrisins uppskot samtykt 21 – 0.

31. Nýggj ferðslulóg

Ár 1962, 15. februar legði varalögmaður fram soljóðandi fylgiskriv (smbr. skjal 3):

Viðlagda uppskot til löglingslóg um ferðslu avloysir lóg nr. 73 frá 19. marts 1930 um motorakför v. m. við seinni broytingum.

Uppskotið er gjört av nevnd, ið landsstýrið 16. februar 1956 samtykti at seta niður at gera uppskot til nýggja ferðslu- og motorlóg. Í nevndini hava sitið landfútin, P. S. Sivertsen, fyrrv. motorsakkönur eftirlitsmaður og J. P. Ellendersen, fulltrúi. Fyriliggjandi uppskot er einmælt samtykt av nevndini.

Hövuðsbroytingarnar eru til dömis:

F e r ð. Í Tórshavn og bygdunum er mesta ferð ökt frá 15 km til 25 km. og millum bygdir frá 30 km til 40 km (§ 30).

T y n g d. Onki akfar kundi fyrr verða skrásett, um egínvektin var hægri enn 2.500 kg. Landsstýrið kundi tó geva undantaksloyvi upp í 3.500 kg. Nú má ongin vognur fullaðin viga meira enn 7.500 kg., bussar tó bert 6.000 kg. (§ 38). Egínvektin verður nú bert nýtt til at útrokna avgjaldið (vegskattin). Harafturímóti er sett mark fyri longd, breidd og hædd á akfarinum (§ 37).

S k ú l a k o y r i n g. Fyrr kundi ein og hvör, ið hevði verið akstjóri eitt ár, verða góðkendur sum koyrilærari. Nú krevst, at ein m.a. hevur koyrt akfar í 3 ár og hevur tikið eina serliga roynd (§ 63).

H ý r u v o g n a r. Sóknarstýrið í samráð við fútan kann áseta tatið á hýruvognum í sóknini og fastseta takstirnar (§ 61).

T r y g g i n g. Ábyrgdartryggingin fyri hýruvognar er sett frá 5.000 kr. upp í 20.000 kr. fyri hvönn persón, vognurin er útbúgvin at taka. Fyri aðrar vognar er tryggingin hækkað frá 40.000 kr. upp í 60.000 kr. (§ 55).

L j ó s. Hesi ljós verða kravd afturat: stöðuljós, bakkiljós og 2 reflekslјós (fyrr eitt) (§ 5).

A ð r a r b r o y t i n g a r. Fyri traktorar, hestavognar og súklur eru ásettar strangari reglur um útbúnað (§§ 7–9).

Akstjórum er umframt við rúsdrekkaávirkan eisini bannað at koyra, tá teir vegna sjúku, veikleika, ovvekur ella ávirkan av huglættandi ella doyvandi evni kunna ikki koyra akfarið á tryggjandi hátt (§ 15).

1. viðgerð 20. februar og málið beint til lógarnevndina.

32. Býti av rakstraravlopinum hjá Happadráttinum

Ár 1962, 15. februar legði varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um býti av rakstraravlopinum av föroyska happadráttinum.

§ 1.

Rakstraravlopið av föroyska happadráttinum verður at býta millum hesar grunnar:

Grunnur til bygging av lögtingshúsi	20 %
Sjúkhúsbyggigrunnur	50 %
Grunnur til bygging av búnaðarskúla	10 %
Grunnur til bygging av studenta- og kostskúla	20 %

Grunnarnir til bygging av varðhaldshúsi og til bygging av hotellum og ferðamannabúðum verða avtiknir og ognir teirra verða lagdar í grunnin til bygging av lögtingshúsi.

§ 2.

Tað í § 1 nevnda býti verður at fremja fyrstu ferð fyri rokuskaparár happadráttarins 1961.

lagtingslov vedrörende fordeling af det færöske lotteri's driftsoverskud

§ 1.

Det færöske lotteris driftsoverskud vil være at fordele mellem följende fonds:

Fonden til opförelse af ny lagtingsbygning	20 %
Sygehusenes byggefond	50 %
Fond til opförelse af landbrugsskole	10 %
Fond til opförelse af gymnasiebygning og kostskole	20 %

Fonden til opförelse af arrest og fonden til opförelse af hoteller og vandrerherberg ophæves og aktiverne overföres til fonden til opförelse af ny lagtingsbygning.

§ 2.

Den i § 1 nævnte fordeling gennemföres förste gang for lotteriets regnskabsaar 1961.

Viðmerkingar:

Í viðmerking til figgjarlögtingslógina 1950/51 er samtykt, at yvirskotið av föroyska happadráttinum skal býtast millum og leggjast í niðanfyri tilskilaðu grunnar eftir hesum lutfalli:

Lögtingshús	10 %
sjúkhús	50 %
búnaðarskúli	10 %
studentaskúli	20 %
hotel v. m.	5 %
varðhaldshús	5 %

Nú ríkiskassin hevur yvirtikið útreiðslurnar av lögreglumálum, herundir bygging av varðhaldshúsi verður biltið, at landskassans grunnur til bygging av varðhaldshúsi eigur at verða fluttur til annað formál, t.d. bygging av lögtingshúsi. Í sama grunn áfli tann töki peningur at verið fluttur, sum er lagdur í grunnin til bygging av hotellum v.m., ið ikki longur kann sigast at vera nökur landskassauppgáva.

So statt skal landsstýrið skjóta upp, at teir pengar, ið eru í nevndu tveimum byggigrunnum (varðhaldshús og hotell v.m.) verða, eftirhondini sum teir eru tökir, fluttir til grunnin til bygging av lögtingshúsi og at yvirskotið av happadráttinum í framtiðini verður býtt eftir hesum lutfalli:

Lögtingshús	20 %
sjúkhús	50 %
búnaðarskúli	10 %
studentaskúli	20 %

Í nevndu grunnum vóru pr. 1. januar 1962:

Lögtingshús	103.963,37 kr.
sjúkhús	250.689,73 kr.
búnaðarskúli	215.851,66 kr.
studentaskúli	1.574.137,66 kr.
hotel v.m. (herav lænt út 76.853,64)	106.297,72 kr.
varðhaldshús	4.558,51 kr.

Viðvikjandi teimum seinast nevndu grunnum verður upplýst:

ad hotellir og ferðamannabúðir:

Av nevndu 106.297,72 kr., sum skotið er upp at flyta til bygging av lögtingshúsi, eru 76.853,64 lætnar til 5 ymiskar lántakarar, meðan mun-urin stendur á bankabók.

ad bygging av varðhaldshúsi:

Tann partur 5 % av rakstrarvinningi happadráttarins, sum skuldi leggjast í grunnin til bygging av varðhaldshúsi er eftir viðmerkingunum

til fíggjarlögtingslógina 1950/51 lagdur í felagsbyggigrunnin. Frammanundan vóru ongir pengar lagdir í fyrrnevnda grunn.

Parturin av rakstrarvinninginum hjá happadráttinum í felagsbyggigrunninum er fyri tíðina 1950—1960: 5 % av 91.170,92 kr. ella 4.558,51 kr.

1. viðgerð 19. februar og 1. mai legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Við tað at onki tvíbiti er í avlopinum av happadráttinum, mælir nevndin til, at tað fer sum tað er í landskassan. Teir í málinum nevndu grunnar verða uppihildnir, og studningur til feirra verður at veita á teim árligu fíggjarlógunum.

Samsvarandi hesum setur nevndin í staðin fyri landsstýrisins uppskot soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um rakstraravlopið av föroyska happadráttinum	laglingslov om det færöske lotteris overskud.
§ 1.	§ 1.
Rakstraravlopið av happadráttinum fer í landskassan.	Lotteriets driftsoverskud indgaar i landskassen.
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi til og við rokuskaparárinum 1961.	Denne lov faar gyldighed til og med regnskabsaaret 1961.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 4. mai.

Uppskotið samtykt 25—0.

33. Landsstýrismál

Ár 1962, 18. februar legði formaðurin fram útskrift av landsstýrisins gerðabók fyri 1960/61 og 1. mai legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

Álit

Eftir tingskipan lögtingsins § 10 hevur nevndin til kannan av landsstýrismálum kannað avrit av landsstýrisins gerðabók fyri tíðarskeiðið 10. august 1960 til 28. juli 1961. Tað hava verið hildnir 70 fundir móti 62 í 1959/60. Nevndin hevur gjölla kannað hesi mál og loyvir sær at gera nakrar viðmerkingar:

Eftirgivin landsskattur er umleið 29.000 kr. móti 25.000 kr. í 1959/60; eins og í fjör er tann eftirgivni skatturin orsakaður av sjúku ella öðrum ringum umst.. Nevndin finnist at, at ein fulltrúi fær 1500 kr. í samsýning fyri nakað í samband við portugalstrolararnar, uttan at tað sæst, hvat tað er fyri eitt arbeiði, hann hevur avrikað. Hann er jú tænastumaður undir landsstýrinum og so statt hampuliga löntur. Somuleiðis má haldast at vera óneyðugt at veita einum yvirlærara eina persónliga eftirlöngevandi viðbót sum mun millum lön sum yvirlærari og tað, hann vildi fingið sum skúlainspektörur á 1. stigi; hesin munur má haldast vera útjavnaður gjögnum nýggja lönarskipan. Nevndin er ikki samd við landsstýrið um at hækka úrtíðargjöldini til skrivstovufólk. Tað er neyvan beint hjá okkum slavisk at fylgja við í allari lönarbroyting, sum fer fram fyri ríkisins skrivstovufólk. Lættan í tolli til flygel til ein skúla. Tað er óvanligt, at flygel verða nýtt til skúlabrúk, og teir skúlar, ið vilja nýta flygel, eiga sjálvir at bera allan kostnaðin. Studning og viðlíkahald av leikvölli eigur avgjört at vera tinginum óviðkomandi, eins og goldnar verða 1000 kr. fyri málning av manni og konu at hanga upp í teirra egna heimi. Tað má haldast, at landsstýrið í mongum förum er nóg so lætt á hondini bæði við eftirgeving av tolli, studningsveiting og samsýningum; væl er tað ikki tær stóru peninganögdir tað í hvörjum einkultum föri er talan um men nógvar tökir smáar o.s.fr. tað í verri er, er tann ósiður, ið tykist at nörast millum fólk, at man kann biðja landsstýrið um studning og samsýning v. m. til næstan alt, bæði líkt og ólíkt, og fáa sömdir. Slíkt stimbrar ikki tann gamla föroyska sjálvbjargnishugin. Viðvíkjandi eftirgevan av helvtini av restskuldini av rennustrongi í Rangabotni heldur nevndin tað vera ivasamt, um landsstýrið hevur fulla heimild at eftirgeva nakað av hesi skuld.

Minnilutin (Erlendur Patursson) er samdur við meirilutan í hesum atfinningum, men setur annars síll egna álit og uppskot fram.

Eftir hesum viðmerkingum loyvir ein meiriluti í nevndini (Hans Iversen og J. Fr. Øregaard) sær at seta fram fylgjandi

Uppskot

Lögtingið góðkennir tær avgerðir, landsstýrið hevur tikið í tíðarskeiðnum 10. august 1960 til 28. juli 1961,

og H. Djurhuus soljóðandi

Broytingaruppskot:

Landsstýrismálanevnd lögtingsins hevur havt «útskriftir úr gerðabók landsstýrisins» til kanningar, men tá hetta er trýnamannevnd, hevur fólkaflokkurin ikki havt høvi til at luttikið í hesum nevndararbeiði, tí vit sambart tingskipanina ongan mann eiga í nevndini.

Flokkarnir hava tó fingið hvör sítt eintak av «útskriftum úr gerðabók landsstýrisins», og loyvir fólkaflokkurin sær í hesum uttannevndaráliti at gera viðmerkingar við uppskoti til nakrar av teimum avgerðum, landsstýrið sambart gerðabók sína hevur tikið í tíðarskeiðinum 10. aug. 1960 til 28. juli 1961, og sum tað nú stendur [illegible] at góðtaka ella mótmæla:

1. Ár 1960, 25. august kl. 10. Allir á fundi. Lögtingssamtyktin í lögtingsmáli nr. 71/1959: Verjuskylda. 3 skriv frá statsministeriinum framlögd dagfest ávikavist 22. april, 27. juli og 10. august 1960. Samtykt at rykkja rikismyndugleikarnar eftir svari uppá skriv 10. juni 1960, har lögtingssamtyktin er avgreidd.

Vit eru nú komnir til í april 1962, men enn hevur tingið onki frætt frá lögtingssamtyktini nr. 71/1959: Verjuskylda. Sett verður tí fram hetta

Uppskot

Álagt verður landsstýrinum í ólavsøkutingsetuni 1962 skrivliga at geva tinginum frágreiðing um hetta mál.

2. Ár 1960, 3. november kl. 10. Allir á fundi. Tænastuferð lögmans í Danmark. Lögmaður greiddi frá samráðingum sínum við rikisstýrið um oyggjarvegin og Nato-stöðina á Sornfelli.

Hvörjar samráðingar lögmaður hevur havt við rikisstýrið um Nato-stöðina á Sornfelli er tinginum ókunnugt, tí hetta

Uppskot

Lögmaður verður biðin um at siga tinginum skrivtiga, hvörjar samráðingar hann hevur havt við ríkisstýrið um Natostöðina á Sornfelli.

3. Ár 1960, 18. november kl. 10. Á fundi K. Djurhuus og lögmaður P. M. Dam.

Framlagt skriv 27. oktober 1960 frá ríkisumboðsmanninum um málsökið bjarging er sermál ella felagsmál.

Samtykt at svara, at landsstýrið, síðani málsökið strandingar er sermál, er í iva um, um málsökið bjarging er felagsmál.

Landsstýrið hevur tó onki at viðmerkja til, at útleggingin verður, at ökið ikki er yvirtikið og sær allarhelst hesa útlegging!!

Her váttar landsstýrið uttan um tingið, at tað allarhelst sær, at eitt málsökið, ið eftir öllum at döma er sermál, verður gjört til felagsmál, og sigur beinleiðis: at útleggingin verður, at ökið ikki er yvirtikið og sær allarhelst hesa útlegging.

Hetta er eitt greftigt brot móti heimastýrislögini og seta vit fram hetta.

Uppskot

Lögtingið góðtekur ikki landsstýrisins avgerð í hesum máli.

Á sama fundi sigur gerðabókin undir punkt 5 soleiðis frá:

Skuldabrev frá Froðbiar söknar kommunu til Kreditforeninger af kommuner í Danmark fyri 135,000 kr. í láni var undirskrivað um ábyrgd landskassans eftir löglingslög nr. 26 frá 25. apríl 1960 um ábyrgd av láni til Froðbiar kommunu til gerð av vatnveiting til Drelnes.

Hvat er hesin peningur nýttur til?

Ongin veil um, at nökur vatnveiting er í gerð á Drelnesi. Hvat er lað fyri skuldarbrev, landsstýrið hevur undirskrivað, og hvar eru pengarnir? Tveir av limum landsstýrisins eru av Tvöroyri, so heilt fremmandir skuldu teir ikki verið hesari vatnveiting viðvikjandi, tá teir undirskrívaðu skuldarbrævið.

Uppskot

Lögtingið átalar landsstýrisins atburð í hesum máli og krevur eina frágreiðing.

Á sama fundi har lögmaður P. M. Dam sat sum sjálvurannar og so

statt hevði fullan avgerðarrætt stendur sum pkt. 8 henda forvitnisliga avgerð:

Lögtingslóg nr. 3 frá 2. februar 1956, endurnýggjað við lögtingslóg nr. 14 frá 28. februar 1957 um eykaavskriving av skipum v.m. fer úr gildi pr. 31. december 1960.

Samtykt at leggja uppskot fyri löglingið um, at lóggávan verður framlongd fyri 5 ár.

Fólkaflokkurin er sera vel nögdur við stöðu lögmansins í hesum máli!

4. Ár 1960, 2. december kl. 10.30. Allir á fundi. Skriv dagfest 17. november 1960 frá ríkisumboðsmanninum, har hann sigur frá undir hvörjum treytum handilsmálaráðið góðkennir, at föroysk stýrimans- og skipsföraraprógv kunnu geva rætt at fáa sjóyrkisbrøv á donskum skipum. Landsstýrið tók við treytunum um, at læruamboð skulu útvegast eftir samráðing við navigatiónsstjóran, at prövtökunevndin er serkön, og at prövtökutíðirnar vera avtalaðar við navigatiónsstjóran. Viðvíkjandi treytum til siglingartíðina verður at samráðast nærri.

Mannagongdin í hesari frágreiðing vísir týðiliga og greitt, at danski navigatiónsstjórin meira og meira fær fótin innum á Föroya sjómannaskúla, so gongur tað við hetta lag, verður tað bert ein spurningur um tíð, tá hesin skúlin heldur ikki er föroyskt sermál.

Uppskot

Lögtingið átalar, at landsstýrið uttanum tingið hevur lagt ymisk ökir sjómanslæruni viðvíkjandi undir danska navigatiónsstjóran.

5. Ár 1961, 26. januar, kl. 10. Lögmaðurin og N. W. Poulsen á fundi. Val av manni í nevndina fyri Tryggingarsambandið Föroyar fyri P. M. Dam, lögmann.

Eftir § 6, 2. stk. í lögtingslóg nr. 24, 28. mars 1956 um trygging var samtykt at velja P. M. Dam aftur.

Á hesum fundi er lögmansins atkvöða avgerandi, og setur hann seg sjálvan í eitt lönandi nevndarstarv. Tað eigur at verða týðiliga gjört vart við, at tingið heldur tað vera óhóskiligt, um landsstýrið knæsetur eina slíka mannagongd, ið kann föra við sær, at limir í landsstýrum koma at seta seg sjálvar í nevndarstörv, landsstýrið hevur í hondum at seta lim ella limir í.

Uppskot

Lögtingið heldur tað vera óhóskiligt, um landsstýrismenn seta seg sjálvan í nevndarsessir, landsstýrinum er heimilt at seta lim ella limir í.

6. Ár 1961, 2. februar kl. 10. Allir á fundi.

Uppskot til «instruks for fiskeriinspektionstjenesten paa Færöerne».

Undanfikið, at punkt B 5 eigur at ganga út, hevði landsstýrið ongar viðmerkingar.

Öll mál og allir spurningar viðvikjandi fiskimarksmálinum og vaktarhaldinum eiga at verða lagdir fyri tingið ella gjördir tinginum kunnugir. Hetta er ikki gjört í hesum föri, og er tað skeivt.

Uppskot

Lögtingið átalar, at landsstýrið ikki hevur sagt tinginum frá hesum «instruks for fiskeriinspektionstjenesten paa Færöerne».

7. Ár 1961, 9. februar.

Skriv dagfest 31. januar 1961 frá eikisumboðsmanninum um ymsar lítið týðandi 2 broytingar í uppskotinum til lög «om læreruddannelsen paa Færöerne», sum kenslumálaráðið ynskir.

Samtykt at góðkenna hesar broytingar uttan at leggja tær fyri lögtingið, síðan tær eru av lítlum týdningi.

Allar broytingar í uppskotum til lógir, ið verða gjördar aftaná at uppskotini eru farin frá tinginum, eiga at verða lagdar aftur fyri tingið. Í hesum föri hevur landsstýrið ikki hildið tað verið ómakin vert so fræt sum at siga tinginum frá, hvörjar broytingar tað hevur gjört.

Uppskot

Lögtingið mótmælir, at landsstýrið ger broytingar í lógaruppskot samtykt á Föroya lögtingi uttan at leggja uppskotini aftur fyri tingið.

8. Ár 1961, 13. april kl. 10. Allir á fundi.

Skriv frá Föroya skúlastjórn dagfest 10. februar 1961 har sagt verður frá, at kenslumálaráðið er sinnað at sökja heimild fyri, at Poul E. Petersen, yvirlærari, fær eina persónliga eftirlöngevandi viðbót, ið er munurin millum hansara lön sum yvirlærari og la lön, hann vildi fingið sum skúlainspektörur á 1. lönarstigi. Spurt verður um landsstýrið kann góðkenna hesa skipan.

Samtykt at svara, at landsstýrið eftir umstöðunum góðkennir skipan-

ina, og fellur so burtur tann persónliga viðbótin, ið higartil er goldin honum úr landskassanum. Kr. Djurhuus tekur fyrivarni, tí hann skilir stöðuna soleiðis, at lönarmunurin longu er útroknaður gjögnum nýggju lönarlógina.

N. W. Poulsen helt nakað að samu sum K. Djurhuus, men mátti eftir tí, sum áður var farið fram, ganga við til hesa skipan, men ógvuliga treyður.

Hetta mál er av slíkum prinsipiellum týdningi, at tað er ófatuligt, at avgerð landsstýrisins er tikin uttan málið er roynt fyri rættinum.

At ein maður, ið er farin úr starvi, tí starvið verður niðurlagt, og sum fær annað starv, ið gevur meira lön, enn tá lön, hann fekk tá starvið var niðurlagt, alla sína tíð uttan arbeiði og ábyrgd tilsvarandi skal fáa eina avlöning, ið er samsvarandi tí lön, hann vildi havt fingið, um hann varð sitandi í upprunaliga starvinum, ljóðar sum eitt heilt ævintýr. Í slíkum málum eigur rætturin at tala.

Uppskot

Lögtingið góðtekur ikki tá avgerð, meirilutin í landsstýrinum hevur gjört í hesum máli.

9. Ár 1961, 4. mai kl. 10. Allir á fundi.

Skriv dagfest 20. apríl 1961 við fyrispurningi frá statsministeriet um at seta ymsar lógir hoyrandi undir verjumálaráðnum í gildi í Föroyum.

Samtykt at svara, at landsstýrið heldur ikki, sum er, at hesar lógir eiga at verða settar í gildi.

Hvörjar lógir hoyrandi undir verjumálaráðnum ynskir statsministeriið settar í gildi í Föroyum, og hvat liggur aftanfyri, tí landsstýrið svarar, at tað ikki, sum er, heldur, at hesar lógir eiga at verða settar í gildi?

Föroyingar eiga at halda fast um, at vit eru uttan fyri danska verjuskyldu, öll verjutiltök og alla verjumálalóggávu, og hesa stöðu eigur lögtingið at verja og gera vart við.

Landsstýrisins svar í hesum máli er so jánkalígt, at förvur er á, at lögtingið sigur frá sínu stöðu, og seta vit tí fram soljóðandi

Uppskot

Föroya lögting mótmælir, at statsministeriið ætlar at fáa sett lógir, ið hava við verjumál at gera, í gildi í Föroyum.

10. Ár 1961, 1. juni kl. 10.

Skriv dagfest 19. mai frá Kjöbenhavns Telefonaktieselskab, Köbenhavn, viðvíkjandi möguligari avtalu millum hetta felag og landsstýrið um samarbeiði viðvíkjandi umsitingini av Telefonverk Föroya Lögtings.

Samtykt at svara, at málið viðvíkjandi telefonverkinum í sini heild er til viðgerðar í serligari millumtinganevnd. Annars verður skrivið kunngjört millumtinganevndini.

Telefonverk Föroya Lögtings hevur verið umsitið av okkum föroyingum, síðani telefonin kom á fyrsta sinni í 1906. Nú tykjast samráðingar hava verið millum landsstýrið og eitt danskt privatfelag, Kjöbenhavns Telefonaktieselskab, Köbenhavn, um samarbeiði viðvíkjandi umsitingini av Telefonverk Föroya Lögtings. Hvör hevur tikið initiativið til hesar samráðingar? Föroya lögting, ið eigur telefonverkið, hevur ikki gjört tað, og neyvan Kjöbenhavns Telefonaktieselskab heldur biðið sloppið sær. Landsstýrið eigur tí týðuliga og greilt at fáa at vita, at Föroya lögtiug ikki ætlar at lata umsitingina av telefonverkinum heilt ella partvís upp í hendurnar á dansku privatfelag.

Uppskot

Umsitingin av Telefonverk Föroya Lögtings verður hvörki heilt ella partvís at lata nökrum uttan fyri Föroyar upp í hendi.

11 Ár 1961, 1. juni kl. 10. Allir á fundi.

Skriv dagfest 12. apríl 1961 um val av einum nevndarlimi.

Lögmaður mótmælti avgerðini frá meirilutanum í landsstýrinum, tí hann var av teirri áskoðan, at eftir vanligari parlamentariskari mannagongd átti hann, sum umboðaði största flokkin á lögtingi, rætt at velja mannin, eins og hann mótmælti, at maður verður valdur, sum hann er ímóti.

Föroya lögmaður mótmælir her, at maður verður valdur, sum hann er ímóti, sjálvt um teir, ið velja hann, hava 9 tingmenn aftanfyri seg, meðan lögmaður hevur 8. Hetta sigur hann er ímóti vanligari parlamentariskari mannagongd, soleiðis sum hann skilir hana.

Henda útlegging av «vanligari parlamentarismu» av landsins hægsta manni í umsitingini er so princippiel, at tingið ikki kann lata hetta standa uttan at siga sína hugsan.

Uppskot

Lögtingið kann ikki góðtaka lögmansins áskoðan í hesum máli.

12. Ár 1961, 11. juli kl. 16. Allir á fundi uttan varalögmaður.

Skriv frá landsapotekaranum dagfest 3. mai í ár um loyvi at seta upp medisintakstirnar við 4 % svarandi til tað hækkaða innflytingargjaldað.

Samtykt at eftirfíka hesum.

Tey, ið hava medisin fyri neyðini, ganga mangan undir tungari byrðu, men stein oman á hesa byrðu leggur landsstýrið við hesari avgerð um, at allir medisintakstir skulu upp við 4 %'um svarandi til innflytingargjaldið. Hefta kann ikki vera í álvaru meint, at lögmansatkvöðan í landsstýrinum soleiðis skal verða nýtt til at leggja byrðir á tey sjúku og veiku.

Uppskot

Lögtingið kann ikki góðtaka hesa avgerð.

2. viðgerð 7. mai 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi

Minnilutaálit frá Erlendi Patursson:

Minnilutin lýsir sítt mísálit á landsstýrinum.

Uppskot minnilutans (E. Patursson) var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, Hanus við Högadalsá og Henning Jespersen.

Atköddu ikki: H. Petersen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, Poul J. Olsen og Haldor Hansen.

Nei atkvöddi: J. Lindenskov.

Burturstaddir: Niels H. Jacobsen, J. P. Davidsen og K. Djurhuus.

Uppskotið fall 11—1.

Broytingaruppskot frá H. Djurhuus:

1. Atkvöðan fór fram við navnakalli eftir uppskoti frá uppskotsstillarunum;

Atkvöddu ja: P. Petersen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. við Högadalsá, H. Jespersen. Ialt 12.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Joh. Fr. Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen, J. Fr. Öregaard, ialt 15.

Burturstaddir: N. H. Jacobsen, J. P. Davidsen, Kr. Djurhuus, ialt 3.

Uppskot 1 sostatt burturdottið 12—0.

2. Uppskot 2 fall 12—0.

3. Eftir áheitan frá uppskotsstillarunum fór atkvöðugreiðslan fram við navnakalli:

Atkvöddu ja: P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. við Högadalsá, H. Jespersen, ialt 14.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Joh. M. Fr. Paulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen, J. Fr. Öregaard. Ialt 13.

Burturstaddir: N. H. Jacobsen, J. P. Davidsen, Kr. Djurhuus.

Uppskot 3. sostatt burturdottið 14—0.

4. uppskot 4 fall 12—0.

5. uppskot 5 fall 12—0.

6. uppskot 6 fall 12—0.

7. uppskot 7 fall 12—0.

8. Eftir áheitan uppskotsstillarans fór atkvöðugreiðslan fram við navnakalli:

Atkvöddu ja: P. Petersen, K. Wang, H. Djurhuus, S. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, L. Joensen, S. Joensen, E. Paturssen, H. við Högadalsá, H. Jespersen, ialt 13.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Joh. M. Fr.

Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen, J. Fr. Öregaard. falt 14.

Burtursfaddir: N. H. Jacobsen, J. P. Davidsen, Kr. Djurhuus.

Uppskot 8. sostatt burturdottið 13—0.

9. Uppskot 9 fall 12—0.

10. Uppskot 10 fall 12—0.

11. Eftir áheitan frá uppskotsstillaranum fór atkvöðugreiðslan fram við navnakalli:

Atkvöddu ja: P. Petersen, M. Johannesen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. við Högadalsá, H. Jespersen, falt 13.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Daubjörg, S. Petersen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Joh. M. Fr. Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen, J. Fr. Öregaard, falt 11.

Burtursfaddir: N. H. Jacobsen, J. P. Davidsen, Kr. Djurhuus.

Uppskot 11 sostatt burturdottið, 13—0.

12. Uppskot 12 fall 11—0.

Uppskot meirilutans Iversen og Öregaard:

Eftir uppskoti frá H. Djurhuus, fór atkvöðugreiðslan fram við navnakall:

Atkvöddu ja: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Daubjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Joh. M. Fr. Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen, J. Fr. Öregaard, falt 15.

Atkvöddu nei: K. Wang, J. Simonsen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. Jespersen, falt 6.

Atkvöddu ikki: P. Petersen, H. Djurhuus, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, H. við Högadalsá, falt 6.

Burtursfaddir: N. H. Jacobsen, J. P. Davidsen, Kr. Djurhuus.

Uppskot meirilutans sostatt burturdottið 15—0.

34. Lögtingslóg um tinglýsing

Ár 1962, 20. februar legði varalögmaður fram uppskot til lögtingslóg um tinglýsing (smbr. skjal D.

1. viðgerð 23. februar og 2. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit

Landsstýrið hevur lagt hetta mál fyri lögtingið við uppskoti til lögtingslóg.

«Tinglysningsloven» frá 31. mars 1926 varð ikki sett í gildi í Föroyum. Eftir grein 54 í lógini skuldi lógin kunna setast í gildi í Föroyum við serligari lóg við teim neyðugu broytingum, men hetta varð ikki gjört. Málið hevur verið fyrilagt lögtinginum í 1926 og fylgjandi ár, men hevur tingið ikki vilja tikið endaliga stöðu, ullarbelst av tí grund, at útskiftingararbeiðið ikki var byrjað í 1926.

Sum nú er verður tinglisið eftir reglunum í N. N. 1-3-10 og 5-3-39 til 41 og fyriskipan frá 28. juli 1841, sbr. lóg frá 1. januar 1854 nr. 7 og annars eftir reglunum, sum viðvíkja tinglesing í lóg frá 31. mars 1928 (om indførelse af en matrikel og oprettelse af et rendregister for Thorshavn) og fyriskipan frá 15. juli 1931 viðvíkjandi útskiftingu uttanfyri Tórshavn.

Ein avgerandi treyt fyri at fáa eina álitandi tinglýsingarskipan í lag er, at allir fastir eigindómar verða matrikuleraðir ella skrásettir soleiðis, at eingin ivi er um teirra «identitet».

Um uppskotið í lögtingsmáli nr. 35/1961: Lögtingslóg um matrikulering og sundurbýti v. m. verður samtykt soleiðis, at möguleiki verður fyri at gera eina fullfiggjaða matrikulering av öllum eigindómum í Föroyum, so skuldi tað verið möguligt at fingið í lag eina álitandi tinglýsingarskipan, og tað fyriliggjandi uppskot til tinglýsingarlóg miðar ímóti hesum.

Lógarnevndin hevur fingið málið til viðgerðar.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins. Tó verður mælt til, at allastaðni har «veðskuldarbrev» stendur í föroysku tekstini fyri «pantebrev» í donsku tekstini, verður sett «pantibrev». Hetta skapar eina greiðari «terminologi» viðvíkjandi «ingligum» og «obligatoriskum» rettindum.

Í grein 39, í donsku tekstini 7. reglu, er komin ein prentvilla. Í staðin fyri «uberettiget» eigur at standa «ubetinget».

Poul Petersen ynskir tó at skila til, at tað hevði verið ynskiligt um

reglan um gjaldfrestir í § 40 hevði verið liðiligari orðað sum upprunaliga ætlað, men tá ið hugur fykist ikki vera fyri tí, verður onki broytingaruppskot sett fram í hesum viðfangi.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 1. mai, 1962.
Uppskot landsstýrisins við nevndinnar broytingum samtykt 27—0.

---

35. Lögtingslóg um matrikulering m. v.

Ár 1962, 20. februar legði N. Winther Poulsen, landsstýrismaður, fram soljóðandi framlöguskriv (smbr. skjal 5):

Í lögtingssetuni 1960, lögtingsmál nr. 25, lögtingstíðindi bls. 126, legði landsstýrið fyri lögtingið uppskot um ymsar broytingar í lóg nr. 109, 7. april 1936 «om kreditforeninger». Endamálið við uppskotinum, sum var samtykt 21. april 1961 við 20—0, var at gera tað möguligt hjá danskum kreditfelögum at virka í Föroyum. Samráðingar hövdu verið við Østifternes kreditforening at veita lán móti panti í föstum eigindóm.

Umfram at broyta nevndu lóg var tað eisini ein treyt fyri lánveitingini, at lóggávan um matrikulering og skráseting av jörð varð förd á jour.

Viðlagda uppskot til lögtingslóg um matrikulering og sundurbýting v. m. og uppskotið um lögtingslóg um tinglýsing í lögtingsmáli nr. 31/1961 förir lóggávuna fram til tað, hon er í öðrum norðanlondum, til tryggjan av honum, ið veitir lán, og tí eisini ein fyrimmur hjá honum, ið lán skal hava.

Viðmerkingarnar til hesi bæði lógaruppskotini eru felags og eru tiknar við í lögtingsmáli nr. 31/1961, sum landsstýrið annars vísir til.

1. viðgerð 23. februar og 2. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit:

Landsstýrið hevur lagt fyri lögtingið uppskot til lögtingslóg um matrikulering og sundurbýti v. m.

Eftir uppskotinum er ætlanin at gjögnumföra fullfíggjaða matrikulering av øllum föstum eigindómum í Føroyum og verður hetta í § 1 í lógaruppskotinum álagt matrikulstovuni.

Uppskotið fyriseluir nærri reglur um

1. sjálva matrikuleringina,
2. eigindómsdómar,
3. útskifting,
4. sundurbýti,
5. samanlegging,
6. umbýti og smærri broylingar av matrikulnumrum, og
7. marknaðsetingarmál.

Grundarlagið undir matrikuleringini verður fyrst og fremst tann matrikulering, ið longu er farin fram í Tórshavn og í leinum bygdum, ið útskiftar eru og annars tey luftfotografiir, sum gjörd eru.

Málið varð við 1. viðgerð, ið fór fram 23. februar 1962, beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og hevur Jens í Dali, matrikulstjóri, verið á fundi saman við nevndini og greitt frá málinum.

Nevndin samdist um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 1. mai 1962.

Uppskot landsstýrisins samtykt 26—0.

36. Uppskot til lóg um vegamál

Ár 1962, 19. februar legði Erlendur Patursson lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lóg um vegamál

Hin 21. mars legði tjóðveldisflokkurin fram uppskot til lóg um vegamál. Endamálið við lógaruppskotinum var at fáa heilt nýggja skipan í öllum vegamálum landsins, hæði viðvikjandi nýggjari vegagerð, umbyggingum, hövnðsumvælingum og viðlíkahaldi, soleiðis at vit um 5 ár hava fullkomið og forsvarligt veganet um alt landið. Við uppskotinum fylgdi eisini uppskot um, hvussu hetta mál eigur at verða loyst figgjarliga.

Málið var til 1. viðgerðar 8. apríl 1961 og varð beint í vega- og havnanevndina, men einki gjört við tað, sml. Lögtingstíðindi 1960, bls. 262-67. Flokkurin vísir til málið og loyvir sær at reisa tað av nýggjum í hesi tingsetu. Viðlagt verður fylgiskjal, ið framlagt varð fá.

Lögtingsmál nr. 36/1961: Uppskot til lóg um vegamál.

Fylgiskjal:

1. Nýggir vegir.

	Gjört km	Ógjört km
SUÐUROY		
1. Tvöroyri—Hvalba	?	1.0
2. Hvalba—Sandvík	3.0	12.0
3. Sunnbø—Víkarbyrgi	0.0	3.5
4. Sunnbøarvegur—Akrabyrgi	0.0	0.5
SANDOY		
5. Húsavík—Dalur	3.5	1.0
VÁGAR		
6. Gásadalsvegur	0.0	5.0
7. Oyragjáarvegur	0.0	3.0
8. Slættanesvegur	0.0	3.0

STREYMOY

9. Oyggjarvegur	14.5	6.0
10. Syðridalur—Norðridalur	0.0	3.0
11. Oyggjarvegur—Norðridalur	0.0	3.0
12. Skælingsvegur	1.5	1.0
13. Tjörnuvík—Haldórsvík	2.0	2.0
14. Haldórsvík—Langisandur—Hvalvík	0.3	10.0
15. Kollafjörður—Hósvík	0.0	5.5
16. Tórshavn—Sund	0.0	4.5
17. Sund—Kaldbakshotnur—Kaldbak	0.0	8.5

EYSTUROY

18. Oyri—Selatrað	0.0	6.0
19. Fjarðarvegur	5.0	1.7
20. Eiði—Gjógv—Funningur	13.0	2.0
21. Oyndarfjarðarvegur	0.0	1.0
22. Helluvegur	0.0	6.0
23. Elduvík—Funningsfjörð	0.0	7.0
24. Funningur—Funningsfjörð	0.0	7.0

NORÐUROYAR

25. Hattarvík—Kirkja	0.0	6.0
26. Svínoy—Havnartangi	0.0	2.5
27. Hvannasund—Viðareiði	3.5	1.5
28. Múli—Norðdepli	0.0	8.0
29. Depli—Norðtoftir	1.0	0.5
30. Klakksvík—Ánirnar—Árnafjörður—Norðdepli	2.5	2.0
31. Kunoy—Haraldssund	2.0	12.0
32. Tröllanes—Mikladalur	0.0	5.0
33. Mikladalur—Húsar	0.0	10.0
Samanlagt		153.7

II. Berggongdir og brýr.

1. Tvöroyri—Hvalbø, berggongd	1.5 km
2. Borðoyggin, berggongd	3.0 km
3. Brúgv um Streymin	0.5 km

1. viðgerð 1. mars og beint til havna- og veganevndina (sbr. tingmál nr. 67/1961 p. 2).

37. Vaktar- og bjargingarskip

Ár 1962, 19. februar legði Erlendur Patursson löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Fyri út við 4 árum síðan — 21. mars 1958 — gjördi Föroya löglting hesa samtykt:

«Landsstýrið fær upp í hendi at skipa fyri, at nýtt hóskandi vaktarskip verður bygt ella keypt.»

Aftan á at landsstýrið í 3½ ár eingi tiltök hevði tikið til at seta hesa samtykt í verk, legði tað fyri tingið «lógaruppskot um bygging av vaktar- og bjargingarskipi», sum varð samtykt í hesi tingsetu í heyst, og sum síðan varð lýst og kunngjört sum lög, har sagt verður:

«Landsstýrinum er heimilað saman við figgjarnevndini at byggja ella keypa vaktar- og bjargingarskip og at taka neyðug lán landskassans vegna til fremjingar av hesum.»

Málið hevur síðan verið til viðgerðar á fundum í landsstýri og figgjarnevnd, men har sýnast nú landsstýrið og meirilutin í figgjarnevndini at vera komin á samt um, at hetta bjargingar- og vaktarskip eisini skal byggjast sum «royndarfiskiskip». Somuleiðis sýnast landsstýrið og meirilutin í figgjarnevndini at vera sinnað til at lata skip byggja, sum í mesta lagi siglir 13 mil og til at hava tað óvápnað.

Henda ætlan um at byggja vaktar- og bjargingarskipið eisini til onnur — vaktar- og bjargingartenastuni óviðkomandi — endamál, stríðir bæði móti fyrrnevndu löglingssamtykt frá 1958 og móti fyrrnevndu lög frá 1961. Hvörki í samtyktini, lögini, teimum greinargerðum og álitum, sum hesum fylgdu, ella á annan hátt varð nakað sum helst orðað um slíkar óviðkomandi uppgávur. Tað má eisini haldast vera givið, at skal vaktar- og bjargingarskipið eisini reka royndarfiskiveiði og möguliga aðrar óviðkomandi og krevjandi uppgávur, fer ikki at hera til at rökja vaktar- og bjargingartenastuna til lítar og so væl, sum löglingið við samtykt síni og lög hevur ætlast til.

Málið um royndarfiskiveiði er vaktar- og bjarggingartenastuni óviðkomandi. Til royndarfiskiveiði kunna onnur skip — vanlig fiskiskip — nýtast, og hava verið nýtt. Í hesum sambandi skal eisini nevnast, at tað á annan háti verða gjördar fyrireikingar til at byggja föroyskt skúlaskip, og kann slíkt skip — betur enn nakað vaktar- og bjarggingarskip — rökja royndarfiskiveiði, sum so eisini má haldast vera ein fátturin í tí skúlaskapi, ið rekast skal á slíkum skipi.

Við hesum grundum hava nevndarlimir tjóðveldisflokksins í figgjarnevndini mótmælt fyrrnevndu ætlanum landsstýris og meiriluta figgjarnevndar, og hava teir kravt samtyktina og lógina setta í verk soleiðis, at skipið ið skal byggjast, hert verður bygt sum vaktar- og bjarggingarskip, at hetta skip siglir í miusta lagi 16 mil, og at tað verður útgjört við sterkum kanónum.

Í samband við útgerð skipsins við kanónum skal verða mint á, at lögtingið sama dag, sum tað gjördi samtykt sína um at láta vaktarskip byggja, nevniliga 21. mars 1958, gjördi hesa samtykt:

«Landsstýrið verður biðið um at útvega föroyskum vaktarskipum fullan lógrættarmyndugleika fyri at kunna verja föroysku áhugamálini í sambandi við sjóverjuna.»

Tó at hesin umbidni lógrættarmyndugleiki er ikki fingin enn, er at vóna, at hann eina ferð fæst — og ikki um so langa tíð. Av hesi grund má tað haldast vera rætt nú beinan vegin at taka avgerð um at hava komandi vaktarskip útgjört við kanónum.

Tjóðveldisflokkurin setir tí fram hetta

Uppskot
til
samtyktar

Formannsskapi lögtingsins verður álagt at bera umsorgan fyri, at samtyktin og lógin um nýtt vaktar- og bjarggingarskip fáa frama skjótast gjörligt, og á tann háti, at skipið ikki verður bygt til vaktar- og bjarggingartænastuni óviðkomandi endamál, at skipið siglir í minsta lagi 16 mil og at tað verður útgjört við sterkum kanónum.

1. viðgerð 2. mars og 2. viðgerð 14. mars 1962.
Uppskotið fall 13—0.

38. Havnagerð á Sandi

Ár 1962, 19. februar legði J. P. Davidsen lögtingsmaður fram soljóðandi skriv d. 2. januar 1962 á Sandi við 125 undirskriftum:

Okkara bestu tökk fyri tann bevilling, ið vit fingu til havnabygging her á plássinum.

Tað harmar okkum tó, at peningurin ikki verður nýttur á besta hátt; men har aftur í móti, á ein hátt, ið okkum tykist höpisleysur.

Tilfarið til pierin verður tikið úti í haganum, er ógvuliga óvinnuligt og langur vegur at flyta tað, tað verður í minsta lagi triggjar ferðir so dýrt, sum tað hevði verið, um tað hevði verið tikið á byggiplássinum.

Hetta harmar okkum, tá okkara ynski var at vaksa um bátahylin við at taka grófið, ið nýtt bleiv luðani, í staðin fyri at taka tað úti í haganum; tað kundi fingist við at sprongt í «turrari grubu» og vildi verið nógv bíligari.

Vit undirritaðu biðja tingið senda menn við praktiskum skili at hyggja at tí, ið verður gjört her, og um tað nú er seint, so kortini, um tað nú er seint fáa annað skil á, nú tað verður byrjað aftur til várs.

1. viðgerð 22. februar og 7. mai legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

Allt

Frá 125 íbúgvarum heinan av Sandi er komin adressa, har menn eru misnögdir við tann hátt, ið arbeiðið við havnabyggingini á Sandi fer fram. Málið varð víst til vega- og havnanevndina, sum á staðnum saman við manni frá landsverkfröðingsskrivstovuni, sóknarstýrinum og öðrum monnum í bygdini, hevur kannað málið. Tað, ið menn eru misnögdir um, er, at tað ikki er tikið grót innanfyri pierin til ífyllu og harvið samstundis fingið viðkað um bátahylin, ið er alt ov lítil. Hetta mál hevur verið fyrr framhildið av sóknarstýrinum yvirfyri landsverkfröðinginum. Undir viðgerðini av málinum í nevndini fyri lá frá landsverkfröðinginum soljóðandi viðmerking:

«Verður aftursent havna- og veganevnd lögtingsins samstundis sum sagt verður frá, at hetta mál um at víðka bátahylin á Sandi í sama viðfangi sum pierurin varð longdur, kom upp heinanvegin havnabyggingin byrjaði.

Tá tað var okkum greitt, at víðkanin av bátahylinum kostaði nógvan

pening, sjálvt um ein partur av tí útsprongda grótinum kundi koma til nytta aftur í arbeiðinum við leinging av pierinum, varð sóknarstýrið spurt, um tað var hugað fyri at brúka eitt parf av játtanini til havnabygging til hesa viðkanina av bátahylinum, t. e. í veruleikanum bert leingja pierin við 30 metrum í staðin fyri 10 metrum, sum tá leysliga var roknað við at fáa burtur úr tí 1 mill. kr. í byggipeningi, sum studningur var játtaður til.

Sóknarstýrisins stöða var, at ein viðkan av bátahylinum mátti ikki skerja ta ætlaðu havnabyggingina, og tá so var, var einki at tala um meira.

Annars kann verða upplýst, at ein öking av bátahylinum við 50 % — eina minni viðkan verður neyvan farið undir, um hon so einaferð verður — kostar o. u. 300.000 kr.. Grótið, sum fer og er farið í pierin, vildi givið einar 50—60.000 aftur, t. e. at uttan so ein hevði 240.000 kr. tökur, kundi ikki verið farið undir at viðka hylin.

Mark er eisini fyri, hvat Sands kommuna fíggjarliga kann átaka sær, og hvat hon kann fáa av lánum, so eg rokni við, at skuldi verið farið undir viðkanina av hylinum, vildi hetta fört við sær, at neyðugt var at skerja leingjanina av pierinum, uttan so at peningurin til bátahylin aftur varð latin úr landskassanum og fókur beinanvegin.»

Vísandi til hesa viðmerking spurdi nevndin menn, ið vóru á staðnum, um teir vildu skerja longdina av pierinum, við tað at grót tikið úr hylinum bleiv so nógv dýrari, svaraðu teir nei.

Nevndin er samd um at útfala, at «um tað ikki styttir um longdina av pierinum og ikki gevur tí almenna meira útreiðslur, eigur grótifyllan til framhald av havnabyggingini at verða tikin norðan fyri ella sunnanfyri molan,» og má nevndin halda, at um grótifyllan bleiv tikin norðanfyri, vildi tað ikki dýrka um arbeiðið og samstundis fört á leið til at lætt um fa möguligu útdýping av bátahylinum, ið einaferð kann væntast at verða framd.

Minnihlutin (Frederik Hansen og Jóhan Simonsen) mælir til, at Sands kommuna fær vanligan lendingastuðning, 50.000 kr. til at gera dráll við skinnarum og spæli, soleiðis at útróðrarbátar kunna dragast upp úr hylinum og niðan í neystini.

Uppskot

frá meirilutanum:

Eitt eintak av álitinum verður sent sóknarstýrinum á Sandi, harra Nikodemus Hentze, og landsverkfröðingsskrivstovuni.

Uppskot

frá minnilutanum:

Sands kommuna fær vanligan lendingastudning, 50.000 kr. til at gera drátt við skinnarum og spæli, soleiðis at útróðrarbátar kunna dragast upp úr hylinum og niðan í neystini.

2. viðgerð 7. mai 1962.
Uppskot minnilutans (Fr. Hansen og J. Simonsen) fall 12—0.
Uppskot meiralutans samtykt 19—0.

---

39. Minstalön og prísviðbót

Ár 1962, 21. februar legði Erlendur Paturssson löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lög um minstalön, prisviðbót og friðtíðarlön fiski- og útróðrarmanna.

1. §

Minstalönin fyri mynstraðar fiskimenn og mynstraðar útróðrarmenn verður 1.200 kr. um mánaðin. Teir, ið eru undir 16 ár, fáa í lutfalli til hetta eftir higar til galdandi reglum.

Útróðrarmenn til lands í Grönlandi fáa minstalön eftir somu reglum.

2. §

Útróðrarmenn, sum í Föroyum selja veiði sína til virkingar (klippfisk, saltfisk, flök og tillikt), fáa cykaprísviðbót við 10 oyru pr. kg. ráfisk.

Nevndin, sum sett er eftir lög nr. 46 frá 1. juni 1961, fær heimild til

sum treyt fyri hesi eykaprísviðbót at krevja, at viðkomandi fiskakeyparar halda nærri av nevndini tilskilaðan minstapris.

Útróðrarmenn til lands í Grönlandi fáa prísviðbót 9 oyru pr. kg. fyri ferskan fisk og 18 oyru pr. kg. fyri saltfisk.

3. §

Teir fiskimenn og teir útróðrarmenn, sum nevndir eru í 1. og 2. § í hesi lög, eiga 6 % frítíðarlön av vinningi sínum (t. e. avrokning, lönjavning og prísviðbót).

Útróðrarmenn í Föroyum og til lands í Grönlandi fáa hesa frítíðarviðbót goldna úr Lönjavningargrunni skipsfiskimanna.

Skipsfiskimenn fáa frítíðarviðbótina goldna frá viðkomandi útgerðarmanni.

4. §

Allar útreiðslur eftir 1. og 2. § í hesi lög, afturat teirri, sum nevnd er í 3. §, 4. stk., verða goldnar av Lönjavningargrunni skipsfiskimanna, og letur landskassin grunninum árliga 1 milj. kr. í eykastuðningi til hesi endamál.

5. §

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

Greinargerð

Higartil hevur tað ikki eydnast at fáa minstulön fiskimanna hækkaða sambært hækkingini í prísum og livikostnaði. Seinastu árini eru fiskimenn har afturat komnir undir eyka prishækking í öllum útgerðarvöru. Meðan aðrar stættir seinastu árini hava fingið munandi lönarhækkingar, hevur minstalön fiskimanna verið óbroytt síðan 1959.

Í hesum uppskoti verður tó mælt til at hækka minstulönina upp í 1.200 kr. um mánaðin.

Skal útróðurin í Föroyum trívast, má tað nú haldast vera neyðugt, at útróðrarmenn fáa ikki verri kor enn aðrir fiskimenn. Her verður tí mælt til, at mytustraðir útróðrarmenn eisini fáa 1.200 kr. í minstulön.

Útróðrarmenn til lands í Grönlandi skulu hava sonn 1.200 kr. í minstulön.

Til tess upp aftur betur at styðja útróðurin í Föroyum og eisini fiskavinnu í sambandi við hann, verður her mælt til, at fiskur, ið verður seldur til virkingar (klippfisk, saltfisk, flök og tíllíkt), fær eykaprísviðbót við 10 oyru pr. kg. ráfisk. Nevndin, sum kannar fiskivinnuraksturin og onnur mál, har í millum útróðrarprísir, skal hava heimild til, sum

treyt fyri hesum eykastudningi, at áseta nærri tilskilaðan minstapris, sum viðkomandi fiskakeypari skal halda.

Eisini má tað haldast vera rætt at hækka prísstudningin hjá útróðrarmonnum til lands í Grönlandi, og verður her skotið upp, at hesin prísstudningur verður 9 oyru pr. kg. ráfisk og 18 oyru pr. kg. saltfisk.

Teir fiskimenn og útróðrarmenn, sum nevndir eru í lógaruppskotinum, skulu hava rætt til 6 % frítíðarviðbót av vinningi sínum (t. e. avrokning, prísviðbót og minstulön). Eftir gildandi sáttmála fiskimannafelagsins og útúgerðarmannafelagsins hava útgerðarmenn skyldu til at gjalda fiskimonnum hesa frítíðarviðbót. Hildið verður rímligt, at mynstraðir útróðrarmenn í Föroyum og til lands í Grönlandi, eisini fáa hesa viðbót, men hon má so gjaldast av Lönjavningargrunni skipsfiskimanna.

Útreiðslur lönjavningargrunnsins av hesi skipan kunna leysliga metast til 1 milj. kr. árliga. Av tí at Lönjavningargrunnur skipsfiskimannu ikki hevur skyldu til at gjalda fa frítíðarlön, sum útgerðarmenn eftir sáttmála hava skyldu til at gjalda, og av tí at lóg nr. 9 frá 3. april 1959 um eykastudning til Lönjavningargrunn skipsfiskimanna alsamt er í gildi, er peningurin til hesi endamál longu framman undan tökur.

1. viðgerð 15. mars og 26. april legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit:

Málið um minstulön, prísviðbót og frítíðarlön fiskimanna hevur verið til viðgerðar í fiskivinnunevndini.

Minnilutin (J. Högnesen) tekur undir við uppskotinum.

Minnilutin (N. Holm Jacobsen) vísir á, hvussu lítið tað produktiva arbeiðið er uppi á landi, nú stórur partur av okkara saltfiskaframleiðslu verður útfluttur, uttan at stórvegis arbeiðspeningur liggur eftir hjá arbeiðsfólki.

Fyri at böta um hesi ringu viðurskiftir og samstundis tryggja útróðrarmonnum væl betur árlöku, hevur fólkaflokkurin í sínum uppskoti um 15 oyrur fyri kilo í prísviðbót sett sum treyt, at fiskurin skal verða virkaður her.

Verður hetta uppskotið samtykt, vil tað gagna bæði arbeiðsmonnum og útróðrarmonnum, samstundis sum tað vil hjálpa til at tryggja flaka- og öðrum fiskavirkjum ráevni, ið vil gera tey för fyri at seta í gongd eina meira stabila framleiðslu.

Fólkaflokkurin hevur altíð havt la áskoðan, at ein prísviðbót fremur ágrýtni, og at ein minstalön skal vera ein sosial borgan í tí niðara end-

anum. Tí verður mælt til, at hámarkið fyri at fáa prísviðbót verður avtikið.

Hesar ábótur prísviðbótini viðvikjandi rökka ikki til sjálvt farið og rakstur tess, ið sjálvandi eisini er ein týðandi partur í hesari vinnu. Mælt verður tí til, at lógarreglan um útflutningsavgjaldið fyri flak verður tikin úr gildi.

Samsvarandi sjónarmiðjunum í viðmerkingunum og uppskoti fólkafloksins og tí í hesum minnilutaáliti framförda setur minnilutin (Niels Holm Jacobsen) fram uppskot samsvarandi.

Minnilutin (Leon Joensen) er samdur við meirilutanum og ásamnar, at minstalönin eigur at fara nakað upp, nú alt er verðið dýrari, tó má hetta sjálvandi liggja innanfyri grunsins gjaldorku, sum í hesum föri er avmarkað til 785.000,– kr. og ikki rökkur rætliliga langt, tá hugsað verður um eisini at gera munandi prísuppískoyti til heimaútróðurin.

Prísuppískoytishugsanin er sjálvandi at ökja um framleiðsluna her heima hjá okkum sjálvum, og so staðt meira vinnu á landi eins og ansað verður eftir, at studningsskipanin ikki útlíknar munin millum lann, ið spennir seg út, og lann, ið tekur sær tað lættari, tí eigur stórur partur av hesum peningi at verða nýttur til hetta endamál.

Meirilutin (Poul J. Olsen og P. M. Dam) flytur fram:

Tingið hevur fey seinastu árini veitt lönjavningargrunni skipsfiskimanna ymsar innlöguhækkingar sum hækking av feskfiskagjaldi, saltfiskagjaldi, klippfiskagjaldi og samtykt nýtt gjald: 1 % av flakaútflutningimum.

Harafturat hevur grunnurin fingið útróðrartilskotið hækkað frá 250.000 kr. til 850.000 kr. og ymisk tollgjöld, ið góvu grunninum 1 millión til rindan av frítíðarlön.

Við tað at útgerðarmenninir hava yvirtikið helmingin av frítíðarlön skipsfiskimanna eru 500.000 kr. faluar aftur til landskassan. Hesar öktu innlögur grunsins hava í hesi tíð gjört tað möguligt hjá grunninum at hækka minstulön skipsfiskimanna frá 650 kr. til 900 kr. og veitt minstraðum fiskimonnum frítíðarlön uppá 6 % av vinnuni á sjónum.

Útróðrarmenn hava fingið prísviðbótina fyri feskfisk hækkaða frá 2 oyru til 6 oyru kilo fyri deksför og frá 5 oyrum til 9 oyru kilo fyri opnar bátar.

Grönlandsútróðrarmenninir hava fingið prísviðbótina hækkaða frá 2½ oyru til 5 oyru kilo fyri feskfisk og frá 5 oyrum til 10 oyru kilo fyri saltfisk.

Til viðgerðar hevur verið munandi hækking av útróðraprísinum í Föroyum soleiðis, at grunnurin kom at rinda í studningi 10 oyru fyri allan fisk, sum landaður varð í Föroyum, eins og hækking av minstulön.

Treytin fyri hækking av útróðrarstudninginum var, at grunnurin annaðhvört mátti fáa meira innlögu ella spara útreiðslur, tí grunnurin hevði í 1960/61 321.000 kr. í halli, og 4 tey seinastu árini eitt samlað hall uppá 560.000 kr.

Nýggjar innlögur vóru tá ikki möguligar at fáa og kom tí upp tann tankin at spara minstulön fyri niðursiglingina. Menn hildu, at sluppir og smærri fiskiför vildu standa seg betur við at avreiða fiskin í Föroyum til ein hægri pris enn at sigla niður fyri minstulön. Men tessverri vóru menn at enda ikki samdir, og varð tí onki burtur úr grunsins hækking av prísviðbótini fyri útróðrarfisk.

Tað var eisini ein treyt fyri hækkan av prísviðbótini, at fiskakeypararnir fóru upp við prísinum við 10 oyrum pr. kilo. Men hetta bar heldur ikki til.

Nú liggur hin figgjarliga stöða grunsins öðrvísi.

Grunnurin hevur seinasta ár eitt ættað yvirskot uppá 485.000 kr. og á figgjarlógini er tann fasti peningaligi studningurin til grunnin uppá 1,5 mill., hækkaður við 300.000 kr. til 1,8 mill. Henda peningaöking tilsamans 785.000 kr. rökkur til eina hækking av útróðrarstudninginum fyri feskfisk frá 6 oyrum til 10 oyru pr. kilo fyri dekstör og frá 9 oyrum til 13 oyru pr. kilo fyri opnar hátar og til hækking av minstulönini frá 900 kr. til 1000 kr. Henda hækking av útreiðslunum verður mett til 780.000 kr.

Innlögan til hesa hækking er nakað lepur, men tað liggur so fyri, at við figgjarársins lok dettur grunsins skylda at rinda helvtina av frítíðarlönini burtur.

Kann grunnurin verða við at fáa henda pening, skuldi rokkið vel til, sjálvt um talan var um, at útróðrarstudningurin kom at verða meira enn ættað.

Skotið verður tí upp, at tann hálva frítíðarmilliónin verður verandi í grunninum.

Talan er um at veita útróðrarmonnum í Föroyum minstulön.

Tað hevði verið yuskiligt, um hetta hevði borið til; men hevur ikki eydnast at finna eina haldgóða skipan fyri hesum.

Eisini er spurningurin um vettiðarlön til útróðrarmenn í Grönlandi og í Föroyum á lofti, men sum áður hildið fram liggja viðurskiftini hesum seinasta spurningi viðvkjandi soleiðis, at útróðrarmenn í Grönlandi og sum oftast eisini í Föroyum, eru sínir egnu arbeiðsgevarar og frítíðarlönarlankin er, at arbeiðsgevarin er tann, sum skal gjalda frítíðarlönina. Her kann tí bert verða talan um eitt tilskot og hetta tilskotið varð givið við hækkingini av prísviðbótini seinasta ár viðvíkjandi grönlandsútróðrinum og í ár í Föroyum. Av tí at fiskiskapurin kom at verða sera

góður, og prísviðbótarhækkingin var meiri enn 6 % kom fiskimaðurin at vinna væl meiri enn frítíðarlönina.

Uppskot

frá meirilutanum (Poul J. Olsen og P. M. Dam):

Tingið heitir á Lönjavningargrunn skipsfiskimanna at hækka minstulönina frá 900 kr. til 1.000 kr. og at hækka prísviðbótina fyri heimaútróður við deksförum frá 6 oyrum til 10 oyrur kilo av feskfiski og frá 9 oyrum til 13 oyrur kilo av feskfiski við opnum bátum.

Uppskot

frá minnilutanum (Leon Joensen).

Í fyrstu syftu:

Tingið heitir á Lönjavningargrunn skipsfiskimanna at hækka minstulönina frá 900 kr. til 950 kr. um mánaðin, og at hækka prísviðbótina fyri heimaútróður frá 6 oyrum til 12 oyrur pr. kilo av feskfiski fyri deksför, og frá 9 oyrur til 13 oyrur pr. kilo av feskfiski fyri opnar bátar.

Í aðru syftu:

Atkvött verður fyri uppskotinum frá Poul J. Olsen og P. M. Dam.

Uppskot

frá minnilutanum (Niels Holm Jacobsen):

1. Mælt verður til at samtykkja uppskot fólkaflokksins.

2. Í reglugerð fyri Lönjavningargrunn skipsfiskimanna: II. Viðbót til fiskaprísir verður h) broytt, so hámarkið hjá fiskimonnum fyri prísískoyti verður strokið.

3. Broytingaruppskot viðvíkjandi avgjaldi av fiskaflaki til útflutnings.

§ 1.

I lög nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lönjavningargrunn skipsfiskimanna, sum henda seinni er broytt, smbr. m. a. lógarkunngerð nr. 16 frá 25. juni 1954 og lögtingslög nr. 26 frá 17. mai 1961 og lögtingslög nr. 15 frá 4. mai 1961 gongur punkt 5 í § 5 út.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 1.

I lov nr. 72 af 22. december 1951 om skibsfiskernes lönreguleringsfond, som denne senere er ændret, jfr. bl. a. lovbekendtgörelse nr. 16 af 25. juni 1954 og lagtingslov nr. 15 af 4. maj 1961 og lagtingslov nr. 26 af 17. maj 1961 gaar punkt 5 i § 5 ud.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

4. Broytingaruppskot viðv. minstulön:

§ 1.

I reglugerð löajavningargrunnsins verður minstalön til fiskimenn ásett sambart hesari reglu: minstalön til fiskimenn yvir 16 ár verður at prístalsviðgera við minstulönini 1951 sum grundarlag. Teir, ið eru undir 16 ár fán í mun hertil eftir higartil galdandi reglum.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 1.

I regulativ for lönreguleringsfondet bliver mindstelön til fiskere at fastsætte efter fölgende regel: mindstelön til fiskere over 16 aar bliver at pristalsregulere med mindstelönnen af 1951 som basis. De som er under 16 aar faar en regulering forholdsvis i overensstemmelse med de gældende regler.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 1. mai.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá P. M. Dam og Poul J. Olsen:

I staðin fyri «frá 6 oyrum til 10 oyrur kilo» verður sett: «frá 6 oyrum til 12 oyrur kilo», og í staðin fyri «frá 9 oyrum til 13 oyrur kilo» verður sett: «frá 9 oyrumfil 15 oyrur kilo».

og frá Leon Joensen:

Í staðin fyri «frá 6 til 12 oyrum pr. kg» verður sett: «frá 6 til 15 oyrur pr. kg» og í staðin fyri «frá 9 til 13 oyrur pr. kg» verður sett: «frá 9 til 15 oyrur pr. kg.»

3. viðgerð 4. mai 1962.

Uppskot tjóðveldisflokksins § 1 var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: Johan Simonsen, Vilhelm Nielsen, Fr. Hansen, Jógvan Högnesen, Sigurð Joensen, Erlendur Paturssen, Hanus við Högadalsá, Hemming Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, J. F. Øregaard, Kj. Mohr, P. M. Dam.

Burturstaddir: J. H. Danbjörg, J. P. Davidsen, Kr. Djurhuus.

§§ 2, 3, 4 og 5 vóru settar undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Simonsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá, H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, P. Petersen, M. Johannesen, N. Holm Jacobsen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, J. F. Øregaard.

Burturstaddur: J. H. Danbjörg, S. Petersen, K. Wang, H. Djurhuus, J. P. Davidsen og K. Djurhuus.

Uppskotið fall 8—0.

Broytingaruppskotið frá Leon Joensen var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: H. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. Simonsen, H. Iversen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá, H. Jespersen og J. F. Øregaard.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, P. Petersen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Poul J. Olsen, J. P. Davidsen, D. Nolsöe, V. Nielsen, P. M. Dam og Haldor Hansen.

Burturstaddir: J. H. Danbjörg og K. Djurhuus.

Broytingaruppskotið samtykt 17—0.

Uppskotið frá minnilutanum (Niels H. Jacobsen) var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Øregaard.

Burturstaddir: J. H. Danbjörg og K. Djurhuus.

Uppskotið fall 13—0.

Uppskot frá minnilutanum (P. M. Dam og Poul J. Olsen) samt. 20—0.

Uppskot frá minnilutanum (Niels H. Jacobsen) stk. 2 var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Kj. Mohr, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Øregaard.

Burturstaddir: J. H. Danbjörg og K. Djurhuus.

Uppskotið fall 12—0.

Uppskotið frá minnilutanum (Niels H. Jacobsen) stk. 3 fall 5—0.

Broytingaruppskot frá P. M. Dam og Poul J. Olsen til tingmál nr. 39 og 76 burturdottin.

---

40. Kanningarnevnd viðv. fiskarakstrinum

Ár 1962, 22. februar legði Erlendur Patursson lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Bæði fyri fiskivinnu og fiskimenn landsins hevur tað almiklan týdning, at rakstrarviðurskifti vinnunnar og alt, ið har undir hoyrir, har í millum kostnaður útgerðarinnar og fiskaprísir, verða gjølliga kannað, til bert við slíkum kanningum ber til at fáa í rætlag, tað sum kann hugsast vera í ólagi, soleiðis at vinnan kemur at hvila á tryggari grundarlagi, samtíðis sum fiskimenn fáa meir burtur úr.

Hetta mál hevur so stóran samfelagsligan týdning, men har afturat eisini beinleiðis týdning fyri fíggjarmál landskassans, sub. tær studningsskipanir av ymiskum slagi, sum eru í gildi, m.a. studningslán til skipabygging, minstulönnar- og prísviðbótarskipan.

Longu árið 1953 reisti Føroya fiskimannafelag henda spurning. Tað mælti til, at tað og Føroya útgerðarmannafelag skipaðu fyri slíkari kanning við tí endamáli, at henda á ábøtur í rakstrinum, so at «meir fekkst í part, bæði til skip og manning».

Tað kom tó einki burtur úr hesum máli tá, og við minstulönnarskipanini 1954 fingu fiskimenn fyri sítt viðkomandi fyribils neyðhjálp.

Í tingsetuni 1957 varð hetta mál tikið upp aftur, nevnliga við 2 uppskotum, ið tjóðveldisflokkurin legði fyri tingið.

I tí fyrra uppskotinum varð mælt til at seta 3 manna nevnd við teirri uppgávu, at kanna fíggjarligu rakstrarviðurskifti fiskivinnunnar og lönarútkomuna í henni, og at bera fram uppskot, ið miða skuldu móti at böta um hesi viðurskifti. Nevndin skuldi serstakliga leggja áherðslu á, at vísa á leiðir til at minka og lætta um útreiðslur vinnu og fiskimanna av fisksölu, útgerð, landing, vinnu og fiskaviðgerð á landi, umvælingum, trygging, rentum, umsiting og öðrum koslnaði.

Landsstýrið skuldi — eftir tilmæli útgerðarmannafelagsins, skiparafelagsins og fiskimannafelagsins útnevna nevndarlimirnar.

Hetta uppskot varð ikki samtykt, men í staðin samtykti tingið 25. april 1958 — uppskot um at áleggja landsstýrinum at stíla fyri hesum kanningum og leggja tær fyri tingið.

Í tí seinna uppskoti tjóðveldisflokksins í tingsetuni 1957 varð mælt til at áleggja saltfiskaprísnevndini at kanna fiskasölumál landsins og alt, sum haldast kundi hava týdning fyri tey, og varð í uppskotinum mærri greitt frá, hvussu hetta kanningarstarv skuldi fara fram. Liðugt skuldi tað vera ikki seinni enn heystið 1958.

Heldur ikki hetta uppskot fekk frama, men samtykti tingið í staðin at biðja landsstýrið stíla fyri hesum kanningum og leggja tær fyri tingið.

Burlur úr hesum báðum samtyktum kom tó einki. Hvörki tá ella seinni gjördi landsstýrið stig til tess at sela hesar samtyktir tingsins í verk, og kom tí alt hetta týdningarmikla mál at liggja á láni.

Tá 3 ár vóru umliðin og hvörki táverandi ella núverandi landsstýri hövdu gjört nakað við hesi mál, reisti tjóðveldisflokkurin tey av nýggjum. Hetta var gjört í tingsetuni 1960.

Í spurningínum um fiskivinnuraksturin varð vist á, hvussu umráðandi lað var, at rakstrarviðurskiftini í fiskivinnuni verða gjölliga kannað, soleiðis at möguleiki verður til störri úrtöku — bæði hjá skipi og manning. Almikil peningur verður settur í nýggj skip, og fyri skipaeigarar ræður um at fáa raksturin til at bera seg, so teir fáa uppfylt rentu- og avdráttarskyldur sínar og ikki missa skipið, íð teir hava sett so miklan pening í. Landskassin hevur eisini stór peningalig áhugamál í hesum sambandi, tí bæði hevur hann veitt hesum skipum stór lán, og eisini letur hann stóran árligan studning til skip, íð ikki veita fiskimonnum ávísa inntöku, nevniliga við hínum almenna studningi til löojavningargrunn skipsfiskimana.

Fyri fiskimenn hevur málið ikki minni týdning.

Í spurningínum um fiskaprísirnar varð beint á, at í öðrum fiskiveiðilondum liggja fiskaprísirnir oman fyri föroysku prísirnar, utlan at að hevur eydnast, at finna fram til orsökirnar til henda prismun. Vist varð á, at saltfiskaprísnevndin ongan myndugleika hevði til at útvega sær tær upplýsingar, íð haldast mugu vera neyðugar í starvi hennara.

Vist varð á hin ovurmikla týdning, sum fiskaprísirnir hava fyri fiskivinnu, fiskimenn og alt samfelagið.

Heldur ikki hesi ferð samtykti lögtingið uppskotini frá tjóðveldisflokkinum. Men aftan á at flokkurin hevði reist hesi mál av nýggjum, legði landsstýrið fram «uppskot til lög um nevnd at kanna föroysku fiskivinnuna», og varð hetta uppskot við nökrum broytingum samtykt 9. mai 1961 og síðan lýst og kunngjört sum lög nr. 46 frá 1. juni 1961.

Í hesi lög verður sagt, at «sett verður nevnd av serkönum við tí upp-

gávu at kanna föroysku fiskivinnuna». Í nevndini komu at sita 9 manns: 4 frá lögtingi, 1 frá landsstýri, 1 frá skiparafelagi, 1 frá útgerðarmannafelagi og 1 frá fiskimannafelagi og seinni fingu útróðrarfelögini 1 mann í nevndina.

Landsstýrið setti formannin.

Í lógini verður sagt, at nevndin hevur heimild til eftir samráð við landsstýrið at taka sær skrivara og aðra neyðuga hjálp.

Eftir hesum skuldu nú loksins ligið væl fyri at fara undir hesi mál, ti skiljaulígt varð, at henda nevnd, ið nú varð sett, bæði skuldi kanna rakstrarviðurskiftini og fiskaprísir, har í millum eisini prísin á útróðrarfiski, soleiðis sum lögtingið við serstakari samlykt seinni avgjördi.

Tó at lógin kom í gildi longu 1. juni 1961, byrjaði nevndarstarvið ikki fyrr enn liðið var út á heystið sama ár — og aftan á at nevndarlimir hövdu heitt á landsstýrið um at fáa nevndina saman. Nevndin helt síðan 3–4 fundir seinasta heyst. Men síðan 27. november 1961 hevur eingin nevndarfundur verið.

Á hesum seinasta nevndarfundi varð einmælt samlykt at taka sær hagfröðing sum sakköna hjálp, og fekst maður til hetta starv. Aftan á hetta hendi tó tað, at tá hesin hagfröðingur — ið er föroyingur og sum hevur bústað uttan lands — kom til Föroya, varð hann — uttan vitan nevndarinnar settur í starv hjá landsstýrinum.

Men síðan hesin seinasti fundur varð hildin — 27. november 1961 — hava nevndarlimir eingi frætt aftur um hetta mál. Og ei heldur hevur tað eydnast at fáa fund aftur í nevndini, tó at nevndarlimir hava kravt fund.

Tað er sum nevnt landsstýrið, ið hevur sett nevndini formann, og má tí landsstýrið — afturat tí, hagfröðingurin varð tikin frá nevndini — eisini standa til svars fyri öllum tí dráli, sum hevur verið og er í hesum nevndarstarvi.

Tað eru alsamt mong og mikil mál, ið troðka á og biða eftir loysu. Spurningarnir um rakstrarviðurskifti fiskivinnunnar og fiskaprísirnar hava t. d. ovurmiklan týdning fyri sáttmálaviðurskifti skipsfiskimanna. Sama er um viðurskifti útróðrarmanna at siga. Bæði skipsfiskimenn og útróðrarmenn hava vónir um, at til her at böta um rakstrarúrslit fiskivinnunnar — bæði við lækking í kostnði og hækking í fiskaprísum — og tað har við verður skapt grundarlag undir störri fiskimanna- og útróðrarmannainntökum. Sonu áhugamál hava sjálvsagt hinir einstöku skipa- og bátaeigarar — ikki minst teir, sum sita við nýggjum og dýrum skipum.

Tað hevur longu verið dálað alt ov leingi við hesum máli.

Í lógini frá 1. juni 1961 varð eingi sagt um, nær nevndin skuldi hava

lokið starv sítt, og skuldi slíkt soleiðis sað verið óneyðugt, um so var, at landsstýrið hevði áhuga fyri málinum. Men, soleiðis sum framferðin hevur verið, og enn er, sýnist hesin áhugi at tróta. Løgtingið kann tó ikki lata sær sæt slíkt lynda.

Tjóðveldisflokkurin mælir tí tinginum til at gera hetta

Uppskot
til
samtyktar

Tingið áleggur nevndini, sum eftir lóg nr. 16 frá 1. juni 1961 er sett til at kanna föroyska fiskivinnuna, til at rökja hetta starv eftir lógini, uttan óneyðuga dvöl og at fáa starvið lokið so skjótt sum umstöður loyva.

Landsstýrinum verður álagt beinan vegin at lata nevndina hava ta sakkönu hjálp (hagfröðing), sum nevndin hevði útvegað sær, men sum landsstýrið tók frá henni.

1. viðgerð 23. mars og 4. apríl legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit:

Meirilutin Poul J. Olsen, P. M. Dam og Leon Joensen setur onki uppskot fram í málinum.

Nevndarlimurin P. M. Dam upplýsir, at 2. stk. í uppskoti tjóðveldisflokksins, har sagt verður, at landsstýrið skal hava tikið ta sakkönu hjálpina frá nevndini, er ikki samsvarandi við veruleikan. P. M. Dam upplýsir, at longu áðrenn hann fekk fjarrit frá nevndarformanninum Johan Djurhuus stjóra um at biðja Kallsberg hagfröðing í finansministeriinum til skrivara hjá kanningarnevndini, hevði finansministeriið eftir áheitan frá lögmanni og statsministeriinum lænt harra Kallsberg at gera kanningararbeiði fyri landsstýrið viðvíkjandi teirri figgjarligu stöðuni í Föroyum, eitt arbeiði, sum skuldi verða liðugt til apríl mánað, verða grundarlag fyri landsstýrisins og statsministeriisins viðgerð av fleggingarspurninginum á teimum ymsu vinnutivs- og umsitingarökjum beina í Föroyum. Men fjarritið varð borið fram til viðgerðar og var ministeriið við til, at Kallsberg skuldi fáa frí eitt ár og átaka sær tað umtalaða skrivarastarvið, men tó soleiðis, at hitt fyrsti umrædda kanningararbeiðið máti verða gjört, áðrenn hann kundi leggja alla sína arbeiðsorku í arbeiðið hjá kanningarnevndini. Um tað bar til uttan at larna uppgávuni fyri landsstýrið og ministeriið at vera kanningarnevnd-

ini til hjálpar samstundis sum arbeiðið fyri landsstýrið fór fram, var gamman í at gera tað.

Hetta varð gjört kunnugt, og stóð og stendur nevndini sjálvfylgjuliga frilt sjálv at arbeiða eins og at taka sær fyribils hjálp, um henni törvar hana.

Samtykt er jú heimild til nevndina at taka sær serköna hjálp, og onki er sagt um, at hesin maður einans skal vera úr finansministeriinum.

Minnilutin (Jógvan Högnesen og Niels Holm Jacobsen) heldur seg til tað í málinum framflutta og mælir til at samtykkja uppskot tjóðveldisflokksins.

Uppskotið frá tjóðveldisflokkinum var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, Poul J. Djurhuus, E. Patursson, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, D. Nolsöe, V. Nielsen, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, J. F. Öregaard.

Burturstaddir: J. H. Danbjörg, H. Iversen og Kj. Mohr.

Uppskotið fall 11—0.

41. Broyting í lóg um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum

Ár 1962, 23. februar legði formaðurin fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 8. frá 6. marts 1958 (smbr. nr. 32 frá 13. mai 1959) um endurnýgging av fiskiskipaflotanum við seinni broytingum.

§ 1.

Í lögtingslóg nr. 8 frá 6. marts 1958 § 5 verður skotið inn millum orðini «maskinur» og «og» «ella maskinur nýklassaðar frá verksmiðjuni við í minsta lagi 1 árs garanti.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1961.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 8 af 6. marts 1958 (jfr. nr. 32 af 13. maj 1959) om fornyelse af fiskerflaaden med senere ændringer.

§ 1.

I lagtingslov nr. 8 af 6. marts 1958 § 5 indskydes mellem ordene «maskiner» og «og» «eller maskiner, nyklasset fra fabrikken med mindst 1 aars garanti.»

§ 2.

Denne lov faar gyldighed fra 1. januar 1961.

Viðmerkingar:

Í tingmáli nr. 10 og 11/1961 samtykti tingið lógaruppskot staðfest og lýst sum lögtingslóg nr. 69 frá 14. november 1961, hareftir landsstýrið fekk heimild at veita studning í serstökum föri saman við figgjarnevndini til keyp av fiskiskipi yngri enn 2 ár.

Vit undirskrivaðu tingmenn loyva okkum at seta fram uppskot til broytingar soleiðis, at landsstýrið eisini fær heimild at veita studning til innseting av motorum sum eru klassaðir á fabrikkini.

1. viðgerð 27. februar og 29. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

23. februar 1962 legði Haldur Hansen o. fl. málið fram á ting og varð tað við 2. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Uppskotið miðar imóti, at í teimum förum har maskinur, sum eru sum nýggjar ella hövuðsumvældar, so fabrikkin gevur sama garanti sum fyri nýggjar maskinur, kunnu koma undir reglurnar um studning.

Nevndin er samd við uppskotsstillararnar, at hetta kann metast javnt við lógina um studning til skip ikki eldri enn 2 ár og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 5. apríl 1962.

Lógaruppskotið frá (H. Hansen, L. Joensen og V. Nielsen) samtykt 21 –0.

---

42. Djóralæknaspurningurin

Ár 1962, 26. februar legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi skriv:

31. august 1961, jbr. lögtingsmál nr. 12/1961: Djóralæknalönin legði landsstýrið fram uppskot um broyting í lön djóralæknans. Eftir hesum skuldi djóralæknin uttan mun til lönaraldur og aspirantatíð verða löntur á endalön í 8. lönarflokki og heraftanat skuldi hann fyri at hava eftirlit við reinföri í matframleiðsluni og matsöluni og harafturat laboratorii-eftirlit við mjólkaframleiðsluni hava í samsýning 10.000 kr. árliga fyri fyrst fyri at leggja hetta eftirlit til rættis.

Eftir uppskoti frá fíggjarnevndini 15. september 1961, samtykti lögtingið áðrenn endalig stöða verður tikin, at heita á landsstýrið um at taka upp samráðingar við föroyskan djóralækna í Danmark og leggja úrslitið av hesum samráðingum fyri tingið.

Hesar samráðingar hava verið í oktober 1961, og hevur landsstýrið sent lögtinginum frágreiðing 8. november 1961. Málið fekk tó onga viðgerð tá.

Eftir frágreiðingini er djóralækni, föddur í Föroyum, sinnaður at taka við emhætinum, um hann beinanvegin verður löntur í 11. lönnaflokki á endalön. Fyri hesa lön hevur hann so eisini tað veterinera eftir-

litið við matsölunni v. m., og skal hann so ikki hava samsýningina 10.000 kr. árliga. Ein treyt er eisini, at hann, hóast hann er yvir 40 ár, fær eftirlön tryggjaða. Hetta er principala uppskot hansara, verður ikki tikið við hesum, fellur hann aftur til tað uppskotið, ið lagt varð fyri lögtingið í august 1961. Hesar lönarskipanir eru góðkendar av felag hansara Den danske Dyrlægeforening. Annars verður víst til frágreiðingina.

Landið hevur nú skjótt í hálvt ár verið uttan djóralækna. Í hesi tíð hevur landsstýrið hæði skrivliga og munnliga frá felögum og dýraeigarum fingið áheitan um at gera úlvegir fyri, at djóralækni verður aftur í Föroyum, eisini eru endurgjaldskröv send fyri neyt, ið skulu vera deyð, tí djóralæknahjálp ikki hevur fingist.

Vísandi til hetta skal landsstýrið heita á lögtingið um at tuka djóralæknasputningin uppaftur til viðgerðar.

Tað verður lagt afturat, at landsstýrið av og á hevur staðið í samband við umrödda djóralækna, og sigur hann seg enn hava áhuga fyri at koma til Föroyar at virka.

1. viðgerð 7. mars og 29. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði málið fram á ting og varð tað við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Í tingsetuni á Ólavsöku var málið eisini til viðgerðar, har mælt var til, at djóralæknin beinanvegin verður löntur við endalön, og at hann haraftarat fær serliga samsýning uppá 10.000 kr. fyri at hava umsjón við matsölum og matframleiðslu. Meirilutin í nevndini, sum lá viðgjörði málið, var av teirri áskoðan, at djóralæknin fyri tað nørmeraðu lönina eisini hevði skyldu at ansa eftir reinföri við matframleiðslu og matsölu og so statt ikki hevði uppiborið eykasamsýning fyri hetta arbeiðið.

Við atkvöðugreiðsluna 19. august 1961 fekk uppskot landsstýrisins 3 atkvöður, meðan uppskot um at biðja landsstýrið samráðast við föroyskan djóralækna, ið býr í Danmark, um lönartreytir, var samtykt við 25 atkvöðum.

Hesar samráðingar hava verið, og landsstýrið hevur nú lagt úrslitið av hesum samráðingum fyri tingið. Í hesi frágreiðing verður upplýst, at nevndi djóralækni tekur við starvinum, um hann verður löntur í 11. lönarflokki og fær endalön beinanvegin og rætt til eftirlön. Best vildi helst verið, um djóralæknaembætið var lagt saman við annað starv, tá ökið Föroyar neyvan gevur manni fult arbeiði, men tað hevur víst seg síðan djóralæknin fór frá, at illa ber til at lata landið vera heilt uttan djóra-

lækna, og treytin fyri at fáa mann settan í starv er, at hann fær lönartreytir, so sum landsstýrið sigur frá.

Meirilutin í nevndini (J. Fr. Øregaard, Andreas Djurhuus, Poul Petersen, Hans Iversen og Sámal Petersen) skjýtur tí upp at broyta normeringslógina fyri djóralæknan soleiðis, at hann verður löntur í 11. lönarflokki.

Eisini mælir meirilutin til, at hann fær endalön beinanvegin og rætt til eftirlön.

Minnilutin í nevndini (Erlendur Patursson og Hemming Jespersen) setur onki uppskot fram.

Uppskot

frá

meirilutanum:

Lögtingslóg um broytingar í lögtingslóg um tænastumenn landsins.

Í lögtingslóg nr. 31, 18. mai 1961 um tænastumenn landsins 16. § verða hesar broytingar:

1. Í punkt 8 gongur út:
   «Djóralækni (1).
2. Í punkt 11 verður skoytt uppí:
   «Landsdjóralækni (1).

Landsstýrinum verður heimilað uttan mun til lönaraldur, og um hann hevur verið aspirantur, at löna fyrsta landsdjóralæknanum við endalön. Eisini verður landsstýrinum heimilað uttan mun til aldur at veita fyrsta landsdjóralæknanum eftirlönarrætt».

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om landets tjenestemænd.

I lagtingslov nr. 31 af 18. maj 1961 om landets tjenestemænd § 16 foretages følgende ændringer:

1. I punkt 8 udgaar:
   «Dyrlæge (1)».
2. I punkt 11 tilföjes:
   «Landsdyrlæge (1).

Landsstyret bemyndiges til at aflönne den förste landsdyrlæge med slutlön uden hensyn til lönningsanciennitet, og om han har været aspirant. Desuden bemyndiges landsstyret at give den förste landsdyrlæge pensionsret uden hensyn til alder».

2. viðgerð 4. april og sama dag legði formaðurin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

frá K. Djurhuus:

Afturat teimum broytingum til tænastumannalógina sum fíggjarnevndin hevur skotið upp í átiti dagfest 29. marts 1962 verða hesar:

3. Í punkt 10 í § 46 gongur út:
«Landsgrannskoðari (1)».
4. Í punkt 11 í § 46 verður skoytt uppí:
«Landsgrannskoðari (1)».
5. Sum nýggj 48. A § verður sett:
«Tær í 45. § nevndu byrjanarlönir við möguligum aldursviðbótum og eftirlöngevandi viðbótum verða frá 1. oktober 1961 hækkaðar við sonu sáttmálaviðbótum sum fólkaskúlalærarar í Föroyum hava og fáa.»

3. I punkt 10 i § 46 udgaar:
«Landsrevisor (1)».
4. I punkt 11 i § 46 tilföjes:
«Landsrevisor (1)».
5. Som ny § 48 A tilföjes:
«De i § 45 nævnte begyndelseslönninger med eventuelle alderstillæg og pensionsgivende tillæg forhöjes fra 1. oktober 1961 med de samme overenskomstportioner som folkeskolelærere paa Færöerne har faaet og faar.»

Viðmerkingar:

ad 3 og 4: Síðani Borgen Hansen legði frá sær sum landsgrannskoðari pr. 1. september 1960 er embætið fleiri ferðir lýst leyst við tí negativa úrsliti, at hvörki fíggjarnevnd ella landsstýrið hava hildið seg kunna tilnevnt nakran av umsökjarunum í embætið. Embætið hevur tí verið sett við konstitution, og er serkön eykahjálp ógvuliga avmarkað fíngin frá Revisions- og Forvaltningsinstitutet, Köbenhavn.

Tað ber ikki til at halda fram á henda háit. Grannskoðanin er so týdningarmikil táttur í almenna húsarhaldinum, ikki minst í eftirlitinum við fyrisitingini, at hvörki lögting ella landsstýri kann forsvara, at landsgrannskoðari ikki verður settur.

Eftir uppskotinum verður lönin hækkað frá 10. lfl. 22.200 kr. árliga hækkandi 3. hvört ár við 2.400 kr. til 27000 kr. til 11. lfl. 26.400 kr. árliga hækkandi 3. hvört ár við 3.000 kr. til 32.040 kr.

ad 5. Eftir áliti dagfest 13. april 1961 frá lögtingsnevndini viðvíkjandi lönar- og starvsviðurskiftum tænastu- og starvsmanna var skotið upp at hækka lönir tænastumanna landsins umleið 9 % í miðal. Hetta uppskot var samtykt.

Til hækkingina er at siga, at hon er ein hækking í bruttolönini. Eftirlönargjaldið var eisini vaksið so nettolönin hækkaði ikki við 9 %, men bert við o. u. 7-8 %.

Í mun til hvat starvsfelagir tænastumanna fingu í hægri grundlönum antin frá 1. april 1958: statstænastumenn, læknar og sjúkasystrar á sjúkahúsum ella frá 1. april 1960: fólkaskúlalærarar og jarðamöður, so var hækkingin her munandi lægri. Sum kunnugt rindar landskassin sín stóra part av hesum lönum, tá ið statstænastumenn í Föroyum eru undantiknir, tó rindar landskassin helvtina av lönini til tveir. Hernfturaf kemur, at allir aðrir tænastumenn enn landsins frá 1. april 1961, sumunir

tó frá 1. oktober 1961, hava fingið tær sokallaðu 40 sáttmálaviðbóturnar. Hesar viðbótur hevur nú eisini alt starvsfólk landsins fingið, umfram tað, at grundlønirnar eru hækkaðar.

I lønaráseting tænastumanna landsins er eftir hesum gjørdur ein dupultur mismunur. Umfram tað, at hetta er ein órættur móti teimum tænastumonnum vit hava, so hevur hetta lønarlagið, jbr. broytingaruppskotini frammanfyri, havt ta ávirkan, at tá ið sókt verður eftir tænastumanni, ið hvussu er tá læra krevst, so sókir ongin kvalificeraður. Almenna fyrisitingin letur seg ikki fremja undir tílíkum korum.

Fyri at javna nakað av hesum viðurskiftum er uppskotið gjört.

Uppskot meiratutans 1. og 2. samtykt 22—0.

Broytingaruppskot frá K. Djurhuus 3 og 4 samtykt 19—0.

Broytingaruppskot frá K. Djurhuus 5 var sett undir atkvøða við navnakall:

Ja atkvøddu: H. Petersen, P. Petersen, J. H. Danbjørg, S. Petersen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. Simonsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. M. Dam.

Nei atkvøddu: Johan Simonsen, J. Högnesen, Poul J. Djurhuus, Erlendur Patursson, H. Jespersen.

Atkvøddu ikki: J. Lindenskov J. P. Davidsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, Poul J. Olsen, H. v. Högadalsá, Haldor Hansen og J. F. Øregaard.

Broytingaruppskot stk. 5 samtykt 17—5.

3. viðgerð 26. april 1962.

Lógaruppskotið samtykt 18—0.

43. Fyriskipan um gymnasieskúlar

Ár 1962, 27. februar legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot

1.

Við heimild í § 23, stk. 1 í lóg nr. 165 frá 7. juni 1958 om gymnasieskoler verður henda lóg sett í gildi fyri Föroyar við kongiligari fyriskipan við hesum broytingum:

1. I § 3 erstattes: «§ 21 i lov nr. 160 af 18. maj 1957 om folkeskolen» med «§ 19 i lov nr. af om folkeskolen paa Færöerne.»
2. I § 4 erstattes ordene: «dansk med norsk og svensk» med: færösk med islandsk, dansk med norsk og svensk».
3. I § 6 erstattes: «folkeskolelovens § 22» med «den færöske folkeskolelovs § 20».
4. I § 9, stk. 2, erstattes: «folkeskolelovens § 13, stk. 2» med «den færöske folkeskolelovs § 11, stk. 2».
5. § 13 affattes saaledes:
   «Optagelse i 1. realklasse sker efter behörig pröve. Der afholdes opryknings pröver fra 1. til 2. og fra 2. til 3. realklasse samt fra 2. realklasse til 1. gymnasieklasse. Oprykningspröven ved udgangen af 2. realklasse skal omfatte skriftlig pröve i færösk, dansk, regning og matematik. De nærmere bestemmelser fastsættes iövrigt af ministeren.
   Ministeren kan i særlige tilfælde meddele undtagelse fra forunstaaende regler.
6. I § 14, stk. 1, erstattes: folkeskolelovens § 13, stk. 2» med: «den færöske folkeskolelovs § 11, stk. 2».
7. I § 21, stk. 1, erstattes: «folkeskolelovens § 64, stk. 1» med: «den færöske folkeskolelovs § 42».
8. § 23 affattes saaledes:
   «Denne anordning træder i kraft straks. Samtidig ophæves kgl. anordning nr. 186 af 8. juni 1953 om studentereksamen for elever, der dimitteres af Lagtingets Studenterkursus, Tórshavn.
   Undervisningsministeren kan efter samraad med Færöernes landsstyre fastsætte nærmere ikrafttrædelses- og overgangsregler.

II.

Uppskot

til

lögtingslóg um nevnd til kannan av gymnasieskúlaskipanini.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt at seta niður 5 manna nevnd til kannan av gymnasieskúlaskipanini í Föroyum yvirhövur.

Nevndin gevur frágreiðing og tilmæli til landsstýrið.

§ 2.

Tær útreiðslur, ið standast av nevndararbeiðinum, herundir samsýning til nevndarlimir, verða goldnar úr landskassanum.

lagtingslov om nedsættelse af et udvalg til undersögelse af gymnasietskoleordningen.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et udvalg paa 5 medlemmer til en almindelig undersögelse af gymnasieordningen paa Færöerne.

Udvalget afgiver betænkning og indstilling til landsstyret.

§ 2.

Udgifter foranlediget af udvalgsarbejdet, herunder vederlag til udvalgsmedlemmer afholdes af landskassen.

Viðmerkingar:

Eftir kgl. fyriskipan nr. 186, 8. juni 1953 «om studentereksamen for elever, der dimitteres af Lagtingets Studenterkursus, Tórshavn», eru reglurnar fyri studentaskeiðið tær somu sum galda fyri privatistar við ymsum frávikum.

Í skrivi dagfest 25. januar 1961 sökti studentaskúlin til konsumálaráðið um at fáa skúlan góðkendan sum gymnasium. Ráðið svaraði, at neyðugt var at skapa lógarheimild fyri gymnasieundirvising í Föroyum við at seta lóg nr. 165 frá 7. juni 1958 um gymnasieskúlar í gildi í Föroyum, áðrenn skúlin kundi verða góðkendur.

Fyriliggjandi uppskot til broytingar í lógini er gjört eftir samráð við studentaskúlan og skúlastjórnina og góðkent av konsumálaráðnum, og hava broytingarnar eina mest sína orsök í, at lærugreinin föroyskt verður tikin við í fyriskipanina, vísl verður tí til föroysku fólkaskúlalógina.

Eftir gymnasielógini verður skúlin, ið higartil hevur verið 2 ára studentaskeið við preliminerdeild, umskipaður til 3 ára realdeild og 3 ára gymnasieskúladejld.

Tað skal viðmerkjast, at málið hevur skund, tí ætlanin er, at næmingarnir skulu til prógvförslu eftir gymnasieskipanini longu í summar.

Viðvíkjandi seinna uppskotinum er at siga, at landsstýrið heldur tíðina vera inni til eina gjölliga kanning av gymnasieskúlaskipanini.

1. viðgerð 2. mars og 26. s. m. legði nevndin fram soljóðandi

Allt

Málið varð av landsstýrinum lagt fram á ting tann 27. februar 1962 og kom til 1. viðgerð 2. mars, har tað varð beint í serliga 5 mannanevnd.

Nevndin hevur á fleiri fundum viðgjört málið gjölla, og við á einum av fundunum var núverandi stjóri studentaskúlans, Chr. Haraldsen, cand. mag., sum greiddi frá skúlans stöðu til málið.

Skeiðið varð stovnað í 1937 sum 2 ára preliminer- og studentaskeið, og soleiðis hevur tað verið alla tíðina lika til skúlaárið 1959/60, táið avgjört var at skipa tað til 3 ára skeið.

Skeið er ongin holl skúlaskipan og 2 ára skeið er helst ætlað teimum, sum á eitt sindur búnum aldri fáa hug at taka studentsprógv so skjótt sum möguligt. Men hjá vanligum studentaskúlaungdómi er hetta ongin góður skúli. Tey vera ovbyrjað av arbeiði við at lesa upp undir prógv, og tað, tey lesa, fær ikki tíð at festa seg í huga teirra og sinni, so tey kundu búnast við lesnaðin. Tí hava fey, sum starvast við studentaskeiðið, leingi ynskt sær, at tað kundi verið skipað til 3 ára gymnasium. Tí eru tær fyrireikingar gjördar har á skúlanum, at 3 lærugreinir, kristni, sangur og fimleikur, sum ikki nýtast at vera lærdar á skeiði, eru tiknar upp á tímaskránna, tí lær s k u l u vera við, um skeiðið skal verða til skúla. Har aftrat varð, sum áður sagt, eitt ár lagt aftrat lærutíðini, so næmingarnir, ið nú ganga har, skulu ganga í 3 ár í staðin fyri 2. Afturfyri skulu tey so ikki geva allar lærugreinir upp til munntiga prógvtöku, men fáa ístaðin fyri árskarakter, sum ikki hevur verið givin higartil.

Hetta lættir teimum vel um prógvtökuna, sum á 2 ára skeiði er ógvuliga torför at koma ígjögnum, serliga hjá teimum minni mentu. Teir, sum starvast við skúlan halda, at hetta er ógvuliga umrúðandi at fáa framt, og tað eigur at verða framt nú, so tey, sum fara upp til prógvtöku í summar, kunna njóta goll av skipanini.

Men samstundis, sum henda skipan verður sett fyribils í gildi, mæla teir til, eins og landsstýrið skjýtur upp, at ein nevnd verður sett til at kanna studentaskúlalæruna í Föroyum og síðani koma við uppskoti til eina möguliga nýskipan. Men ein slík kanning tekur tíð og gerst ikki í hræði, og um nevndin, sum væntandi er, kemur við uppskoti til eina serliga föroyska mentaskúlalóg, so má lógin gerast galdandi frá 1. studentaskúlaflokki. Tað vil siga, at einir 4 til 6 flokkar fara upp til prógv,

áðrenn ein slík lóg kemur í gildi, tí er tað neyðugt at gera eina fyribils skipan, sum skal vera galdandi hesi 4 til 6 árini.

Hetta er skúlans sjónarmið, og meirilutin í nevndini er samdur við tey. Tó er nevndin ikki samd um eitt felags uppskot, men hevur býtt seg í ein meirluta, (J. H. Danbjörg, Hilmar Petersen og M. Johannesen) og ein minniluta, (Hanus við Högadalsá og Knút Wang).

Meirlutin mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við ymsum broytingum.

Minnilutin (Knút Wang og Hanus við Högadalsá) tekur undir við uppskotinum um at Studentaskeið Föroya lögtings verður umskipað til studentaskúla, men finst at, at uppskot koma so seint um hetta, at tað er ivingarsamt um skipanin fæst í lag, áðrenn studentarnir, ið hava lisið eftir gymnasiuskipan í trý ár, fara undir prøvtøku.

Harumframt heldur minnilutin, at stundin er komin, nú skeiðið hevur virkað í 25 ár, at framd verður serföroysk studentaskúlaskipan, og setur tí fram uppskot samsvarandi hesum sjónarmiði.

Marius Johannesen tekur undir við uppskoti minnilutans, hvat viðvíkur punkt 1.

Uppskot

frá meirilutanum (J. H. Danbjörg, Hilmar Petersen og M. Johannesen):

Til uppskot I:

I 2. reglu frá í erva verður millum «sett» og «í» sett «fyribils».

Upp í endan á punkt 1 verður skoytt:

«Dog skal faget sang medtages».

Í punkt 5 næstseinastu reglu verður millum «kan» og «i» sett:

«i samraad med Færöernes landsstyre».

Sum nýtt punkt 8 verður sett:

«I § 22 indsættes efter ordet «til» følgende: «efter samraad med Færöernes landsstyre».»

Punkt 8 verður punkt 9.

I punkt 9 verður 2. punktum strikað, og í staðin verður sett: «Bestemmelserne i kgl. anordning af 8. juni 1953 for elever ved Lagtingets Studenterkursus, Tórshavn, vedrørende pensum og eksamenskrav for fagene dansk og færösk forbliver i kraft indtil videre».

Til uppskot II:

Upp í endan á 1. § verður skoytt:

«sum so leggur tilfarið við uppskoti til nýskipan fyri lögtingið».

Uppskot

frá minnihlutanum (Knút Wang og Hanus við Högadalsá):

I. Föroya lögting samtykkir, at studentakenslan verður sermál.

II.

Uppskot til lögtingslóg um nevnd til gerð av studentaskúlaskipan.

§ 1.

Lögtingið velur 5 manna nevnd til kannan av gymnasiuskúlakensluni og gerð av uppskoti til föroyska studentaskúlaskipan.

Nevndin gevur frágreiðing og tilmæli til ólavsökutingið 1963.

§ 2.

Útreiðslurnar, ið standast av nevndararbeiðinum, samsýning til nevndarlimir, verða goldnar úr landskassanum.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Forslag til lagtingslov om nedsættelse af udvalg til udarbejdelse af en gymnasieordning.

§ 1.

Lagtinget nedsætter et 5 mands udvalg til undersögelse af gymnasieundervisningen og udarbejde forslag til en gymnasieordning.

Udvalget afgiver betænkning og indstilling til olajtinget 1963.

§ 2.

Udgifterne af udvalgsarbejdet, herunder honorarer til udvalgsmedlemmerne, afholdes af landskassen.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

III. Minnilutin tekur undir við uppskoti landsstýrisins, hvat viðvikur 1 við teimum broytingum, ið nevndarmeirilutin hevur gjört.

2. viðgerð 28. mars.

Uppskot minnilutans (K. Wang og H. v. Högadalsá) var setl undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Poul Petersen, Samuel Petersen, Marius Johannesen, Niels H. Jacobsen, Knút Wang, Hákun Djurhuus, Johan Simonsen, Vilhelm Nielsen, H. J. Ellingsgaard, Jógvan Högnesen, Poul J. Djurhuus, Erlendur Paturssen, Hanus við Högadalsá, Hemming Jespersen og Haldor Hansen, Kj. Mohr?

Nei atkvöddi: J. P. Davidsen.
Atkvödda ikki: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, A. Djurhuus, Hilmar Petersen, Hans Iversen, Djon Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen og J. F. Öregaard.
Burturstaddur: Jens Chr Olsen.

Uppskotið samtykt 16—1.
3. viðgerð 13. april 1962.
Uppskot I samtykt 17—0.
Uppskot II samtykt 17—0.
Uppskot minnilutans (K. Wang og H. v. Högadalsá) fall 2—0.

---

44. Telefonsamband við Sandoynna og Skúvoynna

Ár 1962, 23. februar legði Erlendur Paturssson lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Föroya lögting áleggur telefonverkinum at gera tíðarhóskandi telefonsamband í Sandoynna og Skúvoynna og at hava hetta telefonsamband liðugt ikki seinni enn í hesum árinum.

Greinargerð

Telefonsambandið í Sandoynna og Skúvoynna er bæði í ringum standi og pútra avoldað. Fyri fólkið í sýsluni eru hesi vánaligu telefonviðurskifti til miklan ampa og tarn, og má tað haldast vera bráðneyðugt at fáa tey í rættlag.

Sandoyggin hevur í nógv ár havt 2 VHF-sambond, men hesi eru ógviliga óálitandi. Talað hevur verið um at skifta hetta samband út og fán

eitt 4 kanal VHF-samband í staðin. Men hetta 4-kanal systemið kann ikki — eins og tey við 8 kanalum — viðkast. Hetta verður tí helst ov lítið.

Nú Föroyar hevn telefonsamband við allan knøttin, mú tað haldast vera sjálvsagt krav, at telefonsambandið innan oyggja er í lagi. Sandoyggin og Skúvoyggin kunna ikki longur liggja við tí telefonóskili sum er, men eigur hetta at verða fingið í rætlag skjótast gjørligt og ikki seinni enn í hesum árinum.

1. viðgerð 6. mars og 2. viðgerð 26. mars 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Erlendur Patursson:

«Í staðin fyri «ikki seinni enn í hesum árinum» verður sett: «ikki seinni enn 1. september 1962.»

Broytingaruppskotið samtykt 20—0.

Uppskotið so broytt samtykt 22—0.

---

45. Broyting í vanlukkutryggingarskipanini

Ár 1962, 26. februar legði Hemming Jespersen lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lóg um broytingar í Anordning nr. 161 frá 29. mars 1939 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde.

1. §

Í 24. § verða orðini «fra begyndelsen af den 14, uge efter ulykkestil-

feldets indtræden» broytt til «fra begyndelsen af den 15. dag efter ulykkestilfældets indtræden» og orðini «löber dagpengene fra den 14. uges begyndelse» til «fra den 15. dags begyndelse».

2. §

I 25. § verða orðini «Dagpengenes störrelse udgör 6 kr. dagliq» broytt til «Dagpengenes störrelse udgör 2/3 af den forsikredes daglön.»

3. §

I 25. § verður sum pkt. skoytt upp í: «Fiskimenn, sum fáa fulla sjúkraviðbót frá Lönjavuingargrunni skipsfiskimanna, fáa ikki dagpening fyri ta tíð, teir hava fingið hesa sjúkraviðbót».

4. §

I 3. § verður sum nýtt pkt. skoytt upp í:

«Í öllum tilfellum rökkur tryggingin mynstraðan fiski- og útróðrarmann, so leingi hann er mynstraður».

5. §

Allar skaðabötur vanlukkutryggingarinnar verða pristalsviðgjördar við pristalinum 1. januar 1956 sum grundarlagi.

6. §

Henda lög kemur í gildi 1. april 1962.

Uppskot
til
samtyktar

Sett verður 5-manna millumlinganevnd, sum kannar núverandi reglur og rakstur vanlukkutryggingarinnar og sum leggur tilmæli og uppskot fyri komandi ólavsökning.

Greinargerð

Tjóðveldisflokkurin reisti hetta mál í tingsetuni 1961, men fekk tað ikki framt tá, og verður nú reist av nýggjum.

Í hesum lógaruppskoti verður mælt til, at vanlukkutryggingin fyri

fiski- og úttróðrarmenn verður tann, at maður í öllum förum kemur undir tryggingina, so leingi mynstringin stendur við.

Hini broytingaruppskotini eru gjörd eftir tilmælum frá arbeiðarafelögunum.

Mælt verður til, at biðitíðin, sum nú er 13 vikur, verður stytt niður í 14 dagar. Eftir núverandi skipan fær tann, ið kemur til skaða, onga hjálp (dagpening) frá vanlukkutryggingini tær fyrstu 13 vikurnar. Hin vanligi dagpeningur frá sjúkrakössunum er so lítil, at hann ongan mun ger. Tí verður nú mælt til, at stytta biðitíðina. Grundin til, at 14-daga markið er sett, er at eftir sáttmálum Föroya arbeiðarafelags og Havnar arbeiðsmannafelags við arbeiðsgevarafelögini eru og verða skipaðar skaða- og sjúkratryggingar, sum rökka teir fyrstu 14 dagarnar, men heldur ikki longur. Við hesum uppskoti koma tí verkamenn veruliga at verða tryggjaðir við dagpeningi frá fyrsta degi.

Hesa trygging hava teir fiskimenn, ið eru undir lönjavningargrunninum, longu havt í nökur ár, og koma tí nú verkamenn at verða settir javnt við teir. Undantak má so gerast fyri teir fiskimenn, sum fáa sjúkraviðbót frá grunninum.

Uppskotið mælir har næst til at hækka dagpeningin, sum nú er 6 kr. Mælt verður til, at hann verður 2/3 av daglönini, og er hetta eisini eftir tilmælum arbeiðarafelaganna.

Loksins verður mælt til, at allar skaðabötur úr tryggingini verða prístalsviðgjördar við prístalinum 1. januar 1956 sum grundarlagi.

Við stytting biðitíðarinnar, hækking dagpeningsins og öðrum hækkingum koma útreiðslur vanlukkutryggingarinnar at vaksa, men ógjörligt er frammanundan við vissu at ætla um, hvussu mikil henda hækking verður. Hin vegin hevur vanlukkutryggingin seinastu árini givið rættiligan stóran rakstrarvinning. Tað verður tí mælt til, at tryggingargjöldini fyri fyrst ikki verða hækkað meir enn sum svarar til prístalshækkingina, men at stöða verður tikin til hækkingar, tá royndir eru fingnar frá fyrsta árinum aftan á hesar broytingarr.

Törvur er á stórum ábótum í vanlukkutryggingini, og verður tí sett uppskot um at velja 5 manna millumtingnevnd til at kanna núverandi reglur og rakstur tryggingarinnar og til at leggja fram tilmæli og uppskot um hetta á komandi ólavsökutingi.

1. viðgerð 7. mars og 2. mai legði socinla nevndin fram soljóðandi

Alit

7. mars 1962 var málið um broyting í vanlukkutryggingarskipanini til 1. viðgerð. Tað varð beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið á fleiri fundum, eisini saman við serkönnum monnum í vanlukutryggingarspurningum.

Nevndin er á einum máli um, at vanlukkutryggingarlógin krevur stóra ábót. Í setuni 1960 samtykti tingið at lata landsstýrinum upp í hendi at fyrireika uppskot til nýggja vanlukkutryggingarskipan og leggja málið aftur fyri tingið. Tað er nevndini kunnugt, at uppskot er til viðgerðar, men er ikki liðugt at leggja fram til avgerðar fyrr enn í næstu tingsetu.

Men hónst málið er komið so langt, heldur nevndin, at neyðugt er at gera ymsar fyribilsbroytingar nú beinanvegin, serliga viðvikjandi:

1) biðingartíðini
2) dagpeningahæddini
3) skaðaviðbótini

1) Biðingartíðin, sum nú er 13 vikur, viðvikir serliga fólki í heimaarbeiði, meðan t. d. mynstraðir fiskimenn fáa 3 mánaða sjúkaviðbót frá lönjavningargrunnunum. Somuleiðis er eisini viðvikjandi starvsfólki við fastari lön og lærlingum. Tímalöntum er tryggjað lön fyrstu tvær vikurnar aftaná vanlukkutilburð. Arbeiðarafelög og arbeiðsgevarar rinda hvör sína helvt. Men tá henda tíð er facin, er sum nú, eingin möguleiki hjá arbeiðarum at tryggja seg í 11 vikur.

Nevndin er av teirri áskoðan, at henda langa biðingartíðin eigur at verða stytt til at taka við fann dag, tá hin tryggjaði ikki meira fær dagpening frá felag sínum, arbeiðsgevara og lönjavningargrunni e. ö., men tó ikki longur enn til 14 dagar.

2) Dagpeningurin er nú 6 kr. Nevndin heldur tað vera rímuligt at broyta dagpeningahæddina til at vera 3/4 av daglönini, men tó ikki yvir 2/3 av daglönini roknað útfrá eini árslön uppá 10.000 kr. í hægsta lagi.

3) Skaðaviðbótina mælir nevndin til at verða setta útfrá meðalinntökuni hjá manni, trý seinastu árini frammanundan vanlukkutilburði, men tó ikki undir eina minnstuinntöku uppá 5.000 kr. um árið, men tó ikki yvir eina ársinntöku uppá 10.000 kr.

Samstundis sum spurningurin um broyling í vanlukkutryggingini hevur verið viðgjördur, hevur spurningurin um dagpeningagjald frá sjúkakassa eisini verið havdur á lofti. Dagpeningur frá sjúkakassa er bara ein viðfáningur, vanliga bara 40 oyrur. Tá tað eru fleiri spurningar í vanlukkutryggingarskipanini, ið krevja at verða viðgjördir, og spurningurin um t. d. dagpeningur eigur at verða lagdur til sjúkakassarnar

heldur enn til vanlukkutryggingina, verður mælt til, at spurningurin um vanlukkutryggingina og sjúkakassaskipanina verður tikin upp til viðgerðar í sínu heild. Henda nevnd kann hóskandi eisini taka sær av arbeiðsloysistryggingarspurningum her á landi, soleiðis at spurningurin kann verða lýstur út í æsir. Skotið verður til upp, at nevnd verður sett at viðgera hesi viðurskiftir og koma við uppskoti um ábótur.

1.

Uppskot

til

broyting í anordning nr. 161 frá 29. marts 1939 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde.

§ 1.

I § 23 tilföjes som nyt stk. 5:

«Fiskere, som modtager sygelön fra Lönjavningargrunni Skipsfiskimanna, har ikke krav paa dagpenge i den tid, de modtager sygelönnen».

§ 2.

«Dagpengene löber fra den 15. dag efter ulykkestilfældets indtræden».

§ 3.

§ 25 affattes saaledes:

Stk. 1. Dagpengenes störrelse udgör 3/4 af den tilskadekommes daglön, dog höjst 2/3 af paagældende aarslön.

Stk. 2. Som aarslön regnes gennemsnittet af paagældendes indkomst uden fradrag, i de 3 senest forud for ulykkestilfældets dato forlöbne kalenderaar. Den saaledes udfundne aarslön kan dog, naar særlige omstændigheder taler derfor, forhöjes eller nedsættes med indtil 1/3.

Stk. 3. Aarslönnen kan i intet tilfælde sættes höjere end 10.000 kr. eller lavere end 5.000 kr.

Stk. 4. Daglönnen udfindes ved, at den i henhold til foranstaaende beregnede aarslön deles med 300.

§ 4.

I § 44 indsættes efter ordene «nærværende anordning» ordene «bortset fra dagpenge, jfr. § 25 —».

II. Landsstýrið tekur upp samráðingar við rikisstjóruina um setan av nevnd til kannan av lóggávuni viðvíkjandi sjúkatrygging og vanlukkutrygging og somuleiðis at kanna möguleikar fyri lóggávu viðvíkjandi arbeiðsloysistrygging.

og sama dag soljóðandi broytingaruppskot frá nevndini:

Til uppskot nevndarinnar I: Broyting í anordning nr. 161 frá 29. mars 1939 om forsikring mod fölger af ulykkestilfælde:

§ 3.

§ 25 affattes saaledes:

«Stk. 1. Dagpengenes störrelse udgör 3/4 af den tilskadekomnes daglön, jfr. § 44, dog höjst 2/3 af daglönnen beregnet efter en aarslön af 10.000 kr.»

§ 4.

§ 44 affattes saaledes:

«Stk. 1. Som aarslön regnes gennemsnittet af tilskadekomnes indkomst uden fradrag, i de 3 senest forud for ulykkestilfældets dato forlöbne kalenderaar. Den saaledes udfundne aarslön kan dog, naar særlige omstændigheder taler derfor, forhöjes eller nedsættes med indtil 1/3.

Stk. 2. Aarslönnen kan i intet tilfælde sættes höjere end 10.000 kr. eller lavere end 5.000 kr.

Stk. 3. Daglönnen, jfr. § 25, udfindes ved, at den i henhold til stk. 1 og 2 beregnede aarslön deles med 300».

2. viðgerð 2. mai.

Broytingaruppskotið frá nevndini til 1 og 2 í uppskotinum frá nevndini samtykt utan atkvgr.

Broytingaruppskot frá nevndini til § 3 samtykt 25—0.

§ 3 soleiðis broytt 26—0.

Broytingaruppskot frá nevndini til § 4 samtykt 29—0.

§ 4 soleiðis broytt 29—0.

Uppskotið frá tjóðveldisflokkinum § 4 samtykt 20—0.

Uppskotið frá nevndini II samtykt 17—0.

Tingmál nr. 92/1961 burturdottið.

46. Landshandil

Ár 1962, 26. februar legði Erlendur Patursson lögtingsmaður fram søljóðandi

Uppskot

til

lóg um Landshandil Føroya

1. §

Fyri rokning landskassans verður stovnað og rikin handilsfyritøka, sum kallast LANDSHANDIL FØROYA. Sæti landshandilsins verður í Tórshavn.

2. §

Landshandilin skal verða rikin sum sjálvstøðug fyritøka og soleiðis, at hann ber seg í rakstri og leggur lóskandi pening av rakstrarvinningi sínum í tiltaksgrunn.

3. §

Landshandilin rekur innflutningshandil og handil við føroyskum vørum til sølu í heilsølu innan lands. Landshandlinum er eisini heimilt at reka smásølu.

4. §

Endamál landshandilsins er at reka hollan handilsskap í keypi og sølu til frama fyri almenning og vinnulív.

5. §

Landshandilin skal leggja dent á at útvega landsmonnum góðar og ódýrar vørur, har í millum:

1. Vørur, sum almenningurin nýtir.
2. Vørur, sum vinnulívið nýtir í framleiðslu sínu, so sum útgerðarvørur fiskivinnunnar, framleiðsluvørur landbúnaðarins, iðnaðarins, handverksins og húsabyggingartilfar.

6. §

Landshandilin hevur einsamallur rætt til at flyta inn og selja innan lands í heildsölu:

1. Olju
2. Salt
3. Kol
4. Timbur
5. Sement
6. Tubbakk

7. §

Stjóri handilsins skal, í samráð við fíggjarnevnd lögtingsins, lata kanna, hvörjar aðrar vörur, enn tær, sum nevndar eru í 6. § í hesi lög, kunna koma undir einkarrætt landshandilsins til tess upp aftur betur at fremja tey endamál, sum nevnd eru í hesi lög.

8. §

Landsstýrið setir landshandlinum starvsreglur og annars reglugerð undir hesi lög.

9. §

Landsstýrið skipar stjórn landshandilsins í samráð við fíggjarnevnd lögtingsins.

10. §

Landshandilin byrjar starv sítt 1. oktober 1962.

11. §

Henda lög kemur beinanvegin í gildi.

Greinargerð

Í tingsetuni 1957 setti tjóðveldisflokkurin fram uppskot um at seta á stovn Landshandil Föroya, men uppskotið fall tá.

Hetta mál verður nú aftur lagt fyri tingið — við nökrum broytingum.

Endamál handilsins skal ikki — umfram tað, sum forsvarligur rakstur og tiltaksgrunnur krevur — vera at geva peningaligan vinning, men at reka hollan handilskap til fratna fyri almenning og vinnulív landsins sum heild.

Við hesum endamáli skal handilin leggja dent á at útvega landinum góðar og ódýrar vörur, bar í millum: 1. vörur, sum almenningurin nýtir, 2. vörur, sum vinnulívið nýtir í framleiðslumi, so sum útgerðarvörur, framleiðsluvörur landbúnaðarins, iðnaðarins, handverksins og tilfar til húsabygging.

Í fyrsta umfari verða hesar vörur lagdar undir einkarrætt landshand-

ilsins: 1. olja, 2. salt, 3. kol, 4. timbur, 5. sement, 6. tubbakk. Men stjóri handilsins skal í samráð við fíggjarnevnd lögtingsins lata kanna, hvörjar aðrar vörur, kunna koma undir einkarrett handilsins. Tilmælini um hetta verða latin landsstýrinum, sum við viðmerkingum sínum leggur tey fyri lögtingið.

1. viðgerð 7. mars og 24. april legði serstök 5 mannanevnd fram soljóðandi

Álit

Málið varð beint í eina 5 mannanevnd, sum býtti seg í triggjar minnilutar.

Minnilutin (Hans Iversen og Vilh. Nielsen) heldur, at sum umstöðurnar nú eru, er ongin grund til at seta landshandil á stovn og setur so sláttonki uppskot fram.

Minnilutin (H. Jespersen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá tjóðveldisflokkinum til lög um landshandil fyri Föroyar.

Minnilutin (J. H. Danbjörg og J. P. Davidsen) vísir til uppskot í landshandilsmálinum frá P. M. Dam sambart tingtíðindi fyri 1956, bls. 97.

Landshandilsmálið er gamalt mál á tingi.

Seinast, javnaðarmenn hövdu málið frammi, var í 1956, tá ið P. M. Dam javnaðarflokksins vegna setti uppskot fram um lög um landshandil og gjördi fylgjandi viðmerking:

«Tað er ein royndur hlutur, at landshandilin, tá ið hann var í virki, var ein tryggjan fyri at vörur, tá ið stóð fast hjá teimum privatu.

At landshandilin var ein doyvari av príshækkanini, stendur öllum greitt í dag.

Smáir keypmenn og skipseigarar royndu tað av landshandlinum, at teir fyri tað fyrsta stóðu fyri rettvísum býti av vörum, tá ið knipti við at fáa vörur. Eisini royndu teir tað, at útgerðarvörur fingust væl biligari íggjögnum landshandilin enn á annan hátt — og so var landshandilin ikki rationelt skipaður, hvörki viðvíkjandi goymslu- og húsarúmd ella við innkeypi. At so var stavar frá, at landshandilin (fess stjóri og stjórn) kendi seg ikki eiga annan enn fyribils lívsrætt. Hetta fordáði einari rationellari skipan við nýbygging av handilshúsum og við langtrökkandi keypi- og söluavtalum.

Tað er lívsmál at fáa vörurnar biligari frá útlondunum, serliga at fáa alla útgerð til skipaflota okkara til framleiðsluvirði uttan ov nógvan viðskera til millummenninar. Og tað er ikki minst umráðandi at gera tað möguligt fyri fiskimannin, ið hevur sett alt á flot fyri at fáa far, at fáa útgerðina líka so bliga og uppá líka so lagaligar treytir sum stórkeyp-

maðurin. Hetta kann einans fáast við landsins hjálp, og landið ger tað best við einum vælskipaðum landshandli. Ein tílíkur landshandil við einasölu av öllum luksusvörum, el-radiovörum og tílíkum vil vera ein risastór inntökukelda fyri lögtingið og haldgott figgjargrundartag til t.d. eina stórfingna endurnýggjan av okkara skipaflota.

Alt saman um líkið so er setan á stovn av einum landshandli eitt livmál, ið Föroya lögting neyvan kann skjótu frá sær . . . .»

Minnilutin gevur Dam rætt í tí, hann her sigur.

Skilamenn hava hildið fram, at tann stórsti vandi við landshandlinum er, at hann lætt kann verða burokratiskur, stortna í embætismanna tunga og ofta óhandiga lagi, og so statt kann so skjótt bera á, at ein missir meiri fyri minni. Tí tað er hin livandi stjórin, hin vakna stjórnin, ið saman við hollari handilsvitan, ið er hóvuðskraftin í öllum kappingarförum og stöðugt nýskapandi forrætningsskapi.

Ein verulígur vandi er her til stoðis. Men eru vit greiðir yvir hann, og vilja vit sleppa undan honum, kunnu vit eisini lætfliga gera tað við frá fyrsta degi av at skráseta sum ófrávikiligt, at í umsitingini av landshandlinum má tað forrætningsliga vera tað avgerandi bæði tá ið fólk verður sett, og tá ið keypt verður og selt.

Í samband við hesum vil minnilutin gjarna halda fram sum eina farbara og haldgóða leið hjá handilsins fyrisæti at halda sig til hitt nákvæmasta samarbeiði við kooperasjónina alla staðni, í öllum londum, har ið handilin keypir og selur.

Tað er einki at ivast í, at landshandilin kann leggja saman við kooperasjónini, gerast limur av heilsöluskipanum innanfyri hana, sum í handilsskili og dugileika hevur sýnt kappingaföra við sjálvt teir mætastu og kringastu innanfyri hina privatkapitalistisku handilsverðina.

Í samskipan við allheims kooperasjónina vil landshandilin koma at týða hin stórsti stuðul og hjálp ikki bara fyri hin vanliga vörubrúkarin og vöruseljarin, men eisini og ikki minst fyri allar smákeypmenn, fiskimannasamtökur og smærri fyritökur eins og stórvirki, sum ikki er grundað á heilsölu sum ein hóvuðstáttin í forrætningsvirki sínum.

Tað er greitt, at sum landið nú liggur, vil tað krevja eitt stórt fyrireikingararbeið hjá landsstýrinum saman við stjóra og stjórn handilsins, áðrenn handilin kann byrja arbeið sítt. Men hetta má verða gjørt, tí á tí, at tað verður liðugt sum skjótast leikar almikið. Men tað má taka tíð. At byrja handilin longu 1. okober, sum menn tala um, dugir minnilutin ikki at siggja verður möguligt.

At landshandilin má koma at hava einkarrætt at handla við nógvum vöruslögum, er eyðvitað. Fyri at kunna keypa bíligt má ein vera förur at keypa í stórum. Og vit eru ikki fleiri enn so í Föroyum, at vit fyri at

kunna keypa í stórum og harvið biligt ella biligast möguligt megu vit leggja tað samlaða brúkið av einari vöru saman undir eina hond at bjóða út. Tástaðni kann tað muna so frægt, at menn fegnir vilja selja fyri ikki at fjena stórt uppá kg, men uppá alla rúgvuna. Hvörjar einkarsöluvörurnar skulu vera, skal sjálvandi verða latið stjórantum og stjórnini at meta um. Men okkum tykist tað vera rætt og rímiligt, at einkarsöla verður tikin við öllum matvörum og útgerðarvörum og luksusvörum sum tubbakk, leikvörum, radiotólum og radiolutum, öllum el-lutum, öllum greiðum, ið verða nýttar til navigatión, skreytvörum. Men hvussu langt, ið verður farið, kemur til eina og hvörja tíð at standa á hóskandi húsarúmd og likindunum fyri at kunna reka handilin rationelt á kappingarförum grundarlagi.

Uppskot

frá

minnilutanum (J. H. Danbjörg og J. P. Davidsen):

Lögtingslög um landshandil fyri Föroyar.	Lagtingslov om landshandel for Færöerne.
§ 1.	§ 1.
Föroya lögting setur á stovn ein landshandil fyri Föroyar so skjótt sum landsstýrið heldur, at likindi eru til tess.	Saa hurtigt, som landsstyret synes det er muligt, opretter Færöernes lagting en landshandel.
§ 2.	§ 2.
Landshandilin rekur inn- og útflutningshandil, setur í heilsölu og kann, tá ið viðurskiftini tala fyri ti, selja í smásölu föroyskar vörur.	Denne landshandel driver ind- og udförselsforretninger, grosistvirksomhed og kan, naar forholdene taler derfor, drive detailhandel med forskellige varer.
§ 3.	§ 3.
Landshandilin kann handla við öllum vörum, sum stjóri og stjórn handilsins halda tað vera beint at handla við.	Denne landshandel kan drive handel med alle varer, som handelens direktör og bestyrelse synes er mest fordelagtige.
§ 4.	§ 4.
Landshandilin hevur rætt til einkarinnflytan og einkarsölu av vörum.	Denne landshandel har eneret til indförsel og til salg af varer. Bestemmelse om, hvilke varer,

Avgerð um, hvörjar vörur verða at falla inn undir einkarrætt landshandilsins, verður tikin av stjóra (stjórum) og stjórn handilsins.

§ 5.

At stjórna handlinum verður sett stjóri (stjórar) og 7 mannastjórn.

Stjórnin verður vald av lögtinginum, meðan stjórin verður valdur av stjórnini.

Stjórin setur starvsfólkið, um ikki stjórnin ynskir annað.

§ 6.

Lön stjórans verður áset av Föroya landsstýri.

§ 7.

Landsstýrið ger regingerð fyri stjóra og starvsfólk.

§ 8.

Landsstýrið fær í hendi at gera neyðugar fyrireikingar til figgjan av landshandlinum.

§ 9.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

der falder ind under landshandelens eneret, afgöres af handelens direktör (direktörer) og bestyrelse.

§ 5.

Til at bestyre denne handel bliver der at ansætte direktör (direktörer) og at vælge en bestyrelse paa 7 medlemmer.

Bestyrelsen vælges af lagtinget, medens direktören udnævnes af bestyrelsen.

Direktören ansætter kontorpersonalet, saafremt bestyrelsen ikke önsker, at det skal være anderledes.

§ 6.

Direktörens lön fastsættes af Færöernes landsstyre.

§ 7.

Landsstyret udfærdiger regulativ for direktör og kontorpersonale.

§ 8.

Landsstyret bemyndiges til at foretage de nödvendige forberedelser til den finansielle baggrund for landshandelens oprettelse.

§ 9.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 26. apríl 1962.

Uppskot frá minnilutanum (J. P. Davidsen og J. H. Danbjörg) var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, J. Simonsen, J. P. Davidsen, D. Nolsöe, Fr. Hansen, P. M. Dam, Poul J. Olsen, J. Högnesen, S. Joensen, H. v. Högadalsá, H. Jespersen og Haldor Hansen.

Atkvöddu ikki: S. Petersen, M. Johannesen, N. Holm Jacobsen, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, V. Nielsen, Kj. Mohr og K. Djurhuus.

Burtnerstaddir: Hilmar Petersen, P. Petersen, K. Wang, Håkun Djurhuus, Leon Joensen og J. F. Öregaard.

Uppskotið fall 14—0.

Uppskotið frá minnilutanum (H. Jespersen) var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, J. Simonsen, J. P. Davidsen, D. Nolsöe, Kj. Mohr, Fr. Hansen, P. M. Dam, Poul J. Olsen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá, H. Jespersen og Haldor Hansen.

Atkvöddu ikki: S. Petersen, M. Johannesen, Niels Holm Jacobsen, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, H. Iversen, V. Nielsen og K. Djurhuus.

Burturstaddir: H. Petersen, P. Petersen, K. Wang, H. Djurhuus, L. Joensen og J. F. Öregaard.

Uppskotið fall 15—0.

47. Áheitan til landsstýrið um skeið á sjómannsskúlanum

Ár 1962, 26. februar legði Kj. Mohr lögtingsmaður fram suljóðandi skriv:

Heitt verður á landsstýrið um at gera eitt stytri skeið, umleið 3 vikur, saman við stjóranum á sjómannsskúlanum fyri skiparar og stýrimenn á teimum nýggju skipunum til at læra teir at handfara tey tekniskú tólini, so sum radar, loran o.s.v., og at finna snáfrek við hjálp av instruktiónsbókum og samstundis læra at brúka instruktiónsbökur.

1. viðgerð 15. mars og 2. viðgerð 5. apríl 1962.

Samtykt 17—0.

---

48. Áheitan til landsstýrið um föroyskt mál hjá skipseftirlitinum

Ár 1962, 26. februar legði Kj. Mohr lögtingsmaður fram soljóðandi skriv:

Álagt verður landsstýrinum at fyriskipa, at Statens Skibstilsyn nýtir föroyskt mál til kunngerðir sínar og tilíkt, eins og skráseting, tjóðskaparbrövini og málibrövini eru á föroyskum.

1. viðgerð 15. mars og málið beint til tógarnevndina.

---

49. Dýping av Streyminum

Ár 1962, 28. februar legði S. Joensen lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
lóg um dýping av Streyminum í Sundalagnum.

1. §

Í Streyminum í Sundalagnum verður siglingarrenna dýpkað so mikið, at stór för fáa sigt í gjögnum.

Landsverkfröðingiinum verður álagt at fáa könar verkfröðingar til at kanna botnin og til at gera fullfiggjaða ætlan um, hvussu spreingjast skal burtur, soleiðis at slík siglingarrenna fæst, og skal við hesi teknisku ætlan fylgja ætlan um hin peningaliga kostnað av dýpingini.

Tá henda kanning og tekniska og peningaliga ætlan er gjörd, verður málið aftur lagt fyri tingið, og skal hetta verða gjört ikki seinni enn 1. august 1962.

2. §

Henda lóg kemur í gildi heinan vegin.

Greinargerð

Málið um dýping av Streyminum hevur mangan verið til viðgerðar á Föroya lögtingi, uttan at nakað hevur verið gjört til tess at loysa tað. Í tingsetuni 1959 reisti Sigurður Joensen lögtingsmaður hetta mál og samtykti lögtingið at áleggja landsstýrinum at skipa so fyri, at landsverkfröðingsfirma kannaði möguleikarnar fyri gerð av siglingurrennu gjögnum Streymin. Landsstýrið skuldi so leggja málið aftur fyri tingið.

Eingin slík kanning, ið landsstýrinum varð álagt at skipa fyri, hevur verið gjörd. Enn minni hevur landsstýrið lagt málið aftur fyri tingið.

Hin vegin er nú í umbúnaði at byggja garð um Streymin og har við sleingja fyri siglingini.

Tað hevur almiklan týdning at fáa Streymin dýpkaðan so nógv, at stór skip fáa sigt um hann. Týdningurin fyri bygdirnar norðan og sunnan fyri Streymin eru eygsjónligar. Har næst hevur hetta mál landsgagnligan týdning yvirhövur - bæði fyri samgongumál og vinnulívsmál

landsins sum heild. Í Sundalagnum eru tá siglandi verður um Streymin hjá stórum skipum — allra bestu havnar- og vinnulívsmöguleikar.

Fara menn nú at steingja Streymin við garði millum Eysturoyar og Streymoyar, er hetta ikki bert brot á samtykt löglingsins í tingsetuni 1959, men kemur hetta har aftur at verða bygdunum í Sundalagnum og eisini hesum havnar- og vinnulívsmöguleikum landsins sum heild at stórum skaða.

Skoytt skal verða upp í, at verður Streymurin stongdur, vilja könir menn vera við, at hetta kemur at skaða sildaveiðina bæði í Sundalagnum og á Skálafjörðinum.

Til tess at stöðga hesi ætlan og til tess at fáa málið um dýping av Streyminum loyst, leggur tjóðveldisflokkurin fram lógaruppskot, har skilað verður til, at siglingarrennan skal dýpast so mikið, at stór för (skip) fáa siglt í gjögnum, at landsverkfröðingurinum verður álagt at fáa könar verkfröðingar til at kanna botnin og til at gera fullfiggjaða ætlan um, hvussu spreingjast skal burtur, soleiðis at slík siglingarrenna fæst, at gerast skal kostnaðarætlan fyri hesa dýping, at málið, tá henda kanning og tekniska peningaliga ætlan er gjörd, verður lagt aftur fyri fingið, og at hetta verður gjört ikki seinni enn 1. august í ár.

1. viðgerð 15. mars og 4. mai legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið varð við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina, sum á ástaðnum hevur kannað málið saman við landsverkfröðinginum og sóknarstýrinum í Sunda sókn og öðrum skilamonnum har á staðnum.

Menn vóru á einum máli um, at besta ráðini vóru at spreingja burtur í bæði borð, soleiðis at siglingarrennan verður bein. Tá tað bert eru einar 100-150 metrar, ið siglingarrennan er ov trong og grunn, er tað ætlandi ein yvirkomilig uppgáva, her er talan um.

Nevndin mælir tí tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 5. og 3. viðgerð 7. mai 1962.

Uppskotið samtykt 21—0.

50. Uppskot til samtyktar um Leiv Össursson

Ár 1962, 2. mars legði Kj. Mohr lögtingsmaður fram soljóðandi

Nú trolarin 'Leivur Össursson» er lýstur til tvangsölu og so statt möguleiki er fyri, at trolarin fer út av Tvöroyri — ja eintá seldur út av landinum — vil eg Föroya Framburðsflokks vegna seta hetta uppskot fram til samtyktar.

Uppskot

Lögtingið heimilar landsstýrið at keypa trolaran «Leivur Össursson» fyri sjópantirætin og síðani taka upp samráðing við realkreditt og fiskaríbankan um gjaldan av peninginum og taka upp samráðingar við annað felag, ið átekur sær raksturin av trolaranum.

1. viðgerð 12. mars (smbr. tingmál nr. 53/1961).

---

51. Telefonsambandið í Suðuroy

Ár 1962, 1. mars legði Hemming Jespersen lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Föroya lögting áleggur telefonverkinum beinan vegin at freunja tær ábötur á telefonsambandinum í Suðuroy, sum eftir byggiætlanini 1959-1964 lougu nú skuldu hava verið settar í verk, t. e.:

1. 6 pör luftkaðal Tvöroyri -Vág
2. 40 pör sjókaðal yvir Tvöroyrarfjörð.

Somuleiðis verður telefonverkinum álagt at fyrireika byggiætlanina fyri 1963 í so góðari tíð, at farið kann verða undir hesar ábötur í tí árinum, t. e. at leggja 40 pör 0,6 mm kaðal frá Tvöroyrar telefonstöð til Froðbæar og 30 pör 0,6 mm kaðal frá Froðbæ niðan á radiostöðina á Nakki, og viðkan av VHF-radiotelefonsambandinum Tórshavn-Tvöroyri við 8 kanalum.

Greinargerð

Telefonsambandið í Suðuroy hevur leingi verið í ringum standi — og er enn. Í 1959 gjørdi telefonverkið byggiætlan fyri árini 1959—61.

Eftir hesi ætlan skuldi verið liðugt í 1960 at leggja luftkaðal Tvöroyri-Vág og eisini at leggja sjókaðal yvir Tvöroyrarfjörð, men er hvörki av hesum gjört enn.

Hesar ábötur hava stóran týdning fyri telefonsambandið, bæði millum bygdirnar í Suðuroy og fyri telefonsambandið hjá teim syðru bygdunum norður eftir.

Her verður tí mælt til, at hesar ábötur nú verða settar í verk beinan vegin.

Eftir ætlanini frá 1959 skal í 1963 leggjast kaðal frá Tvöroyri til Froðbæar og frá Froðbæ niðan á Nakk. Eisini skal hetta árið VHF-radiotelefonsambandið Tvöroyri-Tórshavn viðkast við 8 kanalum.

Hesar ábötur hava stóran týdning fyri alt telefonsambandið frá Suðuroy og norður eftir.

Tað má tí haldast vera rætt, at áleggja telefonverkinum at fyrireika hesa bygging í so góðari tíð, at byggingin verður liðug eftir ætlan, t. e. í 1963.

1. viðgerð 6. og 2. viðgerð 26. mars 1963.
Uppskotið samtykt 21—0.

52. Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin

Ár 1962, 2. mars legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram sóljóðandi

Uppskot

til

fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin fyri fíggjarárið 1962/63.

Inntøkur:	rokniskapur 1961/62	ætlan 1962/63
1) endurgjald fyri tiggjund	7.800,	7.800,—
2) studningur úr landskassanum	90.000,—	90.000, —
3) ogn pr. 1/4 1961 +	74,38	
	97.725,62	97.800,

Útreiðslur:		
A. vanligar umvælingar av kirkjum 20/2	65.594,54	65.000,—
B. kirkjugarðar	0	10.000, -
C. prestaflutningur	773,82	12.500, -
D. brunatrygging	9.226,40	5.500, —
E. studningur til nýggjar kirkjur	0	0
F. ymist (smbr. undir D)	0	2.500,
G. ætlað ogn pr. 31/3 1962	22.130,78	2.300,
	97.725,—	97.800,—

Viðmerkingar:

ad. A: vanligar umvælingar:

1958/59	11.700 kr.
1959/60	71.364 kr.
1960/61	63.841 kr.

Miðal 59.000 kr.

ad B: kirkjugarðar:

Nakrir kirkjugarðar eru í gerð m. a. í Klaksvík og Funningsfirði, men ongin ætlan um longd fyriliggur.

ad C: Prestaflutningur:

Landskassans partur í studninginum verður ikki rindaður fyrr enn seinast í figgjarárinum. Tað sum kemur til útreiðslu í árinum eru útreiðslur av kirkjusýnum o. l.. Skilað verður til, at prestaflutningurin verður settur nakað upp eftir umsókn frá prestunum. Tessvegna er nakað lagt uppfyri.

1. viðgerð 15. mars og 2. april legði kirkjunevndin fram soljóðandi

Álit

Málið var lagt fram av landsstýrinum 2. mars 1962 og beint til viðgerðar í nevndini 15. mars aftaná 1. viðgerð.

Aftaná at nevndin hevur fingið málið, hevur nevndin kannað málið nærri og fingið upplýsingar um at törvur er á hækking orsakað av, at tað eru komnar veitingar aftrat, serliga viðvíkjandi umvæling av kirkjum og studning til nýggjar kirkjur.

Á sínum uppskoti hevur landsstýrið sett kr. 65.000,00 til vanligar umvælingar av kirkjum. Av tí at nevndini er kunnugt, at tað eru umsóknir um störri umvælingar, verður mælt til, at henda upphædd verður hækkað til kr. 100.000. Til umvæling av gomlu Mariukirkjuni í Kirkjubö verður mælt til at seta kr. 16.000,00 av um árið í 5 ár. Henda kirkja skal hava eina umfatandi umvæling, sum verður ætlað at kosta umleið kr. 250.000,00; men av tí at henda umvæling m. a. eisini verður gjörd fyri at föra kirkjuna aftur í tann gamla stílin, er hetta minni ein kirkjuligur enn ein kulturellur og forminnisligur spurningur. Tí eru eisini útvegir gjördir fyri at fáa henda pening á annan hátt nevnliga soleiðis:

Studningur frá lögtingi	kr.	90.000,00
Studningur frá stati	kr.	125.000,00
Gávur frá ymsum stovnum o. ö.	kr.	35.000,00
Ialt	kr.	250.000,00

Til nýggjar kirkjur mælir nevndin til at settar verða kr. 20.000, av í 5 ár til Klakksvíkar nýggju kirkju, tó treytað av, at teknningarnar verða góðkendur av kirkjustjórnini. Frá kirkjustjórnini er mælt til at lata kr. 100.000,00 í studningi.

Somuleiðis verður mælt til at hækka studningin til kirkjugarðar við

kr. 15.000,00, av ti at studningurin til gerð av kirkjugörðum ætlandi verður hækkaður. Samhært reglugerð er studningurin nú kr. 30,00 pr. m. fyri betongerð og kr. 45,00 pr. m. fyri laðaðan grótgarð, men er hesin studningur, ið áseltur varð í 1951, heldur lágur í mun til prislagið í dag.

Nevndin setur ti fram hetta

broytingaruppskot:

til uppskot landsstýrisins:

Undir Inntökur: 2) (ætlan 1962/63) verða ístaðin fyri «90.000,00» settar «kr. 160.000,00,» og raðtölini tilsvarandi hækkaði.

Undir Útreiðslur: A: verður ístaðin fyri «65.000,» sett «100.000.» (heruv kr. 16.000,— til Kirkjuböar kirkju).

B. verður ístaðin fyri «10.000» sett ..... «25.000»

E. verður ístaðin fyri «0» sett ..... «20.000»

og raðtölini tilsvarandi broytt.

2. viðverð 12. april 1962.

Broytingaruppskot frá nevndini samtykt 25—0.

Landsstýrisins uppskot so broytt samtykt 26—0.

---

53. Yvirtöka av trolaranum Leivur Össursson

Ár 1962, 7. mars legði varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslög um, at landskassin yvirtekur trolaran «Leivur Össursson».

lagtingslov om, at landskassen overtager trawleren «Leivur Össursson».

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at keypa og reka trolaran «Leivur Össursson», herundir at taka moti teimum lánum, ið yvirtöka og rakstur krevja.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til pan landskassens vegne at köbe og drive trawleren «Leivur Össursson», og i denne forbindelse at optage de laan, som overtagelsen og driften forudsætter.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir lögtingslóg nr. 16, 7. marts 1957, lat landsstýrið byggja tríggjar trolarar á skipasmiðjuni Estaleiros do Viana do Castelo, Viana do Castelo í Portugal. Teir tríggir trolararnir «Leivur Össursson», «Olavur Halgi» og «Vágbingur» vóru yvirtiknir allir í 1959 og siðani seldir ávikavist til p/f Suðuroyar norðara trolarafelag, Tvöroyri, p/f Fuglafjarðar trolarafelag, Fuglafirði og p/f Rútafelli, Vági.

Sölupeningurin var fyri hvönn 6.200.000 kr.

«Leivur Össursson» 791.74 br. reg. tons til stöddar var handaður landsstýrinum frá skipasmiðjuni í mai 1959 og seldur felagnum pr. 3. november sama árið. Tíðarskeiðið millum var trolarin rikin fyri landskassans rokning, og gjördi hann ein saltfiskatúr og ein isfiskatúr, ein part av tíðini frá seinast í august til oktober, lá hann tó í Köbenhavn og fekk ymsar umvælingar serliga uppá trolspælið.

Í februar/marts fekk trolarin útskift vindeyguni á brúnni við aluminiumsvindeygur, sama slag sum hinir báðir hövdu, tey hann hevði vóru hildin at vera ónýtilig og samstundis fekk hann stórumvæling av fiskalastini. Landskassin bar allan kostnaðin 137.218,26 kr., heruppi í lön og vistir til vaktarmanning.

Trolarin kostaði landinum at byggja	6.579.226,82
(uppi í hesum tali umvælingarkostnaðurin v. m. í Köbenhavn 99.226,14 kr.)	
og var hann sum nevnt seldur fyri	6.200.000,00
Tapið við söluni (sum er avskrivað) var so statt	379.226,82

Keypspeningurin 6.200,00 kr. var fingin soleiðis:

1. prioritetur Realkreditstovnurin 50 %, 3.100.000 kr., útgoldið	2.993.454,12
2. og 3. prioritetur Fiskarímálaráðið og Fiskaríbankin tils. 15. %, 930.000 kr., útgoldið	920.331,07

4. prioritetur, landskassin, studningslán 20 %	1.240.000,00
Eginpeningur	550.000,00
Ansvarligur innskotspeningur frá landskassanum	70.000,00
Restlán frá landskassanum svarandi til kursmum og irestandi 5 %	426.214,81
	6.200.000,00

Annars hevur landskassin hesi kröv móti felagnum:

Tilskrivað renta av pengum, landskassin hevur lagt út fyribils til lánini frá Realkreditstovninum og ríkisstýrinum eru fingin av restláninum tilsamans		159.095,48
Heimsiglingarkostnaður		111.850,81
Lagt út sum veðhaldari:		
Fyri útgerðarlán eftir lögtingslóg nr. 6, 4. marts 1959, fult afturgoldin nú	163.841,80	
Fyri lán eftir lögtingslóg nr. 16, 7. marts 1957 til rindan av mai termin 1960 til Realkreditstovnin	34.200,34	
Fyri lán eftir löglingslóg nr. 24, 16. mai 1961 til rindan av mai termin 1961 til Realkreditstovnin	16.068,29	214.110,43
		325.961,21
Mótkrav hevur felagið frá ti tíðini landskassin hevði raksturin av trolaranum og fyri ymisk brek, av hesum hevur landsstýrið undir treytum góðkent at gjalda		251.902,71
Eftir til landskassan		74.058,53

«Leivur Össursson» er nú lýstur til tvingsulssölu 12. marts 1962. Um henda tvingslusöla fær tað úrslit, at ikki verður boðið inn í prioritet landskassans, so verður tap hansara av trolaranum hetta:

Avskrivað er:		
Tapið við söluna	379.226,82	
Umvælingin í Tórshavn	137.218,26	516.445,08

At avskriva:		
Restlánið	126.214,81	
Ansvarligur innskotspeningur	70.000,00	
Tilskrivað renta	159.095,48	
Munur millum heimsiglingarkostnað og útlagt sum veðhaldari og mótkrav	74.058,53	730.368,82
Heraftrat er landskassin veðhaldari fyri terminslán tilsamans, sum felagið ikki er fört at gjalda ,umfram rentur		373.125,00
Tilsamans		1.619.938,90

Heraftrat verður landskassastudningurin at avskriva, eftir eru 1.116.000 kr.

Nú er spurningurin, um landskassin skal geva boð á tvingsulssøluni. Upplýst er, at sjópantið í trolaranum er um 58.000 kr., og er hetta frá túrinum frammanundan seinasta túrinum, ið byrjaði í november 1961.

Realkreditstovnurin hevur gjört figgjartøku fyri november termin 1961. Heraftrat skyldar felagið terminsgjøld til fiskimálaráðið og til fiskaríbankan. Terminsskuldin er henda:

Realkreditstovnurin:	
Avdráttur	155.000,00
Renta	88.737,50
Heraftrat morarenta og renta síðan 1/11 1961.	
Fiskimálaráðið:	
Avdráttur	83.300,00
Renta	2.246,96
Heraftrat morarenta v. m.	
Fiskaríbankin:	
Avdráttur	3.240,00
Renta	2.816,61
Heraftrat morarenta v. m.	

Tá ið terminirnar eru goldnar, eru restlánini ávikavist 2.480.000 kr., 791.687,50 kr. og 93.760 kr.

Landsstýrið heldur tað ikki vera rætt, at hesin trolarin verður seldur út av landinum, so leingi skipstrot enn er her. Fyri framtíðan lánveiting frá Realkreditstovninum og frá Fiskaribankanum er tað av týdningi, at hesir stovnar ikki koma undir tap við hesi tvingsulssølu.

Annars verður vist til «frágreiðing um «Portugalstrolararnar»» frá landsstýrinum dagfest 26. april 1961 sent lögtinginum.

1. viðgerð 12. mars og 16. s. m. legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málini vórðu framlögd ávikavist 1. og 7. marts 1962. Samtykt varð at viðgera tey undir einum, og undir 1. viðgerð varð samtykt at beina tey í figgjarnevndina. Nevndin hevur býtt seg í ein meiralutu og tveir minnilutar.

Meiralutin (Andr. Djurhuus, Hans Iversen, S. Petersen og J. Fr. Øregaard) tekur undir í uppskoti landsstýrisins, at landsstýrið fær heimild landskassans vegna at keypa og reka trolarin «Leivur Óssursson» bermdir at taka imóti teimum lánum, ið yvirtøkan og raksturin krevja, soleiðis at báturin kann koma í rakstur beinan vegin. Tó heldur meiralutin, at fann møguleiki eigur eisini at vera, um hóskandi boð fæst, at trolarin kann seljast, tó eigur hetta at verða gjört saman við figgjarnevndini.

Lagt skal vera aftrat, at figgjarnevndin hevur samráðst við realkreditstovnin um sölu av bátinum og frá honum fingið at vita, at um landskassin skuldi selt trolarin, so krevur stovnurin, at landskassin veðheldur fyri tí láni frá stovnunum, ið verður verandi í bátinum, og leggur stovnurin aftrat, at somu støðu hevur fiskimálaráðið og fiskarihankin.

Minnilutin (Hákun Djurhuus) fører fram:

Tá trolarin, so vítt okkum kunnugt, onga leysa skuld hevur, heldur fólkaflokkurin tað vera vert at kanna, um tað ikki eru møguleikar fyri at sanera bátin, áðrenn avgerð verður tikin um at lata hann fara til tvangssölu, alt við tí fyri eyga, at hann kann verða verandi á Tvøroyri, so sum upprunaliga ætlanin var við hesum skipi.

Tað er so, at høvuðspartacigarin í Suðuroyar Norðara Trolarafelag er Froðbiar sóknar kommuna við 100.000 kr. í partapeningi, og haraftarat hevur Føroya lögting sum ansvarligan innskotskapital 70.000 kr. Tað skuldi so statt hørið til at brøytt viðtøkur og stjórnarlag felagsins, soleiðis sum hildið varð neyðugt, fyri at felagið kann halda fram, og kunnu hesar broytingar gerast á aðalfundi. Hvørjar broytingarnar skulu vera, og hvussu stórur kapitalur skal tilførast felagnum, kann ikki sigast greiniliga uttan nærri kánning. Hetta man undir øllum tunstøðum vera

tað biligasta hjá landskassanum. Tað er kanska eisini möguligt at tekna av nýggjum nakað av partapeningi í Froðbiar sókn.

Okkara uppskot at greiða hetta mál á forsvarligan hátt er ein saneering av Suðuroyar Norðara Trolarafelag soleiðis, at gamli partapeningurin verður niðurskrivaður til 1 %. Landskassin setur terminsgjöldini — umleið 400.000 kr. — sum nýggjan partapening í felagið og samstundis verður roynt at tekna mest möguligt av nýggjum partapeningi, sum kann nýtast sum rakstrarpeningur. Tann niðurskrivaði partapeningurin kann seinni uppskrivast aftur, um umstöðurnar verða til tess.

Landskassin má avskriva 1.103.493,82 kr. samtbæri framlöguskriv síðu 2 niðast, meðan restin av teimum föstu prioritetunum verða standandi. Verður restin av studningslánunum ikki roknað við, verða lánini í skipinum aftaná saneringina 3.365.117,50 kr. sum trolarin má haldast at kunna forrenta og avskriva.

Um so er, at saneering ikki kann fáast í lag, og löglingið yvirtekur bátin, eigur báturin at verða boðin út til sölu í samráð við figgjarnevndina.

Hin minnilutin (Hemming Jespersen og Erlendur Patursson) setur helst uppskot fram seinni.

Uppskot
frá

meiralutanum (Andr. Djurhuus, Hans Iversen, S. Petersen og J. Fr Öregaard).

Sum nýtt stk. 2, § 1, í uppskoti landsstýrisins verður sett:

«Eisini verður landsstýrinum heimilt saman við figgjarnevndini at selja trolaran.»

«Endvidere bemyndiges landsstyret til sammen med finansudvalget at afhænde trawleren.»

Uppskot
frá

minnilutanum (Hákun Djurhuus):

I fyrstu syftu:

Roynt verður at sanera Suðuroyar Norðara Trolarafelag samsvarandi tí í álitinum framförda.

I aðru syftu:

Í staðin fyri § 1 í landsstýrisins uppskoti verður sett:

«Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at keypa og selja trolaran «Leivur Óssurson» í samráð við fíggjarnevndina og yvirtaka tey lán, ið standa í honum.»

«Landsstyret bemyndiges til paa landsstyrets vegne at köbe og sælge trawleren «Leivur Óssurson» efter forhandling med budgetudvalget og overtager de laan, der staar i fartöjet.»

Formaðurin legði fram soljóðandi minnilutaálit frá E. Patursson og H. Jespersen:

Stundir hava ikki verið til at geva gjölliga skrivliga frágreiðing í hesum máli, og hevur ti minnilutin valt at bera fram sjónarmið sini við 2. viðgerð í tinginum.

Frá I/f Samvinnufelagi fiskimanna hevur fíggjarnevndin fingið hetta skriv:

«Í spurninginum um rakstur av omanfyri nevnda trolara í framtíðini loyva vit okkum at seta fram hetta tilboð:

Tá landsstýrið hevur keypt bátin á tvingsilsuppboðssöluni keypa vit bátin frá landsstýrinum fyri tey restlán, sum standa í bátinum, og sum ikki eru fallin til gjaldingar, og sum í omanfyri nevnda lögtingsmáli eru uppgjörd soleiðis:

Realkreditstovnurin	2.480.000,00
Fiskimálaráðið	791.687,50
Fiskaribankin	93.760,00
Tilsamans	3.365.447,50

Tá treyta vit okkum:

1. at báturin verður handaður okkum ístandsettur, soleiðis at eingi klassakröv standa eftir ógjörd, og annars klárar til at fara í vinnu.
2. at báturin verður handaður okkum leysur av öllum sjóveðtryggjaðum krövum, sum nú hefta bátin.
3. at vit kunnu taka við omanfyri nevndu prioritetslánum, tilsamans kr. 3.365.447,50.
4. at nevndu lán verða avdráttarfri til komandi november og desembor terminir. Men at renta frá yvirtökudegnum fellur til gjaldingar í mai og juni termin.

Afturímóti binda vit okkum til, at báturin siglur út frá Tvöroyri.

Hetta tilboð er givið við fi fyrivarni, at nevnd okkara, sum skal viðgera málið á fundi í morgin, góðtekur tilboðið.»

Somuleiðis hevur fíggjarnevndin havt til viðgerðar hetta skriv frá Færöernes realkreditinstitut til Föroya landsstýri:

«Við hesum verður váttað, at vit pr. telefon hava sagt Föroya landsstýri frá, at um landsstýrið á auktiónini keypir trolaran Leivur Óssursson og selur hann aftur til mann ella felag, vil Færöernes Realkreditinstitut krevja landskassagaranti fyri, at terminsgjöld í framtiðini verða goldin rættstundis.»

Minnilutin setur fram hetta uppskot:

Uppskot

til

lög um keyp, rekstur og sölu av trolaranum Leiv Óssurssyni.

1. §

Lögtingið velur serstaka 5-manna millumlinganevnd, sum fyri landskassans rokning og við ábyrgd mótvegis lögtinginum verður álagt at keypa og selja trolaran Leiv Óssursson.

Í tí millumbili, sum gongur frá keypi til sölu, verður hesi nevnd, við ábyrgd mótvegis lögtinginum og fyri landskassans rokning, álagt, at fáa trolaran í rekstur skjótast gjörligt, at reka hann á forsvarligan hátt og út frá Tvöroyri.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

2. viðgerð 16. mars.

Minnilutauppskotið frá E. Patursson og H. Jespersen var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: N. Holm Jacobsen, J. Simonsen, Kj. Mohr, J. Högnesen, Poul J. Djurhuus, E. Patursson, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. H. Dambjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen,

D. Nolsöe, V. Nielsen, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, J. F. Öregaard.
Burturstaddir: Jens Chr. Olsen og H. J. Ellingsgaard.

Uppskotið fall 8—0.

Uppskot frá minnilutanum (H. Djurhuus) var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: P. Petersen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, V. Nielsen, Kj. Mohr, J. Högnesen, Poul J. Djurhuus, E. Paturssoa, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.
Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. Simonsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, H. Hansen og J. F. Öregaard.
Burturstaddir: Jens Chr. Olsen og H. J. Ellingagaard.

Uppskotið fall 11—0.

Uppskot frá minnilutanum (H. Djurhuus) í 2. syftu var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, V. Nielsen og Kj. Mohr.
Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Öregaard.
Nei atkvöddu: J. Simonsen, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Paturssoa, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.
Burturstaddir: Jens Chr. Olsen og H. J. Ellingsgaard.

Uppskotið fall 6—6.

Broytingaruppskot frá meirahlutanum (A. Djurhuus o. fl.) til § 1 var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, H. Petersen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V.

Nielsen, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. M. Dam, P. J. Olsen, H. Hansen og J. F. Óregaard.

Nei atkvöddu: J. Simonsen, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Paturssen, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: P. Petersen og Niels H. Jacobsen.

Burturstaddir: Jens Chr. Olsen og H. J. Ellingsgaard.

Broytingaruppskotið samtykt 20—6.
§ 1 so broytt samtykt 17—6.

3. viðgerð 16. mars 1962.
Landsstýrisins uppskot so broytt samtykt 18—0.

---

54. Navnalóggávan

Ár 1962, 7. mars legði varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um nevnd viðvíkjandi navnalóggávuni.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt at seta 3 mannanevnd at eftirkanna navnalóggávuna og geva frágreiðing og uppskot til broytingar.

§ 2.

Tær útreiðslur sum standast av nevndararbeiðnum verða at rinda úr landskassanum.

lagtingslov om udvalg vedrörende navnelovgivningen.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at nedsætte et 3 mands udvalg til revision af navnelovgivningen og afgive betænkning og forslag til ændringer.

§ 2.

Udgifterne i forbindelse med udvalgets virksomhed afholdes af landskassen.

§ 3.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir § 20 í lög nr. 140 frá 17. mai 1961 um persónnövn kann lögin setast í gildi í Föroyum við kgl. fyriskipan.

Undir viðgerðini av lögini helt landsstýrið, at lögin serliga í spurningunum um broyting í ætturnövnum eigur ikki at fáa gildi í Föroyum sum hon er.

Tessvegna er lögin broylt soleiðis, at hon kann setast í gildi í Föroyum við kgl. fyriskipan við törvandi broytingum.

Við tað, at tað verður hildið at vera nóg so stórt arbeiði at leggja á eina tingnevnd at fara lóggávuna igjögnum, hevur landsstýrið hildið tað verið best at sett niður nevnd at geva frágreiðing og mögulígt uppskot til broytingar og setur fram uppskot samsvarandi.

Eftir landsstýrisins ætlan er navnalóggávan ríkismál.

Serprent av lögini liggja við sum skjal.

1. viðgerð 13. og 26. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið.

Lóg nr. 140 frá 17. mai 1961 um persónnövn kann setast í gildi í Föroyum við kgl. fyriskipan við törvandi broytingum, og setur landsstýrið ti uppskot fram til lögtingslóg um at seta 3 mannanevnd at eftirkanna navnalóggávuna og geva frágreiðing og uppskot til broytingar. Landsstýrið setur nevndina.

Málið er beint í lógarnevndina, sum hevur viðgjört málið.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Minnilutin (Hanus við Högadalsá, ið mötti fyri Sigurð Joensen, og Poul Petersen) setur onki uppskot fram í hesum máli, men vísir til sína stöðu í lögtingsmáli nr. 56/1961: Föroysk navnalóg.

Meirilutin (Sámal Petersen, Trygvi Samuelsen og J. Fr. Øregaard) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við fylgjandi broyting:

Í § 1 in fine verður sett aftaná «broytingar» í föroysku tekstini: «á Ólavsökutingi 1963» og aftaná «ændringer» í donsku tekstini «paa Olajtinget 1963».

2. viðgerð 27. mars og 3. viðgerð 26. april 1962.

Landsstýrisins uppskot samtykt 16 0.

---

55. Telefonsambandið í Suðuroy, Sandoy og Skúvoy

Ár 1962, 6. mars legði lögmaður fram sotjóðandi skriv:

Tjóðveldisflokkurin hevur við lögtingsmonnunum Erlendi Paturssyni og Hemming Jesperssyni borið á ting tvinni mál telefonini í Suðuroy, Sandoy og Skúvoy viðvikjandi.

Spurningarnir, uppskotini nerta við, eru umsitingarspurningar við tað, at lögtingssamtyktir longu liggja aftanfyri teir. Men hóast teir eru umsitingarspurningar hava hvörki Erlendur Paturssonur ella Hemming Jesperseu verið hjá umsitingini, telefonstjóranum ella landsstýrismanninum, ið hevur við málið at gera. Um teir hövdu verið hjá umsitingini, vildu teir haft fingið at vita, at umsitingin, telefonstjórin í fyrsta lagi, er við at gera tær ábötur og meira aftrat, ið talan er um.

Til lýsing av málinum, hvussu ið tey liggja, verða her upp aftur tikin skriv frá telefonverkstjóranum júst umröddu spurningum viðvikjandi:

«Viðvikjandi telefonlinjuni miltum Vág og Tvöroyri.

Í brævi dagfest 16. í hesum visa tygum til bræv, tygum hava fingið frá harra J. Danbjörg, lögtingsmanni, har hann kærir um, hvussu ringt er at koma fram við telefonsamtalum í Suðuroy, ti bert 3 linjur eru mill-

um Vág og Tvöroyri. Sum sagt frá til fygum í skrivi dagfest 3. í hesum viðvíkjandi kæru um telefonviðurskiftini í Porkeri, eru 3 linjur alt ov lítið til samband millum sunnava partin av Suðuroynni við meira enn 3000 fólkum, herav 170 felagar, og hin partin av Föroyum. Í framlíðaraetlan telefonverksins um útbygging av linjum er sambandið Vág-Tvöroyri eitt tað, sum liggur næst fyri. Endalig ætlan viðvíkjandi viðkan av hesum linjum verður gjörd nú í vetur, so farið kann verða undir arbeiðið komandi summar. Til hetta verður gjört mugu fólk geva tol, stöðirnar gera sítt besta fyri at fáa trafikkin avgreiddan, men avmarkað er hvussu nógv kann fáast gjögnum 3 linjur, bæði av innan og uttanoyggja samtalum, telegramm og uttanlandssamtalum.

Hval viðvíkir tí svari harra Hans Hammer sigur seg hava fingið frá einum telefonmanni «at lögtingsmenninir fyri Suðuroynna hava skuldina fyri, at ikki fleiri linjur eru til taks», so er tað hugsandi, at hetta sipar til, at so long tíð gekk frá tí lógaruppskotið frá landsstýrinum um lániheimild til telefonverkið, tann heimild sum kundi seta omanevnda arbeiði í gongd, var lagt fyri, og til lögtingið viðtók lógina. Telefonverksins fólk, sum arbeiða í markini, standa oftast fyrst fyri skuli, tá kæra verður um ring telefonviðurskiftir.»

«Viðvíkjandi VHF-radiotelefon til Skúvoy.

Sambart telefonliga avtalu í dag verður við hesum sent fygum avrit av skrivi sent 1. 2. h. á. til sóknarstýrið fyri Skúvoyar- og Dimunar kommunu viðvíkjandi omau nevnda evni.»

«Viðvíkjandi VHF-radiotelefon til Skúvoy.

Í skrivi dagfest 16.1.1962 vísa fygum til at í samröðu við linir av sóknarstýrinum fyri 2 árum síðan var sagt frá, at telefonverkið hevði VHF-radiotól, ið ætlan var at seta upp í Skúvoy, so skjótt 220 V veksilstreymur var at fáa har. Sagt var eisini, at telefonverkið ætlaði at keypa nakrar smáar motorar, sum kundu geva 220 V veksilstreym, og at ein av hesum kundi setast upp í Skúvoy, væntandi um mars-apríl 1960, inntil bygdin fekk veksilstreym.

Tað kom nú at liggja soleiðis fyri, at telefonverkið ikki fekk ta væntaðu lániheimildina frá lögtinginum fyrr enn í august 1961, og kundu tí hesir motorar eins og annað tilfar ikki keypast fyrr enn peningur var útvegaður. Motorarnir eru tí ikki komnir enn.

Í fygara skrivi verður sagt frá, at bygdin fæe veksilstreym síðst í januar 1962. Telefonverkið setti tí heimanvegin radiodeildina til at gjögnumganga tólini og gera fyrireikingar til at seta tey og antennur

upp. Um alt gongur sum ætlað vil VHF-radiotelefonin til Skúvoy kunna vera í brúk til 1. marts í ár.»

«Viðvíkjandi 1: telefonsambandinum til og frá Sandoy og 2: innanbýggja Skálavík-Sand.

1: Til tygara fyrispurning, um hvussu útlitið er fyri betri telefonsamband millum Tórshavn og Sandoy, eri eg nú förur fyri at svara tygum, at tilboð sum kann góðtakast er komið frá «Storno» uppá eitt VHF-radiotelefonsamband CQF 100, eins og tey ið eru í brúk til Klaksvík, Tvöroyri og Vágoy. Tólini kunna verða her í september, um leveringstíðin verður yvirhildin, og kann so roknast við, at tey kunna vera í drift í oktober-november í ár. Radiotólini hava möguleika til at kunna avgreiða upp til 24 samtalur ísenn yvir sama sendara og móttakara. Tilboðið frá «Philips» Holland uppá berifrekvensútstýrið er ikki komið enn, men eg rokni við, at tólini kunna vera her samstundis við radiotólunum. Berafrekvensútstýrið verður at byrja við útgjört til 4 kanalir, men kann útbyggjast, tá förvur verður til tess.

Tá tað nýggja sambandið verður sett upp, verður ein ella tvær kanalir settar inn á nummar á autoamtstöðini í Tórshavn, soleiðis at stöðin á Sandi kann snara seg beinleiðis inn til felagarnar í Tórshavn, eins og hinar stöðirnar við tílíkum VHF-sambandi kunna tað. Sostatt skuldi Sandoyggin fingið eitt gott og álítandi samband til og frá Tórshavn.

2: Viðvíkjandi telefonavgreiðsluni í Skálavík og millum Skálavík og Sand, so er millum Skálavík og Sand 2 linjur, harav tann eina er sett í samband við tann kommunala felagan, t.v.s. tann telefonin sum tey, ið ikki eru felagar, kunna ringja og verða boðsend frá. Saman við tí kommunala felaganum er ein vanligur felagi sum partstelefon á hesi linju. Hin linjan er sett í samband við ein hálvautomatiskan vekslara við 10 felögum. Innan- og uttanbýggjasamtalur frá hesum vekslara verða avgreiddar av telefonstöðini á Sandi. Hesin vekslari er soleiðis innrættaður, at um uttanbýggjasamtala gongur, t.v.s. at linjan er bundin, so fáa felagarnir, um teir ringja fyri at biðja um innan- ella uttanbýggjasamtalu, bundnan tóna og mugu leggja mikrotelefonina á aftur, vekslarin goymir so teirra uppkall, og so skjótt linjan er leys, gevur hann ringing til stöðina fyri at siga frá, at felagi hevur ringt. Stöðin ketur so, við at ringja, inn til tann felagan, sum er fyrst í köini», tí um fleiri hava ringt, meðan linjan hevur verið bundin, verða teir settir í «kö». Um nú tann, ið stendur sum nr. 2 í «köini», ótolnasl og ringir einaferð aftrat, so ringir hann av og fer burturúr «köini». Ringir hann so aftur seinari og linjan enn er bundin t. d. við at nr. 1 ella 2 í «köini» verða avgreiddar, kemur

hann inn aftur í «kö», men nú sum tann seinasti. Hendan feilin, at ringja upp aftur meðan tey eru stillaði í «kö», gera felagar í hálvautomatiskum vekslarum ofta og geva so avgreiðsluni skuldina fyri, at tey ikki verða avgreidd. Eisini kann henda, at felagar, tá samtala er lokin, ikki ringja av, og so statt binda vekslaran, so aðrir ikki koma framat.

Nakað annað er, at í einari bygd sum Skálavík, har felagarnir liggja so spjaddir og tí hava nógvan innanbýggja trafikk, er ein hálvautomatiskur vekslari ikki förur fyri skjótt at avgreiða uppkallini, tí alt má ganga eftir somu linju. Telefonverkið fer tí, nú tað er figgjarliga fört fyri tí, at seta upp ein heilautomatiskan vekslara, sum kann avgreiða innanbýggjasamtalur, uttan Sand kemur upp í millum, og uttan at binda linjurnar millum Skálavík og Sand. Tann kommunali felagin verður tá eisini á vekslarnum, og báðar linjurnar til Sands, so allir felagar fáa tveir möguleikar til uttanbýggjasamtalur í staðin fyri ein, sum nú er. Hesin heilautomatiski vekslarin krevur, at 220 v veksilstreymur er tökur, og at hús verður bygt til hann. 220 v veksilstreymur finnst ikki í Skálavík, men har er eitt privat el-verk við 220 v. javnstreymi. Möguleiki er fyri, at telefonverkið kann fáa streym frá hesum verki og gera hann til veksilstreym. Farið verður eisini undir at samráðast við kommununa um bygging av húsi. Fyriuttan hetta verður eisini nakað av kaðalarbeiði at gera. Ætlanin er gjörd. Um leveringstíðirnar verða yvirhildnar, vil vekslarin kunna vera í drift til heystar.»

«Eftir tygara áheitan verður við hesum givið ummæli til uppskot til samtyktar um telefonsambandið í Suðuroy lag fram á Föroya lögtingi 1. marts 1962 av harra Hemming Jespersen, lögtingsmanni.

Við nevnda uppskoti heitir harra Hemming Jespersen, lögtingsmaður á Föroya lögting um at áleggja telefonverkinum beinan vegin at fremja tær áhöltur á telefonsambandinum í Suðuroy, sum eftir byggiætlanini 1959-1964 longu nú skuldi hava verið settar í verk, t. e.

1. 6 pör luftkaðal Tvöroyri—Vág.
2. 40 pör sjókaðal yvir Tvöroyrafjörð.

Nevnda byggiætlan 1959-1964 varð gjörd í 1958, og ein partur av ætlanini fyri 1959, montering av heilautomat-telefonstöðini í Tórshavn var gjördur í 1959 fyri at fáa hesar í gongd. Harafturat var, orsakað av störri tilgongd, enn roknað var við, av felagum á Strondum og Skálu, neyðugt í 1959 at leggja sjókaðalin Strendur-Saltnes, sum annars var ætlaður at leggja í 1960.

Lániheimild til at útvega peningin til byggiætlanina fekk telefonverk-

ið ikki fyrr enn 3.11. 1959, og tá bert til ætlanina fyri 1959. Tey arbeiðir, ið ætlað vóru at gera í 1959 vóru tí ikki liðug fyrr enn í 1960/61.

Lániheimild til útvegan av peningi til framhald av byggiætlanini fekk telefonverkið ikki fyrr enn í september 1961 og varð tá beinanvegin farið undir fyrireikingar til 1960 ætlanina, telefonsambandið Tvöroyri-Vág og VHF-sambandið Tórshavn-Sand, og 1962 ætlanina, viðkan av automatstöðunum í Klaksvík og Runavík, sum nú ikki hava fleiri nummar eftir.

Sum tygum kunnugt verða ætlanir fyri telefonsambandið Tvöroyri-Vág og VHF-sambandið Tórshavn-Sand, broytlar.

Í staðin fyri ein luftkaðal við 6 linjum millum Tvöroyri og Vág, verða gjördar 8 linjur av copperweldtráð. Hetta gevur beinanvegin 2 samtalumöguleikar aftrat og seinri, tá förvur verður til tess, kunna samtalumöguleikarnir fleirfaldast við berufrekvens, uttan at neyðugt verður at hanga meira tráð upp. Fyrireikingar eru gjördar, og arbeiðið verður gjört í summar.

Í staðin fyri eitt 1 kanal VHF-samband Tórshavn-Sand, sum ikki kann víðkast, er umbiðið eitt VHF-radiosamband, sum kann avgreiða upp til 24 samtalur ísenn, eins og VHF-radiosambandið Tórshavn-Klaksvík o. o., meðan berufrekvensskápini í fyrsta umfari verða útgjörd við 4 kanalum, men fleiri kunna setast til, tá ið tað gerst neyðugt. Hetta anleggið skuldi kunna verið í gongd til heystar við 1 tænastukanal og 4 samtalukanalum. Ætlanin er at sela eina ella tvær kanalir í samband við nummar á automatstöðini í Tórshavn, so at Sand kann ringja beinleiðis til felagarnar har.

Hvat byggiætlanini fyri 1963/64 viðvikir, so er telefonverkið í ferð við at gera fyrireikingar, so at arbeiðini kunnu verða gjörd til fa ætlaðu tíðina.

Tilgongdin av felagum og förvur á fleiri millumbygdalinjum er so nógv vaksandi, at nógvur leggingarpeningur krevst. Ný- og útbygging av telefonlinjum og stöðum fer fram um allan heinin, so eftirspurningurin eftir telefontilfari er stórur, og förur hetta við sær, at leveringstíð in verður longri og longri, ja fyri sumt tilfar upp í tvey ár. Í flestu förum verður ¼ av keypspeninginum kravdur goldin, tá sáttmáli verður gjördur. Telefonverkið má í flestu förum lána peningin og rinda rentur og avdrátt í upp til 2 ár, uttan at tann henti peningurin gevur nakað av sær. Tað sigur seg sjálvt, at tað er mark fyri, hvussu nógvan leggingarpening ísenn telefonverkið kann lana, renta og avdraga á hendan hátt.»

Sambart hesar frágreiðingar frá telefonverkstjórunum hevur umsitingin hendurnar fullar av at fremja jást tey málini, ið talan er um, og

landið liggur soleiðis, at menn eru greiðir yvir, at neyðugt er at fara viðari enn fyri ári ætlað, tí krøvini til telefonverksins útbygging eru stöðugt vaksandi. Hetta verður sagt at gera vart við, at um stutta tíð verður neyðugt at viðgera spurningin um heimild til störri lán og ilegging enn landsstýrið og telefonverksins fyrisøti hevur.

---

56. Föroysk navnalóggáva

Ár 1962. 7. mars legði H. Djurhuus löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

löglingslóg um föroyska navnalóg.	lagtingslov om færösk navnelov.
§ 1.	§ 1.
Löglingið velur 5-manna nevnd at gera uppskot til föroyska navnalóg.	Lagtinget nedsætter et udvalg paa 5 medlemmer at udarbejde forslag til en færösk navnelov.
§ 2.	§ 2.
Útreiðslurnar, ið standast av hesum nevndararbeiði, verða goldnar úr landskassanum.	Udgifterne i forbindelse med udvalgsarbejdet afholdes af landskassen.
§ 3.	§ 3.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

I öllum norðurlondum eru fólkanavnalógir, ið skulu vera ein borgan fyri, at bæði fornövn og eftirnövn eru hóskandi og samsvarandi við tað mál, növnini skulu verða nýtt í sambandi við.

Íslendingar til dömis fingu longu í 1913 sínu fyrstu navnalóg, ið var í gildi til 1925, tá nógaldandi íslendska lógin um mannanövn loysti hana av.

At vit föroyingar eisini hava fyri neyðini eina navnalóg er sjálvsagt og setur tí fólkaflokkurin fram lógaruppskot hesum viðvíkjandi.

1. viðgerð 13. mars og 26. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Fólkaflokkurin hevur lagt málið fyri tingið við uppskoti til löglingslóg um at seta 5 mannanevnd at gera uppskot til föroyska navnalóg.

Málið er beint í lógarnevndina, ið hevur viðgjört málið.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg sundur í ein meirluta og ein minniluta.

Meirlutin (Sámal Petersen, Trygve Samuelsen og J. Fr. Øregaard) setur onki uppskot fram í hesum máli, men vísir til sína stöðu í löglingsmáli nr. 54/1961: Navnalóggávan.

Minnilutin (Hanus við Högadalsá, ið mölti fyri Sigurð Joensen, og Poul Petersen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot fólkaflokksins við fylgjandi broyting:

Í § 1 in fine aftaná «navnalóg» í föroyska tekstini verður sett: «Frágreiðing og uppskot verða at leggja fram á Ólavsökutingi 1963» og í donsku tekstini aftaná «navnelov»: «Betænkning og forslag fremlægges i Olajtingsamlingen 1963».

2. viðgerð 27. mars, (atkvgr. 10/4).
Uppskotið fall 13—0.

---

57. Landsrætturin

Ár 1962, 7. mars legði H. Djurhuus löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot til samtyktar.

Landsstýrið verður biðið um at skipa so fyri, at landsrætturin minst tvær ferðir um árið verður settur í Föroyum, so öll tey föroyska sakarmálini, ið verða skotin inn fyri hetta rettarstigið, verða avgjörd her.

Viðmerkingar:

Allir dómar, ið verða feldir við rettin í Föroyum, kunnu verða lagdir fyri hægri rettarstig, men liggja hesi rettarstig í København.

At hetta mangan er uttanhanda og í mongum förum ger, at fólk ikki hetta sær at sökja fram til hesi retarstig, er lett at skilja.

1. viðgerð 15. mars og 1. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Fólkaflokkurin hevur lagt fyri löglingið uppskot til samtyktar um at biðja landsstýrið skipa fyri, at landsretturin minst tvær ferðir um árið verður settur í Föroyum, so öll tey föroysku sakarmálini, ið verða skotin inn fyri hetta rettarstigið, verðn avgjörd her.

1. viðgerð av málinum fór fram tann 15. marts 1962 og varð málið beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini av málinum býtt seg sundur.

Minnilutin (Hanus við Högadalsá, ið mölti fyri Sigurð Joensen, og Poul Petersen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá fólkaflokkinum.

Meirilutin (Sámal Petersen, Trygve Samuelsen og J. Fr. Øregaard) förir fram, at sum er kann landsrætturin verða settur í Föroyum, tá tað verður hildið at vera neyðugt. Annars verða tey sakarmál, sum í hinum partinum av ríkinum hoyra undir landsrættinum sum 1. instansur, í Föroyum viðgjörd av Föroya rætti, og í öllum appelsakum fer vitniförsla og avhoyring av partinum fram her í Föroyum, soleiðis at tað berl er sjálv dómsviðgerðin, ið fer fram í landsrættinum í København. Sum tað undir 1. viðgerð av hesum máli varð upplýst, er longu skipað so fyri sum í uppskotinum frá fólkaflokkinum nevnt.

Meirilutin setur tí onki uppskot fram.

2. viðgerð 5. mai (atkvgr. 7/5—1962).

Uppskotið fall 11—0.

58. Broyting í toll-lógini

Ár 1962, 7. mars legði Kj. Mohr lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

löglingslóg um broyting í tolllógini.

§ 1.

Landsstýrið fær heimild til at refundera toll og allar innflutnings- og framleiðsluavgiftir, tá vörur, sum eru framleiddar í Föroyum, eru innskipaðar umborð á skip til útflutning, við fyrivisan av útflutningsváttan lýst av einum *av myndugleikunum góðkendum* persóni ella stovni.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i toldloven.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at refundere told og alle indförsels- og fremstillingsafgifter, naar en her i landet fremstillet vare er indladet i skib til eksport mod forevisning af eksportdokument attesteret af en af myndighederne godkendt person eller institution.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Umráðandi er, at hettar uppskot til útvegan av heimild til at refundera toll og allar innflutnings- og framleiðsluavgiftir verður skundisliga viðgjört, við tað at verksmiðjur í Föroyum í heilum fáa fyrispurningar um útflutning og eru noyddar at geva avslag, við tað at nevnda refunderingsheimild ikki er komin ílag.

1. viðgerð 15. mars og 29. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Kjartan Mohr lögtingsmaður legði málið fram á ting 7. mars og varð tað við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 5. apríl 1962.

Lógaruppskotið samtykt 20—0.

59. Rentan av láni við panti í föstum eigindómi

Ár 1962, 12 mars legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

kongiliga fyriskipan fyri Föroyar um lán við pant í föstum eigindómi.

Við heimild í § 6, stk. 4 í lóg nr. 285 frá 3. juli 1942 «om renten af udlaan med pant i fast ejendom» verður lógin sett í gildi í Föroyum við kongiligari fyriskipan við hesum broytingum:

1. Har sum víst verður til lógina sjálva verður sett «anordning» í staðin fyri «lov».
2. Í § 6, stk. 2 nr. 1 verður í staðin fyri «D.L. 5-14-5» sett «N.L. 5-13-3».
3. § 6, stk. 4 gongur út og í staðin verður sett: «Denne anordning træder i kraft .....

Viðmerkingar:

Eftir lóg nr. 362 frá 16. desember 1933 er ikki loyvt at taka hægri rentu av lánum við pant í föstum eigindómi enn 4 % p.a., tó kann sorinskrivarin geva loyvi, at rentan verður hækkað til 5 %. Tílík loyvir eru givin nú í mong ár, bert lángevari hevur sett hesa rentu í pantibrævið.

Við lóg nr. 285 frá 3. juli 1942 varð rentumarkið eins og rentuloyvini avtikin í Danmark og komu í staðin aðrar reglur at verja lántakarar. Partarnir kunnu ikki viðtaka rentu, sum er hægri enn eimulig renta (§ 1), möguleikin at veita lán til undirkurs verður avmarkaður (§ 2), og lántakarin kann bert fráskriva sær rættin at siga lán upp í 5 ella 10 ár (§ 3). Reglurnar um lán til undirkurs eru tó ikki galdandi m.a. fyri kredit- og hypotekfelög, kassaskuldabröv frá hesum felögum eru tí ikki bundin av kursmarkinum.

Henda lógin kann eftir § 6, stk. 4 setast í gildi í Föroyum við kgl. fyriskipan, men er hetta ikki gjört enn; tað er tí ólógligt her at taka hægri rentu enn 5 % av lánum við trygd í föstum eigindómi.

Í 1951 vendi sorinskrivarin sær til landsstýrið og vísti á, at hækkandi renturegglan fördi við sær, at forboðið var torfört at halda. Sparikassi ynskti at hækka rentuna av lánum við 1. prioritets pantirætti í föstum eigindómi til 5½ %, men fingu pantibrövini við tinglesingina viðmerking um, at loyvi var bert givið til 5 %. Serliga var trongdin til lógliga at

rittda meira enn 5 % av lánum við 2. prioritets pantirætti stór undir teimum sera vánuligu lánimöguleikunum. Soriuskrivarin upplýsti, at bankarnir komu undan forboðnum um ikki at taka hægri rentu enn 5 % við at geva pantibrövunum formin skaðaloysisbröv, har rentan ikki var nevnd, ein formur, ið helst ikki svarar til orðaljóðið í lógini, síðani tað eisini eftir skaðaloysisbrevi verður veitt trygd í fastari ogn.

Hesar umstöður gera seg ikki minni galdandi nú, og eru aðrar komnar til, ið bera tann vegin, at hámarkið ikki kann standa við, um neyðugur lánipeningur skal útvegast.

Lóg nr. 144 frá 1. apríl 1960 «om laan og garantier til visse erhvervsvirksomheder» er kunngjörd í Föroyum. Eftir hesi lóg hann statskassin veita lán ella veðhald fyri lánum til idnaðarvirki, handverkarafyritökur og til bygging og modernisering av smærri farmaskipum. Statslánini verða eftir lógini at renta við 6 %, og verður trygd krevd; er trygdin fastur eigindómur, hetta er trygdin lántakari vanliga hevur at vísa á, so forðar rentulógin fyri lánunum.

Eisini lógin um «egnsudvikling» er galdandi her. Fleiri hava sökt um lán eftir hesi lóg. Tilsögnir eru givnar, rentan fyri hesar tilsögnir er sett til 6.75 %, og er lánið treytað av pant í fastari ogn. Lánini kunnu tí ikki verða goldin. Hesar fyritökur kunnu heldur ikki fáa fyribils byggilán í banka eftir lánitilsögnini, tí eisini her verður pant krevt og er rentan fyri hesi lán enn hægri.

Uppskotið frammanfyri svarar til lógina nr. 285 frá 3. juli 1952.

1. viðgerð 19. mars og 5. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er lagt fram av landsstýrinum, sum í framlöguskrivinum setur uppskot til kongiliga fyriskipan fyri Föroyar um lán við pant í föstum eigindómi.

Seinri hevur landsstýrið gjört vart við, at heimildarlógin til kongiliga fyriskipanina, nevniliga lóg nr. 285 frá 3. juli 1912 «om renten af udlaan mod pant i fast ejendom» er sett úr gildi.

Málið varð við 1. viðgerð, ið fór fram 19. mars 1962, beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur undir viðgerðini av málinum býtt seg sundur.

Meirlutin (Sámal Petersen, Poul Petersen, Trygve Samuelsen og J. Fr. Øregaard) mælir tinginum til at samtykkja at taka av tær lógir, ið seta mark fyri rentufótin viðvíkjandi lánum við pant í föstum eigindómi og setur uppskot samsvarandi.

Minnilutin (Hanus við Högadalsá, ið mötti fyri Sigurð Joensen) mælir til, at rentumarkið verður selt til 5½ % og setur fram uppskot samsvarandi.

Uppskot
frá

meirlutanum (Sámal Petersen, Poul Petersen, Trygva Samuelsen og J. Fr. Öregaard):

Lögtingið samtykkir, at N. L. 5-13-3, lög frá 6. april 1855 (hvorved rentefoden i visse tilfælde frigöres og straf for anger forandres m. v.», lög nr. 52 fra 27. mars 1912 «om rentebevillinger», lög nr. 362 frá 16. december 1933 «om ændringer i lov nr. 52 af 27. marts 1912 om rentebevillinger» og annars eldri lögir, sum seta mark viðvíkjandi rentufótinum fyri lán við pant í föstum eigindómi, verða at seta úr gildi.

Uppskot
frá

minnilutanum Hanus við Högadalsá:

Lögtingið samtykkir, at markið viðvíkjandi rentufótinum fyri lán við pant í föstum eigindómi í lög nr. 362 frá 16. december 1933 og öðrum lögum hevur viðvíkjandi verður broytt til 5½ %.

2. viðgerð 7. mai.

Uppskot frá meirlutanum í nevndini samtykt 16—0.

Uppskot frá minnilutanum burturdoltið.

60. Veðhald av lánum til smærri ídnaðarvirki

Ár 1962, 12. mars legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 21 frá 25. apríl 1960 um veðhald av lánum til smærri ídnaðvirkir.

§ 1.

§ 1, 2. punktum verður orðað soleiðis:

«Veð verður givið fyri lán móti panti innanfyri 70 % av paniivirðinum.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 21 af 25. april 1960 om garanti for laan til mindre industrivirksomheder.

§ 1.

§ 1, 2. punktum affattes saaledes:

«Garantien ydes for laan mod pant indenfor 70 % af panteværdien.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir lögtingslóg nr. 21 frá 25. apríl 1960 er landsstýrið heimilað vegna landskassan í fíggjarárinum 1960/61, 1961/62 og 1962/63 at veðhalda fyri lánum upp í 250.000 kr. um árið til smærri ídnaðvirkir. Treytin er, at lánið, sum veðhildið verður fyri hevur 1. prioritets pantirætt innanfyri 70 % av lánivirðinum.

Tað hevur í einstökum förum ligið heldur illa fyri at freyta veðhald av 1. prioritet, serstakliga, tá ið tað hevur verið at vaksið um ídnaðarvirkir, sum hava lán frammanundan.

Landsstýrið loyvir sær so stall at leggja uppskot til broytingar soleiðis, at landsstýrið fær heimild til at geva veðhald fyri lánum eisini mót seinni prioriteum, men innanfyri 70 % av virðinum.

2. viðgerð 28. mars og 3. viðgerð 3. apríl 1962.
Uppskotið samtykt 22—0.

61. Maskinskúlin

Ár 1962, 12. mars legði lögmaður fra msoljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um lán v. m. til maskinskúla í Föroyum.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at læna ella veðhalda fyri lánum til bygging av maskinskúla í Föroyum.

Tann parturin av rákstrinum, ið ikki verður goldin í studningi frá ríkisstýrinum, frá privatum o. ö. verður goldin av landskassanum.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om laan m. v. til en maskinskole paa Færöerne.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at optage laan eller garantere for laan til opförelse af en maskinskole paa Færöerne.

Den del af skolens drift, der ikke dækkes ved statstilskud og tilskud fra private o. a. afholdes af landskassen.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir § 6 í lögtingslóg nr. 8, 19. marts 1954 kann á Föroya sjómansskúla, umframt til tey nautisku prógvini, verða lært og próvtöka fara fram til vanligt maskinistprógv («Den almindelige maskinisteksamen»), maskinpassara- og motorpassaraprógv.

Meðan landið hevur staðið fyri skúlarakstrinum, er læran og próvtökan hjá maskinmonnunum sum felagsmál, jbr. § 16, stk. 2 í nevndu lóg, farin fram eftir tágald. ríkislóg nr. 78, 19. marts 1930 «om eksaminer for skibsmaskinister m. m.». Próvtökan fer fram undir leiðslu og eftirliti frá próvtökunevndini hjá handilsmálaráðnum, uá kenslumálaráðnum.

Við lóg nr. 210, 7. juni 1958 koma nýggjar reglur í gildi viðvíkjandi maskinlærnui, m. a. kemur í staðin fyri prógvini sum motorpassari og sum maskinpassari prógvið sum maskinistur. Lógin kom í gildi 1. februar 1959, og er hon eisini galdandi fyri Föroyar.

Í mai 1960 sókir landsstýrið um, at Föroya sjómansskúli eisini eftir nýggju lógini fær góðkenning sum maskinskúli, og at bann fyri henda

partin av lærumi fær studning bæði til bygging m. a. av starvstovum og klassarúmum og til rakstur.

Í december 1960 sigur handilsmálaráðið, at tað er sinnað at geva skúlanum góðkenningina, tá ið treytirnar eftir kunngerð nr. 141, 30. apríl 1959 eru loknar, m. a. um herarakreftir, klassarúm, herundir serklassar, lærutól og nærningatal. Svarað verður aftur, at skúlin heldur seg lúka treytirnar, tó verður neyðugt at byggja afturat klassarúm og starvstovu.

Fyri at fyrireika hesa bygging setti landsstýrið í 1961 niður nevnd, og skuldi nevndin eisini umhugsað tann spurningin, at tekniski skúlin í Tórshavn, sum stóð fyri tí at fáa sær starvstovur, serliga til undirvising í elektroteknikk, luttók í hesi bygging. Í nevndina kom tí eisini umboð at sita fyri henda skúla. Farið er tó síðani frá hesi ætlan um felagsbygging bæði tí, at teknískí skúlin ikki kundi steðga, hann hevur nú fingið sær starvstovu, og eisini tí, at tann figgjarligi fyrimunur, ið skuldi verið at bygt saman, tá samanum kom, hevði lítið uppá seg.

Nú fyriliggur skitsuppskot til byggingina frá arkitektunum Olaf Mortensen, Tórshavn, M. Didriksen, K. Harild og K. E. Sand Kirk, København. Eftir hesum verður í framhald av tilbyguinginum norðureftir á sjómansskúlanum, bygt í tveimum hæddum 3 skúlastovur og samkomuhöll, höllin at nýta bæði hjá nautisku deildini og maskindeildini. Starvsstovurnar verða í húsum fyri sig tætt norðanfyri skúlan. Varmin fæst frá tí varmaverki, ið er. Kostnaðaretlanin er henda:

Tilbygningurin		500.000.—
Starvsstovurnar:		
Bygningurin	700.000.-	
Leyst innbúgv	100.000.—	
Maskinur og aðrir tekniskir lutir	349.863.—	1.149.863.-
tilsamans		1.649.863.—

Landsstýrið hevur nú samráðst við kenslumálaráðið um, at statskassin veitir studning bæði til bygging og rakstur til henda partin av skúlanum eftir teimum reglum, sum galda fyri tilsvarandi skúlar í Danmark. Reglurnar eru tær, at statskassin veitir upp til 50 % av byggikostnaðinum í avdráttarfríum láni at renta við 4 % p.a.; lánið er treytað av, at skúlin (landið) sjálvur útvegar 16⅔ %, meðan restin 33 ⅓ % verður útvegað t. d. í almennum láni. Rakstrarstudningurin liggur um 80 %.

Tað er ein treyl frá ríkisstýrinum, at skúlin verður rikin sum ein sjálveigandi stovnur leystur av sjómansskúlanum. Í stýrinum fyri skúlan kundi t. d. verið umboð fyri landsstýrið, reiðarafelagið, maskinistfelagið og motorpassarafelagið. Viðtökur skúlans skulu góðkennast av kenslumálaráðnum eftir tilmæli frá landsstýrinum.

At fáa könar menn í maskinuna á fiskiskipaflotanum er ein týdningarmikil táttur í endurnýgging hansara. Maskinurnar, bæði hövuðs- og hjálpimaskinur er ein so stórur og kostnaðarmikil partur av skipinum, at tað fyri rakstrin er av största týdningi, at hesir lutir verða röktir av monnum við neyðugum kunnleika. At steðgur nú er komin her í maskinlæruna hevur fört við sær, at neyðugt hevur verið at givið óvanliga nógv serloyvir til maskinfólk eisini á nýggjastu skipunum. Bæði landsstýrið og fakfelögini eru samd um, at hetta kann ikki halda fram, og at full útgjördur maskinskúli er einasta leiðin at böta um hesi viðurskiftir.

1. viðgerð 19. mars og 4. april legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Álit

Málið varð vist í fiskivinnunevndina 19. mars 1961. Nevndin hevur havt málið til viðgerðar og hevur ongar viðmerkingar at gera.

Minnilutin (Niels Holm Jacobsen) tekur undir við uppskoti landsstýrisins, at ein maskinskúli verður bygdur, men viðvíkjandi læruni á hesum skúla, vil minnilutin vísa á, at tað er umráðandi eisini at skipa so fyri, at vit framyvir kunnu manna okkara nýggju veiðuför við neyðugum maskinfólki, ið hevur fa læru, ið skal til, og at móðurmálsins rettindi sum læringrein ikki verða skerd á nökrum lærustigi.

Tann fullfiggjaða maskinmeistaralæran eftir donskum mynstri tekur rúma tíð, og tað er royndur lutur, at nógvir ungir við hesi læru fara í fremmanda siglug, og seinni taka summir teknikum. Hetta förir við sær, at stórur partur av hesum ungu kunna ikki at arbeiða umborð á föroyska veiðnskipaflotanum, ið harðliga restar lærdar maskinmenn, sum er, og er vandi fyri, at maskinmeistaratrotið veksur, samstundis sum nýggju förini verða fleiri.

Vit kunnu við öðrum orðum ikki rokna við at fáa lærda maskinmanning á okkara veiðuskipaflota, um galdandi lög verður standandi óbroytt, men mugu longu nú ásanna, at henda lóggáva nú verður broytt, so hon verður samsvarandi tí, veiðiskipaflotin hevur brúk fyri.

Galdandi lóg gevur rett til at taka umfram maskinmeistaraprógv

eisini maskinistprógv, ið gevur loyvi til at passa motorar upp í 500 hk. Men fleiri av nýggju línubátunum hava motorar millum 500 og 600 hk, so markið skuldi av röttum ligið á 600 hk og ikki á 500 hk.

Av maskinmonnum á veiðuskipaflotanum krevst í dag, at teir hava læru í ravmagni, kölitekníkki og kenna tey nýmótans navigatiónstólini umborð, so teir eru föeir fyri at bóta um tey í vissum förum.

Minnilutin heldur tí, at vit eiga at gera ta broyting í galdandi lóggávu á hesum öki, at at loyvt verður monnum við maskinistprógvi at passa motorar upp í 600 hk, tá teir hava uppískoytisprógv í ravmagnslæru, kölitekníkki og viðvikjandi navigatiónstólum.

Hvat tíð læran til at taka eitt tilíkt uppískoytisprógv kemur at taka, og hvussu hon eigur at verða lögd til rættis, má ein nevnd av serkönnum gera uppskot um og leggja tað fyri tingið á ólavsöku 1962.

Samsvarandi hesum sjónarmiðum setur minnilutin (Niels Holm Jacobsen) fram hetta

Uppskot

1. Lögtingið tekur undir við landsstýrisins uppskoti um at bygdur verður nýggjur maskinskúli.
2. Lögtingið áleggur landsstýrinum at skipa so fyri, at föroyskt verður lógarfest sum lærugrein á hesum skúla.
3. Sett verður 5-mannanevnd, ið skal gera uppskot til broyting í galdandi maskinlærulóggávu, so hon eisini verður meira samsvarandi tí, okkara veiðuskipafloti törvar.

   Landsstýrið velir nevndarformannin, Föroya maskinskúli (Föroya sjómansskúli) ein nevndarlim, Föroya veiðarafelag ein, Föroya maskinmeistarafelag ein og Föroya motorpassarafelag ein.
4. Útreiðsluna av nevndararbeiðinum verða goldnar úr landskassanum av § 23.8.

2. viðgerð 6. og 3. viðgerð 28. apríl 1962.
Landsstýrisins uppskot samtykt 27—0.

62. Lán til húsabygging.

Ár 1962, 12. mars legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um eitt hypotek til húsabygging.

§ 1.

Sett verður á stovn eitt hypotek við tí endamáli at geva lán til byggingar av sethúsum.

§ 2.

Hypotekið hevur heimstað í Tórshavn.

§ 3.

Hypotekið hevur eitt stýri uppá 3 limir. Tingið velur 2 og landsstýrið 1, sum er formaður í stýrinum. Stýrið verður valt fyri 1 ár, og aftur val er loyvt.

§ 4.

Sum stovnsfe skjýtur landskassin inn 1,5 mill. kr. úr sociala grunninum.

Aftrat stovnsfeinum kann hypotekið útvega förvandi pening við upptöku av láni uppá stovnsfeið upp til 3 ferðir stovnsfeið við landskassans ábyrgd.

§ 5.

Stýrið fyrisetur stöddina á lánunum, rentuna og treytirnar við lánunum samsvarandi samtyktunum. Láuitíðin má ikki fara uppum 15. ár.

lagtingslov om et hypotek til boligbyggeri.

§ 1.

Der opreites et hypotek med det formaal at yde laan til boligbyggeriet.

§ 2.

Hypotekets hjemsted er i Tórshavn.

§ 3.

Hypoteket ledes af en bestyrelse paa 3 medlemmer, hvoraf 2 udpeges af lagtinget, og landsstyret udpeger 1, der er bestyrelsens formand. Bestyrelsen vælges for 1 aar, og genvalg kan finde sted.

§ 4.

Som grundfond indskyder landskassen 1,5 mill. kr. fra det sociale fond.

Udover grundfonden kan hypoteket med landskassens garanti tilvejebringe de nödvendige midler ved belaaning af grundfonden op til 3 gange.

§ 5.

Bestyrelsen fastsætter laanenes störrelse, aarsmaal, rente samt de övrige vilkaar efter de i vedtægterne angivne regler. Laanenes afdragstid maa ikke overstige 15 aar.

Lánini skulu hava prioritet innanfyri hægst 75 % av húsavirðinum.

§ 6.

Stýrið kann seta sum treyt fyri lánum, at húsini eru hóskandi í stødd, dyggleika og vakurleika samsvarandi reglunum í samtyktini.

§ 7.

Landsstýrið fyrisetur gjøllari reglur fyri hypoteksins virki, tess fyrisæti, lánum, metingini o. t. í einari samtykt.

§ 8.

Henda lóg kemur í gildi 1. juli 1962.

Lånene ydes mod prioritet indenfor højst 75 % af vurderingssummen.

§ 6.

Bestyrelsen kan stille som vilkaar for ydelse af laan, at boligerne har en passende størrelse, soliditet og skönhed i overensstemmelse med de i vedtægten fastsatte regler.

§ 7.

Landsstyret fastsætter de nærmere regler for institutets virksomhed, dets administration, laanevirksomhed, vurdering m. v. i en vedtægt.

§ 8.

Denne lov træder i kraft 1. juli 1962.

Viðmerkingar:

Í lögtingsmáli nr. 25/1960 lögdu vit at kalla einsljóðandi uppskot inn á ting, men tað fekk tá ongar sömdir. Vit loyva okkum at vísa til viðmerkingar (lögtingstíðindi 1960 bls. 129).

Sum tá sagt, var tað langur vegur at útvega lán frá danska oyggjakredittfelagnum. Fyrst skuldi lógin broytast, so Föroyar kundu koma inn undir hetta felag, og treytin fyri lángávuni er, at viðkomandi bygd er matrikulerað.

Nú eru tvinni uppskot komin á ting, uppskot til lögtingslóg um tinglýsing og uppskot til lóg um matrikulering.

Tað fer uppaftur at taka tíð til hesar lógir eru settar í verk og tað tykist sum förvarin at fáa flegging til húsabygging veksur dag frá degi.

Út frá hesum loyva vit okkum at leggja uppskot innaftur á ting í teirri vón, at tað nú fær frama.

1. viðgerð 19. mars og 2. mai legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Í tingsetuni 1960/61 setti tingmaður Poul Petersen undir nevndarvið-

gerðini av lögtingsmáli nr. 25/1960: Broytingar í lóg «Om Kreditforeninger» minnilutauppskot til lögtingslóg um eitt hypotek til húsabygging. Minnilutauppskotið fall og lögtingið samtykti uppskotið frá meirilutanum um at gera tær neyðugu broytingar í lóg «Om Kreditforeninger» soleiðis, at Østifternes Kreditforening fekk lógarheimild til at geva lán til húsabygging í Föroyum.

Fólkaflokkurin hevur í hesi tingsetu lagt fyri tingið sum serligt tingmál nevnda uppskot til lögtingslóg um eitt hypotek til húsabygging. 1. viðgerð av málinum fór fram 19. mars 1962 og var málið beint í lógarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg sundur.

Ein meiriluti (Sámal Petersen, Trygve Samuelsen og J. Fr. Øregaard) vísir til tingsamtyktina viðvíkjandi lögtingsmáli nr. 25/1961, sum ivaleyst verður til bata fyri húsabyggingina. Færøernes Realkreditinstitut veitir fyribils bert lán til keyp av fiskiförum, men ætlingin er, at hesin stovnur eisini skal hava útlánsdeild fyri lán til húsabygging, tá neyðug financiering til hetta endamál fæst til vega. Tað er beint, at húsalánsveiting verður at liggja undir hesum stovni, og eigur tað at verða lugsað um at skapa ta neyðuga figgjarliga grundarlag til hetta endamál.

Minnilutin (Sigurð Joensen) vísir til lógaruppskot tjóðveldisflokksins í lögtingsmáli nr. 25/1960 um húsalánsgrunn Föroya, sí lögtingstíðindi 1960, síðu 132 ff.

Minnilutin (Poul Petersen) mælir tinginum at samtykkja uppskotið frá fólkaflokkinum.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 4. mai 1962.

Lógaruppskotið var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: Poul Petersen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá og Hemming Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Haldor Hansen og J. Fr. Øregaard.

Burturstaddir: J. H. Danhjörg og K. Djurhuus.

Uppskotið fall 13 0.

---

63. Frígoymsla

Ár 1962, 12. mars legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um frígoymslur.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt at gera og rökja frígoymslu av spirituosa, vini, öli og tubbaksvörum og um til ber eisini av öðrum, sum duga til less.

§ 2.

Endamát lógarfonnar er at gera frístað hjá vörum sum hesum soleiðis, at tær kunnu flytast inn beinleiðis á frígoymslu har at goymast og farast um, sum vóru tær yvirhövur uttanfyri föroyskt territorium, uttan fyri tær at rinda annað gjald, so leingi tær eru á goymsluni, enn tað avgjald, sum fyrisett er fyri frígoymsluna og uttan skerjing í frígoymslutíð, so leingi avgjald verður rindað rettstundis.

Ikki fyrrenn vöra verður latin út av frígoymsluni, kemur hon undir fyrisett innfutningsgjald, uttan so vöran fer útaftur av landinum.

Landsstýrið fyrisetur gjöllari reglur fyri nögdir og treytir fyri útflýgging av tollvörum av frígoymsluni sum skipsvistir og tilfkt.

lagtingslov om frilagre.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til for landskassens regning at oprette og drive frilager for oplag af spirituosa, vin, öl og tobaksvarer og om muligt tillige andre dertil egnede toldvarer.

§ 2.

Lovens formaal er at oprette et fristed for de paagældende varer, saaledes at disse kan indföres direkte til frilager for der at opbevares og i alle maader behandles som om de befandt sig udenfor det færöske territorium og uden derfor at erlægge anden afgift, saa længe de forbliver paa lageret, end den for frilageret fastsatte lageralfgift og uden indskrænkning i lagertiden, saalænge den fastsatte afgift erlægges rettidigt.

Först ved udlevering af en vare fra frilageret erlægges de tarifmæssige indförselsafgifter, medmindre varen genudföres.

Landsstyret fastsætter de nærmere bestemmelser vedrörende kvanta og betingelser iövrigt for udlevering af toldvarer fra frilageret til skibsproviant og lignende.

§ 3.

Landsstýrinum er heimilt at læna törvandi pening til gerð av frígoymslu og eftir samráð við lögtingsins fíggjarnevnd gera gjöllari reglur fyri rakstur og fyriseting av gjaldinum eftir § 2 o. l.

§ 4.

Landsstýrinum er eisini heimilt at fyriseta törvandi reglur um umseting og pantseting av tílíkum vörum, sum kunnu fara í umfar her á landi.

§ 5.

Brot móti reglunum í hesi lóg koma undir reglurnar í lögtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjöld v. m.

§ 6.

Henda lögtingslóg kemur í gildi 1. januar 1963.

§ 3.

Landsstyret bemyndiges til at optage de nödvendige lån til oprettelse af frilager og efter samraad med lagtingets finansudvalg fastsætte de nærmere bestemmelser vedröende driften samt fastsættelsen af afgiften efter § 2 o. l.

§ 4.

Landsstyret bemyndiges endvidere til at træffe de foranödne bestemmelser med hensyn til omsætning og pantsætning af saadanne varer, der kan göres til genstand for omsætning her i landet.

§ 5.

Overtrædelse af de her givne bestemmelser behandles efter reglerne i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer om indförselsafgift m. v.

§ 6.

Denne lagtingslov træder i kraft 1. januar 1963.

Viðmerkingar:

Í tingmáli nr. 19/1958 lögdu vit at kalla einsljóðandi lógaruppskot inn á ting (smbr. tingtíðindi 1958 bls. 151).

Síðani tá er tollurin farin upp á mongum vörum og haraftrat er 4 % gjald á at kalla öllum vörum.

Tað er so mikið törvandi nú, at fáa eina tílíka goymslu og haraftrat, at vit umsíðnr kunnu gera handil við tílíkum vörum við skip, sum koma henda vegin, og eisini, um tingið skuldi gjört samtykt um tað, at föroysk skip fingu tollvörur hiðani í staðin at fara til Bretlands og aðrastaðnis at keypa.

Vit loyva okkum at mæla til, at uppskotið fær tingsins vælvild.

1. viðgerð 22. mars og 10. apríl legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Alit

12. mars 1962 er málið lagt fram á ting av fólkaflokkinum og varð við 1. viðgerð 22. mars beint í figgjarnevndina.

Uppskotið miðar ímóti at gera eitt frístað fyri brennivín, vínl, öli, tubbaksvörum og öðrum vörum, sum duga til tess, soleiðis at hesar vörur kunnu verða innfluttar, lagdar á goymslu og verða goymdar og viðfarnar har, sum vóru tær uttanfyri föroyskt territorium, soleiðis at tær ikki koma undir annað gjald enn leigugjald til tær verða útafturtiknar annaðhvört til sölu ella útafturflyting.

Nevndin, sum hevur viðgjört málið, hevur býtt seg í 3 minnilutar.

Minnilutin (Sámal Petersen, Joh. M. Fr. Poulsen og Andreas Djurhuus) setur onki uppskot fram.

Minnilutin (J. Fr. Øregaard) er samdur við uppskotsstillararnar, at tað var ynskiligt, at tað í Föroyum var ein fríhavn eins og tað er tað í öðrum londum. Ætlandi var tað best, um henda fríhavn var á Skálafjörðinum, tá har eru stór ónýtt ökir fram við strondini, har slík frígoymsla kundi verið bygd, og har tað vildi verið gjörligt at bygt kai uttan stórvegis útreiðslu, við tað at tað er hládýpi líka í klettin.

Men hetta er eitt mál, ið má fyrireikast og verða ikki sitandir hjá lögtinginum í hesi setuni at gera hesa fyrireiking. Men minnilutin mælir til, at hesar fyrireikingar verða latnar landsstýrinum upp í hendi, og so skjótt sum landsstýrið er liðugt við hesar fyrireikingar at leggja málið aftur fyri tingið.

Minnilutin (Poul Petersen, Erlendur Patursson og Hemming Jespersen) tekur undir við uppskoti fólkaflokksins.

Uppskot

frá

minnilutanum (J. Fr. Øregaard):

Landsstýrið verður biðið um at kanna mögulcikarnar fyri at byggja frígoymslu á Skálafjörðinum og leggja úrslitið av hesum kanningum aftur fyri tingið, so skjótt hesar kanningar eru liðnar.

2. viðgerð 12. apríl 1962.

Lógaruppskotið fall 10– 0.

Uppskotið frá minnilutanum (Øregaard) fall 6 - 0.

64. Stuðling av vinnuligum framburði

Ár 1962, 13. mars legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um stuðling av vinnuligum framburði.

§ 1.

At stuðla vinnuligum framburði serstakliga í smærri bygdum, sum í vinnuligum lívi standa aftanfyri aðrar ella verið hava fyri vinnuligum bakkasti, er landsstýrinum heimilt eftir reglunum í hesi lóg at vera til handa við tekniskum og vinnuligum ráðum til gerð av byggiætlantum og peningaileggingum til fremjingar av tílíkum vinnuligum ætlanum.

§ 2.

Um so er, at landsstýrið heldur eina byggiætlan vera teknisk og vinnuliga forsvarliga, kann tað eftir tilráðing frá figgjarnevndini veita stuðul eftir reglunum í §§ 3 og 4.

§ 3.

Fyri lán til vinnuligar byggingar av nýggjum ella til viðkingar ella til keyp og innleggingar av maskinum í eigindóm, sum virki eigur, kunna veðhald gevast av landsstýrinum landskassans vegna.

Veðhald má ikki fara upptil

lagtingslov om ophjælpning af produktiv udvikling.

§ 1.

Til ophjælpning af produktive fremskridt særlig i de mindre bygder, som i økonomisk henseende staar tilbage for andre bygder eller har været ude for økonomiske vanskeligheder, bemyndiges landsstyret til efter reglerne i denne lov at yde teknisk og økonomisk bistand ved udarbejdelse af projekter og ved finansieringen af saadanne projekters gennemførelse.

§ 2.

Saafremt landsstyret maatte finde et projekt teknisk og økonomisk forsvarligt, kan landsstyret efter indstilling fra finansudvalget yde støtte efter reglerne i §§ 3 og 4.

§ 3.

For laan til opførelse af nye anlæg, til udvidelse af bestaaende anlæg eller til anskaffelse af og installation af maskiner i en virksomheden tilhørende ejendom, kan der af landsstyret ydes garanti paa landskassens vegne.

Garantien maa ikke overstige

90 % av kostnaðinum av nevndu ileggingum.

Veðhaldið skal minkast við eins stórum avdráttum yvir hægst 15 ár.

§ 4.

Undir serligum viðurskiftum kunnu lán gevast í staðin fyri veðhald innanfyri somu mark sum fyrisett í § 3. Lán vera serstakliga givin til byggingar av vinnuligum fyritökum av tyggjum og eisini til smærri vinnuligar fyritökur sum smærri frystihús, hösnagarðar o.t.

Lánini verða givin uppá 15 ár og eru avdráttar- og rentufri í 2 ár. Rentan verður 4½ p.a.

Lán og veðhald verða givin eftir samráð við figgjarnevndina í hvörjum einstökum föri.

Fyri lán og veðhald landskassans verður tryggleiki givin sum pant í húsum og maskinum. Í serstökum föru kann eisini annar tryggleiki krevjast.

§ 5.

So leingi landskassin hevur lán ella veðhald standandi í einum virki, má tað geva seg undir efirlit, sum landsstýrið krevur viðvikjandi rakstri og roknskapi.

Avhendir ella leigar lánhavari virki, sum lán ella veðhald er í, ella flytir hann virki, tekur landsstýrið eftir samráð við tiggjarnevndina avgerð, um lánið kann vera standandi í ti.

90 % af omkostningerne af de nævnte investeringer.

Garantien skal nedbringes med lige store beløb over højst 15 aar.

§ 4.

Under særlige omstændigheder kan der i stedet for garanti ydes laan af landskassen indenfor samme grænser som fastsat i § 3. Laan vil særlig blive ydet til ny anlæg af produktive foretagender og tillige til mindre produktive anlæg saasom mindre fryselhuse, hönsrier o. a.

Laanene ydes paa højst 15 aar og er afdrags- og rentefri i 2 aar. Renten fastsættes til 4½ % p.a.

Laan samt garanti for laan ydes efter samraad med lagtingets finansudvalg i hvert enkelt tilfælde.

For laan og garanti for laan skal der stilles sikkerhed i form af pant i bygninger og maskiner. I særlige tilfælde kan yderligere sikkerheds stillelse kræves.

§ 5.

Saa længe landskassen har laan eller garanti for laan indestaaende i en virksomhed, er denne pligtig at underkaste sig teknisk og regnskabsmæssigt tilsyn som landsstyret maatte forlange.

Afhænder eller udlejer ejeren den virksomhed, til hvilken laan eller garanti er ydet, eller flytter han virksomheden, afgör landsstyret efter samraad med finansudvalget, om laanet skal forblive indestaaende i virksomheden.

§ 6.

Hvussu mikið í lánum ella veðhaldi verða at geva eftir hesi lóg verður fyrisett á árligum figgjarlógum.

§ 7.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 6.

Hvor meget der skal ydes i laan eller garanti i henhold til denne lov fastsættes paa de aarlige finans love.

§ 7.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í lögtingsmáli nr. 31/1958 (vetrarting) lögdu vit einsljóðandi lógaruppskot inn á ting (smbr. tingtíðindi 1958 bls. 183), men fekk ikki undirtöku tá. Aftur í 1959 lögdu vit málið inn aftur á ting (smbr. tingmál nr. 63/1959), men tó samtykti meirilutin lógaruppskot um veðhald av lánum til smærri iðnaðvirkir (lögtingslóg nr. 21 frá 25. apríl 1960) og lógaruppskot um ymsar broytingar í jarðarlógini (lögtingslóg nr. 24 frá 25. apríl 1960).

Tílík lán eru ikki nóg mikið lagalig, tey eru ov stuttfrestað og rentan ov hög, og í mongum förum er kravið til eginpening ovmikið stórt 30 %.

Fyriliggjandi uppskot til lögtingslóg um stuðling av vinnuligum framburði varð ætlað at leggja slöðið, soleiðis at virkini seinni kundu leita sær ílegging í banka ella sum í einstökum förum higartil eftir donsku lógini um egnsudvikling.

1. viðgerð 22. mars og 9. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av fólkaflokkinum við uppskoti til lögtingslóg.

Eftir uppskotinum kunnu lán ella veðhald fyri lán gevast av landsstýrinum landskassans vegna eftir tilráðing frá figgjarnevndini innanfyri 90 % av kostnaðinum av íleggingum til vinnuligar byggingar av nýggjum ella til viðkingar ella til keyp og innleggingar av maskinum í eigindóm, sum virki eigur.

Við 1. viðgerð av málinum varð tað beint í lógarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg sundur.

Minnilutin (Hanus við Högadulsá, ið mötti fyri Sigurð Joensen, og Poul Petersen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá fólkaflokkinum.

Meirilutin (Sámal Petersen, Trygve Samuelsen og J. Fr. Øregaard) heldur, at málið eigur at kannast nærri í sambund við tiltök, ið eru í umbúna viðvíkjandi fremjingum av vinnuligum ætlanum. Sum kunn-

ugt samtykti lögtingið í tingsetuni 1960/61 uppskot til lögtingslög um at seta nevnd til kannan av öktum virkismöguleikum, og varð henda lögtingslög sett í gildi tann 1. juni 1961.

Meirilutin mælir tí lögtinginum at samtykkja fylgjandi

Uppskot

Málið verður latið tí nevnd upp í hendur, sum sambart lögtingslög nr. 41 frá 1. juni 1961 er sett til kannan av öktum mögguleikum.

2. viðgerð 13. april 1962.

Lógaruppskotið fall 13—0.
Uppskot frá meirilutanum samtykt 16—0.

---

65. Veð í veiðu

Ár 1962, 13. mars legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Forslag
til
Lov for Færöerne om pantsætning af fangst.

§ 1.

Enhver, der driver fiskeri, herunder hvalfangst, skal kunne give underpant i fangsten til sikkerhed for betaling af gæld, der er stiftet til udrustning og drift af fisker- og hvalfangerfartöjer.

2. §

Det ifölge vedkommende pantebrev skyldige beløb kan inddrives ved udpantning og forfalder til betaling senest den 31. december i det aar, i hvilket pantebrevet er oprettet. Panteretten bortfalder, saafremt begæring om udpantning ikke er indgivet til sorinskriveren (dommeren) inden 1. april det fölgende aar.

§ 3.

Varer, leveret til udrustning mod pant i fangsten i overensstemmelse med denne lov, kan ikke for andre tilgodehavender göres til genstand for arrest, udlæg eller anden retsforfölgning.

§ 4.

Efter udlöbet i april maaned i hvert af aarene udsletter sorenskriveren de i henhold til denne lov i det foregaaende aar tinglæste pantebreve, uden at fremsættelse af begæring i saa henseende er fornöden.

§ 5.

Tinglæsning, saavel som aflæsning og udslettelse, der sker i medför af denne lov, kan finde sted uden gebyr til statskassen.

§ 6.

Denne lov, der kun gælder for Færöerne, træder i kraft straks.

§ 7.

Fra denne lovs ikrafttræden, ophæves lov nr. 189 7. juni 1958 for Færöerne om pantsætning af fangst i aarene 1958/62.

Viðmerkingar:

Við tað at galdandi lóg um veð í veiðn nr. 189 frá 7. juni 1958 fer úr gildi í árinum, loyvir landsstýrið sær at seta fram uppskot, til endurnýggingar.

1. viðgerð 20. og 2. viðgerð 28. mars 1962.
Uppskotið samtykt 27--0.

66. Vegurin Fútaklett-Oyragjógv

Ár 1962, 13. mars legði Vilhelm Nielsen lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Landsstýrið fær álagt at taka upp lánið eftir lögtingslóg nr. 39 frá 1. juni 1961 um lán og ábyrgd fyri láni til vegin Fútaklett-Oyragjógv og atlögubrúgv, so arbeiðið kann byrja nú.

Viðmerkingar:

Kommunustýrini í Miðvági, Sundavági, Sörvági og Bö hava veut sær til tingið í skrivi frá 8. í hesum og biðið okkum borið tað fram.

Vísandi til skrivið sum fylgir við sum skjal loyva vit okkum at leggja inn uppskot til samtyktar til tingsins vælvild.
+ 1 skriv

Á tingi 13. mars 1962.

Sandavágs sóknar kommuna.

Sandavágur, tann 8. mars 1962.

Föroya Lögting, Tórshavn.

Tann 20. december 1960 hevur Sandavágs kommuna skrivað til landsverkfröðingsskrivstovuna soleiðis:

«Á fíggjarlóg lögtingsins fyri árið 1960/61 er játtaður studningur til vegin Fútaklett-Oyragjógv, og hevur kommunustýrið tess vegna samtykt at heita á landsverkfröðingsskrivstovuna um at fáa vegin útstungnan og projekteraðan nú beinanvegin, so arbeiðið kann byrja til vár.»

Við lögtingslóg nr 39 frá 1. juni 1961 hevur lögtingið heimilað landsstýrinum at læna og landskassans vegna veðhalda fyri neyðugum láni til gerð av vegnum og atlögubrúgv.

Í januar mánaði í ár hava umboð fyri allar kommununurnar í Vágum havt samráðing við lögmannin og landsverkfröðingin um at fáa arbeiðið byrjað, og tá eitki er hent enn, vilja vit við hesum heita á Föroya Lögting um at áleggja landsstýrinum at reisa lánið sum tilskilað í omanfyri nevndu lóg, so helta fyri alla oynna so átroðkandi mál kann byrjast nú.

1. viðgerð 20. mars og 9. apríl legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Alt

8. mars 1962 hava Miðvágs, Sandavágs, Sörvágs og Biggjar kommunur vent sær til tingið við bön um, at vegurin Fútakletl-Oyragjógv verður gjördur. Tingmenn fyri Vágoy hava borið málið fram á ting. Teir föra fram, at teir í januar í ár hava havt samráðingar við verkfröðingin og landsstýrið um hesa vegagerð, men siga teir í nevnda skrivi, tá enn onki arbeið er byrjað, verður lögtingið biðið um at heita á landsstýrið um at veisa lánið, sum lógarheimild er til at taka upp til nevndu vegagerð.

Longu í 1945 var peningur játtaður til hesa vegagerð og til brúgv við Oyragjógv, men var hann ongantið nýttur og seinni mátti Sandavágs kommuna til, at tann játtaði peningur ístaðin var nýttur til havnagerð í Miðvági.

1960 og 1961 játtaði lögtingið 200.000 kr. til vegin, og í tingsetuni 1961 samtykti lögtingið lög um at loyva landsstýrinum at taka upp lán til hesa vegagerð og at veðhalda fyri nevnda láni.

Verkfröðingsskrivstovan sigur seg ikki hava havt fólk til at projektera hesi arbeiðir, men Sandavágs kommuna hevur fingið at vita frá verkfröðingi og landsstýri, at tað stendur teimum fritt fyri sjálvir at seta verkfröðing til at gera hetta arbeiðið, og at kostnaðurin verður goldin av játtanini, sum givin er, utlan at hetta verður at hækka um kommununar part av útreiðslunum. Alt skuldi so statt verið í besta lagi fyri at arbeiðið uppá Oyragjáarvegin og allögubryggja varð byrjað, um tað eydnaðist at finna mann ella felag, sum var fört fyri at átaka sær hetta arbeiðið. 200.000 kr. eru lökar sambart tingsamtykt, og tað, ið írestar, hevur landsstýrið lógarheimild at upptaka sum lán. Nevndin heldur tí, at í staðin fyri at áleggja landsstýrinum at upptaka lán, vil tað gavna málinum meira at biðja landsstýrið hjálpa sóknarstýrinum við at finna mann ella felag, sum er fört fyri at gera projekteringsarbeiðið og helst eisini standa fyri vega- og brúgvagerðini, og setur fram fylgjandi

Uppskot

Landsstýrið verður biðið um at vera Sandavágs kommunu til hjálpar við at finna mann ella firma, sum kann átaka sær at projektera vegin frá Fútakletli til Oyragjógv og brúgv við Oyragjógv og mögulíga standa fyri hesi vega- og brúgvagerð.

2. viðgerð 11. apríl 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi minnilutaálit frá E. Patursson o. fl.

Tá málið var til viðgerðar á fíggjarnevndarfundi, var øll nevndin samd um at úttala, at málið ikki var framt eftir lóg nr. 39 frá 1. juni 1961 og eftir samtykt tingsins 12. mai 1961 og at krevja av landsstýrinum at málið varð framt beinan vegin.

Álit og uppskot er ikki samsvarandi hesi samtykt og eiga vit ongan lut í teimum.

Vit mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá tingmonnunum fyri Vágarnar.

Uppskot frá meiralutanum í nevndini var sett undir atkvøðn við navnakall:

Ja atkvøddu: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, M. Johannesen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, Johan Poulsen, J. Simonsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, Fr. Hansen, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, J. Högnesen, Poul J. Djurhuus, E. Patursson, H. v. Högadalsá, H. Jespersen, Haldor Hansen og J. F. Øregaard.

Burturstaddir: A. Djurhuus og Kj. Mohr.

Uppskotið samtykt 28—0.

Uppskotið til samtyktar var sett undir atkvøðu við navnakall:

Ja atkvøddu: J. Lindenskov, P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Patursson, H. v. Högadalsá, H. Jespersen og H. Hansen.

Atkvøddu ikki: H. Petersen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, Johan Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, J. F. Øregaard.

Burturstaddir: A. Djurhuus, J. P. Davidsen, P. J. Olsen og Kj. Mohr.

Uppskotið fall 12—0.

67. Samferðlsuvegur Hvalba-Sandvík

Ár 1962, 15. mars legði Niels H. Jacobsen lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður Landsstýrinum um landsverkfræðingsskrivstovuna at fáa samferðsluvegin Hvalba-Sandvík projektreðan lidnan og skipa fyri, at maskintól verða tikin í brúk til hesa vegagerð og at kommunanna partur av útreiðslunum av hesi vegagerð verður settur sambart reglunum í lögtingslóg um kommunanna part í útreiðslum av landsvegabygging, samtykt á tingi 23. apríl 1959.

Viðmerkingar:

Nú nútímaus tól eru tikin í brúk til vegagerð, verður arbeiðið bæði skjótari gjört og vegurin betur.

Men víða hvar um landið liggja bygdir, ið ikki hava fingið vegasamband til grannabygdina, og mugu fólkini í hesum bygdum tí gera sum ættarfólk teirra hava gjört í øldir, tá tey høvdu örindi til næstu bygd, ið ofta liggur í sonn kommunu, tey mugu fara til gongu.

Ein av teim bygdum, ið er fyri hesi vanlagnu, er Sandvík. Veittur hevur verið studningur til ein stubba av samferðsluveg Hvalba-Sandvík, men tað svarar ikki til nútíðina at halda fram við hesi vegagerð í tí gamla sporinum. Hon kemur bara at kosta kommununi alt ov mógv og tekur hesin arbeiðsháttur ov langa tíð, samstundis sum hann ikki gevur so góðan veg sum maskintólini gera hann.

Fyri at fáa vend í her havi eg loyvt mær at seta fram omanfyristandandi uppskot til samtyktar.

1. viðgerð 20. mars og 28. apríl legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Allt

15. marts 1962 varð málið lagt fram á ting og varð við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla til at samtykkja uppskotið.

Eisini heldur nevndin, at tað er rætt at projektera allar teir samferðsluvegir, sum enn ikki eru projekteraðir, og at hesir vegir, annaðhvört teir eru byrjaðir at gera ella ikki, koma undir ta studningsskipan, sum samtykt var 23. apríl 1959 og settur fram fylgjandi

Uppskot

1) Uppskotið verður at samtykkja.
2) Allir samferðsluvegir, annaðhvört teir eru byrjaðir at gera ella ikki, verða projekteraðir og koma undir studningsskipan av 23. apríl 1959.

2. viðgerð 30. apríl og 3. viðgerð 7. mai 1962.
Uppskotið til samtyktar samtykt 18—0.
Uppskotið frá nevndini st. 2) samtykt 20—0.

---

68. Einarætt til innfluttning av eplum

Ár 1962, 16. mars legði H. Djurhuus löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

löglingslóg um einarætt til innfluttning av eplum.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at geva Föroya Búnaðarfelag einarætt at flyta inn eplir tilskilaða tíð av árinum sambæri reglugerð setta av landsstýrinum.

löglingslov om eneret til indførsel af kartofler.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at give Föroya Búnaðarfelag (Den færøske landboforening) eneret til indførsel af kartofler over en begrænset tid af året i henhold til regulativ fastsat af landsstyret.

§ 2.

Henda lögtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

22. mars 1955 legði táverandi landsstýrismaður Hákun Djurhuus, ið hevði landbúnaðarmál í hondum, uppskot fyri tingið, ið skuldi tryggja eplaframleiðarum at sleppa av við úrtöku sína.

Víst varð á í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at ein farandi göta var hon at geva Föroya Búnaðarfelag einarætt at flyta inn eplir tilskilaða tíð av árinum um heystið, frá tí upptakingartíð var og til föroysku eplini vóru seld.

Henda skipan vildi fört við sær, at teir, ið vetta eplir, longu um várið hövdu vissu fyri, at teir sluppu av við gröðini longu um heystið, tá föroysk eplir altíð eru góð.

Tíverri tók tá bara Fólkaflokkurin á tingi undir við hesum uppskoti, men reisir flokkurin her aftur málið í teirri vón, at fleiri hesu ferð taka undir, so ein meiraluti á Föroya lögtingi veitir föroyskum búnaðarmonnum tann stuðul, ið hetta lógaruppskot ber í sær.

1. viðgerð 20. mars og 21. april legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av fólkaflokkinum við uppskoti til lögtingslóg.

Við 1. viðgerð av málinum varð tað beint í búnaðarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg sundur í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Haldor A. Hansen, Vilhelm Nielsen og Poul J. Djurhuus) mælir tinginum til at samtykkja lógaruppskotið óbroytt.

Minnilutin (J. P. Davidsen) setur uppskot fram um, at landið fær einarætt til innflutning av eplum.

Minnilutin (Hans Iversen) kann ikki vera við til at geva einarætt til nakað ávist felag ella nakran stovn til innflytan av eplum, men setur annars onki uppskot fram.

Uppskot

frá minnilutanum (J. P. Davidsen):

Landið fær einarætt til innflutning av eplum, sum verða viðari seld.

2. viðgerð 26. april 1962.

Uppskot frá minnilutanum J. P. Davidsen fall 11–0.

3. viðgerð 30. april 1962.

Lógaruppskotið var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, L. Joensen, A. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, P. M. Dam, P. J. Olsen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssson, H. v. Högadalsá, H. Hansen og J. F. Øregaard.

Atkvöddu nei: J. H. Danbjörg, J. P. Davidsen og H. Iversen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, Tr. Samuelsen, Johan Poulsen og D. Nolsöe.

Burturstaddir: K. Djurhuus og H. Jespersen.

Uppskotið samtykt 20 3.

---

69. Mjólkastudningur

Ár 1962, 16. mars legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um mjólkastudnað.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at nýta upp í 250.000,00 kr. í mjólkastudnaði árliga fey fyrstu fýra árini.

§ 2.

Landsstýrið ger av í samráð við Föroya Búnaðarfelag, ið umboðar ognarmenn, fraðarmenn og böndir, hvussu hesin peningur skal

Lagtingslov om tilskud til mælk.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at anvende op til 250.000,00 kr. årlig som tilskud til mælk i de følgende 4 aar.

§ 2.

Landsstyret træffer bestemmelse om, i samraad med Föroya Búnaðarfelag (den færöske landboforening), der repræsenteres af

verða nýttur, so hann verður mjólkaframleiðsluni til största bata.

§ 3.

Eitt ár áðrenn lógin fer úr gildi skal landsstýrið leggja hana aftur fyri tingið við uppskoti.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

selvejere, trömænd og bönder, hvorledes denne bevilling anvendes til største gavn for mælkeproduktionen.

§ 3.

Et aar för denne lov træder ud af kraft skal den af landsstyret igen forelægges for lagtinges tilligemed forslag.

§ 4.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fyri at tryggja föroyska mjólkaframleiðslu í komandi árum heldur fólkaflokkurin að vera neyðugt, at föroyskir búnaðarmenn vita nakað fram í tíðina, hvönn mjólkastuðnað teir kunnu vænta sær í komandi árum, so teir út frá hesari vitu betri kunnu taka avgerð um, hvussu teir skulu teggja teirra framleiðslu til rættis. Lógaruppskot samsvarandi hesum sjónarmiði verður hervið lagt fyri tingið.

1. viðgerð 20. mars og 28. april legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av fólkaflokkinum við uppskoti til lögtingslóg.

Við 1. viðgerð av málinum varð tað beint í búnaðarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg sundur í ein meiralutu og ein minnilutu.

Meirilutin (Haldor A. Hansen, J. P. Davidsen og Hans Iversen) förir fram, at tá tað á figgjarlógini er samtykt mjólkastuðningur uppá 150.000 kr., kann hann ikki taka undir við uppskotinum.

Minnilutin (Vilhelm Nielsen og Poul J. Djurhuus) mælir tinginum til at samtykkja lógaruppskotið.

2. viðgerð 30. april 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Neils H. Jacobsen o. fl.:

Álagt verður landsstýrinum at gera nýggja reglugerð mjólkastudninginum viðvíkjandi, so mjólkaframleiðarar í smábygdum, ið ikki kunnu avskipa teirra framleiðslu til meiari ella mjólkasölubúð kunnu fáa studning fyri ta mjólk, ið verður seld í sjálvari bygdini.

Lógaruppskotið fall 13—0.
Broytingaruppskotið frá N. Holm Jacobsen o. fl. samtykt 21-0.

---

70. Broyting í borg. straffilóg

Ár 1962, 16. mars legði varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot

Eftir heimild í § 5 í lóg nr. 163 frá 31. mai 1961 «om ændringer i borgerlig straffelov (ungdomsfængsel, betingede domme m. v.) verður henda lóg at seta í gildi í Föroyum við kgl. fyriskipan við hesum broytingum:

§ 4 verður orðað soleiðis:

«Denne anordning træder i kraft straks».

§ 5 fer út.

Viðmerkingar:

Landsstýrið loyvir sær at leggja ríkislóg nr. 163 frá 31. mai 1961 fyri tingið við tilmæli, at tær í henni innihildnu broytingar fáa gildi í Föroyum.

Bæði fútin og soriuskrivarin hava mælt til, at lógin verður sett í gildi í Föroyum m. a. tí í henni eru nýggjar reglur av týdningi.

1. viðgerð 20. mars og 26. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Alt

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uppskot um at sett verður í gildi í Föroyum við kgl. fyriskipan lóg nr. 163 frá 31. mai 1961 «om ændringer i borgerlig straffelov» (ungdomsfængsel, betingede dømme m.v.).

Málið er beint í lógarnevndina, ið er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teimum av landsstýrinum nevndu broytingum viðvíkjandi §§ 4 og 5.

2. viðgerð 27. mars 1962.

Uppskot landsstýrisins samtykt 25—0.

---

71. Uppskot til samtyktar at stuðla föroyskum arbeiði.

Ár 1962, 16. mars legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uttan at lögtingið hevði hövi til at siga sína hugsan, varð farið undir bygging av húsum úti við landssjúkahúsið, har ein stórur parlur av tilfarinum kom tilgjördur til Föroyar.

Nú stendur stórbygging fyri í samband við landssjúkahúsið og eigur lögtingið tí at gera vart við seg, so landsstýrið ikki aftur sleppur at lata arbeiðið gera utanoyggja, sum eins vel kann verða gjört heima hjá okkum sjálvum og harvið geva mongum honum arbeiði.

Tað fer ikki at bera til, at hitt almenna stendur sum byggiharri og so ikki letur föroyska vinnu og framleiðslu, handverkarar og arbeiðarar fáa alt tað arbeiðið, ið stendst av slíkari bygging, men flytir inn tilgjört tilfar.

Fyri at lögtingið longu nú kann siga sína hugsan hesum viðvíkjandi og fyri alt tað vísa á, at tað í öllum förum, har arbeiði verður gjört fyri almennan pening ynskir, at föroysk arbeiðskraft verður nýtt, setur fólkaflokkurin fram soljóðandi

Uppskot til samtyktar.

Landsstýrinum verður álagt at ansa eftir, at föroysk vinna og framleiðsla, handverkarar og arbeiðarar, fáa alt tað arbeiðið, ið stendst av almennari bygging, sum föroysk vinna, framleiðsla og arbeiðskrafti eru för fyri at gera.

1. viðgerð 23. mars og 2. viðgerð 26. mars 1962.

Uppskotið samtykt 20--0.

---

72. Landskassalán til útjavning av kurstpi av lánnum til fiskiskip

Ár 1962, 20. mars legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um broyting í lögtingslóg um landskassalán til havnagerð, vegagerð og endurnýgging av fiskiskipaflotanum.

§ 1.

Í § 1 í lögtingslóg nr. 26, 12. mai 1959 um landskassalán til havnagerð, vegagerð og endurnýgging av fiskiskipaflotanum verður sett sum nýtt stk. 2:

Eisini er landsstýrinum heimilað at veita lán svarandi til ein part ella alt kurstapið av lánum,

lagtingslov om ændring i lagtingslov om laan til landskassen til havnebygning, vejbygning og fiskerflaadens fornyelse.

§ 1.

I § 1 i lagtingslov nr. 26 af 12. maj 1959 om laan til landskassen til havnebygning, vejbygning og fiskerflaadens fornyelse tilføjes som nyt stk. 2:

Landsstyret er endvidere bemyndiget til at yde laan svarende til en del eller hele kurstab paa

ið verða veitt móti panti í fiskiskipum. Fyri lánini verður pantitrygd kravd innanfyri 100 % av lánvirði skipsins.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

lån, der ydes mod pant i fiskefartöjer. For lånene skal der stil les pantesikkerhed indenfor 100% af skibets låneværdi.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í lögtingssetuni 1961, smbr. lögtingsmál nr. 10: Eykalán og eyka studningur til nýggj fiskiför, viðgjördi lögtingið (figgjarnevndin), aftaná diskontohækking nationalbankans 23. mai 1961, spurningin um kurstapið á lánsbrövum hjá realkreditstovninum og Kongeriget Danmarks Fiskerihank.

Ein meiraluti í figgjarnevndini ásannaði, at nevndin eftir lögtingslög nr. 17, 25. apríl 1960, um skipabygging saman við landsstýrinum hevði heimild at veðhalda fyri lánum, t.d. frá bankum, svarandi til kurstapið alt ella ein part av tí.

Bankarnir her vóru principielt fyri at veita hesi lán við landskassa veðhald avmarkað til 10.000 kr. fyri hvört skipið og í fyrsta umfari bert til teir, ið hövdu gjört sáttmála og ikki tá fingið skipið prioriterað, um teir ikki sjálvir kundu útvega peningin. Viðvíkjandi komandi byggisáttmálum tóku bankarnir sær rætt til at taka stöðu, hvört málið sær.

Nevndarmeiriluti var samdur við landsstýrið um at veita veðhald fyri lánum eftir nevndu lög at javna munin millum kursin, ið var áðrenn diskontohækkingina og dagskursin, tó hægst 5 % av byggipeninginum. Heitt var tó á landsstýrið um at samráðast við bankarnar um at longja lánatíðina helst til 10 ár, fördi hetta ikki á mál, var meiriluti samdur um, at landsstýrið gav veðhald.

Tilsagnir um veðhald eru givnar, men fyri stytri áramál.

Síðani hevur figgjarnevndin tikið ta stöðu fyri sitt viðkomandi, at kurslánini kunnu svara til alt kurstapið at afturrinda í 10 ár. Alt kurstapið er um 5,5 til 6 % av byggipeninginum.

Nú tað ikki altíð er möguligt at fáa banklán so stór svarandi til alt kurstapið, og at lánatíðin verður 10 ár, er spurningurin at royna aðrar möguleikar. Ein möguleiki er, at landskassin beinleiðis veitir hesi lán. Hetta letur seg gera við uppískoyti til lögtingslög nr. 26, 12. mai 1959 um

landskassalán til havnagerð, vegagerð og endurnýgging av fiskiskipaflotanum, soleiðis at ein partur av feimum 4 milj. kr. í láni hvört figgjarárið kann veitast sum 4. prioritetslán til útjavnan av kurstapinum á láninum frá realkreditstovninum og öðrum lángevartum, eitt nú fiskaríbankanum.

1. viðgerð 22. mars og 29. mars legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið legði máljð fyri tingið 20. mars í ár og varð tað við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 5. april 1962.

Lógaruppskotið samtykt 26—0.

---

73. Broytingar í lóg um rættarstöðu hjá börnum

Ár 1962, 16. mars legði varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot

Eftir § 23 í lóg nr. 200 frá 18. maj 1960 «om børns retsstilling» verður henda lóg at sela í gildi í Föroyum við kgl. fyriskipan við fylgjandi broytingum:

1) «Indtil der paa Færöerne oprettes mödrehjælpsinstitutioner eller dertil svarende institutioner, træder politiet (landfogeden og sysselmændene) i deres sted.»

§ 22, 1. punktum verður orðað soleiðis: «Anordningen træder i kraft .....»

§ 23 fer út.

2) Samstundis sum lógin verður sett í gildi við kgl. fyriskipan verður kunngerð nr. 7 frá 14. januar 1961, sum givin er eftir heimild í § 21, stk. 1 í lógini, eisini sett í gildi.

Viðmerkingar:

Lóg frá 18. mai 1960 kemur í staðin fyri lógina frá 7. mai 1937. Hövuðsavvikini í tí nýggju lógini eru m.a. at ongin munur er á faðirskapi og bidragsskyldu, og eru fleiri lagdir undir faðirskap, kemur hann undir faðirskapin, tá ið tað er meira sum talar fyri, at hann er faðir enn onkur av hinum. I tíðkum föri vildi tað oftani eftir fyrr galdandi lóg verið so, at allir ella fleiri komu undir bidragsskyldu. Eisini er «pater-est» reglan linkað nakað.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri tingið við tilmæli.

1. viðgerð 20. og 26. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uppskot um at sett verður í gildi í Föroyum lóg nr. 200 frá 18. mai 1960 «om börns rettstilling» við kgl. fyriskipan og kunngerð nr. 7 frá 14. januar 1961.

Málið er beint í lógarnevndina, ið er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið við teinum av landsstýrinum nevndu broytingum.

2. viðgerð 27. mars 1962.

Landsstýrisins uppskot samtykt 27—0.

74. Broyting í rættarlógini (faðirskapssakir)

Ár 1962, 16. mars legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot

Lóg nr. 201 frá 18. mai 1960 (ændringer i retsplejeloven) verður sett í gildi í Föroyum.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi lóg um broyting í rettargangslógini er ein fylgja av lógini nr. 200 frá 18. mai 1960 (om börns retsstilling), og tað er tí neyðugt, at henda lógin fær gildi í Föroyum samstundis sum tann fyrr nevnda.

Ein tílík broyting má tó gerast sum broyting í föroyska rettargangslógini nr. 95 frá 16. mars 1960. Í hesum föri so avgjört, við tað at lógin sigur í sini § 2, at hon er ikki galdandi í Föroyum.

Í sinum ummæli skrivar sorinskrivarin m.a.:

> «Loven indförer ogsaa forskellige nye procesregler, der i og for sig ikke er nödvendiggjort af loven om börns retstilling. Blandt disse regler er der grund til at nævne den nye § 456 c, der lader barnemoderens bopæl være afgörende for værnetinget, medens det efter den ældre — og her endnu gældende regel — er sagsögte (den udlagte barnefaders) bopæl, der er afgörende. Det maa forudses, at den nuværende forskel paa de færöske og danske materielle og processuelle regler om börns retsstilling vil kunne före til adskillige indviklede retstilfælde. Man tænker sig blot det særdeles praktiske tilfælde, at en færösk kvinde under ophold i Danmark besvangres af en dér bosat mand, og derpaa rejser tilbage til Færöerne. Efter de her gældende regler skal sagen anlægges ved den ret, hvor den udlagte barnefader bor, altsaa en domstol i den övrige del af riget, men efter de regler, der gælder dér, er det Færöernes ret, der er kompetent. Denne kompetencestrid kan have stor betydning for sagens udfald. Hvis sagen behandles paa Færöerne, kan den, hvis forholdet har været af lösere karakter, före til, at sagsögte anses som bidragspligtig, medens han under de samme omstændigheder kan blive anset som fader, hvis sagen behandles i Danmark.
> Denne uheldige retstilstand bör bringes til ophör derved, at saavel de berombandlede retsplejelovændringer som loven om börns retsstilling sættes i kraft paa Færöerne.

Der burde snarest udarbejdes et ændringsforslag til den færöske retsplejelov, saaledes at alle de her omtalte ændringer i den danske retsplejelov bliver sat i kraft paa Færöerne i det foran foreslaaede omfang.»

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri tingið við tilmæli.

1. viðgerð 20. mars og 26. mars legði lógarnevndin fram soljóðandi

Átt

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uppskot um, at sett verður í gildi í Föroyum lög nr. 201 frá 18. mai 1960 om ændringer i retsplejeloven. Henda lög er ein fylgja av lógini nr. 200 frá 18. mai 1960 om börns retsstilling, sí lögtingsmál nr. 73/1961.

Málið er beint í lógarnevndina, ið er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 27. mars 1962.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt 26—0.

---

75. Broyting í rættargangslógini

Ár 1962, 16. mars legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot

Lög nr. 161 frá 31. mai 1961 «om ændringer i lov om retteus pleje» verður sett í gildi í Föroyum við fylgjandi broytingum:

1) löbenummrene 17, 36, 44 og 15 medtages ikke.
2) ændringerne under löbe nr. 20 indföres forsaavidt angaar medtagelse af den i löbe nummeret som punkt 2) anförte tekst, medens der i den nuværende færöske retsplejelov § 721, stk. 1, iövrigt foretages fölgende ændringer:
«(2)» ændres «(3)»

afsnittet aa.oghh. udgaar, og i stedet indsættes:
«aa. lov for Færöerne nr. 73 om motorköretöjer m.m. af 19. marts 1930 § 30, med mindre tiltalen angaar forhold, der kan medföre frakendelse af retten til at være eller blive förer af motorköretöj, jfr. lovens § 31, «cc». ændres til «bb.» og

at der under löbe nr. 30 foretages fölgende ændringer: ordene «sömandslovens § 73» udgaar og erstattes med: «sömandslov nr. 181 af 1. maj 1923 § 78, stk. 1.»

Viðmerkingar:

Skilað verður til, at broytingin undir «aa» hevur tað við sær, at tey har umröddu mál um miss av rettinum at föra motorakfar eftir reglunum sum galdandi eru í hinum partinum av rikinum fara fram sum statsadvokatmál, meðan tey eftir galdandi regln her fara fram sum politimál, (smbr. § 30 í lí föroysku motorlógini), og at sjómanslógin frá 1. mai 1923 framvegis er galdandi her.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri tingið við tilmæli.

1. viðgerð 20. mars og málið beint til lógarnevndina.

76. Hækking av viðbótini til útróðrarfisk

Ár 1962, 19. mars legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi:

Tann lönarvökstur, ið farin er fram í okkara samfelag, hevur ikki munandi rokkið til teir menn, ið hava heimaútróður til vinnu.

Teir fáa ongan minstulön og frítiðarviðbót, og tá veiðutíðin mangan verður skerd vegna ring veðurlíkindi, er úrtöka teirra so lítil, at royst verður at koma sær í aðra vinnu, um nakar möguleiki er til tess.

Hetta förir við sær, at heimaútróðurin minkar í hvörjum, og tá hugsað verður um, hvussu nógv tað beinleiðis framleiðsluskapandi arbeiðið er gingið til afturs í Föroyum tey seinastu árini, sigur afturgongdin týðiliga frá, at vandi er á ferð.

Fyri at stuðla heimaútróðurinum og tryggja tí parti av okkara vinnufólki, ið hevur sitt útkomi, alt ella partvís, av heimaútróðri beinleiðis og óbeinleiðis, lut í ti lönarvökstri, ið er ein veruleiki í dag, setur fólkaflokkurin fram uppskot um at hækka viðbótina munandi fyri feskfisk, ið verður avreiddur og tilvirkaður her á landi.

Mælt verður til, at viðbótin verður sett upp í 15 oyrur fyri kg fyri deksför og opnar bátar fyri allan feskfisk, ið verður avreiddur og arbeiddur á landi.

Higartil er í ár vorðið goldið til heimaútróðurin uno 400.000 kr., so henda viðbót skuldi ikki törva nakra nýggja inntökulög, tí ætlandi er játtanin á fíggjarlógini för fyri at bera ta meirútreiðslu, ið stendst av hesi hækking, men verður hon neyðug, vil fólkaflokkurin atkvöða fyri henni.

Enn eru útróðrarbátar, ið nýta bensinmotorar, og eigur matningin á hesum bátum at fáa tollin á bensininum, ið nýtt verður á útróðri, endurgoldnan um lönjavningargrunnin úr landskassanum. Hann, ið váttar veiðunögdina, hevur skyldu at vátta bensinnýtsluna og verður at skipa greinliga fyri hesum í komandi reglugerð lönjavningargrunnsins.

Samsvarandi tí í álitinum framförda mælir fólkaflokkurin til broytingar í lögtingslög um at longja skipanina um studnað úr landskassanum til minstulön og viðbót til fiskaprísin:

1. at í lögtingslög nr. 26. dagfest 17. mai 1961 um at longja skipanina um studnað úr landskassanum til minstulön og viðbót til fiskaprísin, verður síðsta pelti í § 1 um viðbót til heimaútróður broytt til hetla orðaljóð:

«at viðbótin verður 15 øyrur pr. kg av veiðuni av øllum runduni kruvdum ráfiski við høvdi innhandlaður og tilvirkaður í Føroyum til útflutnings fyri deksfør og opnar bátar og fyri opnar bátar eisini sildaveiðu til agns, frystingar, sallingar og virkingar.

«at tilskudet udgør 15 øre pr. kg af fangst af rund raafisk med hoved og uden indvolde, der indhandles og tilvirkes til eksport for dæksfartøjer og aabne baade og for aabne baade ligeledes af sildefangst til agn, frysning, saltning og fabrikation.

II. Lögtingslóg
um
endurrindan av bensintolli til útróðrabátar.

§ 1.

Landsstýrið er heimilað úr landskassanum at endurrinda Lönjavningargrunni skipsfiskimanna tann toll, ið grunnurin samsvarandi reglugerð sínni hevur goldið útróðrabátum, ið hava bensinmotorar.

§ 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov
om
refusion af benzintold til fiskerbaade, der driver hjemmefiskeri.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at refundere Lönjavningargrunn skipsfiskimænna den told, som fonden i henhold til sit regulativ har udbetalt til baade med benzinmotor, der driver hjemmefiskeri.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

1. viðgerð 23. mars og 1. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Álit

Nevndin hevur havt málið til viðgerðar.

Meirihlutin (Poul J. Olsen, P. M. Dam, Leon Joensen og J. Högnesen) setur onki uppskot fram, men vísir til stóðu sína í málinum nr. 39/1961.

Minnihlutin (Niels Holm Jacobsen) tekur undir við uppskotinum.

2. viðgerð 1. mai og 3. viðgerð 4. mai 1962.

Uppskot II var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: H. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Kj. Mohr, P. M. Dam og P. J. Olsen.
Atkvöddu nei: J. Lindenskov, J. H. Dambjörg, Haldor Hansen.
Burturstaddur: K. Djurhuus.

Uppskotið fall 13—3.
Uppskot í burturdottið (smbr. 39/1961).

---

77. Val av álitismonnum og nevndum

Ár 1962, 5. apríl stóð val av álitismonnum og nevndum:

1. Lögtingsvalnevndir:

A. Suðurstreymoyar prestagjald:
   a) Fastir limir: Poul Hansen, verkstjóri, Tórshavn, H. O. Hansen, stjóri, Tórshavn, Poul K. Mouritsen, prentari, Tórshavn.
   b) Tiltaksmenn: Aage Mikkelsen, bókhaldari, Tórshavn, J. Wenningstedt, Tórshavn.

B. Norðstreymoyar prestagjald:
   a) Fastir limir: P. J. Djurhuus, Kollafirði, Jacob Samuelsen, Haldórsvík, Arni á Bógvi, Vestmanna.
   b) Tiltaksmenn: Tórstein Grækarisson, Kvívík, Andreas Andreasen, lærari, Vestmanna.

C. Eysturoyar sýsla:
   a) Fastir limir: Herluf Bertelsen, lærari, Fuglafirði, Johan Frederik Poulsen, lærari, Strendur, Jacob Simonsen, lærari, Götu.
   b) Tiltaksmenn: Samuel P. Hansen, Norðagötu, Johs. Petersen, træsmiður, Saltnesi.

D. Norðoya sýsla:

a) Fastir limir: Johannes Vitalis Hansen, Klakksvík, Meinhard Johansen, lærari, Klaksvík, Jákup Samson, jarnsmiður, Klaksvík.

b) Tiltaksmenn: Johan Christiansen, Norðdepli, Einar Wang, Klaksvík.

E. Vága sýsla:

a) Fastir limir: D. Danielsen, lærari, Sörvágur, Jógvan á Ryggi, Miðvágur, Sigmund Fredericksen, vrakari, Miðvágur.

b) Tiltaksmenn: Sören Danielsen, hrævsamlari, Miðvágur, Napoleon Petersen, lærari Miðvágur.

F. Sandoyar sýsla:

a) Fastir limir: Rósing Thorleifsson, sýslumaður, Sandur, Zach. Stórá, Skopun, Peter Joensen, fiskimaður, Skopun.

b) Tiltaksmenn: Óli Danielsen, Húsavík, Th. P. Olsen, óðalsmaður, Húsavík.

G. Suðuroyar sýsla:

a) Fastir limir: Johan Djurhuus, skúlainspektörur, Vágur, Dion Nolsöe, Vágur, Johannes Enni, Tvöroyri.

b) Tiltaksmenn: Jaspur Holm, Tvöroyri, Johannes Hentze, Tvöroyri.

2. Kirkjustjórnin: J. Fr. Oregaard, Johan Simonsen og Joh. M. Fr. Poulsen.

3. Skúlastjórnin: Joh. M. Fr. Poulsen, J. H. Danbjörg og Hanus við Högadalsá.

4. Grannskoðari í Færö Amts Sparekasse: Jacob Sune Jacobsen.

5. Nevnd Föroya Realskúla: J. P. Henriksen, Sigrid av Skarði Joensen, Georg Lindenskov Samuelsen.

6. Nevnd í p/f Skipafelagið Föroyar: J. P. Davidsen og Hans Iversen, seinari valdur í lutakast við Erl. Paturssen.

7. Umboðsmaður á aðalfundi hjá p/f Skipafelagnum Föroyar: Jacob Liodenskov. Tiltaksmaður: Dion Nolsöe.

8. Umboðsmaður á aðalfundi í p/f Sjóvinnubankanum: Haldor Hansen.
Tiltaksmaður: Jacob Lindenskov.

9. Stýrið fyri meutunargrunnin: J. H. Danbjörg, Joh. M. Fr. Poulsen og Bette Rasmussen.
Tiltaksmenn: Jacob Lindenskov, Georg Lindenskov Samuelsen og Sverre Egholm.

10. Nevnd í l/f Grönlandsfelagnum: J. Fr. Öregaard, P. H. Weihe og Frederik Hansen.
Tiltaksmenn: Poul Jacob Olsen, Jens Chr. Olsen og Johan Simonsen.

11. Stýrið í Röroya listasavni: Jacob Lindenskov, Janus Kamban og Tr. Samuelsen.

12. Föroya likningarráð: Haldor Hansen, Tr. Samuelsen og Sofus Olsen.

13. Stýrið í Föroya vanlukkutrygging: Joh. M. Fr. Poulsen, Erlendur Paturssson og Haldor Hansen.
Tiltaksmenn: Tr. Samuelsen, Hemming Jespersen og Magnus Tórsheim.

14. Útskiftingarnevndir: Jógvan Drangberg, Skopun, í staðin fyri Sinnin Hansen, Skopun, ið er deyður.

78. Uppskot til samtyktar viðv. fiskimarkinum

Ár 1962, 22. mars legði Erlendur Paturssson lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt beinan vegin og ikki seinni enn 1. apríl 1962 at geva Föroya lögtingi fullfiggjaða skrivliga frágreiðing um alt tað, sum fram er farið viðvikjandi fiskimarksmálinum, síðan tingið gjördi samtykt sína í hesum máli 10. mai 1961, og at leggja fyri tingið öll skjöl í malinum.

Greinargerð

Hin 10. mai 1961 gjördi lögtingið hesa samtykt í fiskimarksmálinum:

> «Landsstýrið verður biðið um at taka upp samráðingar við danska ríkisstýrið viðvikjandi uppsögn av fyribilssáttmálanum (dagfestur 27. apríl 1959) Danmarkar og Bretlands millum um fiskimarkið við Föroyar, soleiðis at vit verða leysir av honum 27. apríl 1963. Samstundis verða reglur at seta í gildi um 12 fjórðinga fiskamark við Föroyar við beinum basislinjum.»

Uppskot um at biðja dansku ríkisstjórnina taka upp samráðingar við Bretland um revisjón av sáttmálanum frá 27. apríl 1959, kom hin vegin ikki til atkvöðugreiðslu og datt tí burtur.

Í kunngerð frá danska uttanríkismaálráðnum, dagsett 6. febr. 1962, verður sagt, at «Færöernes hjemmestyre», ið haldast má vera Föroya landsstýri, hevur «rettet henvendelse til den danske regering om at faa princippet om 12 mils fiskeriterritorium gennemført fuldstændigt», og at danska ríkisstjórnin, aftan á «yderligere forhandlinger med de færöske myndigheder», hevur latið sendiherra sín í London bera ensku ríkisstjórnini «sine synspunkter vedrörende en fremtidig nyordning af fiskeriterritoriet ved Færöerne».

Av tí, at henda frágreiðing danska uttanríkismálaráðsins eingki nevnir um, at sáttmáli frá 27. apríl 1959 — soleiðis sum tingsamtyktin frá 10. mai 1961 tilskilar — er ella verður uppsagdur, so vil verða leysir av honum 27. apríl 1963, og ei heldur nevnir nakað um, at reglur eru ella

verða settar, so vit — soleiðis sum sama tingsamtykt tilskilar — hava 12 fjórðinga mark við beinum grundlinjum frá sama degi, verður hildið rætt, at tingið áleggur landsstýrinum nú beinan vegin og ikki seinni enn komandi 1. apríl, at geva tinginum fullfiggjaða skriviliga frágreiðing um alt, sum fram er farið í málinum, síðan tingið gjördi samtykt sina í fjör, og at leggja fyri tingið öll skjöl í málinum.

1. viðgerð 30. mars og 2. viðgerð 3. apríl 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi Broytingaruppskot frá E. Paturssoni:

Í uppskotinum verður «1. apríl 1962» broytt til «10. apríl 1962».

Uppskotið til samtyktar var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Paturssoni, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, H. Hansen og J. F. Øregaard.

Uppskotið fall 13—0.

---

79. Vegurin Oyndarfjörð-Hellurnar v.m.

---

80. Nýtt strandfaraskip (Vágar)

Ár 1962, 26. mars legði Haldur Hansen löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

löglingslóg um bygging av nýggjum strandfaraskipi til siglingina vestur í Vágar.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at byggja strandfaraskip til at rökja siglingina vestur í Vágar og at taka upp neyðug lán.

Byggiætlan og byggisáttmáli verður at leggja fyri figgjarnevndina til góðkenningar.

lagtingslov om bygning af nyt kystfartöj til sejlads paa Vágar.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at bygge et kystfartöj til rutesejlads til Vágar og at optage de nödvendige laan.

Byggeoverslag og kontrakt skal forelægges finansudvalget til godkendelse.

Viðmerkingar:

Sum öllum tingmonnum kunnugt, er tað skipið, ið rökir strandferðslunna vestur eftir, ikki tíðarhóskandi til fólkaflutning, og er tí bráðneyðugt at fáa nýtt tíðarhóskandi skip í staðin.

Mælt verður til, at hetta nýggja skipið verður av sonu stödd og möguliga av sonu innrætting sum «Nýggi Pride».

Lagt verður afturat, at í byggigrunni strandferðslu landsins eru 793.385,18 kr.

1. viðgerð 30. mars og 24. apríl legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

26. mars 1962 varð málið lagt fram á ting av Haldor Hansen, Leon Joensen og V. Nielsen og varð við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd við uppskotsstillararnar, at tað skipið, sum rökir siglingina vestur í Vágar, ikki er tíðarhóskandi meira, og kann so stalt mæla tinginum til at taka undir við uppskotinum. Men tá hetta skipið fyrst og fremst er ætlað teinum, sum búgva annaðhvört í Vágum ella í Vestmanna, heldur nevndin, at tað er rímligt, at hetta skipið siglur út frá einum av hesum plássum.

2. viðgerð 26. apríl og 3. viðgerð 28. apríl 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Haldor Hansen o. fl.

Sum § 2 verður sett:

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Broytingaruppskotið samtykt 27—0.
Lógaruppskotið so broytt samtykt 27—0.

---

81. Nýtt strandfaraskip (Mykines).

Ár 1962, 26. mars legði Leon Joensen löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

löglingslög um bygging av ella keyp av nýggjum fari til siglingina Sörvág Mykines.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at byggja ella útvega tíðarhóskandi far til siglingina Sörvág Mykines, og at taka upp neyðug lán.

Byggi- ella keypssáttmáli verður at leggja fyri fíggjarnevndina til góðkenningar.

lagtingslov om bygning eller köb af nyt fartöj til sejladsen Sörvaag Mykines.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassets vegne at bygge eller anskaffe tidssvarende fartöj til sejladsen Sörvaag-Mykines og at optage de nödvendige laan.

Bygge- eller köbekontrakt skal forelægges finansudvalget til godkendelse.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Vist verður til bræv frá íbúgvarunum í Mykinesi til Föroya lögting dagfest 26. mai 1960, ið er viðleft sum skjal.

Mykines, 26. april 1960.

Til Föroya Lögting.

Vit undirritaðu íbúgvarar í Mykinesi vilja hervið heita á okkara háttvirda Lögting um at skaffa okkum eitt tíðarhóskandi far til at rökja siglingina Sörvág-Mykines.

Áðurnevnda far má verða bygt specielt til áðurnevndu sigling, tað vil siga at tað má hava eina avmarkaða longd og dýpi, so at tað eins og tann báturs sum nú rökir siglingina Sörvág-Mykines kann koma inn á gjónna (lendingina í Mykinesi) tá líkindi eru góð.

Sjálvandi má tað nýggja fari vera útgjört við bæði radiotelefon og radara og annars öllum redningstólum sum neyðug eru, so at eisini vit sum búgva handa Föroyars vandamiklasta fjörð kunnu merkja at vit ikki eru heilt burturgloymd tá talan er um tað stóra arbeiði sum nú á dögum verður gjört fyri at tryggja mannalív á havinum.

Tað far sum nú rökjur siglingina Sörvág-Mykines er ein motorháttur 7 tons stórur, bygdur fyri ca. 45 árum síðani, hann er sera ólíðarhóskandi í allar máta. (65 undirskriftir).

1. viðgerð 30. mars og 28. april legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

26. mars 1962 var málið lagt fram á ting av tingmonnunum fyri Vágoy og varð við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

2. viðgerð 30. april og 3. viðgerð 1. mai 1962.

Lógaruppskotið samtykt 25—0.

82. Bygging og rakstur av fiskiídnaðarvirkjum

Ár 1962, 26. mars legði Erlendur Patursson fram soljóðandi

Uppskot
til
lóg um bygging og rakstur av fiskiídnaðarvirkjum.

1. §

Landsstýrið letur, fyri rokning landskassans, byggja og reka fiskaídnaðarvirki, eitt í hvörji sýslu, og fær heimild til at taka lán til hesar byggingar og rakstur teirra.

Fyritökan kallast: «Fiskaídnaðarvirki landsins».

2. §

Yvirstjórn ídnaðarvirkjanna, undir umsjón landsstýrismansins í fiskivinnumálum, er hjá 3 manna stjórn, sum löglingið velur fyri 4 ár í senn. Stjórnin velur sær sjálv formann. Landsstýrið ásetir lön og samsýning stjórnarlimanna. Undirskrift frá 2 stjórnarlimum krevjast til at skuldbinda fyritökuna.

Stjórnin skipar forstjóra, sum hevur um hendi dagligu stjórn og umsjón við bygging og rakstri fiskaídnaðarvirkjanna. Hann hevur prokura og skuldbindur fyritökuna eftir reglunum um prokura. Stjórnin ásetir lön hansara.

3. §

Roknskapur ídnaðarvirkjanna verður granskoðaður av granskoðarum landsins.

4. §

Stjórnin fyrireikar og tekur avgerð um bygging ídnaðarvirkjanna og skal samráðast við sóknarstýri, útgerðarmenn (skipa- og bátaeigarar), fiski- og útróðrarmenn um, hvar í hvörji sýslu tey skulu byggjast, so eisini um stödd teirra og innrætting.

Endaligar avgerðir um bygging í hvörjum stað skulu verða tiknar í samráð við landsstýrismann í fiskivinnumálum.

Öll bygingar- og innrættingarvinna skal verða boðin út í almennari lisitation.

Grundökini, sum fingin verða til fiskaidnaðarvirkini, skulu verða so stór, at góðir möguleikar verða til uppi- og afturathyggingum í framtiðini.

5. §

Fiskaidnaðarvirkini keypa fisk — ferskfisk og saltfisk — og sild — fersksild og saltsild — til virkingar og selja hinar virkaðu fiskavörur.

Stjóri fiskaidnaðarvirkjanna skal, í samráð við yvirstjórn teirra, taka avgerð um hvörjar framleiðslur hvört idnaðarvirki skal reka, har í millum:

1. flakaframleiðslu,
2. hermetikkframleiðslu burtur úr torski, hýsu, upsa og tílíkum fiski,
3. hermetikkframleiðslu og kreydsildarframleiðslu burtur úr fersk- og saltsild,
4. mjölframleiðslu,
5. lýsiframleiðslu,
6. roykiug,
7. aðrar framleiðslur.

6. §

Keypsprisir fiskaidnaðarvirkjanna, aðrir enn teir, ið ásettir verða sambart lóg, verða ásettir av stjórnini, og skulu vera hinir somu í öllum idnaðarvirkjunum.

7. §

Fiskaidnaðarvirkini skulu framleiða ís og skulu hava á goymslu rívligar nögdir av ísi og agni. Teimum er heimilt at reka handil við hesum og öðrum vanligum útgerðarvörum. Stjórnin ásetir útsöluprisir á hesum vörum.

Í sambandi við fiskaidnaðarvirkini skulu vera rúm, har skipa- og bátaeigarar og fiski- og útróðrarmenn fyri ríminliga leigu kunna goyma reiðskap og aðra útgerð.

8. §

Stjóri og stjórn fiskaidnaðarvirkjanna skipa fyri sölu og útflutningi av framleiðsluni.

9. §

Landsstýrismaður í fiskivinnumáhum setir nærri reglugerð eftir hesi lög, har í millum starvsreglugerð fyri stjórn, umsiting og rakstur fiskaídnaðarvirkjanna.

10. §

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

Lov om anlæg og drift af fiskeindustrivirksomheder.

§ 1.

Landsstyret lader for landskassens regning opföre og drive fiskeindustrianlæg, et i hvert syssel, samt bemyndiges til at optage laan til disse anlæg og deres drift.

Foretagendet benævnes «Fiskiídnaðarvirki landsins».

§ 2.

Industrivirksomhedernes overledelse under tilsyn af landsstyresmanden for fiskerianliggender bestaar af en 3 mands bestyrelse, som vælges af lagtinget for 4 aar ad gangen. Direktionen vælger selv sin formand. Landsstyret fastsætter lönninger samt vederlag til bestyrelsens medlemmer. Til at tegne virksomheden udkræves underskrift af 2 af bestyrelsens medlemmer.

Bestyrelsen antager direktör, som har den daglige ledelse samt tilsyn med opförelse og drift af fiskeindustrivirksomhederne. Han har prokura og tegner virksomheden i henhold til bestemmelserne om prokura. Bestyrelsen fastsætter hans lön.

§ 3.

Virksomhedernes regnskab revideres af landsrevisoren.

§ 4.

Bestyrelsen forbereder samt tager bestemmelse om opförelse af industrivirksomhederne og skal optage forhandling med kommunalbestyrelser, redere (skibs- og baadejere) fiskere og hjemmefiskere om, hvor i hvert syssel de skal opföres samt tillige om deres störrelse og indretning.

Endelig afgörelse om opförelse paa hvert sted skal træffes i samraad med landsstyresmanden i fiskerianliggender.

Alt byggeri samt indretning skal udbydes i offentlig licitation.

Grundarealerne til fiskeindustrivirksomhederne skal være saa store, at der gives gode muligheder for udvidelser i fremtiden.

§ 5.

Fiskeindustrivirksomhederne köber fisk — ferskfisk og saltfisk og sild — fersksild og saltsild — for tilvirkning og afsætter de færdige fiskeriprodukter.

Direktören for fiskeriindustrivirksomhederne skal i samraad med deres overledelse tage afgörelse om, hvilken produktion hver af industrivirksomhederne skal udföre, herunder:

1. fremstilling af filét,
2. fremstilling af hermetik af torsk, kuller, sej og lignende fisk,
3. fremstilling af hermetik samt fremstilling af kryddersild af fersk- og saltsild,
4. fremstilling af mel,
5. fremstilling af tran,
6. rögning,
7. anden produktion.

§ 6.

Fiskeindustrivirksomhedernes köbspriser, bortset fra saadanne, der fastsættes ved lov, fastsættes af bestyrelsen, og disse skal være de samme for alle industrivirksomhederne.

§ 7.

Fiskeindustrivirksomhederne skal fremstille is og de skal have rigelige mængder af is og agn paa lager. De bemyndiges til at drive forretning med saadanne og andre udrustningsvarer. Bestyrelsen fastsætter udsalgsprisen for disse varer.

I forbindelse med fiskeindustrivirksomhederne skal der haves rum, hvor skibs- og baadejere og fiskere og hjemmefiskere kan opbevare redskaber og anden udrustning for en rimelig leje.

§ 8.

Direktör og bestyrelse for fiskeindustrivirksomhederne sörger for salg og eksport af produktionen.

§ 9.

Landsstyresmanden i fiskerianliggender fastsætter de nærmere regler

i henhold til denne lov, herunder reglement for bestyrelse, administration og drift af fiskeindustrivirksomhederne.

§ 10.

Denne lov træder i kraft straks.

Árið 1961 var samanseting fiska- og fiskavöruútflutningsins henda:

	Tons
Ferksfiskur	21.896
Saltfiskur	18.797
Klipfiskur	5.120
Saltsild	7.437
Krydsild	67
Frystur flök	1.540
Fiskamjöl	957
Sildamjöl	86
Fiskalýsi	731
Fiskahermetikkur	15
Fiskaslógv	4
Sildarlýsi	12
(Hvalalýsi	4)

Sum vit siggja av hesum tölum, fer hin uógv størsti parturin av fiski okkara ótilgjördur ella nærum ótilgjördur av landinum. Fyrst er tað, at klipfiskaframleiðslan hevur verið í stórari minking. Annað er tað, at bert ein heilt lítil partur av ferskfiskinum verður skorin til flök og frystur, meðan meginparturin av honum fer púra óvirkaður av landinum. Triðja er tað, at bert heilt lítil framleiðsla verður skapt burtur úr fersksildini og saltsildini, meðan meginparturin av henni verður fluttur út sum ótilgjörd saltsild.

Í seinasta árinum fyri seinna heimsbardaga 1939, var fiska og fiskavöruflutningur landsins hesin:

	Tons
Klipfiskur	13.756
Saltfiskur	5.698
Annað	613

Bera vit hesi útflutningstöl frá 1939 saman við útflutningstölini frá

1961, siggja vit tað, at heildarútflutningurin er vaksin í stórum. Men vit siggja eisini, at í 1939 fór upp á seg nógv störri partur av fiskinum tilgjördur av landinum, ja klipfiskaframleiðslan í 1939 var verulíga meir enn tvær ferðir störri enn í 1961. Hin vegin var saltfiskaútflutningurin í 1961 um leið 3 ferðir störri enn í 1939.

Alt saman tikið er virkingin á landi upp á seg nógv minni enn hon var fyri heimsbardagan. Hetta týðir upp á seg minni útflutningsvirði og minni vinnu hjá verkafólkinum á landi.

Endamálið má vera at ökja um útflutningsvirðið og innlökur verkafólksins uppi á landi. Ráðini til tess er at fáa mest möguligt av fiskinum, helst hvönn stort, upp á land til virkingar og at selja virkaðan fisk og virkaðar fiskavörður.

Uppskotið, ið tjóðveldisflokkurin her leggur fram — um bygging og rakstur av fiskaídnaðarvirkjum — miðar fyrst og fremst móti at fáa virðið burtur úr ferskfiskinum og sildini.

Landið skal lata reisa og reka fiskaídnaðarvirki — eitt í hvörjuri sýslu í landinum.

Fiskaídnaðarvirkini skulu m. a. reka hesar framleiðslur:

1. flakaframleiðslu,
2. hermetikframleiðslu burtur úr torski, hýsu, upsa og tilikum fiski,
3. hermetikframleiðslu av krydsildaframleiðslu burtur úr fersk- og saltsild,
4. mjölframleiðslu,
5. lýsiframleiðslu,
6. royking,
7. aðrar framleiðslur.

Meðan flokkurin heldur, at einstaklingar og einstaklingafyritökur bæði eiga og eru mentar at byggja og reka tey smærru virkini (t. d. flaka- og frystivirki) víða hvar í bygdum landsins — og eiga at verða stuðlað til tess — heldur hann tað bæði vera rætt og neyðugt, at tað viðvíkjandi teinum stóru virkjunum verður farið fram, soleiðis sum mælt verður til í hesum uppskoti, nevniliga við at landið letur hesi fiskaídnaðarvirki byggja og reka. Tað skuldi tó einki verið til hindurs fyri, at frystihúsini uppkomin ella seinni verða seld fyritöku í viðkomandi sýslu, t. d. við luttöku frá útgerðarmonnum (og bátaeigarum), fiskimonnum, útróðrarmonnum, felögum teirra og kommunum.

Viðvíkjandi einstökum lutum í hesi skipan verður vist á sjálvt lógaruppskotið.

1. viðgerð 30. mars og 21. april legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

26. marts 1962 varð málið lagt fram á ting og varð við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið, og er meirilutin av teirri áskoðan, at tað sum trýtur í dag ikki eru frystivirkir, men fiskur til flakingar, tá tey virkir, sum eru, hert hava fisk til lítlan part av árinum, og teir menn, sum arbeiða við hesi virkir, ganga arbeiðsleysir stóran part av árinum. Tað hevði tí verið av týdningi at fingið skipað so fyri, at fiskurin, sum nú verður fluttur beinleiðis til bretska marknaðin, varð lagdur upp og skorin her, men hetta hevur enn ikki eydnast monnum, sum hava arbeitt við hesum máli.

Meirilutin setur so statt onki uppskot fram.

Minnilutin (H. Jespersen og E. Paturasson) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 28. april og 3. viðgerð 1. mai 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá P. M. Dam o. fl.

Í staðin fyri 1. stk. í § 1 verður sett:

«Landsstýrinum verður heimilað — í samráðing við lögtingsins figgjarnevnd — fyri landskassans rokning at byggja og reka fiskaiðnaðarvirkir, um heimapresurin av feskum fiski ger avreiðing í Föroyum möguliga hjá stórn fiskiskipum okkara, ið vanliga selja veiði sína av feskum fiski á útlendskum marknaðum, og marknaðarlíkindini annars verða at gera tilíka bygging neyðuga fyri at halda stórfiskiskap föroyinga við Föroyar uppi.

Landsstýrið verður heimilað at

«Landsstyret bemyndiges til i samraad med lagtingets finansudvalg for landskassens regning at anlægge og drive fiskeriindustrivirksomheder, saafremt hjemmeprisen paa fersk fisk gör det muligt for vore store fiskeskibe, der sædvanligvis afsætter deres fangster af fersk fisk paa udenlandske markeder, at afsætte deres fangster paa Færöerne, og at markedsforholdene iövrigt nödvendiggör saadanne anlæg for at opretholde det færöske storfiskeri ved Færöerne.

taka neyðugu lán til hesar byggingar og rakstur av teimum.»

Landsstyret bemyndiges til at optage de nödvendige laan til saadanne anlæg samt deres drift.»

Viðmerkingar:

Tað má ásannast, at so leingi viðurskiftini eru so, at okkara stórn línubátar, ið veiða við Föroyar og undir Íslandi til feskfiskasölu, heldur sigla beinleiðis til bretska marknaðin enn at avreiða í Föroyum, verður flakaskeringin heima hjá okkum sjálvum bara ein viðfáningur. Undir hesum viðurskiftum verður bara hendingaferðir, at flakavirkini, vil hava, og sum eru í gerð og í umbúna at koma, ikki kunnu flakaskera og snarfrysta tann avreidda feska fiskin. Frystivirkini vit hava, eru:

1 í Vági, 1 á Tvöroyri, 1 í Seyrvági, 1 í Vestmanna, 1 í Hvalvík, 2 í Tórshavn, 1 í Runavík, 1 á Skála, 1 í Leirvík, 1 í Götu, 2 í Fuglafirði, 2 í Klaksvík og 1 í Árnafirði.

Flestu av hesum virkjum eru smá og kunnu viðgera bara smærri nögdir av fiski.

Talan er um bygging av stórum flakavirkjum, 1 í Vági, 1 í Klaksvík og 1 í Vágoynni. Eisini er til umröðu bygging av smáum flakavirkjum í Skopun, á Sandi og aðra staðni, og í Hvalba er eitt lítið flakavirki undir bygging, og í Havn er stórt flakavirki við at verða bygt aftrat teimum, tveimum, ið eru nevnd.

Men hesin frystikapaciteturvil vera minni enn so nóg stórur at kunna flaka og frysta alla okkara feskfiskaveiði, um teir 50—70 línubátarnir, sum um heystið og veturin fiska við Föroyar, fara at avreiða til flakavirkini og onnur fiskaídnaðarvirki sum mjölvirki og konservesvirki, vil hava og eru við at fáa. At kunna taka ímóti fiskinum til flakaskurðar og aðra heimaviðgerð er bæði av veiðiligum og arbeiðsligum grundum stórliga at ynskja. Við hesum í hyggju verður nú eisini roynt at fáa feskfiskaprísin — avreiðingarprísin — í Föroyum so högan, at tað skal loysa seg hjá okkara línubátum at avreiða í Föroyum, tá ið vit ganga út frá miðalprísinum á tí bretska marknaðinum fyri heystið, veturin og várið. Hin útlendski feskfiskamarknaðurin hevur eisini ofta verið bátur um at halda og svikaligur at lita á, og hann kann lætliga koma heilt at svikja, samanber hóttanina í svarinum frá teirri bretsku stjórnini til danska ríkisstýrisins uppsögn av fiskisáttmálanum við brelur viðvíkjandi fiskimarkinum við Föroyar.

Skuldi viðurskiftini snúð sær hagar, at tað kom at loysa seg hjá línubátum okkara at avreitl í Föroyum, ella at hin bretski marknaðurin undir toganini um fiskimarkið kom at verða um ikki heilt stongdur fyri okkara föroyingum, men so lemjandi skerdur er neyðugt hjá lands-

stýrinum og fíggjarnevndini at hava heimild til ikki bara við galdandi lógarskipanum at lyna fyri privatum ídnaðarvirkjum, men heimildin má eisini rökka til, um neyðugt, fyri landskassans rokning at lata byggja og reka ídnaðarvirki, so vit verða förir at taka ímóti veiðini hjá okkara skipum og viðgera og selja hana soleiðis, sum nú teir ymsu góðu marknaðarnir ynskja.

og soljóðandi undirbroytingaruppskot frá E. Patursson o. H.:

1. stk. í 1. § í broytingaruppskotinum verður orðað soleiðis:
«Landsstýrið letur — í samráðing við lögtingsins fíggjarnevnd — fyri landskassans rokning — byggja og reka fiskaídnaðarvirki.»

Undirbroytingaruppskotið fall 7—0.
Broytingaruppskotið fall 8—0.
Lógaruppskotið var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Simonsen, Fr. Hansen, P. M. Dam, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.
Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, V. Nielsen, Kj. Mohr, Poul J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Øregnard.
Burturstaddur: K. Djurhuus.

Uppskotið fall 8—0.

83. Stuðul til fiskiroynd eftir sild við kraftblokki

Ár 1962, 28. mars legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um stuðul til fiskiroynd eftir sild.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað til fyrstu fiskiroyndina eftir sild við fiskireiðskapinum «kraftklokki» landskassans vegna at veðhalda móti tapi, um royndin skuldi miseydnast og reiðskapurin við tilhoyri verði seldur við tapi. Veðhaldið er avmarkað til 150.000 kr. og at niðurskriva við 50.000 kr. um árið.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om stötte til et fiskeriforsög efter sild.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til det förste fiskeriforsög efter sild med fiskeredskabet «kraftblok» paa landskassens vegne at garantere mod tab, saaremt forsöget skulle mislykkes og redskabet med tilbehör realiseres med tab. Garantien begrænses til kr. 150.000.--, og saaledes at denne nedskrives med kr. 50.000.— aarlig.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Eftir viðlagda skrivi dagfest 22. mars 1962 frá trolarafelagnum p/f Kimbli, Tórshavn, ætlar felagið sær undir eina fiskiroynd eftir sild við ringnót og kraftblokki. Íleggingin er metl til:

Nót, nylon	100.000 kr.
Kraftblokkur	67.000
Asdic	50.000
Íseting, styrking av bátadekki og aðrar útreiðslur, alt gjört í Reykjavík	83.000
	300.000 kr.

Felagið sigur seg hava möguleikar við láni at útvega tann pening, ið skal til fleggingina.

Viðvíkjandi tí möguliga tapi, ið stendst av, at royndin miseydnast, og felagið tí leggur royndina frá sær og selur reiðskapin, heldur felagið seg hava vónir um at fáa ein part frá onkrum grunni.

Landsstýrið heldur, at umtalaði fiskireiðskapur, sum hevur givið so sera góð úrslit aðrastaðni, eigur eisini at vera royndur her. Tá fyrsta royndin her serliga risiko við sær, verður tikið undir í umsóknini um stuðul. Tó verður hildið, at stuðulin eigur at vera avmarkaður til tað tapið, ið möguliga kann vera av, at reiskapurin aftaná miseydnaða roynd verður seldur, og sölan ikki gevur kostnaðan aftur. Ein part av hesum tapi eigur felagið tó at taka. Eftir skrivinum skuldi reiðskapurin givið um 100.000 kr. aftur við sölu, so tapið at býta verður 200.000 kr. Her verður hildið, at landskassin tekur tær 150.000 kr. uppá seg at niðurskriva við 50.000 kr. um árið, so veðhaldið er burturdottið eftir 3 árum.

P/F KIMBIL TROLARAFELAG

Tórshavn, hin 22. mars 1962.

Föroya Lögting og Föroya Landsstýri

h e r.

Sum tygum kunnugt hava íslendingar hesi seinastu árini fiskað sild við nýggjum tólum, tann sokallaða ringnót og kraftblokkur, og hevur hetta tey tvey seinastu árini gingið so væl, at meginparturin av teimum störru skipunum nú fara yvir til henda veiðuháttin. Vit hava frætt, at millum 35 og 45 skip í Íslandi skulu hava hesi tól ísett í vár.

Sum döni um, hvussu stórar nögdir kunnu fiskast við hesi nót, kann nevnast, at besti íslendski bátur «Viðir II» 90 fötur, 11 manns í 3/4 ár hevur fiskað 8.750 tons av sild.

Júst í Túni, skipari, hevur nýliga verið í Íslandi fyri at kanna möguleikarnar, um ikki eisini föroyingar kundu fiska sild við hesum tólum, og eftir teimum upplýsingum, hann hevur fingið, kann hesin veiðiháttur koma at hava ómetaligan týdning fyri Föroyar. Burhursæð frá, at ein á hendan hátt kann fáa ein lönandi fiskiskap fyri nógv skip, rácvni til sildaoljufabrikkir á landi o. a., so kann hesin fiskiskapur eisini föra við sær, at agnsildin kann fáast til væl biligari prísir.

Vit meina, at tað hevði verið rætt, um föroyingar longu ár kundu fingið kunnleika til henda veiðuhátt, soleiðis at nakrir av teimum bátum, sum nú eru og verða kontraheraðir, kunnu fáa hesi tól ísett.

Okkara ætlan var at seta hesi tól umborð á Brestir nú í summar, men av tí at kostnaðurin er stórur og harav stór risiko um royndin skuldi miseydnast, meina vit ikki, at P/F Kimbil, sum hevur stór lán, kann taka hesa risiko einsamalt.

Brestir lissur 2 saltfiskatúrar og er tað ein royndur latur, at hjá flesta linuskipum er tað saltfiskatúrarnir, sum geva tað yvirskot, ið skal forrenta og avskriva báturnar, og kann hetta metast til 100.000 kr. fyri hetta tíðarskeiðið, hertil kemur tað beinleiðis driftsundirskot, ið royndin kann geva, um hon ikki eydnast, men ein part av hesi risiko hava vit vónir um, at ymsir grunnar vilja taka.

Heggingin við hesi roynd fár hava vit metti tit:

Nylon nót	100.000 kr.
Kraftblokkur, spöl, gerdur	67.000 —
Asdic	50.000 —
Ísetan, styrkjan av bátadekki og aðrar útreiðslur, hetta verður alt gjört í Reykjavík	83.000 —
	300.000 kr.

Sjálva financieringina av hesi peningahædd meina vit, at möguleikar ern at bankarnir vilja veita, men eftir er so risikoin við at royndin ikki eydnast og at vit noyðast at realisera hesi tól.

Við realisatión kunnu vit bert rokna at fáa umleið 100.000 kr. aftur.

Vit loyva okkum sostatt at biðja háttvirda lögting og landsstýri um at veita okkum ein garanti max. 200.000 kr. í 2 ár fyri tað lap, ið stendur av, at royndin miseydnast og vit innanfyri hetta tíðarskeið verða noyddir at uppgeva royndina og selja tólini.

1., 2. og 3. viðgerð 29. mars 1962.
Lógaruppskotið samtykt 29—0.

84. Vegasamband Böur—Gásadal

Ár 1962, 29. mars legði Vilhelm Nielsen lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

samtyktar

Álagt verður landsstýrinum um landsverkfröðingsskrívstovuna at gera kostnaðaraetlan fyri vegasamband millum Bö og Gásadal; antin um ella við hergholi ígjögnum Knúkarnar.

Henda vegagerð kemur öll undir löglingslóg um kommunanna part av landsvegabygging á tingi 23. apríl 1959.

Viðmerkingar:

Ein av teimum bygdunum, ið liggja ringast fyri og heilt uttan vegasamband er Gásadalur. Einasti möguleiki til at fáa vegasamband við hesa bygd er at halda áfram við Biggjarvegnum. Hetta verður helst kostnaðarmikil vegagerð, men nú samtykt er at gera berghol hæði sunnanfyri og norðanfyri, er eisini möguleiki fyri at fáa hendan vegin gjörðan gjögnum berghol í Knúkunum, og verður hetta vel biligari enn hini hæði holuni, ið avgerð er tikin um at gera, tí longdin kann verða vel styttri.

Í slíkur förum, sum her, er tað rætt at arbeilt verður longu nú ávegis móti Gásadali úr Biggjarvegnum, og vildi tað verið eimuligt og rætt, at havna- og veganevndin játtaði ein hóskandi stuðul til hesa vegagerð í hesum figgjarári, og at kommunanna partur verður at gjalda samsvarandi löglingslóg um kommunanna part av landsvegabygginging.

1. viðgerð 30. mars og 2. viðgerð 3. apríl 1962. Uppskotið frá Vilh. Nielsen, Haldor Hansen og L. Joensen var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: P. Petersen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, L. Joensen, J. Simonsen, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Patursson, H. v. Högndalsá, H. Jespersen og Haldor Hansen.

Alkvödda ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, T. Samuelsen, Johan Poulsen, D. Nolsöe og J. F. Öregaard.

Burfursladdir: M. Johannesen, A. Djurhuus, J. P. Davidsen, H. Iversen, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen, J. H. Danbjörg, S. Petersen.

Uppskotið fall 14—0.

---

85. Vegir til Sunds og Kaldbaks

Ár 1962, 29. mars legði K. Wang lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt at taka upp samráðingar við avvarandi kommunur um vegasamband millum Havnina og Sund og Havnina og Kaldbak. Landsstýrið fær gjögnum landsverkfröðingsskrivstovuna gjört kostnaðarætlan fyri vegunillum Havnina og Sund og úr Oyggjarvegnum — Kaldbaksbotn — Kaldbak.

Landsstýrið leggur úrslitið fyri aftur tingið í komandi tingsetu.

Viðmerkingar:

Fyri mongum árum síðan hevur lögtingið ásannað at vegur átti at verið gjördur til Sunds, men hesin vegur er enn ikki gjördur. Lögtingið hevur í tingsetuni 1958 (Tingtíðindi 1958 síðu 261) samtykt at biðja landsverkfröðingin kanna málið um viðking av lendibrúnni á Sundi. Enn er eínki úrslit av hesi samtykt komið til lögtingið. Lendibrúgvin er eitt náttúrligt lið í vegasambandinum millum Havnina og Sund, og kann hetta verða eitt týdningarmikið lið í samferðsluni til og frá Havnini.

Landsverkfröðingsskrivstovan eigur at kanna hvönn veg henlast er at leggja Sundsvegin og hvar hann verður til mest nyttu, úr endanum á núverandi sokallaða Sundsvegi ella úr Hvítanesvegnum. Hugsast kundi at hesin sejuni möguleikin var betur. Sundsvegurin vildi umfram at verið hent samferðslulið eisini skapt samband við Sund, sum nú heldur einki skipasamband hevur, aftaná at Ternan rökir hesa rutu.

Tað at Ternan er sett at rökja rutuna í Sundalagið og harvið eisini til Kaldbaks, er skipasambandið við hesa bygd vorðið nógv verri, við tað at Ternan er ov stór til lendibrúnna har. Kaldbaks kommuna hevur umsókn á tingi um at útbyggja Biggjarstöð, so at skip kunnu leggja at har. Hetta vildi bött onnandi um sambandið, men gott verður ikki fyrenn Kaldbak hevur fingið vegasamband, og hetta vegasamband er best at skapa við at fáa fast í Oyggjarvegin. Löglingið hevur samtykt at henda vegagerð skal koma undir tær nýggju gjaldstreytirnar fyri samferðslusvegir. Kaldbaks kommuna hevur sett pening av til vegagerð. Um ikki allur vegurin kann gerast ísenn, kann verða samráðst við Kaldbaks kommunu um t. d. at fáa fyrst gjört vegin Oyggjarvegur — Kaldbaksbotn.

Tað er einki at taka seg aftur í, at Kaldbaks kommuna er ein av teim «gloymdu kommunum» hvat vegajáttanum viðvíkur.

Talað hevur verið um, at ætlanin er at gera tríggjar 5-áraætlanir fyri vegagerð, og Sundsvegurin og Kaldbaksvegurin eiga at koma inn undir fyrstu 5-áraætlanina.

Í Kaldbaks sókn verða framleiddir einir 400 pottar av mjólk um dagin. Tað er tvörligt at ikki henda mjólk kann koma frísk til nýtarar í Havn, men sum nú skal verða upp til fleiri dagar gomul, tá hon kemur til Havnar og viðhvört koma spilt aftur, m. a. tí at mjólkabátarnir eru als ikki útgjördir til at föra mjólk.

Tórshavn er skjótt vaksandi, og býurin hevur ikki bara brúk fyri tí, sum Kaldbak nú framleiðir, men eisini fyri tí meirframleiðslu, sum vil koma, um sambandið verður betur. Samstundis sum líkindi tá eisini verða fyri aðrari vinnu.

Tá oyggjarvegurin er fördur til Kollfjarðardal koma bygdirnar norðanfyri at liggja samferðsluliga nærri Havnini enn Kaldbak, sum tó er största landbúnaðarbygd nærhendis Havnini.

1. viðgerð 30. mars og 2. viðgerð 3. april 1962.
Uppskotið var sett undir atkvöðu við navnakall (11/4):

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, H. Petersen, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, N. H. Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, T. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. Simonsen, H.

Iversen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, P. J. Djurhuus, E. Paturssón, H. v. Högadalsá og Haldor Hansen.
Atkvöddu ikki: J. H. Danbjörg, J. P. Davidsen, D. Nolsöe, K. Djurhuus, P. M. Dam, Poul J. Olsen og J. F. Öregaard.

Uppskotið samtykt 23—0.

---

86. Heimagjördar ullvörur

Ár 1962, 2. april legði Kj. Mohr lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at seta reglugerð í gildi fyri Föroyar, sum miðar ímóti at ansað verður eftir, at allar tær heimagjördu ullvörur, ið verða at selja uttanlands, verða settar í tu góðsku, ið tær hava uppiborið, so ikki ein vöra, sum ikki er av so góðum slag, fær sama pris sum tann vöra, ið er av hestu góðsku.

Viðmerkingar:

Royndir hava vist, at tær kvinnur, sum fáast við at tilvirka okkara ull, sum verður virkað til at selja uttanlands, eru misnögdar við, at tað ikki er nakað eftirlit við, hvussu teir ymisku lutirnir verða virkaðir, og hvussu góðskan er á ullini.

Hetta förir við sær, at ofta kann hetta skaða fyri at halda uppi góðskuna yvir fyri keyparanum, sum skal gjalda sama prisin fyri tað ringara slagið sum fyri 1. flokks góðsku.

Tað er tí neyðugt, at landið förir eitt eftirlit við vöruni, áðrenn loyvi verður givið til útförslu, og er hetta eitt mál, ið landbúnaðarráðgevarin má finna eina skipan til.

1. viðgerð 4. april og 2. viðgerð 9. april 1962.
Uppskotið afturtikið.

---

87. Broyting í lóg um happadrátt

Ár 1962, 2. april legði Kj. Mohr lögtingsmaður fram soljóðandi

Landsstýrið verður at broyta lógina viðvíkjandi happadrátti fyri Föroyar.

Broytingin verður soleiðis, at í staðin fyri at happadráttarseljararnir nú fáa 7 % í seljaraprovisión, verður hetta at broyta til 12 % í minsta lagi.

Landsstýrið verður at leggja málið fyri tingið á hesi tingsetu.

Viðmerkingar:

Royndirnar við at selja happadráttarseðlar hava vist, at tað er ov lítið, seljararnir fáa fyri arbeiðið, tí ikki er nakað broytt lönini viðvíkjandi, síðani happadrátturin varð settur á stovn, alt er dýrkað sosum telefongjald ,lýsingar, porto og el-streymur. Um provisiónin varð hækkað, varð eisini meira áhugi fyri seljararnar at fáa fólk at spæla í happadráttinum.

1. viðgerð 4. april og 2. viðgerð 9. april 1962.
Málið afturlikið.

---

88. Lóg um djóravernd

Ár 1962, 2. apríl legði Kj. Mohr lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Føroya lögting áleggur landsstýrinum at seta fram lógaruppskot viðvíkjandi lóg um djóravernd fyri Føroyar, eins og slík lóg er í hinum norðurlondum.

Viðmerkingar:

At seta eina djóraverndarlóg í gildi fyri Føroyar er eitt yuski frá djóravinum og frá Føroya fólki kring landið. Hetta tilfakið sömir seg fyri einum mentaðum fólki.

1. viðgerð 4. apríl og 2. viðgerð 9. apríl 1962.
Uppskotið fall 12—0.

---

89. Kokkaskúli

Ár 1962, 2. apríl legði Kj. Mohr lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Føroya lögting áleggur landsstýrinum at seta á stovn kokkaskúla í samband við sjómansskúlan. Skúlin verður við nútímans matgerð. Landsstýrið tekur upp samráðingar við sjómansskúlastjóran og leggur málið aftur fyri tingið á ólavsöku 1962.

Viðmerkingar:

Ein og sjómansskúla og maskinistskúla er eisini neyðugt at seta á stovn kokkaskúla. Góður kokkur bæði á sjógvi og landi er ein stuðul í búsarhaldinum. Skipini hava nú nýmótans hentleikar at nýta til matgerð, somuleiðis má væl ansast eftir, at onki fer til spillis, og samstundis má kokkurin læra at föra proviantlistar og nakað av bókhaldi.

1. viðgerð 4. apríl og 2. viðgerð 9. apríl 1962.
Uppskotið fall 10—0.

---

90. Landsskattur og kommunuskattur

Ár 1962, 2. apríl legði Erlendur Patursson fram soljóðandi framlöguskriv: (smbr. skjal 6):

Tjóðveldisflokkurin leggur her við fyri Föroya lögting uppskot til lóg um landsskatt og kommunuskatt, og mælir tinginum til at samtykkja uppskotið í hesi lingselu, soleiðis at skattur eftir hesi skipan verður lagdur á frá komandi skattaári.

Hövuðslógirnar í núverandi skattaskipan eru lógin um kommunuskatt frá 12. mars 1923 og lógin um lögtingsskatt frá 15. mai 1939. Aftanat hesum hövuðslógum eru í gildi aðrar seinni lógir. Í 98. §, 2. stk. í lógaruppskotinum eru hesar lógir, sum eftir uppskotinum skulu fara úr gildi við nýskipanini, upprokknaðar.

Hövuðsuppistöðan í hesum lógaruppskoti er tað skattalógaruppskot, ið tingið hevði til viðgerðar longu 1955, men hvörki tá ella seinni fekkst avgreitt. Ymiskar týdningarmiklar broytingar eru tó gjördar.

Um uppskotið sum heild er at siga, at tað miðar móti rímiligari og rættvísari býting av skattinum — fyrst og fremst á henda báti:

1. Gjöllari reglur um skattanppgávur, upplýsingarskyldur skattgjaldarans og annara, rætt skattamyndugleikanna til eftirlits og eftirkanningar o. s. fr.

2. Gjöllari reglur um skattskyldu, skattskylduga inntöku og skattaútrokning, m. a. um skatt av ágóða av sölu av jarðarökjum og öðrum ognum, um skattafrælsi fyri inntökur, sum giftar konur hava o. s. fr.
3. Störri barnafrádrátt og tryggingarfrádrátt, serstakar reglur um frádrátt fyri verkamenn, handverkarar og fiskimenn og serstakar reglum frádrátt fyri lönarstættirnar yvirhövur.
4. Gjöllari reglur um myndugleikar, sektir, revsing og innheinting.

1. *Sjálvsuppgáva, eftirlit o. a.*

Eftir uppskotinum verður tað gjört til skyldu at uppgeva inntöku sína (sjálvsuppgávnskylda).

Har næst skulu allir teir, sum reka vinnu og sum byggja sjálvuppgávu sína á rokniskapi, hava skyldu til at leggja fyri líkningarvöldini, tá slíkt verður kravt, alt rokniskapartilfar og öll rokniskaparskjöl, sum sjálvuppgávan byggir á. Somuleiðis fær líkningarráðið rætt til at kanna alt rokniskapartilfar og öll rokniskaparskjöl á staðnum.

Henda skylda hvítir á öllum teimum, sum reka vinnu, t. e. eisini teimum, ið ikki hava bókhaldsskyldu.

Eftir uppskotinum skulu allir skattgjaldarar hava skyldu til at lata líkningarráðnum fullfíggjað yvirlit yvir ognir sínar og virði teirra. Upp í hesar ognaruppgerðir koma tó ikki persónligir lutir, klæði, innbúgv o.t.

Vissar upplýsingarskyldur verða lagdar á almennar stovnanir, peningastovnanir, tryggingarfelög, onnur felög, verksmiðjueigarar, heildsölumenn o. s. fr. Hesir skulu hava skyldu til at geva líkningarráðnum allar tær upplýsingar, ið kunna verða ráðnum til leiðbeiningar í starvi tess.

Henda skylda gildir bert mótvegis líkningarráðnum, ikki kommunustýrum og líkningarnevndum.

2. *Skattskylda, skattskyldug inntöka, skattaútrokning.*

Eftir uppskotinum verða settar gjöllari reglur um hina skattskyldugu inntöku — m. a. hesar:

Virðið á vörum, sum skattgjaldarin nýtir úr egnum virki (t. d. handli), verður mett eftir smásöluvirði.

Ágóði av sölu av ognum verður í nærri tilskilaðum tilfellum roknaður sum skattskyldug inntöka.

Ágóði av sölu av óbygdum jarðaöki verður altið roknaður upp í skattskyldugu inntökuna. Sama hövuðsregla skal gilda fyri bygd jarðaröki, tá byggingin hevur lítið upp á seg.

Gjöllari reglur um skattskylduna, nær hon byrjar og nær hon *heldur* uppat.

Viðvíkjandi hjúnum verður aðalreglan framvegis tann, at giftur mað-

ur verður skattaður av allari inntöku sini og inntöku konunnar, men hevur konan inntøku av sjálvstøðugum virki ella av vinnu uttan fyri vinnu og virki mannsins, verður veittur frádráttur frá inntøkuni við inntøku konunnar, tó ikki við meira enn 2.000 kr.

Í skattastiganum fyri landsskattin eftir 1. § í lóg frá 4. mai 1961 er innroknaður eykaskatturin eftir 2. § í sama lóg.

Reglurnar um sjálva útrokningina av kommunuskattinum eru nakað broyttar, og verður neyðugt at gera nýggjar skattasamtyktir.

Viðvíkjandi landsskattinum á felögum verður hesin inntøkuskattur goldin við 30 % av skattskyldugu inntøkuni. Verður einki vinningsbýti útgoldið, letur felagið ikki annað í skatt enn hetta, men verður vinningur útbýttur, kemur har afturat 20 % av honum at gjalda sum vinningsbýtisskattur.

Viðvíkjandi kommunuskattinum verður reglan tann, at felög verða skattað við líkningarprosent kommununnar uttan hækking ella lækking.

3. *Frádráttir.*

Heilt nýggjar reglur eru gjørdar viðvíkjandi ymiskum frádráttum, bæði í landsskatti og kommunuskatti.

Í inntøkuni hjá fiskimonnum, verkamonnum og handverkarum, ið er fingin sum lön og/ella partur í veiði, her undir miniulön og prísviðbót, verður loyvt at draga frá 100 kr. fyri hvönn veiði- og vinumánað í árinum.

Vistarhald sjómanna verður ikki roknað upp í inntøkuna.

Í inntøkuni hjá øllum verkafólki yvirhövur verður loyvt at draga frá 600 kr., tó í mesta lagi 15 % av lönarinntøkuni, fyri flutning, klædnaslit, eykaútreiðslur í vinnutíðini o. t.

Í inntøkuni verður loyvt at draga frá upp í 600 kr. fyri tryggingargjöld o. t.

Barnafrádráttirnir verða hesir:

Í hinum útroknaða landsskatti verða fyri hvört barnið drignar frá 150 kr., tá inntøkan er lægri enn 10.000 kr., og 100 kr., tá inntøkan er 10.000 kr. ella hægri. Eftir núgildandi lóg er barnafrádrátturin 80 kr. fyri inntøkur undir 9.000 kr. og 60 kr. fyri inntøkur yvir 9.000 kr.

Er inntøkan minni enn 10.000 kr. og barnafrádrátturin meir enn skattur in uttan barnafrádrátt, verður munurin útgoldin avvarðandi skattgjaldara.

Barnafrádrátturin í kommunuskattinum verður gjørdur við frádrátti í skattleggjandi inntøku við minst 600 og mest 800 kr. fyri hvört barnið. Eftir núgildandi lóg er minsti frádráttur 70 og mesti 200 kr. fyri hvört barnið.

Núverandi aldurmark, 15 ár, verður hækkað upp í 16 ár.

4. Myndugleikar, sektir, revsing, innheinting.

Likningarráðið, sum nú er löglingsvalt, verður útnevnt av landsstýrinum. Ein av limum tess skal vera lögkönur, annar roknskaparkönur og triðji fastognar- og byggikönur.

Landsskattaráðið verður lögtingsvalt við 5 limum og hevur fastan skrivara, ið skal vera lög- og roknskaparkönur.

Tann, ið av svikalistum gevur rangar ella villandi skattaupplýsingar, verður sektaður við upp í 5 ferðir tann skatt, hann hevur goldið ella skuldi hava goldið ov lítið, um farið varð eftir upplýsingum hans. Eru hinar skeivu upplýsingar givnar í gáloysi, verður sektin 3 ferðir peningsupphæddina.

Hann, sum í starvi sínum hjálpir skattgjaldara við skattasvikum, verður revsaður við hefti ella sekt.

Reglurnar um innheinting av kommunuskatti verða tær sonn sum nú, men viðvikjandi landsskatti, verður tað latið landsstýrinum til avgerðar, í hvussu stórum pörtum hann skal verða kravdur.

I tingsetuni 1960 legði tjóðveldisflokkurin fram uppskot um gjalding og innheinting av inntökuskatti — uppskot um kelduskatt, smb. Lögtingstíðindi 1960, bls. 298—307. Tingið viðgjördi ikki hetta uppskot, men beindi tað í serstaka millumtinganevnd, sum tó ei heldur hevur gjört nakað við málið.

Tað verður ikki hildið rætt, at lata sjálva skattalógina farnast av hesi dvöl við kelduskattinum, og verður tí hetta skattalógaruppskot lagt fram nú og í hesum líki. Samstundis sum uppskotið um kelduskattin verður viðgjört og samtykt, ber til at gera neyðugar broytingar í sjálvari skattalógini.

1. viðgerð 4. april og 4. mai legði skattanevndin fram soljóðandi

Álit

Hetta uppskotið frá tjóðveldisflokkinum var við 1. viðgerð beint í skattanevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hákun Djurhuus, Poul Jacob Olsen, Hilmar Petersen og Sámal Petersen) mælir til at vald verður 5-manna millumtinga skatta-

nevnd at viðgera nýggja skattalóggávu, og at fyriliggjandi uppskot verður viðgjört í hesi nevnd og setur fram uppskot samsvarandi.

Minnilutin (Erlendur Patursson) heldur, at skattamálið eigur at verða avgreitt í hesi tingsetu og heldur tað vera óforsvarligt at bíða longur við málinum.

Minnilutin mælir tí tinginum til at samtykkja uppskot tjóðveldisflokksins.

Uppskot

frá meirilutanum:

Lögtingslóg um millumtinga skattanevnd.	Lagtingslov om et staaende skatteudvald.
§ 1.	§ 1.
Lögtingið setur niður 5-manna millumtinganevnd at viðgera spurningin um nýggja skattalóggávu. Nevndin gevur álit frá sær til lögtingið.	Lagtinget nedsætter et staaende udvalg paa 5 medlemmer at behandle spörgsmaalet om en ny færösk skattelovgivning. Udvalget afgiver betænkning til lagtinget.
§ 2.	§ 2.
Útreiðslurnar av nevndararbeiðinum, herundir samsýning til limir og medhjálp, verða goldnar úr landskassatum.	Udgifterne ved udvalgsarbejdet, herunder vederlag til medlemmerne og medhjælp, afholdes af landskassen.
§ 3.	§ 3.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder straks i kraft.

2. og 3. viðgerð 7. mai 1962.

Uppskotið frá tjóðveldisflokkinum var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. H. Danbjörg, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, D. Nolsöe, V. Nielsen, Fr. Hansen, J. Högnesen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Tg. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, P. M. Dam, H. Hansen og J. F. Øregaard.

Burturstaddir: P. Petersen, N. H. Jacobsen, Kj. Mohr, K. Djurhuus, P. J. Olsen og E. Patursson.

Uppskotið fall 11—0.
Lógaruppskotið frá meirahlutanum samtykt 20—0.

---

91. Skip til strandfarasiglingina

Ár 1962, 5. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um keyp av báti til strandfarasiglingina.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at keypa hóskandi bát til strandfarasiglingina og at taka neyðugt lán til hetta keyp.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om köb af fartöj til kystfarten.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at köbe et passende fartöj til kystfarten og at optage nödvendigt laan til dette köb.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur frá strandfarasiglingini 1. í hesum fingið soljóðandi skriv:

«Sum háttvirda landsstýri kunnugt, so er Bitan nógv ovlítil til ta sigling, ið hon er ætlað til. Fyri at strandferðslan kann verða för fyri at áluka sær at flyta farmin, má hon leiga eykafar minst 2 ferðir um vikuna. Hetta kostar strandferðsluni ca. 2.000 kr. um mánaðan. Verður hetta

ikki gjört, missa vit allan farmin til aðrar bátar. Fyri at Sandoyggin skal kunna rökjast á rættan hátt, so má Ritan sigla út frá Skopun einar 3 ferðir um vikuna.

Eg mæli til, at strandferðslan keypir ein bát til hjálpar sum skjótast. Vit kunnu nú fáa ein 30 tons bát lagaliga til keyps.

Eg havi tosað við Sjóvinnubankan, og vil hann læna peningin til strandferðsluna. Báturin má sjálvandi hava radar um borð.

Hesin báturin kemur ikki at taka nakað frá Rituni, men tvörturimóti kemur hann at nöra um farm og farmagjald, tí tá líta öll fólk á strandferðslu landsins bæði hvat ið viðvíkir fluttningi av fólki og góðsi.

Tað er nú ringt hjá mær at siga, hvat ein tílíkur bátur kemur at kosta okkum at hava ígongd, og hvat hann kemur at sigla inn. Ætlanin er at taka ein mann av Rituni um borð á tann bátin, ið ætlandi verður keyptur, so statt verður tann samlaða manningin til báðar bátarnar 5 manns. Hetta verður ein meiraútreiðsla uppá 15.000 kr. Báturin kemur eisini at sigla nógvan pening inn í farmagjaldi, eisini tí at báturin verður nýttur til aðra sigling enn til Sandoynna. Men alt í alt, so er tað avgjört neyðugt at fáa bátin nú.»

Í skrivinum frá skipasýninum verðum m.a. sagt, at Ritan ikki fær loyvi til at sigla við meira enn 50 í staðin fyri 70 ferðafólkum í tíðarskeiðinum 1. mai til 30. september og at deksplássið uppi á yvirbygninginum ikki má nýtast til dekslast.

Landsstýrið er á einum máli við administrator um, at neyðugt er at fáa eitt minni far aftrat til strandfarasiglingina, um henda skal rökjast væl.

1. viðgerð 6. og 26. apríl legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

5. apríl var málið lagt fram á ting av landsstýrinum og var við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Tað er fyristöðumaðurin fyri strandfarasiglingini, sum við skrivi til landsstýrið 4. apríl hevur reist málið og förir hann fram, at Ritan ikki er för fyri at lúka tær uppgávur, hon hevur, og er tí neyðugt at fáa eitt skip afturat til hesa sigling.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við tí uppiskoyti, at tað skip,

sum keypt verður afturat, verður at sigla minst tvær ferðir um vikuna norður í Eysturoy. Hetta er avgjört neyðugt við tað, at sum nú er, er bert ein dag um vikuna fartur úr Havn og norðureftir, so tað er ómuligt, at hesin bátur fyri ein part verður nýttur til hesa sigling.

Nevndin setur fram fylgjandi uppskot:

I. Landsstýrisins uppskot verður at samtykkja.

II. Landsstýrinum verður álagt at skipa fyri, at tað minst triggjar ferðir um vikuna verður beinleiðis fartur úr Havn og norður í bygdirnar á eystursiðuni á Eysturoynni.

2. viðgerð 26. og 3. viðgerð 28. apríl 1962.

Landsstýrisins uppskot samtykt 28—0.
Uppskot frá nevndini II samtykt 29—0.

---

92. Sjúkatryggingarmál

Ár 1962, 2. apríl legði Erlendur Paturssson lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

Föroya lögting samtykkir at lata kanna núverandi sjúkratryggingarskipan (sjúkrakassaskipan) við tí endamáli, at leggja öll tey málsöki, sum núverandi sjúkrakassar rökja, beinleiðis undir eina og sama stjórn hins almenna.

Millumtinganevndin í vanlukkutryggingarmálum fær hesa kanning í hendi og leggur úrslitið av kanningini fyri tingið ikki seinni enn 1. august 1962.

Greinargerð

Í sosialmálum má endamálið vera almenn fólkatrygging, t. e. at alt

landsins fólk verður tryggjað móti öllum avleiðingum av samfelagsligum vandum og óhappum.

Í sosialmálum okkara er enn langt á mál í so máta, og enn er ikki bött um mong av verstu brekunum í sosialtryggingarmálum fólksins, t. d. í vanlukkutryggingarlóggávuni og í sjúkratryggingarlóggávuni.

Í serstökum tingmáli hevur tjóðveldisflokkurin lagt fram uppskot um broytingar og ábötur í vanlukkutryggingini. Í hesum máli verður mælt til um- og nýskipan í sjúkratryggingarmálunum.

Hövuðsuppistöðan í núverandi sjúkratrygging er fyriskipanin frá 21. februar 1930 um viðurkendar sjúkrakassar við seinni broytingum.

Henda skipan hevur havt stórtýðning fyri sjúkratryggingarmál landsins. Men hon hevur eisini mong brek, og við teirri framlöku, sum serstakliga í árunum aftan á seinna heimsbardaga hevur verið í öllum sosialtryggingarmálum, har í millum í sjúkratryggingarmálum, er tíðin á mangan hátt runnin frá hesi skipan.

Her verður tí mælt til, at lögtingið letur kanna alla núverandi sjúkratryggingarskipan landsins við tí í byggju, at fáa hesi mál um- og nýskipað eftir teimum royndum, sum fingnar eru, og eftir kravinum um almenna fólkatrygging á hesum öki.

Úr hesum sjónarmiði — kravinum um almenna fólkatrygging — má tað haldast vera neyðugt at gera heilt nýggja sjúkratryggingarskipan, nevniliga slíka, at núverandi sjúkrakassar verða niðurlagdir og í staðin gjörd sjúkratrygging fyri alt landið undir eini og sonnu stjórn hins almenna.

Aðaluppistöðan í slíkari skipan skuldi verið:

Sett verður sjúkratryggingarstjórn fyri alt landið, ið skal rökja allar tær uppgávur, ið teir mongu smáu og stóru sjúkrakassar nú hava, og aðrar sjúkratryggingaruppgávur, sum undir hesa skipan verða lagdar so hvört sum böll verður um tryggingina.

Sjúkrakassagjöldini falla tá burtur. Tilsvarandi pening verður tá hin nýggja sjúkratrygging at fáa úr landskassanum, t. e. burtur av skatta- og öðrum inntökum hans.

Við slíkari skipan verður sjúkratryggingin eins fyri öll, hvar tey so búgva í landinum, og hetta má haldast vera rætt. So er ikki nú. Hjálpin, ið teir ymiska sjúkrakassar veita, er ymisk. Og gjöldini eru ymisk. Fólk, ið búgva langt frá læknu og sjúkrahúsi, skulu ikki revsast fyri tað við ófullkomnari hjálp og störri gjöldum, men tað verða tey nú.

Í öðrum lagi verður möguleiki til at veita betri og störri hjálp yvirhövur. Tá verður eisini byrgt fyri, at einstukar sjúkrakassastjórnir sýta fólki hjálp, sum tey av röttum eiga.

Øll umsiting sjúkrakassanna er óneyðuga kostnaðarsom. Eitt slag av skrivstovuhaldi skal til, hvussu tátil sjúkrakassin er, lunkrevjingin av limagjaldi er tíðar- og peningakrevjandi. Fólkatal landsins er ikki størri enn so, at øll kunna vera undir eini og sonn skipan.

Sjúkrakassagjaldið verður álagt pr. høvd. Maður við minstu inntøku letur sama krónutal, sum tann við tí hægstu. Hin vinnuleysi letur sama krónutal, sum hann, ið vinnu hevur. Næmingar, lærlingar, skúlafólk o. s. fr. lata sama krónutal, sum tey, ið komin eru út í vinnu og hava inntøku.

Sjúkrakassagjaldið er nú oman fyri 100 kr. Hjá mongum er hetta tung byrði. Undan útreiðslunum av sjúkratryggingini sleppur fólkið ikki, sjálvsagt, men verður tann peningur, ið sjúkrahjálpin skal nýta, fingin burtur av skattainntøkum hins almenna, verður úrslitið tað, at hin minni menti kemur at gjalda minni krónutal, hin meiri størri krónutal.

Tann um- og nýskipan, ið her verður talað um at gera, krevur gjøllari kanningar, enn umstøður verða til í hesi tingsetu, og verður tí mælt til, at málið verður givið millumtinganevnd í hendi, sum so leggur úrslit sítt fyri komandi tingsetu.

1. viðgerð 4 .og 2. viðgerð 9. apríl 1962.

Formaðurin lagði fram soljóðandi broytingaruppskot frá E. Patursson:

«Í staðin...fyri» millumtinganevndina í vanlukkutryggingarmálum verður sett:

«Fimmmannamillumtinganevnd — vald av lógtinginum.»

Broytingaruppskotið fall 11—0. (sinbr. tingmál nr. 45/1961).

---

93. Broyting í lógini um Tórshavnar kommunu

Ár 1962, 9. apríl legði Kj. Mohr, lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um broyting í lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 om byen Tórshavns kommunale styrelse.

§ 1.

Uppí § 20, stk. 1 verður sett:

«Er limur hindraður bráðfongis, kann hann eftir skriviligari áheitan um tað eftir býráðsins avgerð sleppa frá starvinum fyribils, til hann fær møtt aftur.»

§ 2.

Hetta lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lov nr. 126 af 27. mai 1908 om byen Tórshavns styrelse.

§ 1.

Til § 20, stk. 1 föjes:

«Er forhindringen forbigaaende kan et medlem i henhold til skriftlig anmodning derom efter byraadets beslutning midlertidig fritages for forretningerne, indtil forhindringen ophører.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sambart skriv frá Tórshavnar býráð dagfest 5. í h. sigur býráðið:

«Sambart gr. 20 í lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 um «Byen Thorshavns kommunale styrelse» er tað eykamanni bert loyvt at taka við starvi sum býráðslimur, tá fastur limur av býráðnum doyr ella fer úr ráðnum.

Býráðið hevur í longri tíð verið í ti stöðu, at býráðslimur hevur ikki kunna luttikið í býráðs- ella nevndararbeiði vegna starv sum sjómaður, og hevur hetta í mongum föri vist seg tarnandi fyri býráðsarbeiðið.

Býráðið loyvir sær ti at venda sær til lögtingið við áheitan um, at gr. 20 í nevndu lóg frá 27. mai 1908 verður broytt samsvarandi teim reglum, sum settar eru í gildi fyri bygdakommunur soleiðis, at eykamaður eisini fær loyvi at taka sess í býráðnum, tá fastur limur vegna sjúku, burturferð ella av aðrari orsök skuldi verið lógliga hindraður í at luttaka í samráðingum býráðsins.»

1. viðgerð 11. apríl og 28. s. m. legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Lögtingsmenninir fyri Suðurstreym hava lagt fyri lögtingið uppskot til lögtingslóg um broyting í lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 om byen Thorshavns kommunale styrelse.

Eftir áheitan frá Tórshavnar býráð verður skotið upp, at § 20, 1. stk. í nevndu lóg verður broytt soleiðis, at býráðslimur, ið er hindraður bráðfongis at möta, kann sleppa frá starvinum fyribils til hann fær mött aftur, og soleiðis at næsti maður á listanum kann möta fyri hann.

Málið var við 1. viðgerð beint í kommunalu nevndina, ið undir viðgerðini av málinum er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 30. apríl og 3. viðgerð 1. mai 1962.

Lógaruppskotið samtykt 25-0.

---

94. Lóg til keyp av sleppingarlombum

Ár 1962, 6. apríl legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um lán til keyp av seyði til sleppingar.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað úr landskassanum at læna upp í 100.000 kr. til hagar, ið hava verið fyri stórum áseyðarmissi, at keypa sleppingarlomb o. t. fyri, so skipanin skjótast möguligt kann fáast uppaftur.

lagtingslov om lån til köb af avlsfaar.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at udlaane op til kr. 100.000, til hauger, der er blevet ramt af store tab af faar til indköb af avlsfaar til oplijælpning af faarebestanden hurtigst muligt.

§ 2.

Láninni verða at afturgjalda í 5 ár og eru rentufri.

§ 3.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Lånene bliver at tilbagebetale indenfor 5 aar og er rentefri.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Longu nú stendur tað mannum greitt, at áseyðamissurin í kavanum herfyri í vissum högum hevur verið so stórur, at talan er um fellisár, hvat hesum högum viðvikir. Hvat fíggjarligt tap, ið hetta hevur verið fyri hesar hagar, letur seg ikki siga í tölum, men tað hevur verið ræðuliga stórt, sigur seg sjálvt. Tað er tí neyðugt at skipa so fyri, at hesir hagar kunnu fáa skipanina upp aftur skjótast möguligt, men her skal stórur peningur til, og í dag er peningur dýrur at læna.

Fólkaflokkurin setur tí lógaruppskot fram um, at teimum högum, ið hava verið meint raktir, skal veitast möguleiki til rentufrítt úr landskassanum at fáa fimmúra lán til keyp av seyði til sleppingar, og verður landsstýrinum heimilað at læna upp í 100.000 kr. til hetta endamál.

1. viðgerð 10. og 28. apríl legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av fólkaflokkinum við uppskoti til lögtingslóg.

Við 1. viðgerð av málinum varð tað beint í búnaðarnevndina.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Haldor A. Hansen, J. P. Davidsen, Hans Iversen og Poul J. Djurhuus) förir fram, at tá mao ikki í löfuni hevur yvirlit yvir, hvat ið mist er av seyði og hvat fara kann í mestu framtíð, má tað vera ivi um, um tað í uppskotinum framförda er nökur loysn til nakran bata fyri allar teir, ið mist hava seyð í hesum kavanum. Meirilutin kann tí ikki mæla linginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Vilhelm Nielsen) mælir linginum til at samtykkja lógaruppskotið óbroytt.

2. viðgerð 1. mai 1962.

Lógaruppskotið var sett undir atkvöði við navnakall:

Ja atkvöddu: M. Johannesen, N. Holm Jacobsen, K. Wang, H. Djurhuus, J. Simonsen, V. Nielsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Patursson, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: J. Lindenskov, H. Petersen, L. Joensen, Johan Poulsen, H. Iversen, D. Nolsöe, Poul J. Olsen, H. Hansen og J. F. Öregaard.

Burturstaddir: J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, T. Samuelsen, A. Djurhuus, J. P. Davidsen, K. Djurhuus og P. M. Dam.

Uppskotið fall 13—0.

---

95. Ábyrgd av útgerðarlánum til útróður í Grönlandi

Ár 1962, 9. apríl legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um ábyrgd av útgerðarlánum til útróður í Vestur- og Eysturgrönlandi.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at taka ábyrgd av útgerðarlánum, sum bátsskipanir taka, og sum hvör bátsskipan sínámillum og hvör einstakur av bátsskipanini heftir fyri in solidum í Vestur- og Eysturgrönlandi í 1962.

lagtingslov om garanti for udrustningslaan til baadfiskeri i Vest- og Östgrönland.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for udrustningslaan, som baadelag optager, og som hvert baadelag indbyrdes og hver enkelt af baadelaget hæfter for in solidum, til baadfiskeriet i Vest- og Östgrönland i 1962.

§ 2.

Heuda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Landsstýrið loyvir sær at leggja inn uppskot til endurnýgging av higartil galdandi skipan um ábyrgd av útgerðarlánum til útróður í Vestur- og Eysturgrönlandi í 1962.

1. viðgerð 11. og 24. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

9. apríl 1962 varð málið lagt fram á ting av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina. Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið óbroytt.

2. viðgerð 28. apríl og 3. sama dag.
Landsstýrisins uppskot samtykt 23 0.

---

96. Skattur til landskassan

Ár 1962, 10. apríl legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot til lögtingslóg um skatt til landskassan.

§ 1.

Reglurnar í § 2 í lögtingslóg nr. 11 frá 4. mai 1961 um eykaskatt til landskassan verða óbroyttar galdandi fyri skattaárið 1962/63.

Forslag til lagtingslov om skat til landskassen.

§ 1.

Bestemmelserne i § 2 i lagtingslov nr. 11 af 4. maj 1961 om ekstraskat til landskassen forbliver uændret i kraft for skatteaaret 1962/63.

§ 2.

Henda lög fær gildi frá 1. apríl 1962.

§ 2.

Denne lov faar gyldighed fra 1. april 1962.

Viðmerkingar:

Seinru árini hevur aftrat í skatti, sum áliknaður er eftir föstu skattatalvuni, verið kravdur eykaskattur, sum til í fjör var 30 % av skattinum av öllum inntökum yvir 5.000 kr., men sum við lögtingslög nr. 11 frá 1. maí 1961 varð broyttur soleiðis, at hann nú er 20 % av skattinum av inntökum millum 6.000 kr. og 8.000 kr. og 30 % tá inntökan er 8.000 kr. ella meira.

Landsstýrið heldur ikki möguleika vera fyri at minka um ella avtaka henda eykaskatt og setur í fram uppskot um, at hann eisini verður kravdur fyri komandi skattaár.

1. viðgerð 11. 2. og 3. viðgerð 28. apríl 1962.
Landsstýrisins uppskot samtykt 17 0.

---

97. Broyting í tænastumannalógini

Ár 1962, 11. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslög um broyting í tænastumannalógini.

Sum nýtt stk. 9 í § 26 í lögtingslög nr. 31 frá 18. maí 1961 um tænastumenn landsins við seinni broytingum verður sett:

Um tænastumaður hevur verið

lagtingslov om ændring i tjenestemandsloven.

Som nyt stk. 9 i § 26 i lagtingslov nr. 31 af 18. maj 1961 om landets tjenestemænd med senere ændringer indföjes:

Saafremt en tjenestemand har

tænastumaður undir ríkinum, fólkakirkjuni, fólkaskúlanum ella Köbenhavnar kommunala skúla í tilsvarandi embæti ella lönarflokki, kann tað verða loyvt honum at flyta lönaraldurin við sær allan ella ein part.

været tjenestemand i staten, folkekirken, folkeskolen eller Köbenhavns kommunale skolevæsen i et tilsvarende embede eller lönningsklasse, kan det tillades, at han overförer lönningsancienniteten den hele eller en del af denne.

Viðmerkingar:

Tað er döm um, at tænastumaður undir ríkinum sökir embæti undir landinum svarandi til tað, hann hevur. Eftir galdandi reglum kann hann ikki flyta lönaraldurin við sær og verður so fylgjan, at hann verður löntur við byrjunarlön við tilnevningina, hann kann tí fara niður í lön.

Í slikum förum eigur möguleiki at vera fyri at flyta lönaraldurin við sær og eisini, tá ið tænastumaður undir ríkinum fær tilnevning her í embæti í tilsvarandi lönarflokki, jbr. regluna í § 26, stk. 3 í tænastumannalögini um flytan úr starvi í annað við somu skipaðu lön, har hin fingni tænastualdurin verður taldur við.

Tær reglur, ið galda fyri tænastumenn undir ríkinum, eiga eisini at galda fyri tænastumenn undir fólkakirkjuni, fólkaskúlanum og Köbenhavnar kommunala skúla, tí eisini haðani kunnu hugsast umsökjarar til tænastumannaembæti undir landinum.

1. viðgerð 13. apríl, 2. 26. og 3. viðgerð 28. apríl 1962.

Lógaruppskotið var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Lindenskov, H. Petersen, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Tr. Samuelsen, L. Joensen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, D. Nolsöe, P. M. Dam, Poul J. Olsen, Haldor Hansen og J. F. Öregaard.

Atkvöddu nei: N. Holm Jacobsen, K. Wang, J. Simonsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: P. Petersen, H. Djurhuus og V. Nielsen.

Burtursfaddir: K. Djurhuus, S. Joensen og E. Paturssen.

Uppskotið samtykt 16–8.

98. Leivur Össursson

Ár 1962, 11. apríl legði Henming Jespersen lögtingsmaður fram soljóðandi

Adressu frá Tvöroyri við 177 undirskriftum:

Undirritaðu Tvöroyramenn krevja nú Föroya Landsstýri hevur keypt «Leivur Össursson», at hann framvegis blívur verandi her á plássinum fyri at avhjálpa arbeiðsloysi, og vit mótmæla harðliga, at Föroya Landsstýri letur henda trolara til Havnar.

1. viðgerð 13. apríl og 1. mai legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Figgjarnevndin hevur fingið hetta mál til viðgerðar.

Til umröðu í nevndini hava verið bröv frá P/F Rútafelli og P/F Fuglafjarðar Samvinnufelag, har biðið verður um veðhald fyri láni upp til 250.000 kr. og eina saneering við at strika peningin, ið felögini skylda til landskassan. I brevinum frá Suðuroyar Norðara Trolarafelag verður biðið um at felagið fær trolarin «Leivur Össursson» aftur til ognar við sonu sömdum sum Rútafelli og Fuglafjarðar Samvinnufelag.

Nevndin hevur hýtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meiralutin (J. Fr. Øregaard, Andr. Djurhuus, Joh. M. Fr. Poulsen, Sámal Petersen og Poul Petersen) mælir tinginum til at givin verður landskassaábyrgd upp í 250.000 kr. til felögini Rútafelli og Fuglafjarðar Samvinnufelag, meðan tað ikki nú verður tikin stöða til saneering av hesum báðum felögunum og spurninginum um «Leivur Össursson». Av tí at figgjarstöðan hjá felögunum er heilt vánalig mælir figgjarnevndin felögunum til beinanvegin nú at hækka um partapeningin við í minsta lagi 200.000 kr.

Samsvarandi hesum setur meiriluta fram uppskot.

Minnilutin (Hemming Jespersen og Erlendur Paturssson) mælir til at gingið verður teimum trinum felögum á móti, soleiðis at Rútafelli og Fuglafjarðar trolarafelag fáa hildið fram og soleiðis at Suðuroyar norðara trolarafelag beinanvegin fær Leiv Össursson aftur til ognar.

Settur verður maður, könur í útgerðarrekstri, til at hava eftirlit við öllum sum rekstrinum, umsitingini og stjórningini viðvíkir í hesum 3 felögum.

Hetta sama eftirlit skal verða fyri trolaran Jóannes Fonsdal.

Samstundis vil minnilutin at sáttmálin við pf. Dagsbrún um leigu av trolaratnum Leivi Óssurssyni verður lagdur fyri tingið.

Uppskot

frá meirilutanum:

Lögtingslóg um figgjarligan stuðul til trolarafelög.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum til eindan av terminsgjöldum til Færöernes Realkreditinstitut pr. 1. mai 1962 uppí 250.000 kr. til hvört av trolarafelögunum P/f Rútafelli, Vágur og p/f Fuglafjarðar Samvinnufelag, Fuglafjörður.

§ 2.

Henda lögtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

Lagtingslov om finansiel støtte til trawlerselskaber.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan til betaling af terminsydelser til Færöernes Realkreditinstitut pr. 1. maj 1962 indtil kr. 250.000,— til hvert af trawlerselskaberne p/f Rútafelli, Vágur, og p/f Fuglafjarðar Samvinnufelag, Fuglafjörður.

§ 2.

Denne lagtingslov træder straks i kraft.

2. viðgerð 5. mai.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá H. Jespersen og E. Patursson:

Í staðin fyri uppskot meirilutans verður sett:

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri lánum til eindan av terminsgjöldum til Færöernes Realkreditinstitut pr. 1. mai 1962 upp í 250.000 kr. til hvört av trolarafelögunum p/f Rútafelli, Vágur, og p/f Fuglafjarðar Samvinnufelag, Fuglafjörður.

§ 2.

Landskassin selur trolaran Leiv Óssurssoon til Suðuroyar norðara trolarafelag.

§ 3.

Settur verður maður, kömur í útgerðarrakstri, til at hava eftirlit við

öllum, sum rakstrinum, umsitingini og stjórningini viðvíkur í teimum 3 felögum, og skal hetta sama eftirlit vera við frolaranum Jóannes Fonsdal.

3. viðgerð 7. mai 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá J. F. Øregaard:

§ 1 í uppskotinum frá fíggjarnevndini verður broytt soleiðis, at «til Færøernes Realkreditinstitutt» gongur út bæði í föroyska og danska tekstinum.

Broytingaruppskotið frá H. Jespersen og E. Paturssoni fall 8—0.
Broytingaruppskotið frá J. F. Øregaard samtykt 22—0.
Lógaruppskotið frá nevndini so broytt samtykt 22—0.

---

99. Ábyrgd fyri láni til Sumbiar kommunu

Ár 1962, 12. april legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot til lögtingslóg um	Forslag til lagtingslov om
ábyrgd fyri láni 100.000 kr. til Sumbiar kommunu til útbygging av pollinum.	garanti for laan 100.000 kr. til Sumbiar kommune til udbygning af pollinum.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað, landskassans vegna, at veðhalda fyri láni 100.000 kr. til Sunnbiar kommunu til útbygging av pollinum.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at garantere for laan 100.000 kr. til Sunnbiar kommune til udbygning af pollinum.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Sunnbiar kommuna sókir í skrivi 16. mars í ár um loyvi at taka lán úr Færö Amts Sparekasse uppá 100.000 kr. til útbygging av pollinum. Sparikassin hevur játtað lánið um landskassin tekur ábyrgdina av tí. Afturgjaldstíðin er 10 ár.

Landsverkfröðingurin upplýsir, at útbyggingin av pollinum verður tyrireikað nú og verður ætlandi farið undir arbeiðið í apríl.

Kostnaðurin er mettur til 600.000 kr. og er játtaður kommununi studningur við 75 % av kostnaðinum ella við 90.000 kr. árliga í 5 ár frá 1. apríl 1959, jmt. lögtingstíðindi 1958 bls. 69. Í ár fær kommunan sostatt 4/5 av studninginum ella 360.000 kr.

Kommununnar partur er 150.000 kr. og vil hon lána 100.000 kr. at afturrinda í 10 ár.

Kommunan hevur latið um figgjaryvirlit pr. 31/12-61, ið vísir, at kommunan tá átti í peningi um 34.300 kr. og í skattaeftirstöðum um 57.300 kr. av einari álíkning uppá um 129.000 kr.

Kommunan skyldaði tá 1.500 kr. í Sparikassanum og um 7.900 kr. í millumrokning við landskassan. Seinri hevur kommunan tikið lán 50.000 kr. í Sjóvinnubankanum at afturrinda í 10 ár til keyp av hvalastöðini í Lopra.

1. viðgerð 24. apríl, 2. 30. apríl og 3. viðgerð 1. mai 1962.

Lógaruppskot samtykt 25—0.

100. Útflyting av ull

Ár 1962, 12. apríl legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um útflyting av ull.

§ 1.

Útflyting av ull úr Föroyum er forboðin uttan loyvi frá landsstýrinum.

§ 2.

Landsstýrið fyrisetur nærri regl ur hesum viðvikjandi.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om udförsel af uld.

§ 1.

Udförsel af uld uden landsstyrets tilladelse er forbudt.

§ 2.

Landsstyret fastsætter de nærmere regler desangaaende.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Seinasta ár vórðu útflutt úr Föroyum 10 tons av óvirkaðari ull fyri 74.000 kr. Herafturat kemur ullin á skinnunum, ið leysliga mett liggur um 30 tons. Sostatt er her talan um nógv ráevni, ið verður útflutt, men sum eins væl kundi verið spunnið til tógv her í Föroyum og síðani gjört til ullint plögg ella vovið til borð- og gólváklæði. Tað má standa öllum greitt, at tað virði, ullin tilvirkað vildi givið, er fleirfaldað tí, ullin sum útflutningsráevni gevur.

Ívaleyst er ein partur av tí, ið verður útflutt, óvandaull. Men av spuna lögunum, ið her eru, vita vit fyri vist, at tað eina tekniskt kann gera alla ull til tógv. Og tey, ið hövdu hövi til at vitja vevuframsýningina í Havn herfyri, kundu har síggja frálíkar lutir, vovnir úr slíkum föroyskum tógvi.

Úr föroyskari bygd, ið hevur vist störst ágrýtni viðvikjandi löting, hevur Fólkaflokkurin fingið hesa áheitan:

«Tá tað nú er ein veruleiki, at so nógv av föroysku ullini verður virkað í landinum, spunnið bundið og vovið, at avvarandi virki verða noydd at flyta ull inn úr öðrum londum til hetta endamál, og orsökin einans er tann, at föroyska ullin verður flutt út úr landinum óvirkað, loyva vit

okkum at heita á tykkum um at leggja fyri lögtingið um at fáa hetta í rætthag.

Uppskot okkara er antin at banna allari útflytan av ull úr Föroyum ella, um hetta ikki er gjørligt, so í hvørtfall at skamta útflutningin.

Ávíst kann verða, at Noreg, um ikki beinleiðis bann, so tó hevur skamtan móti útflutningi av norskari ull haðani úr landinum.»

Samsvarandi hesum í viðmerkingunum framlørdu sjónarmiðjum verður lógaruppskotið sett fram.

1. viðgerð 24. apríl og 2. mai legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av fólkaflokkinum við uppskoti til lögtingslóg.

Við 1. viðgerð av málinum varð tað beint í búnaðarnevndina.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg sundur í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Haldor Hansen, J. P. Davidsen og Hans Iversen) kann ikki mæla tinginum til at samtykkja lógaruppskotið, men setur annars onki uppskot fram.

Minnilutin (Vilhelm Nielsen og Sigurð Joensen) mælir tinginum til at samtykkja lógaruppskotið óbroytt.

2. viðgerð 4. mai 1962.

Lógaruppskotið fall 14—0.

---

101. Minstalön og prísviðbót

Ár 1962, 26. apríl legði K. Djurhuus varalögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um at longja skipanina um studning úr landskassanum til minstalön og viðbót til fiskaprísin.

§ 1.

Við tí endamáli at gera Lönjavningargrunn skipsfiskimanna föran í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember 1962 at veita manningini á föroyskum fiskiskipum og útróðrarmonnum í Grönlandi minstalön og/ella viðbót til fiskaprísin verður lögtingslóg nr. 3. 18. februar 1955 um uppískoyti til lögtingslóg nr. 72, 22. december 1951 um avrokning og lönjavningargrunn skipsfiskimanna longd soleiðis, at 1,8 mill. kr. verða latnar Lönjavningargrunni skipsfiskimanna í studningi úr landskassanum. Studningurin verður goldin grunninum innan 1. april 1963.

Hesin studningur til Lönjavningargrunn skipsfiskimanna verð ur latin treytað av, at grunnurin skipar so fyri í sini komandi reglugerð:

at minstalönin til fiskimenn yvir 16 ár verður 1000 kr. Teir, ið eru undir 16 ár, fáa í mun hertil eftir higartil galdandi reglum,

at grunnurin átekur sær fyrisitingina av studninginum til

lagtingslov om at forlænge tilskudsordningen fra landskassen til mindstelön og tilskud til fiskepriser.

§ 1.

Med det formaal at sætte skibsfiskernes lönreguleringsfond i stand til for tiden 1. januar til 31. december 1962 at yde mandskabet paa færöske fiskeskibe og baadfiskere i grönlandske farvande mindstelön og/eller tilskud til fiskepriser forlænges lagtingslov nr. 3 af 18. februar 1955 om tillæg til lagtingslov nr. 72 af 22. december 1951 om fiskernes afregning- og lönreguleringsfond saaledes, at 1,8 mill. kr. ydes Fiskernes lönreguleringsfond i tilskud fra landskassen. Tilskudet udbetales fonden inden 1. april 1963.

Dette tilskud til Fiskernes lönreguleringsfond ydes paa betingelse af, at fonden foreskriver i sit førstkommende regulativ:

at mindstelönnen til fiskere over 16 aar udgör kr. 1000. De fiskere, der er under 16 aar, faar tilskud efter hidtil gældende regler,

at fonden paatager sig administrationen af tilskudet til fis-

fiskimenn í heimaútróðri og í sildaveiðu við opnum báti,

at viðbótin verður 10 oyrur pr. kg av veiðuni av öllum rundum, kruvdum ráfiski við hövdi innhandlaður í Föroyum til útflutnings fyri deksför og 13 oyrur pr. kg fyri allar opnar bátar eisini á sildaveiðu til agns, frystingar og saltingar.

§ 2.

Í lög nr. 72 frá 22. december 1951 um avrokning og lönjavningargrunn skipsfiskimanna, sum henda seinni er broytt, smbr. m.a. lögarkunngerð nr. 16 frá 25. juni 1954, verða gjördar hesar broytingar at galda fyri fyrst:

a) Í stk. 1 í § 5 verður «1 %» undir 1), 4) og 5) broytt til «1½ %», undir 2) verður «1 %» broytt til «2 %» og undir 3) «1½%» broytt til «2%».
b) Sum nýtt punkt 5 til § 5: 1 % av söluvirðinum av fiskaflaki til útflutnings.
c) Stk. 7 í § 5 fer úr gildi.
d) Aftrat § 7, aftaná orðið «avgerð», verður sett: «gjögnum stýrið fyri lönjavningargrunnin».
e) Av stórhvalaveiðu 50 kr. av hvörjum veiddum stórhvali og 25 kr. av hvörjum sildreka ella öðrum smáhvali.

§ 3.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

kere, der driver hjemmefiskeri, og sildefiskeri med aabne baade,

at tilskudet udgör 10 öre pr. kg af fangst af al rund raafisk med hoved og uden indvolde, der indhandles til eksport for dæksfartöjer og 13 öre pr. kg for alle aabne baade samt sildefangst til agn, frysning og saltning.

§ 2.

I lov nr. 72 af 22. december 1951 om Skibsfiskernes afregnings- og lönreguleringsfond, som denne senere er ændret, jfr. bl. a. lovbekendtgörelse nr. 16 af 25. juni 1954, foretages följende ændringer at gælde indtil videre:

a) I stk. 1 i § 5 ændres «1 %» under 1), 4) og 5) til «1½ %», under 2) ændres «1 %» til «2 %» og under 3) ændres «1½» til «2 %».
b) Som nyt punkt 5 til § 5: 1 % af salgsværdien af fiskefilet til eksport.
c) Stk. 7 i § 5 træder ud af kraft.
d) Til § 7, efter ordet «bestemmelser», indsættes: «gennem styret for lönreguleringsfonden».
e) Af storhvalfangst 50 kr. af hver fanget storhval og 25 kr. af hver sejhval eller anden mindre smaahval.

§ 3.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Landsstýrið loyvir sær at leggja fram uppskot til endurnýggingar av galdandi skipan um studning úr landskassanum til minstulön og prisviðbót eins og seinasta ár.

Harafrat hevur landsstýrið loyvt sær eftir tilmæli frá lönjavningargrunninum at fyriseta avgjald til grunnin av stórhvalaveiðu, soleiðis at hon kann koma undir minstulönarskipanina.

1. viðgerð 28. april og 4. mai legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Álit

Málið varð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við hesum broytingum:

Í § 1 verður í næstuiðasta pelti á fyrstu síðu aftaná «16 ár» sett: «1000 kr.» í báðum tekstunum.

Í seinasta pelti í § 1 verða 10 og 13 oyrur broytt til: «15 oyrur» í báðum tekstunum.

Sum nýtt punkt f verður sett:

Allur rundur ráfisktur, sum verður innhandlaður í Föroyum og beinleiðis útfluttur aftur sum ótilvirkaður ísfiskur, kemur undir avgjald til lönjavningargrunnin við 10 % av söluvirðinum.

Af al rund ruafisk, der indhandles paa Færöerne og direkte eksporteres som utilvirket isfisk svares en afgift til lönregulerings-fonden paa 10 % af salgsværdien.

2. viðgerð 4. mai.

Formaðurin legði fram soljóðandi

broytingaruppskot frá Johan Simonsen o. fl.

Í § 1 in fine verður sett:
«at myunstrendir útróðrarmenn við dekksförum fáa 800 kr. um mánaðin í minstulön»,

og soljóðandi

Í staðin fyri fiskivinnunevndarinnar punkt f verður sett:

Allur rundur ráfiskur, sum verður innhandlaður í Föroyum og fær prísviðbót og beinleiðis útfluttur sum ótilvirkaður ísfiskur, kemur undir avgjald til lönjavningargrunnin við 15 oyrum pr. kg av innhandlaði vektini.

Af al rund raafisk, der indhandles paa Færöerne og faar pristilskud og direkte eksporteres som utilvirket isfisk svares en afgift til lönreguleringsfonden paa 15 öre pr. kg af den indhandlede vægt.

Broytingaruppskot frá Johan Simonsen o. fl. var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: H. Djurhuus, J. Simonsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, Poul J. Olsen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá, H. Jespersen og Haldor Hansen.

Akvöddu ikki: H. Petersen, J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. Petersen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Johan Poulsen, J. P. Davidsen, Hans Iversen, P. M. Dam og J. F. Öregaard.

Burturstaddir: J. Lindenskov, L. Joensen, D. Nolsöe, V. Nielsen og K. Djurhuus.

Broytingaruppskotið fall 8—9.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Kj. Mohr og fleiri:

Í 1. §, 1. stk. verður aftaná «Í Grönlandi» skotið inn: «til lands og frá móðurskipi.»

Broytingaruppskot frá Kj. Mohr o. fl. var sett undir atkvöðu við navnakall:

Ja atkvöddu: J. Simonsen, Kj. Mohr, Fr. Hansen, J. Högnesen, S. Joensen, E. Paturssen, H. v. Högadalsá og H. Jespersen.

Atkvöddu ikki: P. Petersen, J. Lindenskov, J. H. Danbjörg, S. Petersen, M. Johannesen, Niels H. Jacobsen, K. Wang, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Poul J. Olsen, J. P. Davidsen, H. Iversen, P. M. Dam og J. F. Öregaard.

Burturstaddir: H. Petersen, H. Djurhuus, L. Joensen, Johan Poulsen, D. Nolsöe, V. Nielsen, K. Djurhuus og Haldor Hansen.

Broytingaruppskotið fall 8—9.

Broytingaruppskot frá nevndini til § 1 samtykt 21—0.

Broytingaruppskot frá nevndini til § 2 fall 13—9.

Landsstýrisins uppskot §§ 2 og 3 samtykt 21—0.

102. Projektering av vegabygging

Ár 1962, 26. apríl legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um projektering av vegabygging.

§ 1. Landsstýrinum verður heimilað fyri landskassans rokning at lata gera projektir við tilhoyrandi kostnaðarætlanum fyri tær í landsverkfröðingsins «Umhugsan viðvíkjandi útbyggingini av vegasambandinum í Föroyum í komandi árum» frá 21. februar 1961, nevndu vegabyggingar.

§ 2. Landsverkfröðingurin hevur útinningina av nevndu projekteringsarbeiðum í hondum eftir nærri fyriskipan av landsstýrinum.

§ 3. Samráðst skal verða við avvarandi kommunustýrir um hvussu vegur skal liggja.

§ 4. Henda lóg kemur í gildi bein anvegin.

lagtingslov om projektering af vejanlæg.

§ 1. Landsstyret bemyndiges til for landskassens regning at lade udföre projekter med tilhörende overslag for de i landsingeniörens «Overvejelser vedrörende udbygning af det færöske vejnet i tiden fremover» dateret 21. februar 1961, nævnte nyanlæg og vejreguleringer.

§ 2. Nævnte projekteringsarbejder udföres ved landsingeniörens foranstaltning efter landsstyrets nærmere bestemmelser.

§ 3. Fastlæggelse af vejenes traché skal ske i samraad med vedkommende kommunalbestyrelser.

§ 4. Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í seinnu árunum hevur tað verið tingi eins og landsstýri skilligt, at ein av mest týðandi tættum í útbyggingini av okkara samfelag er at skapa líkinda vegasambond millum bygdirnar, har hetta kann gerast fyri rímuligan kostnað, men eisini greitt, at vegabyggingin sum so

mangt annað – áður hevur verið eftirbátur í tilikan mun, at drúgt verður at vinna á mál.

Við tingsins vælvild hevur í hesum árum kunna verið lögd – eftir okkara förimuni – stór orka í vegabyggingina; men vit megu ásanna at skulu tær í hjálögdu «Umhugsan viðvikjandi útbygging av föroyska vegasambandinum í komandi árum» frá landsverkfröðinginum dagfest 24. februar 1961 nevndu byggingar verða framdar innan fyri rimuligt tíðarskeið, má ein lagaligari figgjarskipan fáast í lag; tílíkari skipan hevur landsstýrið virkað fyri og hevur vónir um at fáa framda.

Tá landsstýrið biður um ta í lógaruppskotinum umröddu heimild, at er tað tí hildið verður beinast at arbeitt verður við báðum síðunum av málinum, tí teknisku og figgjarligu, í senn, so tiltökini kunnu setast í verk uttan stórvegis tarn, tá ið byggipeningur er tökur.

LANDSVERKFRÖÐINGURIN

Tórshavn, 24. februar 1961

MH/NA

Overvejelse vedrörende udbygningen af det færöske vejnet i tiden fremover.

Medens opgaverne inden for vejbygningen paa Færöerne hidtil praktisk talt kun har bestaaet i en förögelse af vejnettets længde, bör man i tiden fremover, saafremt der overhovedet kan skabes ökonomisk mulighed herfor, i lige saa höj grad lægge vægt paa en forbedring af de vigtigste strækninger inden for eksisterende vejnet.

Selv om man ovenfor nævnt næsten udelukkende har investeret de til raadighed staaende midler i nyanlæg, kan det ikke siges, at vejnet tet er saa vidt udbygget, som man i dag med rimelighed kan forlange, og naar dertil kommer, at kvaliteten af de fleste betydende vejstrækninger lader meget tilbage at önske, kan man kun konstatere, at der endnu mangler meget i, för de færöske veje og det færöske vejnet kan siges saa nogenlunde at være paa höjde med de tekniske krav, biltrafikken stiller, og de krav, et moderne samfund stiller til samkvem og transportmuligheder – selv med al skyldig hensyntagen til landets geografiske, bebyggelsesmæssige, erhvervsmæssige o.a. forhold.

I det fölgende er angivet de vejbygningsopgaver, saavel nyanlæg som forbedringer, som der er almindelig enighed om bör söges realiseret inden for et saa kort aarsmaal, som de ökonomiske og tekniske muligheder overhovedet tillader, og som for hovedpartens vedkommende er nödvendige led i en á jourföring af vejnettet og vejene d.v.s. for at

göre dem nogenlunde tidssvarende sammenlignet med forholdene iövrigt paa Færöerne.

Nyanlæg.

Disse kan naturligt deles i 3 grupper:

a) Veje, hvoraf kortere eller længere strækninger er udfört, og som det har været lagtingets agt at lade fuldföre, saa snart arbejderne paa de större vejanlæg, der er under udförelse paa Streymoy og Eysturoy, er afsluttet.

Disse er:

	Længde km	udfört km
Vejen Hvalba-Sandvík (Suðuroy) ..... ca.	12,0	3,0
Hjá föroyingum hevur tað altíð verið so, at sunnudagurin hevur verið hildin sum bæði heilidagur og frídagur umborð á skipum eins væl og uppi á landi. Men undir seinasta heimsbardaga hendi tað, at sunnudagurin í nógvum förum umborð á okkara skipum kom at vera vanligur arbeiðsdagur, og hevur tað vist seg at vera torfört at koma burtur úr hesum óskili. «Minst til at halda hvíludagin heilagan» og «Í seks dagar skalt tú verk títt vinna, men sjeynda dagin skalt tú halda hvíludag». Hetta er Guds boð til okkara fólk eisini í dag.

Í 1949 hava limir bæði í Föroya fiskimannafelag og í Suðuroyar fiskimannafelag einmælt samtykt at mæla til, at skipað verður fyri við lóg, at sunnudagurin verður frídagur umborð í föroyskum fiskiskipum, sjá tingtíðindi 1949, bls. 335. Fyri at fiskimenn okkara skulu fáa sunnudagin aftur sum hvíludag, mega vit finna fram til eina fiskimannalóg, og skal eg mæla til at velja eina 5 manna millumtinganevnd, sum hevur til endamál at finna fram til eina fiskimannalóg, ið gevur fiskimonnum okkara sunnudagin aftur sum hvíludag og leggja lógaruppskot aftur fyri komandi ólavsökuting.

Vist skal vera til norska lóg «Lov av 17. juni 1955 om saltvannsfiskeriene», sum eisini hevur paragraffir um sunnudagshvíld.

1. viðgerð 2. mai og sama dag legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Vilhelm Nielsen, lögtingsmaður, hevur lagt fyri lögtingið uppskot til samtyktar um at seta 5-manna millumtinganevnd at koma fram við uppskoti til ólavsökutingið til lóg um sunnudag sum hvíludag á föroyskum fiskiskipum.

1. viðgerð av málinum fór fram 2. mai 1962 og varð málið beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið. Tað eru lógarreglur um sunnu- og heiligdagsarbeiði umborð á skipum. Vist verður til grein 56 í lóg nr. 181 frá 1. mai 1923 «sömandsloven», ið er soljóðandi:

«Paa söndage og andre her i riget anordnede helligdage maa der ikke paalægges mandskabet arbejde, som kan opsættes.

Paa de nævnte dage bör der saavidt muligt gives mandskabet lejlighed til at holde gudstjeneste ombord.»

Minnilutin (Poul Petersen) mælir til at samtykkja uppskotið frá Vilhelm Nielsen.

Nevndin (Poul Petersen undantikin) setur sostatt einki uppskot fram.

2. viðgerð 7. mai 1962.

Uppskotið fall 11– 0.

III. Húsið á skansanum

Ár 1962, 2. mai legði H. Djurhuus lögtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at skipa so fyri, at húsið á Skansanum verður málað sum skjótast og takið fætt, so tey, ið har búgva, kunna liva undir turrum í vátveðri.

Viðmerkingar:

Tað er ikki ovmikið tikið til, at húsið á Skansanum hevur staðið og stendur sum ein skomm fyri Havnar hý og hitt almenna. Omálað við rustaðum taki er tað eitt tað fyrsta, fremmanda fólk sær, ið kemur inn á Havnina, og sjálvt um fólk í Havnini hýr eru so von við hesa ljótu sjón, at tey ikki hava gjört vart við seg, hevur það stungið í eyguni á mongum.

Eisini býr fólk í húsinum, og það ljóðar, at har lekur í eyri og seyri, slíkt er ósömiligt, tá talan sum her er um hús, ið hitt almenna hevur ábyrgd av.

Fyri at fáa hesi vána viðurskifti í rætlag nú, verður uppskotið til samtyktar sett fram.

1. viðgerð 2. mai 1962 (málið afturtikið).

---

112. Lívstryggingarvirki

Ár 1962, 4. mai legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um lívstryggingarvirki.

Kapitul I.
Almennar ásetingar

§ 1.

1. stk. Föroyskur lívstryggingarstovnur verður settur við einkarrætti at reka lívstryggingarvirki í Föroyum. Lívstryggingarstovnurin er ætlaður persónum, sum hava danskan heimarætt ella búsitandi í kongaríkinum Danmark, eisini persónum búsitandi í útlandinum, men hava annað tilknýtt til kongaríkið.

2. stk. Unuboð her fyri felög, sum higartil hava rökt lívstryggingarvirki í Föroyum halda tær tryggingar, tey hövdu pr. hóast hetta virkið kemur undir

lagtingslov om livsforsikringsvirksomhed.

Kapitel I.
Almindelige bestemmelser.

§ 1.

Stk. 1. Der oprettes en færösk livsforsikringsanstalt med eneret til at drive livsforsikringsvirksomhed paa Færöerne. Anstalten er bestemt for personer, der har dansk indfödsret eller er bosat i kongeriget Danmark, endvidere for personer, bosat i udlandet, men med tilknytning i övrigt til kongeriget. Anstaltens navn er «Föroya livstrygging».

Stk. 2. Herværende agenturer for selskaber, der hidtil har drevet livsforsikringsvirksomhed paa Færöerne, bevarer deres livsforsikringsportefölje pr.

livstryggingarstovnsins einarætt, men mugu ikki eftir henda dag nýtekna ella hækka livstryggingar.

§ 2.

1. stk. Livstryggingin rökir virki sítt við landskassaveðhaldi.

2. stk. Stovnurin hevur formúgu sína fyri seg sjálvan. Hon má ikki blandast við landskassans.

3. stk. Stovnurin rindar sjálvur rakstrarútreiðslur sínar.

§ 3.

1. stk. Hjá livstryggingarstovninum kann verða tryggjað öll slög av livstryggingum, eisini eftirseturenta, livrenta, eftirlönar- (avlanis)trygging.

2. stk. Livstryggingarstoovnurin má ikki taka við endurtryggingum.

§ 4.

1. stk. Livstryggingarstovnsins virki stjórnast av stýrinum fyri Tryggingarsambandinum Föroyar.

Stjóri tryggingarsambandsins hevur sum forretningsförari daglign leiðsluna av livstryggingarstovninum.

2. stk. Hitt almenna tilsýnið við

uanset denne virksomhed falder ind under livsforsikringsanstaltens eneret, men maa efter denne dato ikke nytegne, herunder forhöje disse livsforsikringer.

§ 2.

Stk. 1. Livsforsikringsanstalten udöver sin virksomhed under landskassens garanti.

Stk. 2. Anstalten har sin egen formue, der ikke maa sammenblandes med landskassens.

Stk. 3. Anstaltens driftsudgifter afholdes af den selv.

§ 3.

Stk. 1. I livsforsikringsanstalten kan tegnes alle arter af livsforsikringer, herunder overlevelsesrenter, livrenter og pensions- (invalidditets)forsikringer.

Stk. 2. Livsforsikringsanstalten maa ikke overtage genforsikringer.

§ 4.

Stk. 1. Livsforsikringsanstaltens virksomhed ledes af bestyrelsen for Tryggingarsambandið Föroyar. Direktören for Tryggingarsambandið Föroyar har den daglige ledelse af livsforsikringsanstalten som dennes forretningsförer.

Stk. 2. Det offentlige tilsyn med

stovninum liggur hjá tveimum persónum, valdum atvikavisl av lögtingi og landsstýri. Útreiðslurnar av tilsýninum verða goldnar av stovninum.

§ 5.

Stýrisins avgerðir um íseting av livstryggingarstovnsins midlum at tryggja tryggingargrunninum skulu leggjast fyri landsstýrið til góðkenningar, uttan so at midlarnir verða nýttir til lánveiting móti pant í livstryggingarstovnsins egnu tryggingarskjölum innanfyri afturkeypsvirðið.

§ 6.

1. stk. Við tekning av tryggingum, har livstryggingarstovnurin er interesseraður í, at fann tryggjaði livur so longi sum mögulligt, krevjast so fullfíggjaðir upplýsingar um heilsu- og aldur viðurskiftir, sum eftir stýrisins metan eru neyðugir. Tílíkir upplýsingar verða givnir av læknu í heilsuváttan á oyðuhlað frá livstrygging arstovninum.

2. stk. Tó kann stýrið við landsstýrisins samtykki avgera, at tryggingar av nærri greindum slagi og innanfyri nærri ásettar peningahæddir kunnu verða tekn aðar uttan læknuváttan, men móti persónligari heilsuváttan.

§ 7.

Stýrið ásetur við landsstýrisins góðkenning tær gjöllari reglur um, hvussu stóra peninga-

anstalten föres af to henholdsvis af lagtinget og landsstyret udpegede personer. Udgifterne ved tilsynet afholdes af anstalten.

§ 5.

Bestyrelsens beslutninger om anbringelse af livsforsikringsanstaltens midler til dækning af forsikringsfonden skal indstilles til landsstyrets godkendelse, medmindre midlerne anvendes til ydelse af laan mod pant i livsforsikringsanstaltens egne policer indenfor tilbageköbsværdien.

§ 6.

Stk. 1. Ved tegning af forsikringer, hvor del er i livsforsikringsanstaltens interesse, at den forsikrede lever saa længe som muligt, fordres saa udförlige oplysninger om helbredstilstand og övrige forhold, som efter bestyrelsens skön maa anses fornödent. Saadanne oplysninger gives i en helbredsattest, udstedt af en læge paa livsforsikringsanstaltens blanketter.

Stk. 2. Dog kan bestyrelsen med landsstyrets samtykke bestemme, at forsikringer af nærmere angivne forsikringsarter og indenfor nærmere fastsatte beløb kan tegnes uden lægeundersögelse mod afgivelse af personlig helbredserklæring.

§ 7.

De nærmere regler for, hvor store beløb paa samme persons liv livsforsikringsanstalten kan

hædd livstryggingarstovnurin kann halda á eguum vágleika fyri sama persóns lív. Endurtryggingin skal altíð, tá ið tilber, gerast hjá donskum (ella föroysk um) felag og skipað soleiðis, at tað til less svarandi tiltakstryggingargjald verður goymt hjá livstryggingarstovninum.

holde for egen risiko, fastsættes af bestyrelsen med landsstyrets godkendelse. Genforsikringen skal saa vidt muligt placeres i danske selskaber og skal ordnes saaledes, at den dertil svarende præmiereserve deponeres i livsforsikringsanstalten.

§ 8.

Kemur ring umfarssjúka ella verða vit fyri óvardum hendingum, ið bera við sær ótta fyri, at gjaldfesti fyri einum tryggingarslag ella tryggingarbólki verður at bera stovninum tap við sær, kann stýrið við landsstýrisins sam tykki krevja eykatryggingargjald fyri tryggingar, ið verða teknaðar undir tilikum tíðum. Varir hetta longur enn tvey ár, kann ikki verða hildið fram við krevjing av eykatryggingargjaldi uttan serliga lógarheimild.

§ 8.

Skulle der indtræde en større epedemi eller andre uforudsete begivenheder, som lader befrygte, at tarifen for en forsikringsart eller forsikringsgruppe vil bringe livsforsikringsanstalten tab, kan bestyrelsen med landsstyrets sam tykke forlange en tillægspræmie for forsikringer, der tegnes i en saadan periode. Strækker denne sig ud over 2 aar, kan opkrævning af tillægspræmie dog ikke fortsætte uden særlig lovhjemmel.

§ 9.

1. stk. Fyri at gera törvandi tryggitekniskar útrokningar og kanningar verður ein aktuarur at hava tilknýti til stovnin. Sum tilíkur kann bert verða tikin persónur, sum við tryggivísindi ella við matematiskum lærdómi og praktiskum arbeiði í livstryggingarvirki er búgvin til less. Aktuarin verður settur og loystur úr starvinum av stýrinum við góðkenning av tilsýninum.

2. stk. Aktuarin hevur ábyrgdina fyri, at stovnurin heldur útrokningargrundarlag sítt, undir

§ 9.

Stk. 1. Til udförelse af de nödvendige forsikringstekniske beregninger og undersögelser skal der ved anstalten være tilknyttet en aktuar. Som saadan kan kun antages en person, som gennem en forsikringsvidenskabelig eller matematisk uddannelse suppleret med praktisk erfaring i livsforsikringsvirksomhed er kvalificeret hertil. Aktuaren ansættes og afskediges af bestyrelsen med tilsynets godkendelse.

Stk. 2. Aktuaren har ansvaret for, at anstalten overholder sit beregningsgrundlag, herunder

hesum reglurnar fyri afturkeypi av tryggingum og fyri láni móti pant í stovnsins egnu tryggingum, og hann hevur ræti av stovnunum at krevja sær til handa allar upplýsingar, ið törva fyri at taka við hesari ábyrgd. Tað liggur á aktuarinum uttan at dvölja á at siga tilsýninum frá hvörjum broti av felagsins útrokningargrundarlag.

§ 10.

Livstryggingarstovnsins starvsfólk og umboðsfólk hava tögnskyldu viðvíkjandi öllum ti, sum tey í virki sínum hjá livstryggingarstovnunum fáa at vita um viðurskiftini hjá teimum tryggjaðu og teimum sum sökja at verða tryggjað.

Kapitul II.

Framlöga av rokuskapi,

§ 11.

1. stk. Á hvörjum ári ger stýrið rokuskapin almannakunnugan. Roknskapurin skal hava rakstrar roknskap og statsuppgerð eins og frágreiðing um livstryggingarstovnsins virki og hvussu ognirnar eru settar í farna almanakkaári.

2. stk. Roknskapurin verður granskaður av tveimum grannskoðarum, sum landsstýrið velur. Grannskoðararnir skulu har aftur at ansa eftir, at allar ognir stovnsins eru til samsvarandi teirri fyriskipan, sum landsstýrið hevur gjört.

reglerne for tilbageköb af forsikringer og for laan mod pant i anstaltens egne forsikringer, og han har ret til af anstalten at forlange alle oplysninger, som er nödvendige for overtagelsen af dette ansvar. Det paahviler aktuaren uopholdelig at göre indberetning til tilsynet om enhver overtrædelse af selskabets beregningsgrundlag.

§ 10.

Der paahviler livsforsikringsanstaltens personale og agentur tavshedspligt med hensyn til de forsikredes og de forsikringssögendes forhold, som de i deres virksomhed for livsforsikringsanstalten faar kendskab til.

Kapitel II.

Regnskabsaflæggelse.

§ 11.

Stk. 1. Bestyrelsen offentliggör hvert aar regnskabet, som skal indeholde et driftsregnskab og en statusopgörelse, samt beretning om livsforsikringsanstaltens virksomhed og midlernes anbringelse i det forlöbne kalenderaar.

Stk. 2. Regnskabet revideres af to af landsstyret udnævnte revisorer, der tillige kontrollerer tilstedeværelsen af anstaltens samlede formuebeholdning, alt i overensstemmelse med en af landsstyret udstedt instruks.

§ 12.

1. stk. Við uppgerðini av ársroknskapinum verður bókað: Tær obligatiónir, ið eru gjördar ella garanteraðar av almennum myndugleika, tær ið eru gjördar av kreditfelögum ella hypotekfelögum ella av öðrum góðkendum fleggingarstovnum, eins og tey virðisbröv, ið eftir slagi sínum og tryggleika kunnu bólkast við nevndu obligatiónir. Henda bólking verður gjörd eftir hesum reglum: Um sett er afturgjaldingartíð, verður prísurin hægst settur javnt við virðið, ið ognað er til, kortini ikki hægri enn kursurin fyri úttöku og heldur ikki omanfyri sölukursin á keypsdegnum. Er ikki sett nökur afturgjaldingartíð, verða obligatiónirnar og virðisbrövini bókað í mesta lagi til miðalskurðin av tí keypskursi, ið seinast er ritaður undan roknskaparsins árslok og av kursinum í tilsvarandi dögum í seinast undanfarnu inntil 9 árum, sum pappírini hava verið slovusins ogn, men kortini ikki omanfyri pari. Virðispappírini, sum verða givin undir somu deild, somu seriu og sama rentufóti, verða tó bókað til ein felags miðalkurs.

2. stk. Partabröv, ið eru fyri almenuari kursmerkjan, mugu í mesta lagi verða bókað til keypskursin, ið verður merktur seinast við roknskaparársins enda. Onnur partabröv verða bókað í mesta lagi til virðið, ið er roknað eftir upplýsingum, ið innan roknskaparársins enda liggja fyri viðvikjandi avvarandi partafelag.

§ 12.

Stk. 1. Ved opgörelse af aarsregnskabet opföres obligationer, som er udstedt eller garanteret af offentlige myndigheder samt obligationer, som er udstedt af kreditforeninger eller hypotekforeninger eller af godkendte finansieringsinstitutter, samt værdipapirer, som efter deres art og den sikkerhed, de frembyder, kan stilles i klasse med de förnævnte obligationer, efter följende regler: Saafremt der er fastsat en amortisationstid, opföres de höjst til den pris, for hvilken de er erhvervet, dog ikke til höjere kurs end den, hvortil de udtrækkes, og heller ikke over sælgerkursen paa köbsdagen. Saafremt der ikke er fastsat nogen amortisationstid, opföres de höjst til gennemsnittet af den ved regnskabsaarets slutning sidst noterede köberkurs og kurserne paa de tilsvarende dage i de nærmeste forudgaaende indtil ni aar, i hvilke papirerne har været i anstaltens eje, dog ikke over pari. Værdipapirer, som er udstedt under samme afdeling, serie og rentefod, opföres dog til en fælles gennemsnitskurs.

Stk. 2. Aktier, der er genstand for offentlig kursnotering, maa höjst opföres til den ved regnskabsaarets slutning senest noterede köberkurs og andre aktier höjst til en værdi beregnet paa grundlag af de ved regnskabsaarets slutning senest foreliggende oplysninger angaaende det paagældende aktieselskab.

3. stk. Uttan so at virðið má haldast at liggja lægri, verða onnur virðisskjöl bókað til prisin, tey eru fingin fyri, men tó ikki yvir pari.

4. stk. Av stovnsins ársroknskapi skal síggjast, hvörjar kursir virðispappír hansara eru seff til.

5. stk. Ognarpostir í fremmandum mynti mugu í mesta lagi verð bókaðir til kursin, sum verð ur merktur við roknskaparsins enda. Skuldpostar í fremmandum mynti skulu í minsta lagi verða bókaðir til henda kursin.

6. stk. Fastarognir mugu ikki verða bókaðar til hægri virði enn lað, ið ein av landsstýrinum fyriskipað metan kemur til.

7. stk. Tilsýnið kann áleggja at skriva niður bókað virði av stovnsins ognum, um serligar umstöður eru fyri tí í einstökum tilfellum.

§ 13.

1. stk. Í statusuppgerðini skulu undir skuldunum serskilt verða tikin ein tryggingargrunnur av samlaða peninginum í:

a) Tiltaksviðurgjaldinum fyri tílíkum tryggingum við bonusi, ið eru fráboðað og fallin til gjaldiugar, men ikki goldin.

b) Tiltakstryggingargjaldinum av öllum virðum av tryggingum í umfari. Tiltakstrygging-

Stk. 3. Andre værdipapirer opföres, medmindre værdien maa antages at være lavere, til den pris, hvortil de er erhvervet, dog ikke over pari.

Stk. 4. Det skal af anstaltens aarsregnskab fremgaa, til hvilke kurser dens værdipapirer er optaget.

Stk. 5. Aktivposter i fremmed mönt maa höjst opföres til den ved regnskabsaarets slutning noterede kurs, og passivposter i fremmed mönt skal mindst opföres til denne kurs.

Stk. 6. Faste ejendomme maa ikke opföres til höjere værdi end den, der angives ved en vurdering foranstaltet af landsstyret.

Stk. 7. Naar særlige omstændigheder i det enkelte tilfælde maatte tale derfor, kan tilsynet paabyde en nedskrivning af de bogförte værdier af anstaltens aktiver.

§ 13.

Stk. 1. I statusopgörelsen skal der under passiver særskilt optages en forsikringsfond bestaaende af summen af:

a) Erstatningsreserven, der omfatter saadanne forsikringsbelöb, og dertil knyttede bonusbelöb, som er anmeldt og forfaldne til udbetaling, men endnu ikke er udbetalt.

b) Præmiereserven, der omfatter den samlede værdi af alle löbende forsikringer. Præmiere-

argjaldið skal í minsta lagi vera á hædd við munin millum kapitalvirðið og stovnsins skyldur sambært allar leypandi livstryggingarsáttmálar (skuldir) og kapitalvirðið av tí reina tryggingargjaldinum, sum tann tryggjaði skal rinda í framtíðini (ognir). Við tað reina tryggingargjaldið skilst tann parturin av tryggingargjaldinum, sum við íbirtan av tryggingarsáttmála sambært tágaldandi grundarlag fyri tryggingargjaldsins útrokning svarar til tann átikna vánlejka. Sama grundarlag skal verða nýtt við útrokning av nevnda kapitalvirði. Til rindan av framtíðarrakstri av tryggingum, ið ikki longur verður goldið tryggingargjald fyri verður tiltakstryggingargjald at innihalda uppiskoyti, sum er skotið upp av stovninum og góðkent av tilsýninum.

2. stk. Hevur stovnurin givið frá sær eina trygging í endurtrygging, er hann ikki við ásetanina av tryggingargrunninum skyldugur at viðrokna so mikið, sum endurtryggjað er, um so er, at yvirtökufelagið setur eina av tilsýninum góðkenda trygd fyri tiltakstryggingargjaldið.

serven skal mindst udgöre et beløb saa stort som forskellen mellem kapitalværdien af anstaltens forpligtelser efter samtlige löbende livsforsikringskontrakter (passivet) og kapitalværdien af de nettopræmier, som forsikringstagerne skal erlægge i fremtiden (aktivet). Ved nettopræmie forstaas den del af forsikringspræmien, som ved forsikringskontraktens indgaaelse efter det da gældende grundlag for præmieberegningen netop svarer til den overtagne risiko. Det samme grundlag skal anvendes ved beregning af de nævnte kapitalværdier. For forsikringer, for hvilke der ikke længere skal betales præmie skal præmiereserven indeholde et af anstalten foreslaaet og af tilsynet godkendt tillæg til bestridelse af deres fremtidige drift.

Stk. 2. Har anstalten afgivet en forsikring i genforsikring, er den ved fastsættelsen af forsikringsfonden ikke forpligtet til at medregne det genforsikrede beløb, saafremt der af det overtagende selskab er stillet en af tilsynet godkendt sikkerhed for præmiereserven.

§ 11.

1. stk. Stovnurin kann í statusuppgerð sini seta sum ogn kapital virðið upp í 30 % av framtíðaruppískoytinum til reintryggingargjald fyri tryggingar, ið felagið

§ 11.

Stk. 1. Indenfor beløbet af de omkostninger, som erhvervelsen af nye forsikringer har medført, kan anstalten i statusopgörelsen som aktiv opföre kapitalværdien

hevur fyri egnu rokning, og sum við roknskaparársins enda eru í gildi, smbr. stovnsins tryggingartreytir. Hetta kapitalvirðið má vera innanfyri hæddina av umloysunum av ognanini av nýggju tryggingunum. Tey uppiskoyti, sum á henda hátt verða pengamett, mugu ikki fara uppum 7 % av reina tryggingargjaldinum.

2. stk. Viðvíkjandi leimum tryggingum, ið vöru í gildi við seinasta roknskaparárslok er at siga, at ikki má verða pengamett störri procentlutur av uppiskoytinum enn hann, sum ognin var sett til í nevnda ársrokuskapi.

3. stk. Umrödda ogn kann nýtast til rindan av tryggingargrunninum, um hesi rindan er givið gætur við ásetingum av stovnsins reglum fyri afturkeypi av tryggingarskjölum og veitan av fritryggingaskjölum.

§ 15.

Aftrat leimum í §§ 5 og 14, stk. 3, nevndu ognum kann til rindan av tryggingargrunninum nýtast uppi helmingin av leimum ognum, sum eru tey við roknskaparársins lok fallin, men ikki goldin tryggingargjöld.

§ 16

1. stk. Ársyvirskotið verður at býta millum bonusgrunnin og tiltaksgrunnin soleiðis:

a) Alt yvirskotið skal falla til

af indtil 30 % af de fremtidige tilleg til nettopræmierne for de ved regnskabsaarets udgang efter anstaltens forsikringsbetingelser i kraft værende forsikringer, som selskabet holder for egen regning. De tillæg, som paa denne maade kapitaliseres, maa dog ikke udgöre mere end 7 % af nettopræmierne.

Stk. 2. For de forsikringers ved kommende, som var i kraft ved udgangen af det foregaaende regnskabsaar, maa ikke kapitaliseres större procentdel af tillæggene end den, hvormed aktivet var opfört i nævnte aars regnskab.

Stk. 3. Det her omhandlede aktiv kan anvendes til dækning af forsikringsfonden, forsaavidt der er taget hensyn dertil ved fastsættelsen af anstaltens regler for policernes tilbageköb og ydelse af fripolicer.

§ 15.

Til dækning af forsikringsfonden kan udover de i §§ 5 og 14 stk. 3 nævnte midler anvendes indtil halvdelen af det aktiv som udgöres af de ved regnskabsaarets slutning forfaldne, ikke betalte præmier.

§ 16

Stk. 1. Aarsoverskudet fordeles mellem bonusfond og reservefond saaledes:

a) Dersom reservefonden er stör-

bonusgrunnin, um tiltaksgrunnurin er meira ella tað sama sum 5 % av ogn og skuld (smbr. § 13, 1. slk.).

b) Lögd verða 10 % av yvirskotinum til tiltaksgrunnin og hin partarin av yvirskotinum til bonusgrunnin, um tiltaksgrunnurin er minni enn 5 % av ogn og skuld, men meira ella tað sama sum 2 %, fyri reinar rentutryggingar tó 2½ %.

c) Er tiltaksgrunnurin minni enn 2 % — fyri reinar rentutryggingar 2½ % av ogn og skuld, skal, um yvirskotið rökkur, fyrst leggjast av til tiltaksgrunnin so nógvur peningur, at grunnurin fær nevndu stödd. Viðvikjandi tí eftirverandi yvirskotinum verður at skipa sum undir b).

2. stk. Teir í 1. stk. nevndu prosentpartar til tiltaksgrunnin kunnu skerjast í mun til tann prosentpartin av tí í § 14 nevndu ogn, sum ikki er tikin við í slovnsins statusi.

3. stk. Tað sum tiltaksgrunnurin er meira enn tað í 1. stk. a) nevnda procent kann verða nýtt at leggja av til tiltakstryggingargjald, ið förvur er á. Vegna broyting í útrokningargrundarlagnum annars má tiltaksgrunnurin ikki verða minkaður uttan samtykki

re end eller lig med 5 % af summen af aktiv og passiv (jfr. § 13, stk. 1), skal hele overskuddet henlægges til bonusfonden.

b) Dersom reservefonden er mindre end 5 %, men større end eller lig med 2 %, for rene renteforsikringer dog 2½ %, af summen af aktiv og passiv, henlægges 10 % af overskuddet til reservefonden og resten til bonusfonden.

c) Dersom reservefonden er mindre end 2 %, for rene renteforsikringer dog 2½ %, af summen af aktiv og passiv, skal der — saavidt overskuddet strækker til — forlods henlægges til reservefonden et saa stort beløb, at denne faar den nævnte størrelse, hvorefter der med restoverskuddet forholdes som under b) angivet.

Stk. 2. De i stk. 1 nævnte procentdele for reservefonden kan reduceres med en procentdel svarende til den del af det i § 14 nævnte aktiv, der ikke maatte være oplaget paa anstaltens status.

Stk. 3. Beløb, hvormed reservefonden overstiger den i stk. 1 a) nævnte procentsats, kan benyttes til henlæggelse til præmieresserven, som er nödvendiggjort ved en ændring i beregningsgrundlaget. Iövrigt maa reservefonden ikke formindskes uden tilsynets

tilsýnisins, uttan so at törvur er á at rinda undirskolið.

§ 17.

1. stk. Vinningur og tap vera, tá ið söla og úttöka av virðispappírum fer fram, at seta sum munur millum tann vinna pening og bókað virði á ávíkjandi pappírum.

2. stk. Um vinningur er, tá ið stovnsins virðisskjöl verða uppgjörd, ella tá ið ognin ökist í virði, ella tá ið virðispappír ella fastar ognir verða seld, verður hann at flyta til kursjavningargrunnin, hvörs ognir nýtast til at skriva niður stovnsins virðisskjöl ella föstu ognir, ella til rindan av tapi við söluna. Á sama hátt við vinningi við úttöku av virðispappíri.

samtykke, medmindre det er nödvendigt for at dække underskud.

§ 17.

Stk. 1. Ved salg eller udtrækning af værdipapirer bestemmes gevinst og tab som forskellen mellem det indvundne beløb og de vedkommende papirers bogförte værdi.

Stk. 2. Hvis der ved opgörelsen af anstaltens værdipapirer eller ved værdiforögelse af faste ejendomme fremkommer en gevinst, eller hvis værdipapirer eller faste ejendomme sælges med gevinst, overföres denne til en kursreguleringsfond, hvis midler anvendes til nedskrivning af anstaltens værdipapirer eller faste ejendomme eller til dækning af tab ved realisation heraf. Der forholdes paa samme maade ved gevinst ved udtrækning af værdipapirer.

Kapitul III.

Útrokningargrundarlag, tryggingartreytir og bonus.

§ 18.

1. stk. Reglur fyri livstryggingarstovnsins tekniska grundarlag, tryggingartreytum og bonusi og öðrum skulu verða góðkendar av landsstýrinum.

2. stk. Tryggingartreytirnar skulu setast í stovnsins tryggingarskjölum, soleiðis sum landsstýrið ásetur.

Kapitel III.

Beregningsgrundlag, forsikringsbetingelser og bonus.

§ 18.

Stk. 1. Reglerne for livsforsikringsanstaltens tekniske grundlag, forsikringsbetingelser og bonus m. v. skal godkendes af landsstyret.

Stk. 2. Forsikringsbetingelserne skal optages i anstaltens policer i det omfang, landsstyret fastsætter.

3. stk. Heilsuváttanir, ið verða givnar av læknum, ið undirsökja, eins og heilsuváttan frá tí, ið ynskir trygging, skulu vera góðtiknar av landsstýrinum.

§ 19.

1. stk. Landsstýrið skal góðtaka allar broytingar av teimum undir § 18 nevndu viðurskiftum. Umsókuir um hesar broytingar vera av lívstryggingarstovnsins stýri sendar gjögnum tilsýnið.

2. stk. Við umsóknini skulu fylgja ummæli frá aktuarinum, ið er knýttur til stovnin, sambært § 9.

3. stk. Ásetanir í tryggingartreytunum, ið geva tí tryggjaða störri rættindi enn tilsvarandi ásetanir, ið við broyting av treytunum vera galdandi í framtíðini, verða slöðugt í gildi viðvíkjandi tryggingum, ið eru teknaðar, áðrenn broytingin kom í.

4. stk. Ásetanir viðvíkjandi tryggingargjöldum og útreokning av endurkeypsvirðinum verða stöðugt í gildi fyri tær tryggingar, sum tær higartil hava verið í gildi fyri, og tær nervast ikki av möguligum seinri broytingum.

§ 20.

1. stk. Maður kann tekna trygging í lívstryggingarstovnsins deild fyri vána lív (brekað), um tær

Stk. 3. Landsstyret skal godkende de erklæringer, som skal afgives af den undersögende læge og af den forsikringssögende selv angaaende dennes helbredstilstand.

§ 19.

Stk 1. Enhver ændring af de i § 18 nævnte forhold skal godkendes af landsstyret. Andragende herom indsendes af livsforsikringsanstaltens bestyrelse gennem tilsynet.

Stk. 2. Andragendet skal være bilagt med en udtalelse fra den til anstalten knyttede aktuar, jfr. § 9.

Stk. 3. Bestemmelser i forsikringsbetingelserne, der giver större rettigheder for den forsikrede end tilsvarende bestemmelser, som fremtidig bliver gældende ved en ændring af betingelserne, vedbliver stadig at bestaa for forsikringer, tegnet för ændringens ikrafttræden.

Stk 4. Bestemmelser vedrörende præmier og beregning af genköbsværdier har vedblivende gyldighed for de forsikringer, for hvilke de hidtil har været gældende, og beröres ikke af eventuelle senere ændringer af disse bestemmelser.

§ 20.

Stk. 1. Saafremt de ved begæring om en livsforsikring afgivne helbredsoplysninger er af den be-

við sökingini um livstrygging givnu heilsuváttanir eru so vorðnar, at tryggingin kann ikki gevast eftir vanligum tryggingarfesti ella við smærri hækkingum.

2. stk. Við útrokning av tryggingargjöldum fyri slíkar tryggingar kunnu nýtast aðrir forútsetuingar viðvíkjandi livsvánum, rentufóti og trygdar- og virkisuppískoyti, enn teir fyri livstryggingarstovnin annars galdandi og gerast broytingar í stovnsins tryggingartreytum.

3. stk. Viðvíkjandi livstryggingarstovnsins deild fyri brekað kann verða gjörd ein serlig endurtryggingarskipan samsvarandi reglunum í § 7.

§ 21.

Viðvíkjandi at sleppa undan rættargongu gilda ásetaninar í § 116, smbr. § 117 í lög nr. 129 frá 15. apríl 1930 um tryggingaravtalur.

§ 22.

1. stk. Er tryggingarskjal vorðið burfur, kann stýri livstryggingarstovnsins eftir áheitan frá ti tryggjaða, ið yvirfyri ti hevur prógvað rætt sín til tryggingarskjalið, við 6 mánað ávaring kalla tryggingarskjalsins ihendihavara at koma til sín. Lýsingin, ið verður at seta í blaðið, sum góðkent er at taka almennar lýsingar í Föroyum, í fyrsta nummar í

skelfenhed, at forsikringen ikke kan anlages efter de sædvanlige tariffer eller med en mindre forhöjelse, skal der være adgang til at tegne forsikring i livsforsikringsanstaltens afdeling for mindregode liv.

Stk. 2. Ved beregningen af præmier for saadanne forsikringer kan anvendes andre forudsætninger med hensyn til levesandsynlighed, rentefod samt sikkerheds- og driftstillæg end de for livsforsikringsanstaltens övrige forsikringer i livsforsikringsanstaltens forsikringsbetingelser.

Stk. 3. For livsforsikringsanstaltens afdeling for mindregode liv kan træffes en særlig genforsikringsordning i overensstemmelse med reglerne i § 7.

§ 21.

Om fritagelse for retsforfölgning gælder bestemmelserne i § 116, jfr. § 117, i lov nr. 129 af 15. april 1930 om forsikringsaftaler.

§ 22.

Stk. 1. Er en livsforsikringspolice bortkommet, kan livsforsikringsanstaltens bestyrelse paa begæring af den, som for bestyrelsen har godtgjort sin adkomst til policen, med 6 maaneders varsel indkalde ihændehaveren til at melde sig. Indkaldelsen, der sker ved kundgörelse i det til optagelse af offentlige bekendtgörelser paa Færöerne autoriserede blad,

fjórðingsári skal geva tryggingarskjalinum nóg greitt merki við navni á tí tryggjaða (fyri hvörs liv livstryggingin er teknað). Um ongin kemur aftaná tílíka lýsing, er tryggingarskjalið farið úr gildi, og stýrið letur so avvarandi fáa nýtt tryggingarskjal. Umboysurnar við lýsingini verða at rinda av tí, sum hevur yvskt hana.

2. stk. Kemur onkur til stýrið sambært lýsingina og kann friðalig skipan ikki fáast í lag, kann ikki nýtt tryggingarskjal krevjast, áðrenn rætturin hjá teimum fráboðaðu krövum teirra millum eru avgjörd við dómi.

i det første nummer i et fjerdingaar, skal indeholde en tilstrækkelig betegnelse af policen, derunder navnet paa den forsikrede (den, paa hvis liv forsikringen er tegnet). Dersom ingen efter saadan kundgörelse melder sig, er policen ugyldig, og bestyrelsen udleverer da vedkommende en ny forsikringspolice. De med indkaldelsen forbundne omkostninger udredes af den, der har begæret den iværksat.

Stk. 2. Melder nogen sig efter bekendtgörelsen, og kan mindelig ordning ikke opnaas, kan en ny police ikke kræves udstedt, førinden de anmeldte krav indbyrdes berettigelse er afgjort ved dom.

Kapitul IV.

Ymiskar ásetingar.

§ 23.

1. stk. Um tann tryggjandi og tryggjaði eru hvör sín, má livstryggingarstovnurin ikki uttan samtykki frá tí tryggjaða teknna nakað slag av livstrygging, harvið hann ábyrgdar seg til deyða av tí tryggjaða at gjalda störri pening enn goldna tryggingargjaldið við rentum.

2. stk. Livstryggingarstovnurin má ikki teknna nakað slag av livstrygging, hvarvið hann bindur seg til at gjalda meira pening enn goldið tryggingargjald við rentum sum fylgjan av deyða, áðrenn tann tryggjaði er 8 ár.

Kapitel IV.

Forskellige bestemmelser.

§ 23.

Stk. 1. For saa vidt forsikringstageren er en fra den forsikrede forskellig person, maa livsforsikringsanstalten ikke uden den forsikredes samtykke tegne nogen art af livsforsikring, hvorved den ved den forsikredes död forpligter sig til at udbetale större belöb end de indbetalte præmier med renter.

Stk. 2. Livsforsikringsanstalten maa ikke tegne nogen art af livsforsikring, hvorved den forpligter sig til at udbetale större belöb end de indbetalte præmier med renter som följe af dödsfald, der indtræder för den forsikredes fyldte 8. aar.

3. stk. Lívstryggingarstovnurin má ikki tekna lívstrygging at gjalda í útlendskum mynti.

§ 24.

Hvör einstakur umboðsmaður fyri lívstryggingarstovnin skal vera útgjördur við prógvi um, hvör hann er, ella við fullrú frá lívstryggingarstovnsins forrætuingsförara.

§ 25.

Lívstryggingarstovnurin er fritikin fyri allan beinleiðis skatt til landskassa og kommunur.

Kapitul V.

Reglur um revsingar og lógarinnar gildi.

§ 26.

Felög ella umboðsdeildir,ið tekna lívstryggingar móti áseting-um í § 1, verða revsað við bót.

§ 27.

Um boð ella onnur, sum vinnuliga arbeiða við tekning av tryggingum fyri lívstryggingarstovnin og sum nýta órættar ella villleiðandi uppgávur, revsast við bót.

§ 28.

1. stk. Henda lóg kemur í gildi

Stk. 3. Livsforsikringsanstalten maa ikke tegne livsforsikringer lydende paa betaling i udenlandsk valuta.

§ 24.

Enhver agent for livsforsikringsanstalten skal være forsynet med legitimation eller fuldmagt udstedt af livsforsikringsanstaltens forretningsfører.

§ 25.

Livsforsikringsanstalten er fritaget for enhver direkte skat til landskasse og kommune.

Kapitel V.

Straffe- og ikrafttrædelsesbestemmelser.

§ 26.

Selskaber eller agenturer, der tegner livsforsikring i strid med de i § 1 indeholdte bestemmelser, straffes med böder.

§ 27.

Agenter eller andre, der erhvervsmæssigt virker for tegning af forsikringer til livsforsikringsanstalten, og som herved anvender urigtige eller vildledende angivelser, straffes med böder.

§ 28.

Stk. 1. Denne lov træder i kraft den

2. stk. Tær undir kapitul III í lög nr. 129 frá 15. april 1930 um tryggingaravtalur ásettu reglur galda eisini fyri livstryggingarstovnin eins og aðrar í nevndu lög ásettar reglur eisini verða at nýta í livstryggingarstovninum, um tær eftir innihaldi sínum hóska, og tað í hesari lög ella aðrari lögtingslög eru ikki reglur um hesi viðurskiftir.

Stk. 2. De i kapitel III i lov nr. 129 af 15. april 1930 om forsikringsaftaler indeholdte bestemmelser gælder ogsaa for livsforsikringsanstalten, ligesom de i nævnte lov indeholdte övrige bestemmelser ogsaa kommer til anvendelse paa livsforsikringsanstalten, for saa vidt de efter deres indhold kan det, og der ikke i nærværende lov eller andre lagtingslove er givet regler om de paagældende forhold.

Viðmerkingar:

Í lögtingstíðindi nr. 50/1960: Lívstrygging, jbr. Lögtingstíðindi 1960, s. 209, samtykti lögtingið, at landsstýrið skuldi taka upp samráðingar við Tryggingarsambandið Föroyar um föroyska livstrygging, og at leggja málið fyri tingið aftur í næstu setu.

Samráðinar hava verið við tryggingarsambandið, og hevur hetta felag við sakkönari hjálp frá Einar Olsen, stjóra í livstryggingardeildini hjá tryggingarpartafelagnum Skandinavia, København, gjört uppskot til lögtingslög um livstryggingarvirki. Tað er hetta uppskotið við smávegis broytingum, sum við hesum verður lagt fyri lögtingið.

Við fyribils kunngerð nr. 14, 17. juni 1940, fekk Tryggingarsambandið Föroyar einarætt at tekna tryggingar í Föroyum frá 1. januar 1943, jbr. nú lögtingslög nr. 24, 23. mars 1956. Lívstryggingar vóru tó undantiknar einarættinum.

Fyriliggjandi uppskot hevur sína fyrimynd í «Statsanstalten for Livsforsikring», jbr. lógarkunngerð nr. 11, 15. januar 1951. Föroya lívstrygging hevur tingið sama felagsligan status sum nevndi stovnur, samstundis sum royni er at laga hana eftir skaðatryggingini her, har hetta letur seg gera. Reglur eru tó eisini tiknar frá lög nr. 143, 13. mai 1959 «om forsikringsvirksomhed», og er har serliga hugsað um roknskaparföslu, §§ 11 og 13, kursjavningargrunnur § 17, stk. 2, útrokningargrundarlag, tryggingartreytir og bonus §§ 18 og 19.

Skotið verður upp, at Föroya lívstrygging fær einarætt at reka livstryggingarvirki í Föroyum. Hon er ætlað persónum, sum hava danskan heimarætt ella eru búsitandi í kongarikinum Danmark, eisini persónum búsitandi í útlandinum, men við tilknýti til kongaríkið (§ 1). Tá ið ikki verður farið út um hesar persónar, so er tað tí, at tað helst er stórri

möguleiki at vurdera, hvönn vágleika stovnurin her tekur uppá seg. Landskassin veðheldur fyri virki hansara, tó hevur hann formúma fyri seg, og má hon ikki blandast við landskassans (§ 2).

Stovnurin verður stjórnaður av stýrinum fyri tryggingarsambandinum, og er stjórin har forretningsförari (§ 4).

Lívstryggingin er frítikin fyri allan beinleiðis skatt til landskassa og kommunu (§ 25).

Viðvikjandi spurninginum um frá hvörjum degi onnur felög ella persónar missa rattin at tekna lívstrygging, § 1, stk 2, og frá hvörjum degi lógin fær gildi, § 28, stk. 1, verður mell til at samráðast við tryggingarsambandið undir nevndarviðgerðini.

1. viðgerð 4. mai 1962 og málið beint til lógarnevndina.

---

113. Fluttningsstudningur til kolaframleiðsluna

Ár 1962, 2. mai legði fíggjarnevndin fram suljóðandi

Álit

Tað er arbeiðsmanna kolavirki á Tvöroyri sum hevur vent sær til lögting og landsstýri við skrivi av 24. mars 1962 við bön um studning til kolaarbeiðararnar har á plássinum.

Í hesum skrivi föra teir fram, at kolaarbeiðarnir hava eina lön uppá 36—38 kr. um dagin og í einstökum föri hava teir verið niðri á 33 kr. fyri 8 tíma arbeiðsdag. Viðari föra teir fram, at um ikki kolaarbeiðarar verða stuðlaðir eins nógv og aðrir stættir, má verða roknað við, at kolaarbeiði verður niðurlagt heilt skjótt. Teir mæla til, at leimum verur veittur ein studningur uppá 12 kr. fyri hvört tonsið teir framleiða til sölu.

Málið hevur verið til viðgerðar í fíggjarnevndini, men heldur nevndin ikki at tað ber til at tryggja nökrum ávísum arbeiðarum í privatum virki

minstulön, meðan tað í nærum hvörjari bygd gangn nógvir arbeiðarar sum slóran part av árinum hvörki fáa 33, 36 ella 38 kr. um dagin. Eisini stendur tað kolaframleiðarunum fritt fyri at hækka prísin á kolinum, so teir soleiðis fáa munin millum tað, sum teir í dag vinna, og tað arbeiðarar vinna við anna arbeiði.

Nevndin hevur havt fund við umboðsmenn fyri kolaarbeiðararnar á Tvöroyri og við umboðsmann tingsins Iarra Wiberg. Hesir hava upplýst fyri nevndini, at tá kompressarin, sum landsstýrið hevur játtað kolaarbeiðarunum, verður tikin í brúk verður roknað við, at teir vinna einar 2 kr. meira um dagin, enn tað teir vinna í dag, so um teimum verð játtaður ein studningur uppá 5 kr., vildu teir kunna bildið umleið vanliga arbeiðslön.

Nevndin ásannar týdningin, tað hevur, at kolið, sum nýtt verður í landinum, verður tikið úr okkara egnu fjöllum og soleiðis gevur arbeið til nógvar hendur, heldur enn at nýta útlendskt brenni og vil tí mæla tinginum at játta kolaframleiðarunum í Suðuroy ein flutningsstudning (Poul Petersen tó við tí fyrivarni, at studningurin skerjir ikki tingsins játtan á fíggjarlógini til nýggj innslög og til propps á konto § 23.6: Kolagrevstur: kr. 100.000.—.).

Nevndin loyvir sær so statt at seta fram soljóðandi

Uppskot

Fyri fíggjarárið 1962/63 verður veitt kolaframleiðarum úr landskassanum 5 kr. fyri hvört selt tons av koli.

2. viðgerð 2. og 3. viðgerð 4. mai 1962.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá E. Paturssoni o. fl.:

«5 kr.» verða broyttar til «12 kr.»

Broytingaruppskotið fall 6—0.

Uppskotið frá nevndini samtykt 18—0.

114. Skúlabókasövn

Ár 1962, 2. mai legði N. Winther Poulsen landsstýrismaður fram soljóðandi

Uppskot
til

lögtingslóg um studning til skúlabókasövn.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at læna upp til 100.000 kr. at veita í studningi til keyp av handbókum og öðrum tílíkum bókum til skúlarnar.

Renta og avdráttur av lániinum verða at játta á fíggjarlögtingslógini fyrstu ferð 1963/64.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om tilskud til skolebiblioteker.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa landskassens vegne at laane indtil 100.000 kr. at yde som tilskud til köb af haandböger og andre lignende böger til skolerne.

Rente og afdrag af laanet afholdes over finanslagtingsloven förste gang 1963/64.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Ikki minst eftir tí aýggju skúlalógini er lað av största týdningi, at allir skúlar hava eitt hóskandi bókasavn við neyðugum handbókum bæði fyri lærarar og eisini fyri börnini, sum eiga at læra at arbeiða sjálvstöðugt.

Skúlastjórnin hevur latið kanna, hvat skúlarnir hava av handbókum, og vísir tað seg, at flestu teirra hava ongar tílíkar, meðán einstakir, helst prøvtökuskúlartir, hava ein ringanting av bókum.

Tað verður hildið ovboðið hjá kommununum nú í eini handavending at fáa allar hesar bökur til vega, tær makta tað neyvan fíggjarliga. Skotið verður tí upp, at statur og lögting veita ein studul uppá 100.000 kr. hvör til hetta endamál.

Landsstýrið er samt við skúlastjórnina í, at tað er neyðugt, at skúlarnir vera væl útbúnir við amboðum, her undir eisini handbókum, sum tá næmingarnir læra at nýta tær við skili, verða hitt bestu grundarlagið undir tí útbúgving av næmingunum, sum miðað verður ímóti.

Henda umsóknin frá skúlastjórnini er send landsstýrinum við skrivi

28. f. m., og hevur tað ti ikki verið gjörligt at fingið hana viðgjörda í samband við fíggjarlógina 1962/63.

Skúlastjórnin heldur, at keypið av nevndu bókum, ikki minst vegna 8. skúlaárið frá komandi skúlaári, eigur at vera gjört áðrenn nýggja skúlaárið byrjar. Av hesi orsök verður málið lagt fyri lögtingið longu nú og ikki í næstu tingsetu.

1. viðgerð 2. mai og 4. mai legði skúlanevndin fram soljóðandi

Alit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum 2. mai og sama dag uttan orðadrátt beint í skúlanevndina.

Eftir teimum upplýsingum, sum nevndin hevur fingið, hevur ein nevnd sett av skúlastjórnini 31. august 1961 arbeitt við hesum máli. Í hesi nevnd eru Chr. Lützen, fyrrv. skúlastjóri, J. P. Joensen, landsskúlaráðgevari og Ludvig Petersen, yvirlærari. Henda nevnd hevur fingið ymist tilfar til vega, m. a. upplýsingar um, hvussu staðt er við handbókum við skúlarnar í Föroyum, og vísir tað seg, at helvtin av skúlunum eigur onga hók, og í öllum skúlum undantikið einum, er ógvuliga illa staðt við hökur. Henda nevnd hevur so sett ein lista upp við ætlan um, hvörjar bökur, ið serligur törvur er á hjá skúlunum at fáa, og skúlanevndin heldur, at henda meting er rættiliga skilagóð. Tó hövdu vit hildið, at slíkar bökur sum R. Joensen: Royvið og Greivabitin hövdu verið heutar bökur hjá skúlunum at havt eitt nú í samband við samfelagslæru ella stílskriving.

Nevndin er samd um, at tað er avgerandi neyðugt at útvega skúlunum slíkt bókatilfar og mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 4. og 3. viðgerð 5. mai 1962.

Landsstýrisins uppskot samtykt 24—0.

115. Broyting í læknaskipanini

Ár 1962, 2. mai legði lögmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Tingið samtykkir at seta í gildi í Föroyum:

Anordning om ændring i anordning nr. 515 af 4. oktober 1919, hvorved lov om embedslægevæsenets ordning af 21. april 1914 sættes i kraft paa Færöerne.

I henhold til den ved § 20 i lov nr. 87 af 21. april 1914 om embedslægevæsenets ordning dertil meddelte bemyndigelse fastsættes herved fölgende ændring i anordning nr. 515 af 4. oktober 1919, hvorved lov om embedslægevæsenets ordning af 21. april 1914 sættes i kraft paa Færöerne:

Indenrigsministeren bemyndiges til at fastsætte betalingstaksterne for embedslæger paa Færöerne for de i § 15, stk. 2, i ovennævnte anordning af 4. oktober 1919 omhandlede forretninger.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur fingið til ummælis spurningin um at seta í gildi í Föroyum kgl. anordning om ændring i anordning nr. 515 af 4. oktober 1919, hvorved lov om embedslægevæsenets ordning af 21. april 1914 sættes i kraft paa Færöerne frá 7. februar 1962. Eftir fyriskipanini fær innanríkismálaráðharrin heimild at áseta gjöldini til læknar fyri at fyribyrgja farsöttum v. m. Hesi gjöld hava verið ásett í sjálvari fyriskipanini og eru tí ikki samsvarandi prislagnum í dag.

Landsstýrið mælir til at samtykkja, at fyriskipanin verður sett í gildi í Föroyum.

1. viðgerð 2. mai og 4. mai legði lögarnevndin fram soljóðandi

Alit

Landsstýrið hevur lagt fyri lögtingið uppskot til samtyktar um at seta í gildi í Föroyum kgl. anordning om ændring i anordning nr. 515 af 4. oktober 1919, hvorved lov om embedslægevæsenets ordning af 21. april 1914 sættes i kraft paa Færöerne fra 7. februar 1962.

Hereftir fær innanríkisráðharrin heimild at áseta gjøldini til læknar fyri at fyribyrgja farsøttir v. m.

Málið varð við 1. viðgerð tann 2. mai 1962 beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 5. mai 1962.

Uppskot landsstýrisins samtykt 20—0.

---

116. Góðkenning av almennum roknskapum

Ár 1962, 2. mai legði decisiónsnevndin fram soljóðandi frágreiðing:

Á fundi 25. november 1959 gjørdi decisiónsnevndin av at leggja burtur allar roknskapir og frágreiðingar frá 1954/55 og eldri. Síðani hevur nevndin viðgjørt hesar roknskapir v.m.:

Strandfaraskip Løgtingsins 1954/55 og 1955/56 — 1957/58.
Fonden for forulykkedes efterladte 1955 — 1956 — 1957 — 1958.
Tvøroyra sjúkrahús 1956/57.
Overformynderiet 1955/56 — 1956/57 — 1957/58 — 1958/59.
Hvildarheimið «Naina» 1956 — 1957 — 1958.
Telefonverkið 1955/56.
Happadráttur in 1956 — 1957 — 1958 — 1959.
Fólkaskúlin til 1/10 1957.
Eftirlønargrunnur heraraina 1956/57 — 1958/59.
Socialútreiðslur (felagsmál) 1954/55 og 1955/56 — 1956/57.
Dr. phil. Jakob Jakobsens legat 1955/56 — 1956/57.
Føroya Búagrunnur 1954/55 — 1955/56.
Dronning Alexandrines hospital 1955/56.
Føroya skúlagrunnur 1956 — 1957 — 1959.

Eftirlönargrunnur Föroya millum- og realskúla 1956 - 1957 - 1959.
Grunnurin til keyp av nyttugum skúlabókum 1956 - - 1957 1959.
Pastor Engelstedts legat 1956 -- 1957 - 1959.
Royndarbrúkið í Hoyvík 1957/58.
Tey föroysku apotekini 1955/56 — 1957/58 1959/60.
Byggirokuskapur fyri meginapotekið pr. 1/10 1958.
Plantagenævnet 1956/57.
«Alv» 1956.
Frágreiðing til Föroya Lögting pr. 1/8 1958.
Frágreiðing viðv. toll- og framleiðslugjöldum 1956/57 - 1957/58 -- 1958/59.
Frágreiðing viðv. avstemman av lögtingsskatti 8/1 1958.
Frágreiðing viðv. kassaeftirlíti í landskassanum 21/3 og 17/10 1959.
Vinnulánsgrunnurin 1958.
Det store nordiske Telegrafselskabs gavefond af 1. aug. 1956 pr. 31/3 1960.
Skúlabókagrunnurin 1959.
Nautisk royndarkamar 1959/60.
Læraralönir fólkaskúlans frágreiðing av 25/8 1960.
Föroya Jarðargrunnur 1957/58.
Landskassarokuskapur 1956/57 - 1957/58 -- 1958/59.

Nevndin mælir til, at nevndi rokuskapur við grannskoðarafrágreiðingum verða góðkendir, tó við hesum viðmerkingum til fylgjandi:

Vinnulánsgrunnurin 1958.

Eftir síðu 2 í frágreiðingini eru studningslánini til útróðrabátar tikin til inntöku, meðan peningurin fyri 1958 kr. 40.825,00 ístaðin átti at verði avsettur til möguligar avskrivingarskyldur fey 5 árini studningslánini skulu nýtast. Gjaldstovan, sum nú hevur yvirlikið rokuskapin hjá vinnulánsgrunninum, verður biðin um at syrgja fyri, at peningurin verður avsettur sambæt grannskoðaraviðmerkingina.

Happadrátturin. 1957/1958 og 1959.

Vísandi til, at ágóðin hjá seljurum ofta vísir seg at vera alt ov stórur, verður landsstýrið biðið um at kanna möguleikarnar fyri, at viðtökurnar verða broyttar soleiðis, at seldir lutaseðlar - provisión, verða avroknaðir beinan vegin aftaná hvönn drátt, soleiðis at bert landskassin hevur ábyrgdina av úlgjaldanini av vinningum. Somuleiðis verður fyrisligið, at rakstrarúrslitið hjá happadráttinum verður samlað á einari statuskonto í landskassanum, og at mögulig uvlopssaldo av hesi konto hvørt

5 árs skeið verður býtt eftir vanligum reglum, meðan rakstrarhallið verður flutt til landskassans rakstur.

Skúlabókagrunnurin 1959.

Nevndin vísir til viðmerking frá grannskoðaranum um, at tað er ikki heimild at lata stuðning til útgávu av öðrum enn skúlabókum.

Frágreiðing viðv. toll- og framleiðslugjöldum 1957/58 og 1958/59.

Álagt verður landsstýrinum at fáa gjört eina greiniligari tollskrá og einfaldari útrokning av tolli, og gjöllari eftirlit við framleiðslugjaldi og stuttleikaskatti.

Annars verður víst til avskrift av gerðabókini, sum liggur í málinum.

2. viðgerð 2. mai 1962.

Frágreiðingin samtykt 20 0.

---

117. Röntgentól til læknadömir

Ár 1962, 2. mai legði Haldor Hansen löglingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum saman við landslæknanum at skipa fyri, at röntgentól verða uppsett í teimum læknadömum, har einki hospital er.

Viðmerkingar:

Tað er ógvuliga uttanhanda og sera kostnaðurmikið hjá bygdafólki í hesum ávísu læknadömum at vera noydd at fara til Havnar, Tvöroyri

ella Klakksvíkar við minni brekum sum t. d. ein brotin fingur, bein ella armur o. l., sum læknin kett kundi viðgjört, um hann hevði röntgentól við hondina.

1. viðgerð 2. mai 1962 og málið beint til figgjarnevndina.

---

118. Lögtingshús

Ár 1962, 4. mai legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Í 1856 vóru lögtingshúsini liðug. Í lögtingssetuni 1904 var samtykt at sela niður 5-manna lögtingsnevnd at gera fyrstu fyrireikingarnar til nýggj lögtingshús. Eftir at málið var kannað kom lögtingið tó til tað úrslit, at tær figgjarligu umstöðurnar ikki vóru nóg rúmar at fara undir at byggja av nýggjum, og samtykti í tingsetuni 1906 í staðin at leingja og byggja húsini um. Hesi arbeiði vóru liðug til tingsetuna 1907. Síðani tá er einki stórvegis gjört við húsini.

S t k. 1. Traktorer, der ganske overvejende anvendes udenfor vejene som træk- eller drivkraft for arbejdsredskaber, skal dog

kortini ikki verða skrásettir, treyta av at teir einans nýta vegirnar;

a) til sjálvflutning til arbeiðisstað og umvælara og frá teimum aftur,

b) sum dragmegi hjá arbeiðisaktólum til arbeiðisstað ella umvælara og frá teimum aftur (viðfestir vognar verða javnsettir arbeiðisaktólum, tá ið teir einans verða nýttir til flutning av amboðum).

c) til royndarkoyring ella tilika ávisa tíðarmarkaða koyring við lögregluloyvi í hvörjum einstökum föri.

2. petti. Traktorar, ið umframt ta í 1. petti nevndu koyring á vegum einans gera vegarbeiði á vegökjum, avmarkaðum á tryggj andi hátt við vegstongsli ella merkjum, ella verða nýttir til at halda reint, sópa kava og tilíkt, skulu heldur ikki verða skrásettir.

3. petti. Skal traktorur av tí í 1. petti umrödda slag umframt har umröddu koyring nýtast til framleiðsluflutning, kann hann aftan á, at lögregluni er fráboðað, uttan skráseting eftir reglunum í § 11 verða góðtikin til tess, um hann ið traktorin eigur hevur jerðar- ella urtagarðsbrúk. Góðkenningin heimilar einans flutning av framleiðslu, ið stavar frá ella skal nýtast í jarð- ella urtagarðsyrkinum, til ognina og frá henni og somuleiðis millum partar av henni; bensindrivnir traktorar mugu ikki verða nýttir longur enn 10 km burtur frá ognini at flyta til idnaðarnýtslu framleiðslu, ið stavar frá yrkinum. Fyri felagstraktorar hjá

ikke indregistreres, forsaavidt de alene benytter vejene:

a) til egentransport til og fra arbejdssted og reparatör,

b) som trækkraft for arbejdsredskaber til og fra arbejdssted eller reparatör (med arbejdsredskaber ligestilles paahængs vogne, der alene benyttes til befordring af redskaber),

c) til prövekörsel eller anden lignende tidsbekrænset körsel efter derom af politiet i hvert enkelt tilfælde meddelt tilladelse.

Stk. 2. Traktorer, der paa vejene udover körsel som i stk. 1 nævnte alene udförer vejarbejde paa vejomraader, der er begrænset paa betryggende maade ved afspærring eller afmærkning, eller anvendes til renholdelse, snerydning og lignende, skal heller ikke indregistreres.

Stk. 3. Önskes traktorer af den i stk. 1 omhandlede art foruden til den dér omhandlede körsel anvendt til transport af produkter, kan traktoren efter anmeldelse til politiet uden registrering efter reglerne i § 11 godkendes hertil, forsaavidt traktoren tilhörer ejeren af en landbrugs- eller gartneriejendom. Godkendelsen giver kun ret til transport af produkter, der hidrörer fra eller skal benyttes i landbrugs- eller gartnerivirksomheden, til og fra ejendommen samt mellem dele af denne, og benzindrevne traktorer maa ikke anvendes udover en afstand af 10 km fra ejendommen til transport til industriel brug af produkter, der hidrörer fra virk-

ánarum (nýtarum) av fleiri ognum kann góðlöka ikki verða útvegað, um felagsognin umfatar meira enn ein traktor. Koyring í ávísum býum ella býarökjum kann verða bannað av fútanum, har viðureskiftini serstakliga mela til tess.

4. petti. Um ta í 3. petti umröddu góðkenning, um sýning frammanundan og gjalding fyri hana og somuleiðis um merking av soleiðis góðkendum traktorum áseetur Föroya landsstýri nærri fyriskipanir.

§ 13.

Ansingareftirlit.

1. petti. Lögreglu og hinum motorsakkönna er altíð heimlað at steðga einum og hvörjum akfari at láta tað kannað ella at ansa eftir, at akstjóriu lýkur treytirnar fyri lógliga at kunna koyra uttarið. Finst, at akfarið lýkur ikki tær í hesi lóg ella sambæt hana settu fyriskipanir, kann nýtsla tess verða bannað og nummarspjaldur ella onnur lógarásett frámerki verða burturbeind, til tess at funnin brek eru bött.

2. petti. Við brýr og við serstök vegstrekki, t.d. byrgingar, kann verða sett fast eftirlit við tyngd akfara og stödd.

3. petti. Lögreglan og hin motorsakköni kunnu eina og hvörja tíð krevja eitt skrásett ella góðkent akfar vist fram til eftirkanningar at vita, um tað framvegis lýkur tey í hesi lóg ella sambæt henni settu krív. Föroya landsstýri kann áseta fyriskipanir um tíðarvissar eftirkanningar. Fyriskipanir um gjald fyri ta í hesum

sumheden. For traktorer i sameje mellem ejere (brugere) af flere ejendomme kan godkendelse ikke meddeles, hvis samejet omfatter mere end een traktor. Körsel i visse byer eller byområader kan forbydes af politimesteren, hvor forholdene særlig taler derfor.

Stk. 4. Om den i stk. 3 omhandlede godkendelse, om forudgaaende syning og betaling herfor samt om mærkning af saaledes godkendte traktorer fastsætter Færöernes landsstyre de nærmere bestemmelser.

§ 13.

Kontroleftersyn.

Stk. 1. Politiet og den motorsagkyndige er altid berettiget til at standse ethvert köretöj og bade det undersöge eller til at kontrollere, at föreren opfylder betingelserne for lovligt at kunne före köretöjet. Findes det, at köretöjet ikke opfylder de i denne lov eller i medför af denne givne forskrifter, kan dets benyttelse forbydes og nummerplader eller andre paabudte kendingsmærker fjernes, indtil forefundne mangler er afhjulpet.

Stk. 2. Ved broer, og ved særlige vejstrækninger, f.eks. dæmninger, kan der iværksættes fast kontrol med köretöjers vægt og störrelse.

Stk. 3. Politiet og den motorsagkyndige kan til enhver tid fordrange et indregistreret eller godkendt köretöj fremstillet til eftersyn af, om det vedblivende fyldestgör de i denne lov eller i medför af denne stillede fordringer. Færöernes landsstyre kan fastsætte bestemmelser om periodisk eftersyn af motorköretöjer.

petti umröddu eftirkanning verða áseltar av Föroya landsstýri.

4. petti. Verður akfar ikki víst fram, tá ið boðað er, kann lögreglan banna nýtslu tess og beinn burtur nummarspjöldrini (frámerkini).

C. Útlendsk akför.

§ 11.

1. petti. Fyri akför úr útlondum, ið sambært onkran millumfjóða sáttmála, ið Danmark hevur tikið við, fyribils kunnu verða nýtt her á landi, galda fyriskipanirnar í §§ 5-10 einans so mikið, sum tær eru heimilaðar í sáttmálanum. Akför, ið eftir § 11 hava skrásetingarskyldu, kunnu verða nýtt óskráset her á landi, um tey eru lógliga skrásett í heimlandinum og hava tjóðarmerki og nummarspjaldur í minsta lagi fyri aftan á akfarinum, sbr. kortini 3. petti.

2. petti. Föroya landsstýri smiðar nærri reglur um eftirlit við teimum í 1. petti umröddu akförum, meðan tey eru her á landi, og ásetur fyriskipanir um, undir hvörjum treytum akför, ið koma úr útlondum uttan at vera umfatað av sáttmála, sum í 1. petti er nevnt, kunnu verða nýtt her á landi.

3. petti. Um hann, ið eigur (nýtir) úr útlondum innflutt motorakfar ella annað av § 11 umfatað akfar, býr her á landi, skal akfarið verða skrásett, ella skulu öll nummarspjöldur tess

Bestemmelser om betaling for de i dette stykke omhandlede eftersyn fastsættes af Færöernes landsstyre.

Stk. 1. Fremstilles et köretöj ikke efter tilsigelse, kan politiet forbyde dets benyttelse og fjerne dets nummerplader (kendingsmærker).

C. Udenlandske köretöjer.

§ 11.

Stk. 1. For köretöjer fra udlandet, der i henhold til en af Danmark tiltrådt international overenskomst midlertidigt kan benyttes her i landet, gælder bestemmelserne i §§ 5-10 kun i det omfang, de har hjemmel i overenskomsten. Köretöjer, der efter § 11 er registreringspligtige, kan benyttes uden registrering her i landet, saafremt de er lovligt registreret i deres hjemland og forsynet med nationalitetsmærke og nummerplade, i det mindste bag paa köretöjet, jfr. dog stk. 3.

Stk. 2. Færöernes landsstyre udfærdiger de nærmere regler for kontrollen med de i stk. 1 omhandlede köretöjer under deres ophold her i landet og fastsætter bestemmelser om, under hvilke betingelser köretöjer, der indkommer fra udlandet uden at være omfattet af overenskomst som i stk. 1 nævnt, kan anvendes her i landet.

Stk. 3. Saafremt ejeren (brugeren) af et fra udlandet indført motorköretöj eller andet af § 11 omfattet köretöj er bosiddende her i landet, skal köretöjet indregistreres eller samtlige dets num-

verða flýggjað lögregluni innan 14 dagar aftan á, at tað er komið inn í landið. Fær ánari (nýtari), ið ikki býr her á landi, aftan á komuna sær hústað her á landi, ella fær onkur, ið býr her á landi, akfarið frá honum til ognar (nýtslu), skal tað verða skrásett ella nummarspjöldur flýggjað innan 14 dagar aftan á hetta.

III. Fyriskipanir viðvíkjandi akstjórum o.ö.

§ 15.

Sjúka, overving o.a.

Eingin má koyra ella royna at koyra akfar, um hann vegna sjúku, veikleika, overving, ovvekur, ávirkan av huglættandi ella doyvandi evni ella av tilíkari orsök er so háttaður, at hann er ikki förur at koyra akfar av avvarandi slag á tryggjandi hátt. At nakar so háttaður við akfari hevur flutt fólk við vinnuligum endamáli, verður roknað fyri tilsakan. Hevur arbeiðisgevari akstjórans ella annar yvirmaðursamábyrgd av, at hann so háttaður hevur koyrt akfar, verður hesin eisini revsaður.

§ 16.

Rúsdrekkaávirkan.

1. p e t t i. Eingin má koyra ella royna at koyra motordrivið akfar, um hann hevur notið so mikið rúsdrekka, at hann er ikki förur fyri at koyra akfar á fulltryggjandi hátt.

2. p e t t i. Heldur ikki má nakar súkla, ríða, reiða, koyra rossavogn ella tilíkt, ella royna tað,

mærplader afleveres til politiet inden 14 dage, efter at det er indkommet. Tager en ikki her i landet bosiddende ejer (bruger) efter indrejsen hopæt her i landet, eller overgaar köretöjet fra ham til en her i landet bosiddende ejer (bruger), skal indregistrering eller aflevering af nummerplader ske inden 14 dage derefter.

III. Bestemmelser vedrörende förere af köretöjer m. v.

§ 15.

Sygdom, overanstrængelse m. v.

Et köretöj maa ikki föres eller forsöges fört af nogen, der paa grund af sygdom, svækkelse, overanstrængelse, mangel paa sövn, paavirkning af opstemmende eller bedövende midler eller af lignende aarsager befinder sig i en saadan tilstand, at han er ude af stand til at före et köretöj af den paagældende art paa betryggende maade. At en person i en saadan tilstand med köretöjer har befordret personer i erhvervsmæssigt öjemed, betragtes som en skærpende omstændighed. Har förerens arbejdsgiver eller anden foresat medansvar for, at han har fört köretöj i saadan tilstand, straffes tillige denne.

§ 16.

Spirtuspaavirkning.

S t k. 1. Et motordrevet köretöj maa ikke föres eller forsöges fört av nogen, der har nydt spiritus i et saadant omfang, at han er ude af stand til at före köretöj paa fuldt betryggende maade.

S t k. 2. Cykel eller hest maa ej heller föres eller forsöges fört af nogen, der har nydt spiritus i et

um hann hevur nolið so mikið rúsdrekka, at hann er ikki förur fyri at ráða súkluni ella rossinum á fullteyggjandi hátt.

3. petti. Bannað er at lita upp í hendurnar á nökrum, ið er ávirkaður av rúsdrekka, so sum í 1. og 2. petti er nevnt, at stýra motordrivnum akfari, súklu ella rossi.

4. petti. Er orsök til at halda, at maður hevur brotið frammanfyristandandi fyriskipan, kann lögreglan taka hann til læknu til kanningar, eitt nú at gera blóð- og landroynd til at greina alkoholsamdráttin. Lögmálaráðharrin kann ásetta nærri fyriskipanir um læknakanningina.

§ 17.
Ábyrgd akstjórans av skili akfarsins.

Akstjórin skal eina og hvörju tíð ansa eftir, at akfari er í tryggjandi skili, serstakliga at róður, brenstur, ávaringar- og báknitól og lyktir eru sum fyriskipað og arbeiða álítandi, og at koplingin til nögduligan viðfestan vogn, leguvogn ella viðfest aktól er álítandi og í tryggjandi skili.

§ 18.
Koyriprógv til motorakför.

1. petti. Motorakfar kann einans verða koyrt av fólki, ið frá lögregluni hevur fingið koyriprógv. Meðan koyrt verður, skal akstjórin altíð hava koyriprógvið hjá sær, og vísa lögregluni tað, tá ið hetta verður kravt.

2. petti. Koyriprógv kann einans verða givið fólki, ið fylt hevur 18 ár. Umsökjarin skal hava hógv við rúsandi evnum og siggja

saadant omfang, at han er ude af stand til at före cyklen eller hesten paa fuldt betryggende maade.

Stk. 3. Det er forbudt at overlade föringen af motordrevet köretöj, cykel eller hest til en person, der er paavirket af spiritus som i stk. 1 og 2 nævnt.

Stk. 4. Er der grund til at antage, at en person har overtraadt foranstaaende bestemmelser, kan politiet fremstille ham for en læge til undersögelse af alkoholcentrationen. Justitsministeren kan træffe nærmere bestemmelser om lægeundersögelsen.

§ 17.
Förerens ansvar for köretöjets stand.

Föreren af et köretöj skal til enhver tid være opmærksom paa, at köretöjet er i forsvarlig stand, særlig at styre- og bremse-, signal- og tegngivningsapparater samt lygter virker forskriftsmæssigt og sikkert, og at tilkoblingen til eventuel paahængsvogn, sættevogn eller paahængsredskab er sikker og i forsvarlig stand.

§ 18.
Förerbevis til motorköretöjer

Stk. 1. Motorköretöj maa kun föres af personer, der hos politiet har erhvervet förerbevis. Under körslen skal föreren altid have förerbeviset hos sig og paa forlangende forevise det for politiet.

Stk. 2. Förerbevis kan kun udstedes til personer, der er fyldt 18 aar. Andrageren skal være ædruelig og i besiddelse af til-

og hoyra nóg vel og annars andaliga og kropsliga vera so förur, sum neyðugt er. Hann skal við royndina prógva, at hann dugir nóg val at koyra og hevur neyðugan kunnleika um akfarið og viðferð tess og um fyriskipanir ferðslulóggávunnar. Hevur hann ikki fyrr havt koyriprógv til motorvogn ella motorsúklu, skal hann undan royndini hava nomið koyring hjá góðkendum koyrilærara. Landsstýrið ásetur nærri reglur um royndina, útsjónd og innihald koyriprövsins og somuleiðis um gjaldið fyri royndina og koyriprógvið.

3. pettí. Landsstýrið ger av, undir hvörjum treytum fólk, ið hava rætt til at koyra motorakfar í útlondum, kunnu fáa koyriprógv her á landi.

4. pettí. Föroya landsstýri kann ásetta fjölbroyttari treytir fyri at fáa koyriprógv til motorakför, ið nýtt verða vinnuliga til fólkaflutnings. Viðvíkjandi koyri prógvi til buss- ella farmakoyring kann landsstýrið somuleiðis ásetta serligar reglur. Koyriprógv til motorakför, ið nýtt verða vinnuliga til fólkaflutnings, kann vera sýtt tí, ið döndur er fyri sakarfilburðir, ið benda á hóttandi vanda fyri misnýtslu av koyriprógvinum, sbr. lóg nr. 286 frá 18. juni 1951.

5. pettí. Koyriprógv geldur í 5 ár frá útgávudegnum. Fólki, ið fylt hevur 70 ár, kann koyriprógv kortini verða givið fyri styri

strækkelig syns- og höreevne samt iövrigt af den fornödne aandelige og legemlige förlighed. Han skal ved en pröve godtgöre at være i besiddelse af tilstrækkelig köre-færdighed og fornödent kendskab til köretöjer og dets behandling samt færdselslovgivningens bestemmelser. Saafremt han ikke tidligere har haft förerbevis til motorvogn, henholdsvis motorcykel, skal han forinden pröven have taget undervisning i köre-færdighed hos godkendt körelærer. Landsstyret fastsætter de nærmere regler for pröven, for förerbevisets udseende og indhold samt gebyret for pröven og förerbeviset.

Stk. 3. Landsstyret træffer bestemmelse om, under hvilke betingelser personer, der har ret til at före motorköretöj i udlandet, kan faa förerbevis udstedt her i landet.

Stk. 4. Færöernes landsstyre kan fastsætte mere vidtgaaende betingelser for udstedelse af förerbevis til motorköretöjer, der benyttes erhvervsmæssigt til befordring af personer. Forsaavidt angaar förerbevis, der benyttes til omnibus- eller fragtmandskörsel kan landsstyret endvidere fastsætte særlige regler. Förerbevis til motorköretöjer, der benyttes erhvervsmæssigt til befordring af personer, kan nægtes den, der er dömt for strafbart forhold som begrunder en nærliggende fare for misbrug af förerbeviset, jfr. lov nr. 286 af 18. juni 1951.

Stk. 5. Förerbeviset gælder i 5 aar fra udstedelsesdagen. For personer, der er fyldt 70 aar, kan förerbevis dog udstedes for kor-

tímabil. Sama er galdandi eftir nærri fyriskipan landsstýrisins, tá ið viðurskiftini annars í stóran mun mæla til hetta. Tá ið koyriprógvið er farið úr gildi vegna tíð, kann tað verða endurnýggja, um avvarandi framvegis lýkur treytirnar. Lögreglan ger av, um viðkomandi kann sleppa frá nýggjari royndi.

6. petti. Lögreglan kann eina og hvörja tíð taka koyriprógvið aftur, um avvarandi ikki longur lýkur treytirnar fyri at fáa koyriprógv. Koyriprógvhavar eru skyldigir at geva seg undir tær kanningar, ið eru neyðugar at gera hetta av. Spurningurin, hvört avvarandi kann haldast hava hógv við rúsandi evni, sbr. 2. petti, kann eina og hvörja tíð verða fluttur fyri dómstólarnar.

§ 19.
Venjikoyring við motorakförum o. ö.

1. petti. Venjikoyring teirra, ið læra at koyra motorvogn, kann einans fara fram, tá ið, sambært § 63, góðkendur koyrilærari er í akfarinum við næmingsins lið og so verður at rokna sum stjóri akfarsins. Við ta í § 18, 2. petti, umröddu royndi verður næmingurin kortini at rokna sum akstjóri. Vil nakar, ið longu hevur koyriprógv, iðka stinni sítt at koyra motorvogn og lí fremur venjikoyring í akfari, sum til less er góðtikið, og við góðkendum koyrilærara við liðina, verður koyrilærarin sonuleiðis at rokna sum stjóri akfarsins. Fyriskipanirnar í §§ 15 og 16 eru kortini í öllum förum eisini galdandi fyri næmingin.

tere tidsrum; det samme gælder efter landsstyrets nærmere bestemmelse, hvor forholdene iövrigt taler derfor. Efter udlöbet af gyldighedstiden kan beviset forneyes, saafremt den paagældende stadig opfylder betingelserne. Politiet bestemmer, om vedkommende kan fritages for at aflægge ny pröve.

Stk. 6. Politiet kan til enhver tid tage förerbeviset tilbage, naar den paagældende ikke længere opfylder betingelserne for at faa förerbevis. Förerbevisindehavere er pligtige at underkaste sig de til afgörelse heraf fornödne undersögelser. Spörgsmaalet, om den paagældende maa anses for ædrulig, jfr. stk. 2, kan til enhver tid indbringes for domstolene.

§ 19.
Övelseskörsel med motorköreföjer m. v.

Stk. 1. Övelseskörsel for personer, der uddanner sig til körsel med motorvogn, kan kun finde sted, naar der paa köretöjet ved siden af eleven findes en i medför af § 63 godkendt körelærer, der da anses for at være förer af köretöjet. Ved den i § 18, stk. 2, omtalte pröve anses eleven dog for at være förer. Saafremt en person, der allerede har förerbevis, önsker at opöve sin færdighed i at före motorvogn og derfor foretager övelseskörsel i et dertil godkendt köretöj med en godkendt körelærer ved siden af sig, anses körelæreren ligeledes for at være förer af köretöjet. Bestemmelserne i §§ 15 og 16 finder dog i alle tilfælde ogsaa anvendelse paa eleven.

2. p e t t i. Venjikoyring við motorsúklu kan einans fara fram undir vegleiðing og eftiransan av koyrilærara, ið góðkendur er sambært § 63 og hevur ábyrgdina av, at venjikoyringin fer fram á tilíkum stöðum og á slíkan hátt, at hon eftir lærustöði næmingsins má haldast kunna fremjast uttan vanda fyri hina ferstuna.

3. p e t t i. Venjikoyring má ikki fara fram fyrr enn 1 mánað fyri ta tíð, ið næmingurin eftir aldrinum kann fáa koyriprógv, og hjá fólki, ið koyrirættindini eru frádömd, ikki fyrr enn 1 mánað, áðrenn tey aftur kunnu fáa hesi rættindi.

3. p e t t i. Motorakfar skal, meðan venjikoyring fer fram, bæði framman- og aftaufyri hava skelt við teksti, ið greidliga ger kunnugt, at akfarið verður nýtt til venjikoyring. Skeltið kann einans verða nýtt í sambandi við venjikoyring. Föroya landsstýri ger av, hvönn serligan trygdarútbúnað motorakför skulu hava, tá ið tey verða nýtt til venjikoyring.

5. p e t t i. Venjikoyring kann fara fram allastaðni, har ferðsla við akförum av avvarandi slag er loyvd; kortini kann lögreglan heilt ella lutvíst banna venjikoyring á ávísum götu- ella vegastrekkjum, har umstöðurnar, eitt nú gætur eftir teimum, har búgva, krevja tað.

6. p e t t i. Föroya landsstýri kann áseta serligar fyriskipanir venjikoyring viðvíkjandi.

S t k. 2. Övelseskörsel med motorcykel maa kun finde sted under vejledning og overvaagen af en i medför af § 63 godkendt körelærer, der har ansvaret for, at övelseskörslen foregaar paa saadanne steder og paa saadan maade, at det efter elevens uddannelsestrin maa antages at kunne ske uden fare for den övrige færdsel.

S t k. 3. Övelseskörsel maa ikke finde sted tidligere end 1 maaned för det tidspunkt, hvor eleven efter sin alder kan faa udstedt förerbevis, og, forsaavidt angaar personer, hvem förerretten er frakendt, ikke tidligere end 1 maaned för frakendelsestidens udlöb.

S t k. 4. Motorköretöj skal under övelseskörsel saavel foran som bagpaa være forsynet med et skilt, hvis tekst tydeligt tilkendegiver, at köretöjet benyttes til övelseskörsel. Skiltet maa kun benyttes i anledning af övelseskörsel. Færöernes landsstyre bestemmer, hvilke særlige sikkerhedsindretninger der skal findes paa motorköretöjer, som benyttes til övelseskörsel.

S t k. 5. Övelseskörsel kan finde sted overalt, hvor færdsel med köretöjer af den paagældende art er tilladt, dog kan politiet helt eller delvis forbyde övelseskörsel paa bestemte gade- eller vejstrækninger, hvor forholdene, herunder hensynet til de omboende, kræver det.

S t k. 6. Færöernes landsstyre kan fastsætte særlige bestemmelser vedrörende övelseskörsel.

§ 20.
Upplýsingarskylda og ábyrgd viðvikjandi koyriprógvi.

1. petti. Ánari (nýtari) akfarsins hevur, tá ið lögreglan beiðir, skyldu at upplýsa, hvör ið akstjóri hevur nýtt akfarið.

2. petti. Ánari (nýtari) og akstjóri motordrivna akfars mugu ikki lita koyringina upp í hendurnar á nökrum, sum ikki hevur gilt koyriprógv til akfarið og avvaraudi koyring.

§ 20.
Oplysningspligt og ansvar med hensyn til förerbevis.

Stk. 1. Ejeren (brugeren) af et köretöj er paa politiets begæring forpligtet til at give oplysning om, hvilke personer der som förere har benyttet köretöjet.

Stk. 2. Ejeren (brugeren) og föreren af et motordrevet köretöj maa ikke overlade föringen til en person, der ikke er i besiddelse af et til köretöjet og den paagældende körsel gyldigt förerbevis.

§ 21.
Útlendskir akstjórar.

Fólk, ið ikki búgva her á landi, kunnu, meðan tey fyribils eru her, koyra tilíkt motorakfar, sum teimum í heimlandinum er heimilað at koyra, uttan at hava föroyskt-danskt koyriprógv, um hetta er heimilað í millumlandasáttmála, sum Danmark hevur tikið við; í öðrum förum kann lögreglan geva loyvi til at koyra motorakfar her á landi. Nærri reglur um hetta verða áseltar av Föroya landsstýri.

§ 21.
Udenlandske förere.

Personer, der ikke er bosiddende her i landet, kan under midlertidigt ophold her före saadant motorköretöj, som de i deres land er berettiget til at före, uden at være i besiddelse af færösk-dansk förerbevis, forsaavidt dette er hjemlet ved en af Danmark tiltraadt international overenskomst; i andre tilfælde kan politiet meddele tilladelse til at före motorköretöj her i landet. De nærmere regler herom udfærdiges af Færöernes landsstyre.

IV. Ferðslureglur.
A. Inngangsfyriskipanir.
§ 22.

1. petti. Fyriskipanirnar, sum í hesi deild eru givnar um akför, akstur ella akandi, umfata eisini súklukoyring, koyring við handvogni og ríðing, so víða sum tær kunnu nýtast. Sama geldur, tá ið ross og fæ verða rikin ella leidd; nóg væl skal vera ansað eftir teimum.

2. petti. Tá ið fyriskipanirnar í hesum tátti verða nýttar, verður eisini tann at skilja sum gang-

IV. Færdselsregler.
A. Indledende bestemmelser.
§ 22.

Stk. 1. De i dette afsnit givne bestemmelser om köretöjer, körsel eller körende omfatter ogsaa cyklekörsel, körsel med trækvogn og ridning i den udstrækning, de kan anvendes. Det samme gælder for föring af heste og kreaturer; disse skal være undergivet tilstrækkelig bevogtning.

Stk. 2. Ved anvendelse af bestemmelserne i dette afsnit ansES som gaaende ogsaa den, der förer

andi, ið koyrir barnavogn, rullistól, annað avlamisakfar, ið útbúgvið er til handamegisfluting, ella tilikt.

B. Fyriskipanir um alla ferðslu.

§ 23.
Aðal reglur.

1. petti. Vegfarar skulu vera eiriligir og hava fyrilit, so at ikki öðrum stendst vandi, skaði ella ónáðir av, og so at ferðslan verður ikki tarnað ella órógvað meir enn neyðugt. Skyldu at vera eirilig hava eisini tey, ið búgva ella eru slödd við vegin.

2. petti. Serliga skal vern givið gætur börnum og teimum, ið á fyrisettan hátt nýta eitt merki, ið av Föroya landsstýri er skipað avlomunum. Hetta merkið kann einans verða nýtt av fólkum, ið hava tvörrandi ella veika sjón ella hoyrn, ella hava annað kropsligt brek, ið er teimum serstakliga hágið í ferðslunni.

§ 24.
Ferðsluávisingar.

1. petti. Vegfarandi skulu gera eftir teimum ávísingum, sum lögregla ella vegamyndugleikar geva við ferðslulalvum, merkjum ella teknum. Neyðsendarokstjóri kann kortini í átroðkandi föri, tá ið hann fer fram við hinum mesta varsemi, ganga uttan um tílíkur ávísingar.

2. petti. Vegfarar skulu gera eftir teimum ávísingum, lögreglan gevur at tempra ferðslunn,

barnevogn, rullestol, andet invalidekörelöj, der er indrettet til fremdrift ved haandkraft, eller lignende.

B. Bestemmelser for al færdsel.

§ 23.
Grundregler

Stk. 1. Vejfarende skal optræde hensynsfuldt og udvise agtpaagivenhed, saa at der ikke opstaar fare eller forvoldes skade eller ulempe for andre, og saaledes at færdselen ikke unödigt hindres eller forstyrres. Pligten til at vise hensyn gælder ogsaa overfor den, der bor eller opholder sig ved vejen.

Stk. 2. Særlig hensyntagen skal udvises overfor börn og overfor personer, der paa foreskreven maade bærer et af Færöernes landsstyre for invalider fastsat mærke. Dette mærke maa kun bæres af personer med manglende eller svækket syn eller hörelse, eller som lider af anden legemlig mangel, der er til særlig ulempe for dem i færdselen.

§ 24.
Anvisninger for færdselen.

Stk. 1. Vejfarende skal efterkomme de anvisninger, som gives af politiet eller vejmyndighederne ved færdselstavler, afmærknisg eller signaler. Förer af udrykningsköretöj kan dog i paatrængende tilfælde under iagttagelse af ganske særlig forsigtighed undlade at fölge saadanne forskrifter.

Stk. 2. Vejfarende skal efterkomme de anvissinger, politiet giver til regulering af færdselen,

og steðga, tá ið lögreglan báknar.
3. petti. Bannað er at heina burtur, flyta, avlaga, dálka ella skala ferðslutalvur, -merki, ella -tekin.

§ 25.
Frítt um at fara hjá skrúðgonga og neyðsendarakfari.
1. petti. Vegfarandi skulu so mikið sum til ber geva samferðari skrúðgongu o. tl. frítt um at fara.

2. petti. Tá ið neyðsendarakfar ger vart við seg við serstökum av Föroya landsstýri ásettum ljóð- og ljóstekinum, skulu öll onnur vegfarandi í góðari tið halda akfarinum vegin opnan; akfarandi skulu alt fyri eitt koyra til síðis og eisini steðga, um hetta gerst neyðugt. Neyðsendarakferð við nýtslu av tilikum teknum kann einans fara fram í átroðkandi föri, og nýtsla av teknunum sleppir ikki neyðsendarakstjórannum frá skyldini at geva trygdteikanum hjá öðrum nóg mikið gætur.
3. petti. Óviðkomandi er bannað at fara nærri enn 100 m aftan á neyðsendarakfari ella at koyra skaðastaði so nær, at koyring til ella frá verður tarnað.

§ 26.
1. petti. Ein og hvör, ið av egnum ávum ella á annan hátt verður uppi í at renna á ella í öðrum ferðslunóhappi, skal alt fyri eitt steðga og eftir besta förimuni veita meislaðum hjálp og í aðrar máta taka lut í teimum tiltökum, sum av óhappinum gerast fyri neyðini. Avvarandi hava sínámill-

og standse naar politiet giver tegn dertil.
Stk. 3. Det er forbudt at fjerne, flytte, forvanske, tilsmudse eller beskadige færdselstavler, -afmærkning eller -signaler.

§ 25.
Fri passage for optog og udrykningsköretöj.
Stk. 1. Vejfaresde skal saavidt muligt give fri passage for sluttet optog o.l.

Stk. 2. Naar udrykningsköretöj tilkendegiver sig ved særlige af Færöernes landsstyre fastsatte lyd- og tyssignaler, skal alle andre vejfarende i god tid holde vejen aaben for köretöjet for körendes vedkommende ved straks at köre ind til sides og om fornödent standse. Udrykningskörsel under brug af saadanne signaler maa kun finde steel i paatrængesde tilfælde, og brug af signalerne fritager ikke föreren af udrykningsköretöjet for pligten til tilbörlig hensynstagen til andre menneskers sikkerhed.
Stk. 3. Det er forbudt uvedkommesde at fölge nærmere end 100 m efter udrykningsköretöj eller köre saa nær et skadested, at körsel til eller fra dette derved hæmmes.

§ 26.
Stk. 1. Enhver, der med eller uden egen skyld bliver delagtig i en paakörsel eller andet færdselsuheld, skal straks standse og efter bedste evne yde hjælp til tilskadekomne og iövrigt deltage i de forholdsregler, som uheldet giver anledning til. De paagældende har gensidigt pligt til paa

um skyldu, tá ið kravt verður, at siga navn síff og bústað og hava annars skyldu at geva tær upplýsingar um óhappið, sum fey eru för fyri. Avvarandi hava somuleiðis skyldu skjótast gjörligt at boða lögregluni frá hendingini.

2. petti. Eru ferðslutalvur ella tekin ella stongsil ella lyktir við vegarbeiði farin av lagi, skal akstjórin alt fyri eitt eftir föreinuni fáa merkini aftur í rettlag.

§ 27.

Bann móti at hanga uppi í akfari og móti spæli o. ö.

1. petti. Bannað er at leypa upp á, at krökja seg fastan í akfar, meðan koyrt verður, ella at heingja sleðu, handvogn, leikavogn ella annað tilikt upp í akfar.

2. petti. Á vegi mugu ongar hálkur ella skreiðibreytir verða gjördar; heldur ikki má verða spælt á vegi ferðsluni at búga.

§ 28.

At seta ella leggja nakað frá sær á vegi o.a.

1. petti. Lutur, ið kann vera ferðsluni búgin, má ikki uttan lögregluloyvi verða settur ella lagdur burtur á vegi, uttan so at serlig viðurskifti gera hetta neyðugt. Hann skal, tá ið ikki ber til at beina hann burtur av akbreytini, altíð verða beindur so langt til viks, sum til ber. Hetta geldur eisini vegtilfar.

2. petti. Burtursettur ella burturlagdur lutur skal í lyklatendringartíð vera lýðuliga merktur við væl lýsandi lyktum við litleysum glasi, skipaðum í so stórum

forlangende at opgive navn og bopæl og har iövrigt pligt til at give de oplysninger om uheldet, som de er i stand til. Den paagældende har endvidere pligt til snarest muligt at anmelde det skete til politiet.

Stk. 2. Er færdselstavler eller signaler eller spærringer eller lygter ved vejarbejder bragt ud af stilling, skal föreren straks efter evne bringe afmærkningen i orden igen.

§ 27.

Forbud mod at hænge paa köretöj og mod leg m.v.

Stk. 1. Det er forbudt at springe op paa, at hage sig fast i et köretöj, under körsel, eller at hænge slæde, trækvogn, legevogn el. lign. efter köretöj.

Stk. 2. Der maa ikke paa vej laves glide- eller kælkebaner, ligesom der ikke paa vej maa drives leg eller spil til ulempe for færdselen.

§ 28.

Henstillen eller henlæggelse af genstande paa vej m.v.

Stk. 1. Genstand, der kan være til ulempe for færdselen, maa ikke uden politiets tilladelse henstilles eller henlægges paa vej, medmindre særlige forhold gör henlæggelsen nödvendig. De skal, hvor anbringelse udenfor körebanen ikke er mulig, altid anbringes saa yderligt paa denne som görligt. Dette gælder ogsaa vejmaterialer.

Stk. 2. Henstillede eller henlagte genstande skal i lygtetændingstiden være tydeligt afmærket med klart lysende lygter med ufarvet glas, der er anbragt i et

tali og á slíkan hátt, at skap lutsins sæst.

3. pétti. Glaspetti, seymir, rusk, olja ella annað, ið kann vera ferðsluni at vanda ella ampa, ella kann skala vegin, má ikki verða tveitt ella lagt eftir á vegi.

C. Fyriskipanir fyri akandi.

Meðan koyrt verður, skal nóg mikið varsemi og gætur vera givið hiuari ferðsluni, sbr. annars næstu greinir.

§ 29.

Pláss akfarsins á akbreytini.

1. pétti. Ilin akandi hevur skyldu, tá ið hann setur á gongd frá breytjaðri, og hvörja ferð hann skiftir ferðsluleið, eisini tá ið hann sneiðir yvir í aðra farbreyt, at vissa sær, at atburðir hansara er uttan vanda ella stórvegis ampa hjá teimum, ið aftaná koma.

2. pétti. Áðrenn fyrireikað og farí verður at sneiða, skal akstjórin ansa eftir, at hetta er uttan vanda fyri nakran, ið kemur aftanífrá. Bíðað má vera við at sneiða, til mótgangandi ferðsla er umfarin.

3. pétti. Vending og afturæftirkoyring kunnu einans verða framdar, tá ið hetta ber til uttan ónáðir fyri aðra ferðslu. Vendingar skulu verða framdar frameftir til vinstru, uttan so at kringumstöðurnar ikki loyva hetta.

4. pétti. Akfar, ið koyrir aftan á öðrum akfari, skal hava so stóra frástöðu frá tí, at eingin vandi er fyri at renna á, fyri tí

saadant antal og paa en saadan maade, at genstandens omrids angives.

Stk. 3. Glasskaar, söm og affald, olie eller andet, der kan medföre fare eller ulempe for færdselen eller som kan beskadige vejbanen, maa ikke henkastes eller efterlades paa vej.

C. Bestemmelser for körende.

Under körslen skal der udvises tilbörlig forsigtighed og tages fornödent hensyn til den övrige færdsel, jfr. iövrigt de följende paragraffer.

§ 29.

Köretöjs plads paa körebanen

Stk. 1. Det er en körendes pligt ved igangsætning fra kanten af körebanen og ved enhver ændring af færdselsretning, herunder ved svingning over i anden vognbane, at forvisse sig om, at manövren kan ske uden fare eller væsentlig ulempe for bagfra kommende færdsel.

Stk. 2. För forberedelsen og udförelsen af en svingning skal föreren passe, at manövren kan foretages uden fare for bagfra kommende. Svingning maa afvente forbikörsel af modgaaende færdsel.

Stk. 3. Vending og baglænskörsel maa kun foretages, naar det kan ske uden ulempe for anden færdsel. Vendinger skal ske forlæns tilvenstre, medmindre forholdene ikki tillader dette.

Stk. 4. Et köretöj, som körer bag et andet, skal holde saa stor en afstand fra dette, at der ikke er fare for paakörsel, saafremt

um fremra akfarið steðgar ella minkar ferðini.

5. petti. Uttan mun til fyriskipanirnar í 1-4 petti skal akfar, ið uýtt verður til vegarbeiði, við ti fyriliti, ið fyri neyðini er, verða koyrt so, sum neyðugt er arbeiðsins vegna.

§ 30.

Ferð.

1. petti. Akferðin skal eina og hvörja tíð verða lagað eftir viðurskiftunum viðvikjandi trygdteikanum hjá öðrum og má ongantíð verða meiri enn so, at akstjórin hevur fult vald á akfarinum. Bæði veg- og veðurviðurskifti, umstöðurnar við sjálvum akfarinum og lassi tess og ferðsluviðurskiftini í aðrar mátar skulu í hesum sambandi verða havd í huga. Tá ið koyrt verður í lyktatendringartíðini, skal eisini verða givið gætur eftir ljósviðurskiftunum. Ljósinum frá egnu lyktum akfarsins uppíroknaðum.

2. petti. Serliga hevur akstjórin skyldu at hava eina eftir kringumstöðunum hóskandi litla ferð

a) á fjölbygdum öki,
b) tá ið sýnið er vánaligt av ljósella veðurviðurskiftunum,
c) við krossvegir,
d) á vegbugi,
e) framman fyri sýn,
f) har yvirlitið á annan hátt er avmarkað,
g) tá ið vandi er fyri glámlýsi,
h) tá ið mött verður öðrum akfari á smölum veg ella smalari brúgv, har torfört er um at fara, ella tá ið koyrt verður við serstakliga rúgvismiklum lassi,

det forreste köretöj standser eller dets hastighed mindskes.

Stk. 5. Uanset bestemmelserne i stk. 1-4 maa köretöj, der anvendes til vejarbejde, under iagttagelse af den fornödne forsigtighed föres saaledes, som det er nödvendigt af hensyn til arbejdet.

§ 30.

Hastighed.

Stk. 1. Körehastigheden skal til enhver tid være afpasset efter forholdene med hensys til andres sikkerhed og maa aldrig blive større end at föreren bevarer fuldt herredömme over köretöjet. Baade vej- og vejrforholdene, köretöjets egen tilstand og belæsning og færdselsforholdene iövrigt skal herved tages i betragtning; ved körsel i lygtetændtisgstiden skal hensyn tiltige tages til belysningen, herunder lyset fra köretöjets egne lygter.

Stk. 2. Navnlig paahviler det föreren at holde en efter forholdene passende lav hastighed

a) i tættere bebygget omraade,
b) naar sigtbarheden er nedsat paa grund af lys- eller vejrforholdene,
c) ved vejkryds,
d) i vejsving,
e) foran bakketop,
f) hvor oversigten iövrigt er begrænset,
g) ved risiko for blænding,
h) ved möde ved andet köretöj paa smal vej eller bro, hvor passage er vanskelig, eller ved körsel med særlig omfangsrigt læs,

i) í háum föri,
j) har bussur er steðgaður ella er um at steðga við röst,
k) har småbörn eru stödd við vegin,
l) har arbeiði verður gjört á vegnum.

3. petti. Akferðin má kortini ikki fara upp um 25 km um tíman í Tórshavn og í bygdunum. Uttanbíggja má ferðin ikki fara upp um 40 km um tíman.

4. petti. Í ringum föri skal ferðin verða lagað so, at onnur, alt tað ber til, ikki verða fyri slettum.

5. petti. Annars kann, tá ið motordrivin akför verða skrásett ella góðkend, verða sett serstakt lágt mark fyri ferðini, um konstruksjón akfarsins ger hetta neyðugt. Tílíkt mark fyri ferðini kann eisini verða sett fyri serstök slög av hjólklæðingum og somuleiðis fyri akför á beltum, rullum og gangarum.

§ 31.

Möti og framumsókn.

1. petti. Tá ið akandi mötast, skuln báðir partar í góðari tíð halda nóg nikið til högru, og um neyðugt minka um ferðina. Er vegurin futvís stongdur, skal akfarið á tí akbreytarhelmingi, har stongsulin er, um neyðugt steðga á.

2. petti. Frammumsókn skal fara fram til vinstru. Frammumsókn kann einans verða framd, tá ið tað er uttan ampa hjá bæði frammanífrá og aftanífrá komandi ferðslu, og tá ið væl sýnt er um akbreytina.

Framumsókn má so m.a. ikki verða framd framman fyri ósýnum ella knöppum vegbugi og

i) i glat eller fedtet føre,
j) hvor bus holder eller er ved at holde ved et stoppested,
k) hvor smaabörn opholder sig ved vejen,
l) hvor der foretages arbejde paa vejen.

Stk. 3. Körehastigheden maa dog ikke overstige 25 km i timen i Tórshavn og bygderne. Udenfor disse maa hastigheden ikke overstige 40 km i timen.

Stk. 4. I daarligt före skal hastigheden afpasses saaledes, at andre saa vidt muligt ikke udsættes for tilsfænkning.

Stk. 5. Iøvrigt kan der ved indregistrering eller godkendelse af motordrevne köretöjer fastsættes en særlig lavere hastighedsgrænse, saafremt köretöjets konstruktion nödvendiggör det. Saadan hastighedsgrænse kan ogsaa fastsættes for særlige arter af hjulbeklædninger samt for köretöjer paa bælter, valser og medler.

§ 31.

Möde og overhaling.

Stk. 1. Naar körende möder hinanden, skal begge i god tid holde tilstrækkeligt til höjre og om fornödent nedsætte farten. Er vejen delvis spærret, skal det köretöj, i hvis körebanehalvdel spærringen er, om fornödent holde tilbage.

Stk. 2. Overhaling skal ske til venstre. Overhaling maa kun foretages, naar det kan ske uden ulempe for saavel forfra som bagfra kommende færdsel, og naar der er fri oversigt over körebanen. Overhaling maa saaledes bl. a. ikke ske foran eller i uoverskuelig eller brat vejkurve og

framman fyri ella í brekku, har ósýnt er. Framumsókn framman fyri ella á krossvegi kann einans verða framd, tá ið viðurskiftini loyva tað, og við mesta varsemi.

3. petti. Akandi, ið vil sökja fram um annan, ið ekur frammanfyri, skal, um viðurskiftini gera tað neyðugt, við ljóð- ella ljóstekni vissa sær, at hin er varur við, at hann ætlar at sökja framum. Hin frammanfyri akandi skal, tá ið hann verður varur við hin aftanífrá komandi, halda til högru og um neyðugt minka um ferðina ella steðga, so at framsóknin kann fara fram vandaleys. Hann, ið sökir framum, kann aftan á framumsóknina ikki halda til högru, fyrr enn hann er komin so langt fram um hitt akfarið, at það verður ikki fyri vanda ella verulegum bága.

§ 32.

Skylda at halda av.

1. petti. Tá ið akandi ferðast á akbreytum, ið fara hvör tvörtur um aðra, hevur akstjórin á tí akfarinum, ið hevur hitt akfarið til högru handar, skyldu at halda av. Av hesum sleppur kortini eingin akstjóri undan skyldunni at vera framúr gáin, tá ið koyrt verður av einum vegi yvir á ella tvörtur um annan. Serskakliga tá ið koyrt verður av vegi við littari ferðslu yvir á ella tvörtur um eyðsæð týðningarmeiri veg, skal hann, ið kemur av minnu vegnum, í góðari tíð minka um ferðina og í rímuligum mun lata ferðslunna á störra vegnum fara framvið fyrst.

2. petti. Har ið sett er serstök ferðslutalva við HALT, hevur hin

foran eller paa uoverskuelig bakke. Overhaling foran eller i vejkryds maa kun ske, naar omstændighederne tillader det, og under iagttagelse af særlig forsigtighed.

Stk. 3. Körende, der vil overhale en foran körende, skal, hvis det efter forholdene er nödvendigt, ved lyd- eller lyssignal sikre sig at denne er opmærksom paa, at han vil overhale. Den forankörende skal, naar han bliver opmærksom paa den bakfra kommende, holde til höjre og om fornödent nedsætte hastigheden eller standse, saaledes at overhaling kan ske uden fare. Den overhalende maa efter overhalingen ikke holde til höjre, för han er naaet saa langt frem foran det andet köretöj, at dette ikke udsættes for fare eller væsentlig ulempe.

§ 32.

Vigepligt.

Stk. 1. Naar körende færdes ad körebaner, der skærer hinanden, har föreren af det köretöj, som har det andet köretöj paa sin höjre side, vigepligt. Herved fritages dog ikke nogen förer for pligten til at iagttage særlig agtpaagivenhed ved körsel fra en vej ud paa eller over en anden, særlig ved körsel fra en vej med ringe færdsel ind paa eller over en aabenbart mere betydende vej skal den, som kommer fra den mindre vej, i god tid nedsætte hastigheden og i rimelig udstrækning lade færdselen paa den større vej passere først.

Stk. 2. Hvor særlig færdselstavle for STOP er anbragt, har

akandi, aftan á at hava steðga akfarinum, tá ið hann koyrir fram, treytaleysa skyldu at halda av fyri ferðsluni frá báðum síðum á tvörvegnum.

3. petti. Treytaleysa skyldu at halda av fyri ferðslu frá báðum síðum hevur somuleiðis hann, ið koyrir av traðarvegi, húsöki ella grundstykki, farstöðu ella röst, ella á annan hátt koyrir um gongubreyt.

4. petti. Frammanfyristandandi fyriskipanir galda ikki, tá ið annað fylgir av fyriskipanini í § 25.

§ 33.

Steðgur og farseting.

1. petti. Akfar má ikki verða steðga ella farsett á tílíkum stað ella á slíkan hátt, at öðrum stendst vandi av ella tað veldur ferðsluni óneyðugan bága. Akfarið skal verða sett við útjaðarin á akbreytini ella, um til ber, utlan fyri hann. Vanfarið akfar skal so skjótt, sum til ber, verða beint burtur av akbreytini.

2. petti. Tá ið stjóri akfarsins fer frá tí, skal á höviligan hátt verða vissað, at tað fer ikki á gongd ella verður burturflutt. Rossakfar má ikki standa fyrispent, uttan so at álítandi fólk heldur teymunum, ella tað á annan hátt er höviliga vissað, at rossini fáa ikki farið av stað við vogninum; hetta er eisini galdandi, tá ið rossakfarið stendur fyrispent í portri, túni ella á öðrum mstað, haðani frítt er fyri at koyra út á veg.

3. petti. Tá ið vognburðar verða upplatnar, farið verður út og skipað verður vöra í ella úr, skal hetta verða gjört á slíkan

dan körende, efter at have standset köretöjet, ved fremkörsel ubetinget vigepligt for færdsel fra begge sider paa den krydsende vej.

Stk. 3. Ubetinget vigepligt for færdselen fra begge sider har ligeledes den, der körer ud fra markvej, ejendom eller grundstykke, parkeringsplads eller holdeplads, eller som jövrigt foretager udkörsel over fortov.

Stk. 4. Foranstaaende bestemmelser gælder ikke i det omfang, andet fölger af bestemmelsen i § 25.

§ 33.

Standsning og parkering.

Stk. 1. Köretöj maa ikke standses eller parkeres paa saadant sted eller paa en saadan maade, at der opstaar fare for andre eller unödigt voldes ulempe for færdselen. Köretöjet skal stilles ved körebanens yderkant eller om muligt uden for denne. Havareret köretöj skal snarest muligt fjernes fra körebanen.

Stk. 2. Naar föreren af et köretöj forlader dette, skal det paa behörig maade sikres, at det ikke kan sætte sig i gang eller fjernes. Hestekköretöj maa ikke holde forspændt, medmindre en paalidelig person holder tömmerne, eller det paa anden maade er behörigt sikret, at hestene ikke kan löbe med vognen; det gælder opsaa, naar hestekköretöjet holder forspændt i port, gaard eller andet sted, hvorfra der er fri udkörsel til vej.

Stk. 3. Aabning af vogndöre, udstigning og paa- eller aflæsning skal foretages paa en saadan maade, at det kan ske uden fare

hátt, at tað er uttan vanda og ferðslunni so lítið bágið sum til ber.

§ 34.
Tekin og bákn.

1. petti. Tá ið neyðugt er, so at einki skal berast á, skal akandi við atláti ella ljóstekni ella á annan hóskandi hátt vara onnur við vandan. Kortini hevur akandi skyldu, áðrenn tekin ella bákn verður nýtt, at vissa sær, at atlan hansara kann verða framd uttan vanda ella stórvegis ampa hjá öðrum. Óneyðugur ella óeiriligur varningur er bannaður.

2. petti. Bákn fyri broyting ella ábending um ferðsluleið skal verða veitt í hvörjum föri, tá ið tað krevst sum vegleiðing hjá hini ferðslunni. Soleiðis skal verða báknað serliga tá ið sneitt verður yvir á aðra akbreyt, tá ið veni verður ella farið verður á gongd frá breytjaðri. Báknað verður við báknara, tá ið fyriskipað er, at slíkur skal vera á akfarinum, og annars við, at armur verður rættur út flatvegin til ta lið, ið sneitt verður, ella, tá ið hetta ikki ber til, á annan vel sjónskan og greiðan hátt. Bákningin skal vara, til byrjað er at seta á gongd ella at broyta ferðsluleið. Akstjórin skal ansa eftir, at báknarnýtslan heldur uppat, tá ið atlaða ferðslubroytingin er framd.

3. petti. Akandi, ið steðga ella knappliga minka um ferðina, skulu frammanundan týðuliga gera greiða atlan sína við at bákna fyri at boða teimum, ið aftaná koma. Hetta verður gjört

og til mindst mulig ulempe for færdselen.

§ 34.
Signaler og tegn.

Stk. 1. Naar det er nödvendigt for at afværge fare, skal körende ved lyd- eller lyssignal eller paa anden hensigtsmæssig maade henlede andres opmærksomhed paa faren. Det er dog en körendes pligt forinden brug af signal eller tegn at forvisse sig om, at en tilsigtet manövre kan ske uden fare eller væsentlig ulempe for andre. Unödvendig eller hensynslös signalgivning er forbudt.

Stk. 2. Tegn for ændring eller angivelse af færdselsretning skal gives, naar som helst det er paakrævet som vejledning for den övrige færdsel. Tegn skal saaledes navnlig gives ved svingning ind i anden körebane, vending eller igangsætning fra kanten af körebanen. Tegnet gives ved hjælp af retningsviser, hvor anbringelse heraf paa köretöjet er foreskrevet, og iövrigt ved, at en arm rækkes vandret ud til den side, til hvilken der skal svinges, eller, hvor dette ikke kan ske, paa anden tydeligt synlig og utvetydig maade. Tegngivningen skal ved vare, indtil igangsætning eller ændringen af færdselsretningen er paabegyndt. Föreren skal paase, at brug af retningsviser ophörer, naar den tilsigtede manövre er afsluttet.

Stk. 3. Körende, der standser eller hurtigt nedsætter hastigheden, skal forud til underretning for bagfra kommende ved tegn tydeligt tilkendegive deres hensigt. Dette sker ved brug af stop-

við at nýta steðglykt, tá ið álagt ella loyvt er at hava slíka á akfarinum, og annars við, at armur verður rættur upp, ella á annan væl sjónskan og greiðan hátt.

§ 35.
Ljósviðurskifti.

1. petti. Tá ið koyrt verður í lyktatendringartíð, skulu fyriskipaðu lyktir lýsa. Á fleiri samankoplaðum akförum er bert neyðugt at halda lýsandi aftanlykt aftast á vognaraðnum og spjaldralykt við aftasta nummar spjaldur á raðnum.

2. petti. Tá ið koyrt verður eftir vegi, sum liggur í nóg góðum ljósi, má skyggjandi ljós ikki verða nýtt; á vegi í fullum ljósi kunnu motorakför einans nýta stöðuljós. Blindandi ljós má heldur ikki verða nýtt, tá ið akför mötast; glæman skal vera niðurbend í hóskandi tíð.

3. petti. Fyriskipanirnar í 1. petti verða á líkan hátt nýttar, tá ið akfar í lyktatendringartíðini er steðgað ella farsett á akbreyt, sum ikki liggur í nóg góðum ljósi; steðgað ella farsett motorakfar skal einans nýta stöðuljós, eisini við stuttan steðg, og onnur akför kunnu heldur ikki nýta blindandi ljós. Viðfeslur vognur ella legu-vognur og somuleiðis viðfest aktól skulu, tá ið tey eru úrkoplað, umframt at hava reytt ljós afturefter eisini vera merkt við tveimum hvítum ljósum frameftir.

4. petti. Fyriskipanirnar í 2. og 3. petti um, hvussu motorakfar skal nýta stöðuljós, verða á líkan hátt nýttar um traktorar og onnur akför, ið hava serskilt stöðuljós.

lygte, hvor anbringelse heraf paa köretöjet er paabudt eller tilladt, og iövrigt ved, at en arm rækkes i vejret, eller paa anden tydeligt synlig og utvetydig maade.

§ 35.
Belysning.

Stk. 1. Ved körsel i lygtetændingstiden skal de foreskrevne lygter holdes tændt. Paa flere sammenkoblede köretöjer er det kun nödvendigt at holde baglygte tændt bagest paa vogntoget og nummerpladelygte tændt ved vogntogets bageste nummerplade.

Stk. 2. Ved körsel paa vej, der er tilstrækkelig oplyst, maa blændende lys ikke anvendes; paa fuldt oplyst vej maa motorköretöj kun benytte positionslys. Blændende lys maa ejheller anvendes ved möde med andet köretöj; nedblænding skal ske i passende tid.

Stk. 3. Forskrifterne i stk. 1 finder tilsvarende anvendelse, naar köretöj i lygtetændingstiden er standset eller parkeret paa körebane, der ikke er tilstrækkelig oplyst; et standset eller parkeret motorköretöj maa kun benytte positionslys, ogsaa ved kortvarig standsning, og andre köretöjer maa ejheller anvende blændende lys. Frakoblet paahængs- eller sættevogn samt paahængsredskaber skal foruden med rödt lys bagud være afmærket med to hvide lys fremad.

Stk. 4. De i stk. 2 og 3 indeholdte bestemmelser om motorköretöjs anvendelse af positionslys finder tilsvarende anvendelse paa traktor og andet köretöj, der er udstyret med særligt positionslys.

5. petti. Bannað er at nýta onnur ljós og aðrar endurskinslutir, enn ásett ella loyvt er í hesi lög ella í fyriskipanum sambæt henni.

§ 36.
Ferming akfarsins.

Frá inntökuni hjá teimum deyðsbúgvum, ið umrødd eru í 14. gr. nr. 4, verður drigið tað, sum í farna inntökuárinum er goldið eftirsitandi hjúni úr búnum sum renta ella vinningsbýti av búparti less og arvingum sum renta ella vinningsbýti av arvaparti teirra.

12. gr.

Hevur maður burturgivið ogn og lagt tað bond á, at inntökurnar fyri fyrst verða lagdar burtur til goymslu, og at tann ella teir, ið gávuna fáa, ikki fyrst fáa ræði á ognini við burturlögdum inntökum, skal hann upp í skattskyldugu inntöku sína telja tær inntökur av hesi ogn, sum í inntökuárinum eru komnar afturat og burturlagdar. Men um gávumáttakari hevur fingið avmarkaða atgongd til at taka út av inntökunum, tá hvílir inntökuskattskyldan viðvíkjandi teimum inntökum, ið hann hevur fingið ráð yvir, á honum sjálvum.

13. gr.

1. stk. Í hesi lóg merkir inntökuárið tað rokuskaparskeið, sum hin skattskyldugu inntöka er vunnin í.

2. stk. Inntökuárið er vanliga almannakkaárið. Skattskyldugum, ið hava sjálvstøðuga vinnu, og sum í hesi vinnu nýta serligt rokuskaparár, er loyvt at hava hetta til inntökuár, sbr. fyrimælini í 3. stk.

3. stk. Til at hava annað inntökuár enn tað, ið higar til er nýtt til uppgerðar av skattskyldugari inntöku, krevst loyvi frá líkningarráðnum frammun undan. Verður av tílíkari rokuskaparumskipan inntökuskeið

styttri ella longri enn 12 mánaðir, skal inntökan í hesum tíðarskeiði, tá hon er metti til skatt, verða hækkað ella lækkað til eina peningshædd, sum svarar til inntökuna í 12 mánaðum.

4. stk. Skattur fyri ávíst skattaár verður lagdur á á inntökuna í ti inntökuári, sum fellur saman við ella endar í næsta almanakkaári fyri byrjan skattaársins. Í serligum förum er likningarráðnum loyvt at loysa undan hesum fyrimæli.

2. kapitul.

Skattskyldan.

Nær hon tekur við og heldur uppat.

11. gr.

Fulla skattskyldu, t.e. skattskyldu viðvíkjandi allari inntöku annað hvört hon hevur uppruna sín í Föroyum ella ikki, hava

1) hvör maður, ið hevur fastan bústað ella tilhald í Föroyum, og hvör maður, ið dvölur her í bráðfeingi, tá hann innan fyri 12 mánaða tíðarskeið hevur dvölt her í minsta lagi 90 dagar samanlagt, annað hvört hann hevur verið burtur í millum ella ikki,

2) hvör ríkisborgari, sum ger tænastu umborð á föroyskum ella útlendskum skipi, tá hann seinast hevur havt fastan bústað her á landi ella tilhald, sum ger hann skattskyldugan, smbr. nr. 1, og hvör sum ger tænastu umborð í föroyskum skipi, tá hann í 12 mánaðir hevur verið minst 90 dagar, samfullar ella í skiftum, í hesi tænastu. Skattskyldan fellur burtur frá tí degi, ið hann, sum hetta varðar, sambæt sýndum skjölum er settur í inntökuskatt utan lands eftir teimum reglum, ið galda fyri fólk, búset har,

3) hvör maður búfastur í Föroyum, sum dvölur uttanlands í bráfengi. Tað er bráfengisdvöl uttanlands, so leingi maður ikki hevur dvalt har í 1 ár. Tó fellur skattskyldan burtur frá tí degi, ið hann sambart sýndum skjölum eigur at svara inntökuskatt utan lands sum búsettur har,

4) deyðsbúgv, sum verða tikin til almennar skiftisviðgerðar í Föroyum, ímeðan skiftið er ikki lukið,

5) tá tey eiga heima í Föroyum

a) skrásett partafelög og onnur vinnufelög, har sum eingin felagsmaður ábyrgist persónliga skuldbindingar felagsins, og sum býta avlopið í lutfalli við tann pening, sum felagsmenn hava lagt í felagið,
b) sínamillum tryggingarfelög, tó eins har tey tryggja uttan at skuldbinda seg til sínamillum ábyrgd, ella har ið tey umfram tryggingarstarvsemi hava einahvörja vinnu, har ímillum rakstur ella burturleigu av fastogn,
c) fastognalánsfelög, útlánsfelög og onnur veðlánsfelög eins og sparikassar og lánsgrunnar, har ið einans stovnar ella ábyrgdarmenn eiga lut í avlopinum; somuleiðis onnur tilík felög o.s.fr. í lann mun, tey umfram tað starvsemi, ið tógir teirra siga, hava einhvörja vinnu, har í millum rakstur ella burturleiga av fastogn,
d) onnur felög, legat og aðrar stovnanir í lann mun, tey hava inntöku av vinnu, har ímillum rakstur ella burturleigu av fastogn.

15. gr.

1. stk. Avmarkaða skattskyldu hevur hvör maður, sum ikki kemur undir fyrímælini í 14. gr. um fulla skattskyldu, men

a) sum handhavi ella samhandhavi rekur ella tekur lut í vinnu, ið hevur fastan rakstrarstað í Föroyum, ella sum á annan hátt eigur lut í avlopinum av slíkari vinnu, ella sum samlögumaður ella samútgerðarmaður eigur lut í samlögufelagi ella samútgerð, ið er skrásett í Föroyum,
b) sum ánari, samánari, nýtari ella inntökunjótari fær inntöku ella avgjald av fastogn í Föroyum,
c) hevur ikki tilhald ella bústað í Föroyum, og er stjórnar- ella nevndarlimur ella tilíkt í virki í Föroyum.

2. stk. Skattskyldan tekur einans um tilíka inntöku, sum nevnd er í 1. stk. Men um tilík vinna, sum umrödd er í a), verður tikin sum útbúgv frá virki skattgjaldarans uttanlands, tá skal til útbúgvið teljast tann vinningur, sum ellans má, at útbúgvið hevði havt, um tað var sjálvstöðug fyritöka, sum óheft gjördi keyp við hövuðsvirkið.

3. stk. Fulltrúi her á landi hjá honnu, ið avmarkaða skattskyldu hevur, ber eisini ábyrgd av skattgjaldingini.

4. stk. Felög ella stovnanir osfr., sum eiga heima uttanlands, eins og deyðsbúgv, ið eru til skiftisviðgerðar uttanlands, hava avmarkaða inntökuskyldu undir sonn treytum, ið áður eru nevndar í 1. stk. Reglurnar, ið ásettar eru í 2. og 3. stk. skulu her nýtast á sama hátt.

16. gr.

1. stk. Undantikin skyldu at svara skatt til landskassan og kommunuskatt eru

a) landskassi Föroya eins og tær stovnanir, har ið inntökur og útlögur eru fyriskipaðar í figgjarlógum lögtingsins, og virki og stovnanir, sum eru ogn lögtingsins, og sum verða rikin fyri landskassans rokning,

b) útlendskir sendikonstar og sendistarvsmenn í konsultænastu, tá ið teir ikki eru ríkisborgarar. Tó eru besir skyldugir at gjalda skatt av tilíkari inntökt, sum nevnd er í 15. gr.,

c) kirkjur, ið eiga sjálva seg, viðvikjandi kirkjuhúsum við grund og kirkjugarði,

d) lutafelög við óavmarkaðari ábyrgd limanna og sum bert skifta við limir sínar, og lutafelög, har bert landsyrkisfelög eru lutacigarar, og lutafelög, har bert slík yrkisfelög og hitt almenna eru lutacigarar.

2. stk. Landsstýrið kann gera av, at tey felög og stovnanir osfr., sum nevnd eru í 14. gr. nr. 5 b) — d) fáa fult ella avmarkað skatlafrælsi, um so er, at inntökan eftirstovnanarskipan, lögum ella samtyktum teirra hans skal verða nýtt til almenn góðgerin ella kirkjulig, manngóð, listarlig, vísindalig ella tílík endamál. Áður enn avgerð er tikin, fær landsstýrið sær álit í málinum frá kommunustýrinum, sum málið kemur við.

17. gr.

1. stk. Giftur maður verður skattaður av allari inntöku sini og inntöku konu hansara, tá tey búgva saman.

2. stk. Sigur giftur maður frá, at kona hans, sum eftir 1. stk. er skattað saman við honum, í inntökuárinum hevur havt inntöku av sjálvstøðugum virki ella av vinnu uttan fyri vinnu ella virki mansins, verður veittur honum frádráttur frá inntökuni við inntöku konunnar, tó ikki meira enn 2.000 kr.

3. stk. Kona, sum livir alsamt skild frá manni sínum, er sett í skatt serstakliga av allari inntöku sini, har í millum uppihaldspeningi frá manninum til hana sjálva ella til børn, sum eru hjá henni, og sum maðurin er skyldugur at uppihalda.

4. stk. Hjón verða metl at liva hvört sær alsamt, tá annað teirra hevur fastan búsluð ella slíðugt tilhald uttanlands, ella tá tey hava búð hvört sær í 2 ár í stytsta lagi, og hetta hevur fört til tað, at felags húshald er slitið, og annað hvörtstendst av endaligum sambúðarsliti ella yrki hjónanna.

18. gr.

1. stk. Börn, sum búgva heima, teirra mittum ætleidd börn, stjúkbörn ella fosturbörn, og sum í byrjan skattaársins hava fylt 16 ár, ella sum hava stöðuga inntöku av arbeiði sínum hjá uttanhýsisfólki, verða sett serstakliga í skatt av inntöku síni, her uppi í eisini inntöku av ogn ostr.

2. stk. Í öðrum förum enn teimum, ið nevnd eru í 1. stk., er inntökan hjá barni, ið heima býr, tald upp í skattskylduga inntöku húsbóndans.

3. stk. Tá inntökan hjá börnum, ið búgva heima og sjálv eru skattskyldug, verður mett til skatt, er ikki talt upp í tað, sum tey fáa til uppihald, all ella partur av tí, frá húsbóndanum, uttan so at hetta uppihald er viðurlag fyri vinnu í virki húsbóndans ella vinnu, og tað tí er drigið frá skattskyldugu inntöku hansara.

19. gr.

1. stk. Flytir maður higar til lands, verður hann skattskyldugur frá fyrsta degi í tí mánaðinum, sum kemur beint aftaná tilflyting hansara; teir persónar, ið umröddir eru í 14. gr. nr. 1, sum dvölja her á landi í bráfengi, verða eisini skattskyldugir frá fyrsta degi í tí mánaðinum, sum kemur beint aftaná tilflytingina.

2. stk. Flytir maður úr Föroyum, heldur skattskyldan uppat, tá hurtflytingarmánaðurin er úti: men í teimum förum, ið nevnd eru í 14. gr., nr. 2 og 3, heldur hon ikki uppat, fyrr enn tann dagin, hann er vorðin skattskyldugur uttan lands, ella fyrr enn tey 4 ár eru umliðin, sum nevnd eru í 14. gr. nr. 3.

3. stk. Allur skattur fyri tíðina fram til endan á tí mánaði, maður flytir út, kann krevjast goldin, áður enn skattgjaldarin flytir út, annað hvört hesin skattur eftir teimum vanligu reglum er fallin til gjaldingar ella ikki.

20. gr.

1. stk. Giftist í skattaárinum kvinna, sum var tald sjálvstöðugur skattgjaldari, tá skattur varð lagdur á, heldur skattskylda hennara uppat, tá skattaárið er úti.

2. stk. Stavar skattskylduga inntöka hennara av vinnu (her uppi í vinna fyri lön), og heldur henda vinna uppat, áður enn 3 mánaðir eru gingnir frá tí, at hon giftist, ella er inntöka hennara slík, at hon fellur burtur, av tí at hon giftist, tá skal henni kortini verða loyvt, um hon er gift í fyrra helmingi av skattaárinum, fyri seinna árshelming at krevja at fáa ta mettu skattskyldugu inntöku sína lækkaða so mikið, sum svarar til tær burturfalnu inntökur.

3. stk. Tá maður verður settur í skatt fyri næsta (næstu) skattaar aftaná giftingina, skal honum verða loyvt við somu treytum, sum í 2. stk. eru tilskilaðar, og á sama hátt at krevja, at tær inntökur, sum kom

hevur havt, áður enn hon giftist og sum eru at rokna til tær í 2. stk. nevndu, ikki koma upp í metingina av skattskyldugu inntöku hansara.

21. gr.

1. stk. Verða hjún skild til borð og song ella við fullum hjúnaskilnaði, verða tey hvört sær sett í inntökuskatt frá byrjanini á tí skattahálvári, tað kemur aftaná, at dómur varð uppsagdur ella skilnaðarloyvið givið. Konan verður tá sett í skatt av tí, sum hon í inntökuárinum hevur havt í inntöku av setogu, og somuleiðis av inntöku í inntökuárinum av tí parti úr felagsbúnum, sum verður skiftur henni, meðan maðurin verður skattaður av eftirverandi inntökum. Teir persónligu skattir, sum goldnir eru í inntökuárinum, verða dregnir frá inntökum mannsins og konunnar í lutfalli við stöddirnar á hesum inntökum. Sami allurður verður havdur, tá hjúnini verða sett í skatt fyri skattaárið eftir, har ið tað eru inntökur í tí parti av inntökuárinum, sum er fyri tann dag, tey skildust.

2. stk. Slíta hjún sambúð sína, tó tey hvörki verða skild til borð og song ella við fullum hjúnarskilnaði, verða tey sett í inntökuskatt hvört sær frá og við tí degi, skattaár byrjar, um sannað verður, at treytirnar fyri, at tey mugu roknast fyri at liva adsamt skild, sbr. 17. gr. 3. stk., eru fyri hendi, nú ið árið byrjar. Tá tey verða sett í skatt fyri hetta og í tí lutfalli, tað er neyðugt, eisini fyri næsta skattaárið, verður farið fram eftir reglunum í 1. stk. Flyta tey saman aftur, áður enn fyrsta skattaárið, ið tey eru sett í skatt hvört sær, er at enda komið, falla hesar skattsetingar burtur, og maðurin verður settur í inntökuskatt fyri alt skattaárið av samanlögdu inntöku hjúnanna.

22. gr.

1. stk. Doyr skattgjaldari, fellur skattskyldan burtur, tá tað skattahálvár, sum hann er deyður í, gongur út. Situr einkja eftir hann, skal hon verða sett í skatt serstakliga frá tí degi, næsta skattahálvár (skattaár) byrjar.

2. stk. Einkja ella einkjumaður, ið hava havt vanligt figgjarfelag við hitt deyða hjún, verða sett í skatt av allari inntöku hjúnanna í tí inntökuári, sum skattsetingin er gjörd eftir. Men um tað má ætlast, at inntöka einkju ella einkjumanns í hesum skattaskeiði, verður minni enn hin metta inntöka, vegna tess, at hitt hjúnið er fallið frá, tá skulu tey kunna krevja tilsvarandi lækking av hesi inntöku. Er kona skattgjaldara deyð í fyrra helmingi av skattaári, kann skattgjaldarin við sama treytum sum framman fyri nevndu og við gildi fyri seinna árshelming krevja metingina av inntöku sínu broytta, soleiðis at hann fær tilsvarandi lækking.

3. stk. Hevur serogn verið í hjúnalagnum, skal, tá eftirsitandi hjúnið

verður sett í skatt, verða sæð burtur frá inntöku hins deyða av egnari vinnu og eisini av seragn í inntökuárinum, sum meting er fyri. Ef kona skattgjaldara deyð í fyrra helmingi av skattaári, er loyvi skattgjaldaranum við gildi fyri seinna árshelming at krevja metingina av inntöku sínu broytta soleiðis at burtur verður sæð frá mögulígari inntöku konunnar av hesum sama slagi í inntökuárinum.

23. gr.

1. stk. Skattskyldan, sum tey í 14. gr. nr. 4 umræddu deyðsbúgv hava, byrjar frá og við tí skattahálvári, ið kemur aftaná, at búgvið er tikið til skiftis. Táið búgv kemur undir almenna skiftisviðgerð, stutt eftir at tann, ið arvin læt eftir seg, er deyður — t. e. at heimaskifti ikki hevur verið, ella at eftirlivandi hjún hevur ikki sitið við búnum óskiftum — verður skiftið roknað at vera tikið til viðgerðar, beinanvegin hann er deyður.

2. stk. Tá búgvið fyrstu ferð verður sett í skatt, verður skattskylduga inntökan ætlað til 5 pst. av teirri ogn, sum uppgjörd er til ognarmetingina. Somuleiðis verður atborið fyri næsta skattaár, um ikki í minsta lagi 6 mánaðir eru gingnir frá tí degi, skiftisviðgerðin tók við, og til tað roknskaparárið er lokið, sum er beint frammanundan álíkningini; tí um so er, verða inntökur búsins í hesum tíðarskeiði nýttar sum grundarlag fyri álíkningini, aftaná at tær hutfallsliga eru hækkaðar til 12 mánaða inntöku.

3. stk. Skattskyldan hjá teimum her umræddu deyðsbúgvum heldur uppat við endan á tí skattahálvári, tá búgvið verður lokið.

24. gr.

1. stk. Nýstovnað felög ella aðrar stovnanir, sum eiga heimstað her á landi, verða fyrstu ferð tikin við í skattsetingini fyri fyrsta skattaár aftaná, at fyrsta roknskaparskeið er umliðið, og verða skattað av allari inntökuni í hesum tíðarskeiði, sama hvussu langt tað er. Á samsvarandi hátt verður farið fram tá áður stovnað felög osfr., sum hava ikki verið skattskyldug higar til dags, taka upp virki, ið er skattskyldugt.

2. stk. Tá felög osfr., ið eiga heimstað her á landi, verða tikin av ella taka upp skattfrælst virki, stendur skattskyldan við, til tað skattaárið er úti, sum avtökan ella upptökan av skattfrælsum virki átti sær stað í. Umframt tað skal slíkt felag osfr. fyri sama skattaár verða sett serstakliga í inntökuskatt av inntökuni í tíðini frá útgongu roknskaparársins, ið síðsta vanliga skattseting felagsins er gjörd eftir, og til felagið varð tikið av ella tók upp skattfrælst virki. Likvidator, ávikavist nevndin, skal í seinasta lagi 4 vikur aftan á avtöku ella upptöku av skattfrælsum virki geva líkningarráðnum boð um hetta og leggja hjá yvirlit yvir inntökurnar í nevnda tíðarskeiði; hetta yvirlit verður gjört eftir

reglunum um sjálvuppgávu, um hesar annars eru hóskandi. Verður ikki boðað frá, soleiðis sum her er fyriskipað, verður likvidator, ávikavist nevndin dömd í sekt so stóra, sum landsstýrið leggur á. Likvidator, ávikavist nevndin, kann eisini verða tvingað til at lata inn áðurnevndu boð og inntöknuppgerð við at dömdar verða dagbölur, so stórar sum landsstýrið leggur á.

25. gr.

1. stk. Maður ella felag osfr., sum samlaert 15. gr. hava avmarkaða skattskyldu her á landi, verða skattskyldug frá tí degi, tey fáa viðkomandi inntökukeldu. Hin skattskyldugi verður fyribils fyri la tíð, ið eftir er av skattaárinum, settur í skatt av ætlaðari inntöku sini hesa tíðina úr áðurnevndu inntökukeldu. Á samsvarandi hátt verður farið fram, tá skattur verður áliknaður fyri skattaárið eftir; men um í minsta lagi 6 mánaðir eru gingnir frá tí degi, ið inntökukeldan fekst, og til roknskaparárið framman undan skattsetingini er úti, tá skal skattsetingin verða gjörd eftir inntökuni í hesum tíðarbili, eftir at hon er hækkað lutfallsliga, so hon svarar til inntökuna í 12 mánaðum. Har ið ætlað óktondin inntöka fyribils er havd sum grundarlag undir skattsetingini eftir reglunum frammanfyri, skal líkningarvaldið rætta hana, tá skattaárið er liðið. Til hesa rætting letur skattgjaldarin, áður enn 6 vikur eru liðnar eftir tað, at skattaárið var úti, inn uppgerð av teirri sonnu inntökuni í tí tíðarskeið, sum spyrst um; henda uppgerð kemur undir reglurnar um sjálvuppgávu og um ábyrgd av rangari sjálvuppgávu í tí lutfalli, tað er í samsvari við innihald teirra.

2. stk. Avmarkað skattskylda eftir 15. gr. heldur uppat, tá tann mánaðurin er liðin, sum inntökukeldan er uppgivin, avhend ella fellur burtur í, og — viðvlkjandi persónum — tá mánaðurin er úti, sum skattgjaldarin er deyður í.

Hvussu inntökuskatturin verður útroknaður.

3. kapitul.

Landsskatturin.

26. gr.

1. stk. Fyri börn, sum ikki eru 16 ár í byrjanini á tí almanakkaári, sum skatturin er lagdur á, og sum hava ikki sjálv evni til at kosta uppihald sítt, verða frá tí eftir 26. § útroknaða skatti teirra, ið fulla skattskyldu hava og nevndir eru í 14. § nr. 1—3, drignir frá 150 kr., tá inn-

tökan er minni enn 10.000 kr. og 100 kr. tá inntökan er 10.000 kr. ella hægri.

Við barn meinast hjúnabandsbarn, barn uttan hjúnabands, tá móðirin er skattgjaldarin, stjúkbarn, ættleitt barn ella fosturbarn, sum ikki er latið stöðugt fosturviðurlag fyri.

Er inntökan lægri enn 10.000 kr. og barnafrádrátturin hægri enn skatturin uttan barnafrádrátt, verður munurin útgoldin avvarandi skattgjaldara.

Gjaldstovan rindar peningin í desember mánaði.

2. stk. Áður enn inntökuskatturin verður roknaður, verður skattskylduga inntökan hjá öllum, ið skatt skulu gjalda hjá persónum, tá fyrst möguligir frádráttir sambært 2. stk. ern frá – javnað niður til fyrsta krónutal, ið er deilandi við 50 (stiginntökan).

27. gr.

1. stk. Teir í 14. §, nr. 1–4 nevndu óavmarkaðu skattskyldugu og teir í 15. § nevndu avmarkaðu skattskyldugu persónar lata skatt til landskassan eftir hesum stiga:

Er stiginntökan minni enn 4.000 kr., verður eingin skattur latin.

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður goldið kr.	av kr.	og av hinum
4.000	5.000	75	4.000	6 %
5.000	6.000	135	5.000	8 %
6.000	7.000	215	6.000	11,5%
7.000	8.000	330	7.000	13 %
8.000	10.000	460	8.000	14 %
10.000	15.000	740	10.000	16 %
15.000	20.000	1.540	15.000	25,5%
20.000	30.000	2.815	20.000	33 %
30.000	40.000	6.115	30.000	40 %
40.000	50.000	10.115	40.000	57 %
50.000	75.000	15.815	50.000	61 %
75.000	100.000	31.065	75.000	66 %
100.000	200.000	47.565	100.000	68 %
200.000	400.000	115.565	200.000	70 %
meira enn	400.000	255.565	400.000	73 %

2. stk. Tey í 14. §, nr. 5 nevndu felög, sum hava fulla skattskyldu, eins og tey í 15. §, 4. stk. nevndu felög, sum hava avmarkaða skattskyldu, lata skatt til landskassan bæði av inntöku og vinningsbýti á henda hátt:

Inntökuskattur verður goldin við 30 % av skattskyldugu inntökuni. Vinningsbýtisskattur verður goldin við 20 % av tí vinningi, sum er býttur felagsmonnum sambærl samtykt í viðkomandi inntökuári, her uppi í renta ella vinningur av býltum tiltaksgrunslutum.

3. stk. Áður enn skatturin hjá teimum í 2. stk. nevndu felögum verður roknaður, verða 5 % av goldnum partapeningi ella trygdarpeningi drigin frá.

4. stk. Gjaldstovan roknar landsskattin eftir tí lista, sum hon sambærr 16. gr. 1. stk. fær frá kommunala líkningarvaldinum og krevur hann inn, smbr. 83. gr.

4. kapitul.

Kommunuskatturin.

28. gr.

1. stk. Rætt til skattaálögu eigur kommuna, har ið skattgjaldarin í skattaárinum hevur fast tilhald fyri seg ella húski sítt. Hevur hann í skattaárinum fast tilhald í fleiri kommunum her á landi, skal hann gjalda skatt í hvörjari teirra, og verður hetta skattgjald eina mest sundurbýtt eftir tí, hvussu leingi hann hevur sjálvur hildið til í hvörjari kommunu.

2. stk. Fast tilhald, ið er styttri enn 3 mánaðir, verður ikki í nakrari kommunu roknað fyri at stovna skattskyldu, uttan so at hetta er framhald av föstum tilhaldi á sama stað áður, og skattgjaldarin alt samanlagt hevur bildið til har í 3 mánaðir í minsta lagi. Men hevur maður ikki í skattaárinum havt 3 mánaða fast tilhald í nakrari kommunu í landinum, tá hava kortini allar kommunur, har ið hann í skattaárinum hevur havt fast tilhald, rætt til at skatta hann eftir tí, sum hetta tilhaldið hevur verið langt, um so er, at tað var ikki styttri enn ein mánað.

3. stk. Teir, ið starva í sigling ella fiskiskapi, verða, um teir hava ikki bústað ella fast tilhald í nakrari kommunu, skattaðir í teirri kommunu, har ið teir vanliga halda til, tá teir ikki eru á sjónum. Ber ikki til at staðfesta tilíkan vanligan tilhaldsstað, skal skatturin verða goldin í teirri kommunu, sum skipið hevur heimstað, ella, um skipið eigur

heima uttanoyggja, í teirri kommunu, har sum hesir skattgjaldarir seinast hava verið skattskyldugir til tilhaldskommununa; í ivamálum hevur landsstýrið tá endaligu avgerðina.

4. stk. Persónar, sum í heilum skifta tilhald, gjalda skatt til ta kommunu, sum helst má vera hildin at vera heimakommuna teirra; í ivamálum hevur landsstýrið ta endaligu avgerðina.

5. stk. Deyðsbúgv verður skattað í teirri kommunu, har hin deyði seinast hevði skattskyldu til tilhaldskommununa.

29. gr.

Hevur maður tilhald í einari kommunu, av tí at hann er á sjúkahúsi ella sinnissjúkahúsi ella er settur í fangahús ella tilíkt, og uppfyllir hann samstundis tað, sum krevst til at verða settur í tilhaldskommunuskatt í aðrari kommunu í landinum, tá skal hann ikki gjalda tilhaldskommunuskatt í fyrnevndu kommunu. Hetta sama hevur gildir fyri tann, sum heldur til í eini kommunu, av tí at hann er har í almennum örindum og sum samstundis uppfyllir tað, sum krevst til at vera settur í tilhaldskommunuskatt í aðrari kommunu í landinum, uttan tá tað má ætlast, at hann fer at halda til í fyrnevndu kommunu í eitt heilt skattaár; verður hetta, tá verður hann skattskyldugur til hesa kommunu, tá fyrsta skattaár aftan á tilflutningin byrjar, og heldur skattskyldan við, til hon eigur at halda uppat eftir teimum vanligu reglunum í lógini.

30. gr.

1. stk. Hann, ið flytir til kommunu, skal gjalda skatt til hana frá fyrsta degi í tí mánaði, sum kemur beint aftan á tilflutning hansara, tó í ongum föri fyrr enn tað skattahálvár byrjar, sum hann hevur fingið boð um álikningina.

2. stk. Flytir skattgjaldari í skattaárinum burtur frá kommunu, skal hann gjalda skatt til hana til tann dag, ið hann verður settur í skatt til tilflutningskommununa, sbr. 1. stk., tó ikki lougur enn til skattaárið er á enda. Flytir hann til kommununa í síðsta lagi hin fyrsta í einum mánaði, hevur tilflytingarkommunan rætt til at fáa skattin fyri tann mánaðan. Men um hann flytir frá eini kommunu fyri tann fyrsta í einum mánaði og ikki flytir til nýggja tilhaldskommunu fyrr enn seinni í mánðunum, tá heldur skattskyldan til fráflytingarkommununa ikki uppat, fyrr enn hesin mánaður er á enda.

3. stk. Flytir skattgjaldari burtur úr Föroyum, skal hann, til skattskyldan heldur uppat, gjalda skattin til ta kommunu, sum hann var skattskyldugur, tá hann flutti burtur. Men um skattgjaldarin eftir tað, at hann lat bústað sín frá sær, framvegis er skattskyldigur her á landi sambart 11. gr. nr. 2, tá verða reglurnar í 28. gr., 3. stk. nýttar.

31. gr.

Skattgjaldari, sum uttan at hava yvirgivið fasta tilhald sítt í eini kommunu, eisini hevur havt fast tilhald í aðrari kommunu ein part av árinum, og sum har verður settur í ein lægri persónligan kommunuskatt fyri hetta tíðarbilið, skal til ta fyrnevndu kommununa gjalda munin millum tað skattgjald, ið hann hevur goldið í báðum kommununum tilsamans, og tann skatt, ið hann álti at goldið, hevði hann eina havt tilhald í fyrnevndu kommununi.

32. gr.

1. stk. Líkningin av kommunuskatti verður avgreidd av teimum kommunalu líkningarvaldunum.

2. stk. Tey kommunalu líkningarvaldini eru í bygdakommununum kommunustýrini og í Tórshavn líkningarnevndin.

3. stk. Reglurnar í lóg nr. 126 frá 27. mai 1908 um Tórshavnar býar kommunustýri, um hvussu líkningarnevndin verður vald og skipað og um samtyktir hennara, verða standandi í gildi.

4. stk. Landsstýrið kann loyva kommunu við størri fólkatali at skipa líkningarnevnd og hevur hon so skattalikningina í hondum. Tá slík líkningarnevnd verður skipað, fyrisetur landsstýrið reglur, sum samsvara teimum, sum galdandi eru um, hvussu Tórshavnar líkningarnevnd er vald og skipað, og um atkvöðugreiðslu og samtyktir hennara.

33. gr.

1. stk. Liknað verður eftir ogn og förimuni eftir teimum reglum, sum fyriskipaðar eru í hesi lóg og eftir skattasamtyktini, sum sambart henni er skipað í hvörjari einstakari kommunu.

2. stk. Barnafrádráttur verður veittur fyri tey somu börn, sum nevnd eru í 26. §, 1. stk. Frádráttur in, ið verður gjördur í skattleggjandi inntökuni, áður enn hon er hækkað ella lækkað eftir 21. §, skal vera eins fyri öll uttan mun til inntökuna, og skal hann fyri hvört barnið vera í minsta lagi 600 kr. og í mesta lagi 800 kr.

34. gr.

1. stk. Hvör kommuna skal hava skattasamlykt, sum kommunan skal gera eftir, tá liknað verður. Í samtyktini skal vera ásett, at kommunala líkningarvaldið skal nýta líkningarstiga fyri hækking ella lækking eftir förimunarviðurskiftum, og tað er einans loyvt at víkja frá tí ásetta stiga í óvanligum förtum. Landsstýrið staðfestir samlyktina eftir uppskoti frá kommunala líkningarvaldinum og tilmæli frá líkningarráðnum. Líkningarráðið staðfestir líkningarstigan eftir tilmæli frá kommunala líkningarvaldinum.

2. stk. Í samtyktini og líkningarstiganum, sum hoyrir afturat hesum, skal vera ásett:

1) at skattainntökan hjá hvörjum einstökum skattgjaldara skal verða hækkað (inntökur í störra lagi, lítið húski, serliga stóran vinning í ti farna árinum, serliga góð rekstrarlikindi) ella verða lækkað (inntökur í minna lagi, nógv börn, elli, sjúka, stór tap ella óhapp í ti farna árinum) við ávikavist upp til 40 % og upp til 70 %, men her skal tó verða ansað eftir, at tað, sum skattainntökan er hækkað ella lækkað við í teimum einstöku förum — eftir áðurnevndu umstöðum — kemur at svara til ta hækking ella lækking, ið skattgjaldarar fáa, sum hava tilsvarandi inntökur,

2) at inntökur, ið eru ikki störri enn 2.000 kr., er loyvt ti kommunala líkningarvaldinum at lækka eftir ætli, tó ongantið so nógv, at eingi skattgjald verður.

3. stk. Allar skattainntökur, sum eru funnar eftir hesum reglum, verða skattaðar við sonnu prosent (líkningarprosentini) fyri allar skattgjaldarar í kommununni. Prosentin er funnin á tann hátt, at öll tann peningshædd, sum kommunan leggur á í tilhaldskommununskatti, verður faldað við 100 og síðan verður útkoman býtt við teimum samantaldu skattskyldugu inntökuhæddum, afturá at tær eru hækkaðar ella lækkaðar eftir líkningarstiganum. Áður enn inntökuskattarin verður roknaður, verður skattskylduga inntökan hjá öllum skattskyldugum — hjá persónum, fáið fyrst möguligir frádráttir sambart 26. gr., 2. stk. og 33. gr. 2. stk. eru frá — javnað niður til fyrsta krónutal, ið kann býtast við 50. Líkningarprosentin verður tilskilað í skattakvittanini.

4. stk. Tey í 27. gr., 2. stk. nevndu felög verða skattað við líkningarprosent kommununnar uttan hækking ella lækking, sum tilskilað er í 2. stk. í hesi grein, men við frádrátti sambart 27. gr., 3. stk.

5. kapitul.

Sjálvuppgávan og hvat ið stendst av ti, at eingin er.

35. gr.

1. stk. Persónar, deyðsbúgv, felög og stovnunir osfr., sum koma undir reglurnar í 2. kapitli um inntökuskattskyldu skulu sjálv uppgeva inntöku sína í samsvari við reglurnar, sum her fylgja.

2. stk. Í seinasta lagi hin 1. januar krevja tey kommunalu likningarvaldini allar, sum skulu verða settir í skatt, at geva upp skattskyldugu inntöku sína, áður enn tær í 3. stk. tilskilaðu frestir eru úti. Hetta skal vera gjört í serligari kunngerð í öllum kommunnunum á tann hátt, sum vanliga er nýttur í kommununi. Í kunngerðini skal greidliga verða skilað til, at um skattgjaldari ikki gevur upp inntöku sína, verður farið fram, sum í 39. gr. er sagt.

3. stk. Sjálvuppgávan yvir inntökuna skal vera innlatin til kommunala likningarvaldið í seinasta lagi 15. januar; sjálvuppgávur teirra, sum eru skyldugir at föra góðkendar roknskaparbökur, ella sum álagt er at föra roknskap sambart 38. gr. 2. stk., ella uppgávur frá deyðsbúgvum, felögum, stovnanum osfr., skulu vera innlatnar í seinasta lagi 31. januar. Sjálvuppgávan er roknað fyri at vera innlatin rettstundis, tá hon í seinasta lagi áðurnevnda dag er fingin likningarvaldinum ella latin í postin.

4. stk. Í sjálvuppgávuni skal vera skilað til, hvussu stór inntökan er í teimum ymisku hövuðsinntökugreinum, og annars skulu allar sundurliðingar vera gjördar, sum landsstýrið fyriskipar eftir samráð við likningarráðið.

5. stk. Sjálvuppgávan yvir ognina, smbr. 63. gr., skal vera innlatin til likningarráðið eftir somu reglum og við somu freslum, sum nevnd eru í 3. stk. Í ognaruppgerðini skal — innfrant samantalda eginogn, annað hvört ognin er verulig, ella skuldhall er — vera tilík sundurliðing av ognum og skuldum, sum landsstýrið fyriskipar eftir samráð við likningarráðið. Tó skal ikki verða krevt, at ogn ella skuld viðvikjandi lánum ella fingnum vörum og veitingum skal vera sundurliðað, um so er, at hetta í bókum, sum sjálvuppgávan byggir á, er liðað sundur, sum tað eigur, smbr. 62. gr.

6. stk. Allir teir, sum sambart 38. gr. lata inn figgjarstand, og sum eiga ogn — av hvörjum slag hon so er — sum er ikki tald uppí figgjarslöðuna, skulu lata likningarráðnum yvirlit yvir hesa ogn við somu freslum, sum fyrisettar eru í 5. stk. og uppgjörd eftir teim reglum, sum fyriskipaðar eru í 63. gr.

36. gr.

1. stk. Oyðiblöð til sjálvuppgávur verða gjörd eftir skipan landsstýrisins, og tey verða gjögnum kommunala likningarvaldini í góðari tíð send öllum, ið eru at rokna fyri skattskyldug. At skattskyldugur fær ikki oyðublað sendandi, loysir hann ikki frá skyldu síni at lata inn sjálvuppgávu ella frá teimum avleiðingum, ið standast av ti, at maður ikki letur inn sjálvuppgávu.

2. stk. Annars skal kommunala likningarvaldið senda öllum teimum

sjálvuppgávublöð, sum verða skattskyldug í skattaárinum, so skjótt ið hetta verður likningarvaldinum kunnugt. Táið uppgávublað verður sent, skal likningarvaldið seta lagaliga frest til at senda sjálvuppgávuna aftur útfylta. Verður henda frest ikki hildin, verða nýttar reglurnar fyri, hvussu skal vera athorið, táið sjálvuppgávan ikki kemur rettstundis.

37. gr.

1. stk. Sjálvuppgávan skal vera undirskrivað sum gjörd eftir bestu saunföring.

2. stk. Fyri teir, ið eru yngri enn 16 ár, og teir, ið hava mist figgjarræði, skrivar verji undir. Hann, sum hevur fingið skipaðan lögverja, ella einkja, sum hevur fingið skipaðan tilsjónarmann, skrivar undir saman við verja.

3. stk. Skrivar fulltrúi undir sjálvuppgávu fyri hond skattgjaldara, ber hann, ið fulltrú gav, ábyrgdina, sbr. tó 75. gr.

38. gr.

1. stk. Allir teir, ið eru skyldugir at föra góðkendar handilsbökur, eins og deyðsbúgv, felög og aðrar stovnanir skulu lata fylgja sjálvuppgávuni rakstrarroknskap og figgjarstöðu í byrjan og enda rakstrarársins.

2. stk. Landsstýrið hevur heimild til eftir tilmæli frá likningarráðnum at ásetta, at teir, ið hava atvinnu, sum lóggávan annars ikki fyriskipar bókhaldsskyldu, skulu vera skyldugir at föra roknskap, sum ger teimum krövum fulnað, ið likningarráðið setur sum lægsta mark, og at teir, áður enn sjálvuppgávufresturin er úti, skulu senda likningarvaldinum rakstrarroknskap, ið er gjördur úr hesum roknskapartilfari.

3. stk. Um nú skattgjaldari, sum sambart tí, ið frammanfyri er ásett, er skyldugur at senda inn rakstrarroknskap og figgjarstand, ikki ger hetta, tá verður inntökuuppgáva hansara mett ógild, og hann verður at ganga undir tað, ið av hesum slendst viðvíkjandi skattseting og rætti til kæru. Kommunala likningarvaldið hevur umframt heimild til at seta frest, nær ið roknskapurin skal vera innsendur, og at leggja við 10 kr. í dagsekt frá tí degi, at freslin er úti, og til roknskapurin kemur inn: somuleiðis hevur likningarráðið eisini heimild til at tvinga innsending við at leggja á dagliga sekt. Sektin fellur til landskassan, og viðvíkjandi felögum ber hvör nevndarlimur ábyrgd fyri gjaldingini.

4. stk. Likningarvaldini hava heimild til at krevja teir, sum ikki koma undir reglurnar í 1. og 2. stk., men hóast at föra rakstrarroknskap ella regluliga gera upp árliga figgjarstöðu, at senda inn samsvarandi upplýsingar um inntöku teirra og figgjarstöðu. Verða upplýsingarnar ikki sendar inn, er heimilt at tvinga teir til tess við dagsekt í samsvari við regluna í 3. stk.

39. gr.

Um fullfiggjað sjálvuppgáva yvir inntöku ikki er latin inn rettstundis, eins og frammanfyri er áselt, verður farið fram á henda hátt:

a) Likningarvaldið metir inntökuna til eina peningahædd, sum er í minsta lagi 25 % hægri enn nevndin veit um ella ætlar. Verður inntökan ætlað, verður hon í minsta lagi sett 25 % hægri, enn hon var sett til skattaárið frammanmidan. Verður rettilig sjálvuppgáva send inn, áðrenn likningin er liðug, verður tann veruliga inntökan hækkað við 1 % fyri hvönn dag, ið liðin er frá tí, at innsendingarfrestin gekk út, tó í mesta lagi við 25 %.

b) Verður í rettari tíð fyri likningarvaldinum mælt ímóti metingini til skatt, tá kann hon bert verða hækkað í tann mun, hin metta inntökan er hægri enn tann veruliga inntökan, hækkað við teimum prosentum, ið tilskilaðar eru í a). Sama gildir, um avgerð likningarnevndarinnar verður skotin inn fyri landsskattaráðið.

c) Verður tann metingin, ið varð gjörd, tá ið skattur var álagdur, skotin til landsskattaráðið, uttan at mælt er ímóti álikningini í rettari tíð, sum sagt er í b), tá kann metingin bert verða hækkað í tann mun, hon er meira enn tann veruliga inntökan hækkað við 30 %, um so er, at kæran ikki verður afturtikin sambart 60. gr. 4. stk.

40. gr.

1. stk. Kommunala likningarvaldinum er heimilt, tá serligar grundir eru fyri hesum, at leingja frestina til at lata inn sjálvuppgávu við upp til einum mánað. Annars hevur bara likningarráðið heimild til at veita frest.

2. stk. Tær avleiðingar, ið nevndar eru í 38. og 39. gr., og sum standast av tí, ikki at lata inn sjálvuppgávu yvir inntöku ella ogn, ella av ikki rettstundis at lata inn roknskap, ker hevur likningarráðið heimild til at lina ella heilt lata falla burtur, tá skattgjaldarin sökir um hetta og til undanförslu hevur grund, sum ráðið telur fullgóða.

41. gr.

1. stk. Er skattgjaldari settur í skatt eftir reglunum í 38. og 39. gr., av tí at hann hevur ikki latið inn gilda sjálvuppgávu yvir inntökuna, og verður tað seinni upplýst, at veruliga inntöka hansara hevur verið stórri enn tann ætlaða, tá skal hann aftaná gjalda tvifaldan tann inntökuskatt, sum í vantar, um so er, at hann er ikki sekur til revsingar sambart 75. gr.

2. stk. Skattakrav, sum stendst av tí, at inntöka hevur ikki verið uppgivin, fyrnist ikki.

6. kapitul.

Starv kommunalumlikningarvaldanna.

42. gr.

1. stk. Fyri 15. januar skrivar kommunustýrið (likningarnevndin) eftir oyðiblað, sum likningarráðið stilar og sendir út, manntalslista yvir allar teir persónar, felög osfr., sum skulu verða sett í skatt til kommununa.

2. stk. Í serstaka deild á manntalslistanum verða settir allir teir persónar, felög, stovnanir og deyðsbúgv, sum ikki eiga heima her á landi, men sum í kommununi hava tílíka inntöku, sum nevnd er í 15. gr.

43. gr.

1. stk. Tað fyrsta, fresturin til at lata inn sjálvuppgávu er úti, fer kommunala likningarvaldið undir at meta til skatt allar teir, sum skulu gjalda skatt í kommununi. Í sambandi við hetta tekur likningarvaldið upp tað brævaskifti og heintar saman tær upplýsingar um inntøku og viðurskifti skattgjaldara, ið törva til, at álíkningin kann vera bein. Hevur likningarvaldið fingið upplýsingar, sum viðvíkja skattborgara í øðrari kommunu, so hevur tað skyldu skjótast gjörligt at beina hesar viðari til avvarandi likningarvald.

2. stk. Fyrstir av øllum verður formaður likningarvaldisins settur í skatt og síðani hinir limirnir. Limur skal geva seg frá, meðan hann sjálvur verður settur í skatt, sbr. her 59. gr.

3. stk. Nú verða teir mettir til skatt, sum hava latið inn sjálvuppgávu. Heldur likningarvaldið sjálvuppgávu vera ov lága, skal tað hoða skattgjaldaranum, um hann er staddur í kommununi, at koma á fund við likningarvaldinum at veita greinligari upplýsingar ella sannanir. Er øvvarðandi skattgjaldari staddur øðrar staðir her á landi, sum likningarvaldið veit um, tá verður hann biðin um, skrivliga um tað törvar, at geva tær neyðturvuligu upplýsingar og sannanir innan fyri tann frest, sum likningarvaldið setir. Er ikki kunnugt, hvar hann heldur til, ella dvölur hann uttanoyggja og hevur ikki fulltrúa her, sum er likningarvaldinum kunnugur, ber til at seta hann í skatt uttan fyrst at krevja hann eftir nærri frágreiðingum osfr. Er skattgjaldari ikki komin til fundar, ella hevur hann ikki áður enn áseltur frestur er úti, givið tær kravdu upplýsingar, ber til at seta hann í skatt, uttan at aftur er heitt á hann.

4. stk. Síðan verða hinir, ið skatt skulu gjalda, settir í skatt, og skal tá,

um fullgóðar upplýsingar um inntöku hjá hvörjum einstökum vanta, vera farið eftir tí, sum uppihald hansara og húski eftir stödd og húshátti má ætlast at kosta, eins og eftir tí, sum annars er kunnugt um fíggjarligu viðurskifti hansara, um stöddina á virki hansara og um úrtökuna. Her skal verða ansað eftir, at inntöka hjá skattgjaldarum, sum hava ikki latið inn fullfíggjaða sjálvuppgávu í rettari tíð, ella sum hava ikki latið fyriskipaðan roknskap fylgja sjálvuppgávuni, verður mett til skatt í samsvari við reglurnar í 39. gr.

5. stk. Til endans verða settir í skatt teir, ið hava avmarkaða skattskyldu, og sum sambart 42. gr. 2. stk. eru skrivaðir í serliga deild á manntalslistanum.

6. stk. Har í serstakar umstöður sum t.d. sjúka, deyði, trongligt hússetur og tílíkt, í einstökum förum tala fyri, at skattgjaldari ikki verður settur í skatt eftir allari skattskyldugu inntöku síni, kann líkningarvaldið umfram at lækka kommunuskattin sambart 31. gr. í serstökum fylgiskrivi til tað yvirlit, sum sambart 16. gr. verður sent gjaldstovuni, greiða nærri frá viðurskiftunum og mæla til, at landsskatturin verður ikki roknaður av allari inntökuni.

44. gr.

1. stk. Á lí í 42. gr. nevnda lista tilskilar kommunala líkningarvaldið fyri hvönn einstakan skattgjaldara hansara endaligu útkonnu inntöku og skattainntöku og tann álíknaða kommunuskattin. Í Tórshavn skal eisini verða sett tann peningahædd, ið er líknað á hvönn einstakan skattgjaldara sum húsaskattur sambart 31. gr. í lög nr. 126 frá 27. mai 1908. og í bygdakommununum verður sett tann peningshædd, ið er líknað á hvönn einstakan skattgjaldara eftir markaloti, sbr. 81. gr. í hesi lög.

2. stk. Í tíðini frá 1. mars til 11. mars — báðar dagar íroknaðar — verður tann í 1. stk. umræddi listi lagdur fram til alment eftirlit á högligan stað fyri íbúgvarnar, aftan á at helta framman undan er kunngjört soleiðis, sum vanligt er í kommununi. Á listanum skal vera sagt frá tí hóvi, ið skattgjaldari hevur til at kæra yvir álíkningina, sbr. 45. gr.

3. stk. Um so er, at skattgjaldari, ið uppfyllir treytirnar fyri at verða tikin við í teiri almennu skattaálíkningini í tilhaldskommununi, skuldi verið umlopin, tá líknað varð, verður hann settur í skatt serstakligo.

4. stk. Somuleiðis verður hann, sum aftan á skattaálíkningina verður skattskyldugur til eina kommunu — av tí at hann flytir til hana ella á annan hátt — serstakliga setur í tilhaldskommunuskatt til hesa kommunu, sbr. 30. gr. 1. stk. og 49. gr.

5. stk. Hevur kommunala líkningarvaldið ikki farið eftir sjálvupp-

gávu frá skattgjaldara, sum hann hevur latið inn rettstundis, skal tað í seinasta lagi 1. mars skrivliga siga honum frá hesum og gera hann kunnugan við metingina av inntøku hansara. Í hesari frágreiðslu verður eisini sagt frá, at mótmæli móti metingini skal verða sent kommunala líkningarvaldinum skrivliga í seinasta lagi 14. mars.

15. gr.

1. stk. Hvørjum tí, sum er settur í skatt eftir hesari lóg, er heimilt at kæra yvir tann kommunuskatt, ið er líknaður á hann ella annan mann, ella yvir, at onkur er umlopin. Kæran, ið skal vera skrivlig, verður latin inn til kommunala líkningarvaldið í seinasta lagi tann 14. mars. Kæra, ið er borin seinni, er til onkis. Er tað annar maður, ið kærir, skal hin skattskyldigi fáa høvi til at svara fyri seg.

2. stk. Í tíðini frá 14. mars til 20. mars viðgerð kommunala líkningarvaldið á einum ella fleiri fundum tær innkomnu kærur og sigur í seinasta lagi 20. mars skattgjaldaranum og er kæran latin inn av øðrum skattgjaldara, tá eisini honum frá avgerð sínu, sum kann verða skotin til landsskattanevndina, áðrenn 4 vikur eru liðnar frá tí, at hann fekk at vita av henni, smbr. 60. gr.

3. stk. Áðrenn líkningarvaldið fellur úrskurð um kærurna, letur það teir kærumenn, sum hava kravt tað og um maður hevur kært yvir aunan eisini teir skattgjaldarar, sum kært er yvir, fáa høvi til, eftir at hava fingið fundarboð frammanundan, munnliga at bera fram nærri upplýsingar og sannanir.

16. gr.

1. stk. Kommunala líkningarvaldið skal í seinasta lagi 25. mars senda Føroya gjaldstovu eitt eintak av tí skattalista, sum nevndur er í 11. gr. 1. stk.

2. stk. Í seinasta lagi 15. apríl sendir líkningarvaldið eitt eintak av hesum sama skattalista til líkningarráðið saman við øllum teimum skjølum, sum álíkningin er gjørd eftir, so sum sjálvuppgávur, rokuskapum, upplýsingum frá arbeiðsgevarum og øðrum, sum fingnir eru, o.a.m.

17. gr.

1. stk. Verður skattgjaldari, sum ikki stendur á manntalslistanum, sambart avgerð av hægri valdi at skriva á listan og seta í skatt, skal líkningarvaldið beita á hann um at senda inn sjálvuppgávu innan fyri hóskandi frest, sum líkningarvaldið setir. Hann verður so settur í skatt eftir somu reglum, sum galda fyri vanliga líkning, uttan tað at fresturin

fyri at senda líkningarvaldinum kæru yvir skattsetingina er 14 dagar frá tí, at hann fekk at vita av henni.

2. stk. Verður nú eftir tað, at skattalistin er gjördur, vegna kæru ella av aðrari orsök einhvör skattseting broytt, ella verður skattgjaldari settur í skatt, sum ikki stendur á skattalistanum, tá verða tær frágreiðingar um hetta, sum neyðugar eru, sendar líkningarráðnum.

18. gr.

1. stk. Spurningar um, hvussu skattgjaldið hjá persóni skal verða býtt millum tvær ella fleiri kommunur, avger landsstýrið.

2. stk. Tá skattgjaldari, sum framleiðis hevur tilhald, ið ger hann skattskyldugan í einari kommunu, fær sær fast tilhald í aðrari kommunu her á landi og verður har kravdur eftir persónligum kommunuskatti, hevur hann, um hann sýnir kvittan fyri at hava goldið skattin, ið var líknaður á hann til fyrnevndu kommunu, rætt til at krevja spurningin um, hvussu skatturin skal verða býttur millum báðar kommununar, avgjördan, áðrenn hann greiðir nakað skattgjald til hina kommununa fyri tað tíðarskeið, sum hann longu sambart sýnda kvittan hevur goldið skatt fyri til fyrnevndu kommunu.

3. stk. Hvör maður, ið ikki tykist vera skattskyldugur í eini kommunu, sum hevur sett hann í skatt, hevur loyvi til at leggja málið undir dómstólarnar.

7. kapitul.

Skattur til atvinnukommununa.

19. gr.

1. stk. Persónar, deyðsbúgv og felög osfr., sum eftir reglunum í hesari lóg hava skattskyldu til eina kommunu her á landi, sum tilhalds (heima-) kommunu, og sum hava atvinnu, sbr. 15. gr. 1. stk. og 2. stk. í hesari málsgrein, í aðrari kommunu enn tilhaldskommununi, tá skattaárið byrjar, eins og persónar, deyðsbúgv og felög osfr., sum hava heimstað í útlondum og hava atvinnu í einari kommunu her á landi, skulu av teirri innföku, sum tey hava havt av henni í innföktuárinum, sbr. 13. gr. gjalda skatt til atvinnukommununa eftir teimum reglum, sum her fylgja.

2. stk. Atvinnu í einari kommunu hevur tann persónur, lað deyðsbúgv ella felag osfr., ið

1) sum handhavi ella samhandhavi rekur ella á annan hátt eigur lut í avlopinum av einari vinnu (sum t.d. handverks-, verksmiðju, handils-, bank-, umboðssölu-, tryggingar-, arbeiðstakara-, sakförara-, læknavirki, vinnu sum veetur, vinnu við fólka- ella vöruflutningi ella náðnari vinnu, tílíkari og áðurnevndu), sum hevur samband við kommununa, av ti at har er fastur rakstrarstaður - útibúgv, handilsstova, framleiðslustaður, og annað fast arbeiðspláss, umboðsmaður, vörugoymsla, hvðan bíleggingar verða avgreiddir regluliga ella tílíkt,

2) nýtir, eigur ella hevur sum beneficium fastogu ella fær avgjald av slíkari,

3. stk. Verður slík atvinna niðurlögd í skattaárinum, skal tann vunningur, sum skattgjaldarin hevur havt í tíðini frá útgongu roknskaparársins, ið seinasta vanliga skattseting hansara (felagsins) er gjörd eftir, og til vinnan varð niðurlögd, vera serstakliga skattlagdur eftir teimum stigum og reglum, sum galdandi eru fyri skattaárið, tá avlökan er gjörd.

4. stk. Er atvinnan niðurlögd, áðrenn skattaárið byrjar, men skattgjaldarin í skattaárinum aftur fær vinnu av áðurnevnda slag í kommununi, verður atvinnan aftur skattskyldug, táið næsta fjórðingsár byrjar.

5. stk. Skattskyldan til atvinnukommununna er treytað av ti, at inniðka skattgjaldarans í hesari kommunu í inntökuárinum er í minsta lagi 1.000 kr.

6. stk. Rættin til at skattleggja ley í hesi grein nevndu felög osfr., eigur tann kommuna, sum felagið osfr. hevur hövuðsskrivstovu sína í, ella hðani felagið osfr. verður stjórnað (heimstaðarkommunan). Verður í skattaárinum, sum er, heimstaðurin fluttur úr einari kommunu aftur í aðra, eigur fráflutningskommunan skattarættin, til at skattaárið er úti. Í ivamálum ger landsstýrið av, hvör ið er at rokna fyri heimstaðarkommuna.

50. gr.

1. stk. Skyldan at gjalda skatt til atvinnukommununa fellur burtur.

1) tá persónlig skattskylda hansara, ið av varðar, annars heldur uppat, eftir reglunum í hesari lóg,

2) frá ti degi, at atvinnuskattskyldigur persónur, sum er fluttur til atvinnukommununa at halda til, verður settur í tilhaldskommununskatt til hana,

3) tá tað skattaárið, sum atvinnan annars heldur uppat í, er á enda, shr. tó 49. gr. 3. stk.

51. gr.

1. stk. Likningarvalið í atvinnukommununni áliknar atvinnuskattin

út frá tilíkari inntøku, ið nevnd er í 49. gr. 2. stk., og sum er vunnin í atvinnukommununi í inntøkuárinum.

2. stk. Atvinnuskatturin verður álíknaður eftir sonnu reglum og við sonnu stigum, sum tilhaldskommununskatturin er álíknaður eftir.

3. stk. Kommununala líkningarvaldið sigur bæði skattgjaldara og tilhalds- ella heimakommununi frá álíkningini.

4. stk. Til at nýta við viðgerðina er hin skattskyldugi — er tað felag osfr. stjórnin — skyldugur at geva líkningarvaldinum tær upplýsingar, ið tað heldur vera neyðugar til viðgerðina. Verða upplýsingarnar ikki latnar, setir líkningarvaldið frest til at senda tær inn og leggur við 10 kr. í dagsekt, sum fellur til landskassan.

5. stk. Bæði skattgjaldarin og tilhalds- ella heimakommununan hava rætt til at klaga yvir álíkningina eftir sonnu reglum, sum nevndar eru í 45. gr.

52. gr.

1. stk. Flytur nú persónur, sum bæði hevur fast tilhald í einari kommunu og tað í 49. gr. nevnda samband við hana og er settur í skeft til hana sum tilhaldskommunu, frá kommununni, tá ber til við serstakligari líkning at seta hann í atvinnuskatt til hana frá ti degi, at tilhaldskommununskattskyldan heldur uppat.

2. stk. Um einkja eftir skattgjaldara heldur fram við vinnuni, tá ber til við serstakligari líkning at seta hana í skatt til atvinnukommununa frá ti, at fyrsta skatahálvár aftaná andlátið byrjar.

3. stk. Atvinnuskattur skal í teimum förum, ið nevnd eru í 1. stk., verða lagdar á, áðrenn 3 mánaðir eru liðnir frá ti, at tilhaldskommununskattskyldan helt uppat, men í ti föri, sum nevnt er í 2. stk. áður enn 1 mánaður er liðin frá ti, at skattahálvárið, sum andlátið var í, gekk út. Annars verða reglurnar í 51. gr. um skattseting osfr. nýttar á samsvarandi hátt.

53. gr.

1. stk. Teir persónar, tey deyðsbúgv ella felög osfr., sum sambart ti, ið frammanfyri er ásett, eru sett í skatt í einari ella fleiri atvinnukommununum, hava ræt til at krevja, at av ti persónliga kommununskatti, ið er líknaður á tey í tilhalds- ella heimakommununi, gongur ein hóskandi frádráttur. Hesin frádráttur skal vera í luttfelli við tað, ið er lagt á tey í øðrum kommununum fyri tað tíðarskeið, ið hesin seinni skattur latur um. Líkningarráðið ger av ivamál.

2. stk. Er skatturin til tilhaldskommununa longu goldin, tá skatturin til atvinnukommununa sambart ti, ið frammanfyri er sett, verður endaliga ásettur, tá hevur skattgjaldarin í 3 mánaðir eftir hetta ræt til frá

tilhaldskommununi at krevja afturgoldnan tann part av tí skatti, ið hann hevur goldið henni, sum hann eftir 1. stk. hevði átt rætt til at draga frá.

54. gr.

Heldur stýrið í atvinnukommununi, at tann skattur, ið eftir reglunum frammanfyri kann verða álíknaður í atvinnukommununi, fer at vera so lítil, at hann lönir ikki ómakin og útreiðslurnar, ið standast av at siga frá krövum um skattaálögu og av at innheimta skattin, hevur stýrið loyvi til at sleppa hesum krövum.

Eftirlit og kærurvald.

8. kapitul.

Líkningarráðið.

55. gr.

1. stk. Til at hava eftirlit við skattaálíkningini er skipað líkningarráð.

2. stk. Líkningarráðið er skipað av 3 limum og 3 varamonnum, sum landsstýrið tilnevnir fyri 1 ár, og avger landsstýrið samstundis, hvör skal vera formaður, og hvör skal taka sæti hansara, um honum berst frá. Ein av ráðslimunum skal vera rokniskaparkönur, annar lögköntur og triðji fastognar- og byggikönur (og tilsvarandi fyri viðkomandi varamenn).

3. stk. Sonn reglur, sum gilda fyri, hvör hevur skyldu at taka við skipan í kommunustýri og líkningarnevnd, eru galdandi fyri limir líkningarráðsins.

4. stk. Limirnir fáa samsýning, sum landsstýrið ásetir.

5. stk. Til at veita líkningarráðnum og skrivstovu tess hjálp, tá biðið er um tað í málum viðvíkjandi serliga margbroyttum og truplum rokn-skapum, kann landsstýrið, um tað törvar, skipa serstaka rokuskapar-köna hjálp. Um kommunala líkningarvaldið biður um tað, kann líkningarráðið í slíkum föri gera av, at líkningarvaldinum verður veitt hjálp í tílíkum málum, sum omanfyri eru nevnd.

Hjálparmenn fáa lön, sum landsstýrið ásetir.

56. gr.

1. stk. Likningarráðið hevur eftirlit við skattalíkningini og ansar eftir, at hon í öllum kommununum fer fram á rettan og samlíkan hátt og í samsvari við reglurnar í hesari lóg og við skattasamlyktina hjá kommununi. Likningarráðið hevur heimild til at geva teimum kommunalu likningarvaldunum, rættleiðingar likningini viðvíkjandi, og eru tey skyldug at fylgja hesum rættleiðingum. Somuleiðis kann likningarráðið — bæði meðan liknað verður og seinni — áleggja likningarvaldunum í kommununum at likna skattin uppaftur fyri einstakar skattgjaldarar ella allar.

2. stk. Likningarráðið kann eisini, bæði meðan liknað verður og seinni, broyta skattsetingar, sum kommunalu likningarvaldini hava gjört. Skal skattseting verða hækkað eftir ætling má hetta tó verða gjört, áður enn 2 ár eru liðin frá ti, at skattaárið gekk út. Áður enn skattgjald verður broytt, skal skattgjaldarin og kommunala likningarvaldið fáa hövi til skrivliga at gera grein í hesum máli.

3. stk. Likningarráðið hevur rætt til, har ið lað er eftirynskjandi, at senda mann, ið hevur fingið umboð til tess, fyri seg á fundir, sum tey kommunalu likningarvaldini hava, tó við ongum atkvöðurætti. Ráðið hevur eisini heimild til at stevna hesum valdum saman til fundar fyri at geva leiðbeining um likningina.

4. stk. Mál viðvíkjandi eftirgjalding og sektarábyrgd sambart 13. kapitli verða viðgjörd í likningarráðnum, sum greiðir landsstýrinum lilmæli um, hvussu málið eigur at verða avgjört.

57. gr.

1. stk. Öllum teimum, sum sett eru í skatt eftir avgerð likningarráðsins, ella sum likningarráðið hevur broytt skattalálöguna hjá, er heimilt at kæra til landsskattanevndina, og skal slik kæru verða send skrivliga innan ein mánað eftir lað, at tey hava fingið boð um úrskurð likningarráðsins.

2. stk. Á sama hátt hevur kommunustýrið (likningarnevndin) rætt til at senda landsskattanevndini kæru yvir avgerð likningarráðsins.

9. kapitul.

Landsskattaráðið.

58. gr.

1. stk. Landsskattaráðið viðger skattakærur, soleiðis sum henda lóg sigur.

2. stk. Í landsskattaráðnum sita 5 lögtingsvaldir limir. Ráðið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni, og hevur sær fastan skrívara, sum skal vera lóg- og roknskaparkönur. Á sama hátt velur tingið 5 vararáðslimir. Starvslíð ráðslima og varamanna er 4 ár.

3. stk. Reglurnar í 55. gr. 3. 1., og 5. stk. hava samsvarandi gildi fyri landsskattaráðið.

4. stk. Limirnir fáa lön ella samsýning sum lögtingið ásetur.

59. gr.

1. stk. Eingin limur í teimum skattavaldum, sum nevnd eru í 32., 55. og 58. gr., má taka lut í viðgerð av skattseting, táið málið varðar

a) hann sjálvan ella hjúnafelaga hansara,

b) nakran, ið er skyldur ella svágur við hann í beinan ættlegg aftur ella niður eftir, systkin hansara ella hjúnafelagar teirra, ættleidd börn hansara ella fosturbörn, ella ættleiðingar- ella fosturforeldur hansara,

c) felag osfr., sum hann er nevndur- ella stjórnarlimur í.

2. stk. Eingin má samstundis vera limur í fleiri enn einum av teimum skattavaldum, ið nevnd eru í 32., 55. og 58. gr.

60. gr.

1. stk. Landsskattaráðið fellir úrskurð um kærur yvir tær metingar av tí skattskyldugu inntökuni, sum kommunalu líkningarvaldini ella líkningarráðið hava gjört.

2. stk. Skattgjaldari kann sjálvur senda inn kæru yvir skattseting. Tó kann skattgjaldari ikki skjóta skattseting til landsskattanevndina, hevur hann ikki í rettari tíð sent kæru um hana til kommunalu líkningarvaldið, sbr. 15. gr., uttan so at hann heldur fram, at hann er ikki skattskyldugur ella at tað eru gjörd slík formlig mistök, tá hann varð settur í skatt, at tey kunnu ógilda skattsetingina; í slíkum förum er loyvt at kæra, til júni mánaður er úti. Annars skal kæra vera send áður enn 4 vikur eru liðnar frá tí, at skattgjaldarin fekk at vita skatt sín.

3. stk. Eisini er hvörjum skattgjaldara heimilt at kæra um tað, at inntöka hjá öðrum skattgjaldara helst er ov lágt mett. Kæran skal vera latin inn, áðrenn júni mánaður er úti.

4. stk. Er kæra latin inn ov seint, ella eru treytirnar fyri at fella úrskurð um hana eftir lí, ið frammanfyri eru ásett, annars ikki til staðar, verður hon ikki viðgjörd. Tó er landsskattanevndini heimilt at taka kærur til viðgerðar í teimum förum, ið nevnd eru í 2. stk., og tá hon heldur fullgóð forföll vera, sjálvt um tær vanligu treytir fyri hesum eru ikki uppfyltar.

5. stk. Kæra um landsskattaálikningina verður send skattaráðnum

beinleiðis innan 1 mánað aftaná, at skattakravið er fingið, sunbr. annars reglurnar í hesari grein og í 61. gr.

61. gr.

1. stk. Kæra til landsskattaráðið skal verða send skrivliga og skal styðja seg við grundir og hjálögd sannunarskjöl. Tá hin kærandi ella skattgjaldarin, sum lut eigur í máli, biður um tað, skal hann ella umboðsmaður hansara sleppa munnliga fyri nevndini at siga fram sína áskoðan.

2. stk. Ráðið leitar sær ummæli likningarráðsins um ta innkomnu kæru. Áður enn likningarráðið gevur hetta, krevur tað kommunala likningarvaldið eftir áliti í málinum og roynir annars at fáa til vegar tær upplýsingar, ið törva til at fella úrskurð í málinum. Likningarráðið hevur annars, tá tað biður um tað, rætt til at lata mann í umboði sínum munnliga geva landsskattaráðnum ummæli sitt; sonuleiðis kann nevndin biðja likningarráðið senda mann fyri seg, tá nevndin hevur mál til viðgerðar.

3. stk. Í teim förum, har eingin sjálvsuppgáva hevur verið latin inn, men beinleiðis er ætlað um innföku hjá skattgjaldara, sendur tann meinigin við, ið kommunala likningarvaldið mögguliga likningarráðið, hevur gjört, uttan sa at hann, ið kærir, kemur við tilíkum upplýsingum og sannanum afturat, at landsskattanevndin av tí heldur seg sjálv kunna ætla um málið.

4. stk. Landsskattaráðið fellir úrskurð um ær innkomnu kærur.

Nevndin hevur heimild til at taka alla skattasetingina, sum hon er, upp til viðgerðar, sama hvat kærunevnið er.

Skylda at veita upplýsingar.

Fyrimæli um ábyrgd og revsing.

10. kapitul.

Heimildir likningarvaldanna til eftirlits.

62. gr.

Allir, sum reka vinnu og sum byggja sjálvuppgávu sína á rokuskapi, hava annað hvört teir eru skyldugir at föra góðkendar rokuskapabökur ella ikki, skyldu til at leggja fyri likningarvaldini tað rokuskapartilfar við fylgiskjölum, sum sjálvuppgávan er gjörd út frá, tá hetta verður kravt. Sonuleiðis hevur likningarráðið rætt til at sleppa at eftirkanna hetta tilfarið á staðnum.

11. kapitul.

Ognaruppgerðin.

63. gr.

1. stk. Öll, sum eru undir skattskyldu til inntökuskatt eftir hesari lóg, hava við teimum undantökum og markum, ið sett eru niðanfyri, skyldu til at lata líkningarráðnum, sbr. 35. gr. 5. og 6. stk. fullfiggjað yvirlit yvir allar ognir og figgjarlig rættindi teirra við tilskilan av virðinum.

Hesar ognir og rættindi eru millum annað:

1) fastognir (grundöki við húsum ella uttan, eins og hús á annara manns öki),

2) för,

3) vörur, ræevni, maskinur, innbúningur, innstöða og leysafe, ið nýtt er í vinnu,

4) bilar, motorhjólheslar, flogför, ross og heslavognar, ið skattgjaldarin nýtir sjálvur,

5) peningur og peningaígildi, útistandandi skuldir, skuldabröv, innogn í banka, sparikassa ella aðrari peningastovnan, partabröv, lutaprógv og aðrir parlar í felögum, somuleiðis, lista- og frímerkjasöva eins og skartgripir, táið virði teirra er meira enn 10.000 kr.

6) avhendilig forrættindi, rættur til at fáa landsskuld, arvafestigjald eins og onnur stöðug rættindi, ið eru avhendilig.

2. stk. Til ogn í deyðsbúgvi, sum er tikið til almenna skiftisviðgerð her á landi, teljast allar ognir eftir hin deyða, tilíkar sum omanfyri nevndar, sum eru tiknar til skiftis, tá ognin verður uppgjörd, soleiðis at við ognarmetingina verða ikki tald við öll tey virði, sum áður eru útlulað arvingum búsins.

64. gr.

Við meting á ognum er farið eftir hesum reglum:

1) Meting á fastogn skal fara eftir dagsprísi. Tá fastognin verður metl, skulu umframt grundöki og hús teljast við öll föst verk eins og múr- og naglfastur útbúnaður og tey rættindi og hinnindi, sum ognini fylgja. Tá víkur at landbúnaði, verður hartumframt talt við alt, sum liggur niðurfyri av sáð og fóðurevnum, tá uppgjörl verður, í tann mun hetta ikki er meira enn tað, sum törvar til at halda ognina í góðum rakstri. Við meting á hagajörð verður haguseyðurin taldur við, uttan tað sum er kenning. Eftir tilmæli frá líkningarráðnum ger landsstýrið, leg-

ið tað er hildið neyðugt, likningarvaldunum gjøllari leiðbeiningar viðvikjandi hvørjum meginreglum, tey skulu fylgja, og hvørji atferð, tey skulu hava við fastognameting.

2) Skip, skulu verða mett eftir søluvirði teirra. Við metingina verður serliga farið eftir, hvussu høgt skipið er tryggjað; men um keypsvirðið er hægri, tá avskrivingar, ið eru góðkendar í inntøknuppgerðini, eru frádrignar, tá verður farið eftir hesum virðinum.

3) Vørur, ræevni, hálv- og fullvirkaðar vørur skulu verða sett til sama virði, sum nýtt er, tá ið hin skattskylduga inntøkan verður uppgjørd, sbr. 5. gr. 3. stk. Í landbúnaði verða sáð og fóðurevni á goymslu einans mett serstakliga, har ið tey eru meira enn tað, sum tørvar til at halda ognina í góðum rakstri, sbr. nr. 1.

4) Maskinur, innbúningur og onnur rakstrargögn, sum eftir reglunum í 8. gr. 1. stk. koma undir skattfrælsa avskriving verða mett til keypsvirði, tá fyrst skattfrælsar avskrivingar eru frádrignar. Rakstrargögn, sum verða endurnýggjað yvir raksturin, verða mett til 50 % av keypsvirðinum.

5) Innistøðan á garðinum verður mett til miðalvirði, sum likningarráðið setir.

6) Flutningsfør, sum skattgjaldarin nýtir sjálvur, verða mett eftir søluvirðinum.

7) Útistandandi skuldir verða mettar til navnvirði, uttan so at tað má ætlast, at virðið er annað.

8) Virðisbrøv verða mett eftir gangvirði teirra, um so er, at tey verða almennt virðismett.

9) Onnur virðisbrøv verða mett eftir navnvirði, uttan so at ætlast má, at tey hava annað virði.

10) Avhendilig forrættindi eins og støðug rættindi, ið eru avhendilig, verða mett eftir ætlaðum søluvirði. Um hesi rættindi heimila støðuga árliga inntøku, verður virði á teimum metl til 20 ferðir ta árligu inntøkuna.

65. gr.

Til ognina verður ikki talt:

1) rættindi, sum eru treytað av einmhvørjum, ið er óvist,

2) ogn, sum er fingin í arv ella til gávu við tilskilan, at annan maður fær inntøkurnar fyri fyrst, og at hann, ið ognina eigur, ikki hevur ráð yvir henni, ímeðan hin fær inntøkurnar,

3) ogn, sum er fingin í arv ella gávu við tilskilan, at inntøkurnar fyri fyrst skulu goymast, og at hann, ið ognina eigur, hvørki skal hava ráð yvir ogn ella inntøkum,

4) nýtslurættindi ella krøv til tíðarviss gjøld, ið eru veitt skattgjald-

aranum alla ævi hansara ella styttri óvissa tíð sum ein rettur, ið ikki má avhendast, sum t.d. rettur til eftirlön, lívrentu o.l., leiguleysan bústað, hald, leypandi gjöld samhart vanlukkutryggingarsáttmála o.l.

66. gr.

1. stk. Við uppgerð av ogn eru skuldir skattgjaldarans frádragnar.

2. stk. Til skuld verður ikki talt:

a) borgskuldbindingar, sum enn ikki eru gjaldkomnar,

b) aðrar skuldbindingar, sum eru treytaðar av einhvörjum, ið er óvist.

3. stk. Virðið á skuldbindingum skattgjaldarans til at lata tíðarviss gjöld, ið eru persónligur rettur, sum ikki er avhendiligur, og sum eru veitt honum, ið eigur rettin alla ævi hansara ella styttri óvissa tíð, sum t.d. eftirlön, lívrentu o.ll. leiguleysan bústað, hald o.l., kann ikki verða drigið frá, tá ognin verður gjörd upp. Somuleiðis kann heldur ikki verða drigið frá virðið á ti nýtslurætti av sama slagi, sum nevndur er framanfyri, ið hvílir á ognini. Hetta er galdandi uttan mun til, um trygd er latin fyri, at skuldbindingin verður hildin.

67. gr.

1. stk. Ogn, sum maður hevur inntökurnar av ella nýtir, meðan annar maður hevur fingið ognarrettin, tó uttan at hava ráð á henni so leingi hin fyrrnevndi hevur inntökurnar ella nýtslurna, verður til helvtar tald uppí ogn hansara, ið inntöku ella nýtslu hevur.

2. stk. Men hevur hann, ið fær inntökurnar av ognini ella nýtir hana, sjálvur avkannað sær ognarrettin, tá skal ognin öll verða tald upp í ognaruppgerð hansara.

3. stk. Um maður hevur burturgivið ogn og lagt lað band á, at inntökurnar fyri fyrst verða lagdar til goymslu, og at tann ella teir, ið gávuna fáa, ikki fyri fyrst fáa ráð yvir ognini við goymdum inntökum, tá skal hann framleiðis telja ognina við teimum burturgoymdu inntökum upp í ognaruppgerð sína.

68. gr.

Ognin verður gjörd upp í einum lagi eftir standinum, fúið lað inntökuárið gongur út, sum inntökuskatturin er álagdur eftir, um ikki öðrvísi er skipað í hesari lög.

69. gr.

Ogn, sum gift kona eigur, ið lýr saman við mantli sínum, verður tald upp í ognaruppgerð hansara, tó at ongin er serogn-heitnæra. Somuleiðis

telur húsbóndin upp í ognaruppgerð sína ogn hjá börnum, sum eru yngri enn 16 ár, um so er, at inntökan av henni skal verða tald uppí skattskyldugu inntöku húsbóndans.

70. gr.

Um nú maður og kona skiljast til borð og song ella við fullum hjúnaskilnaði, tá innsendir hvört hjúnið sær ognaruppgerð, frá byrjanini á tí skattaárinum, ið kemur aftaná dómsuppsögnina ella skilnaðartoyvið. Maðurin dregur frá í uppgerð sínari tær ognir, sum tilkoma konuni, ella sum vóru hennara serogn, og sum hon nú ræður yvir einsamöll. Konan setir í ognaruppgerð sína tann part av felagsognini, sum maðurin hevur kunnað drigið frá í uppgerð sínu.

12. kapitul.

Skylda at geva upplýsingar um lönir o.a.

71. gr.

1. stk. Allir, sum hava havt löna fólk í vinnu eru, táið teir verða kravdir, skyldugir, ókeypis at geva líkningarvaldinum frágreiðing, möguliga á lista, um vunnar lönir, samsýningar o.l. og somuleiðis um pening, sum stendur inni hjá arbeiðsgeva, ella sum hesin hevur sett á serliga konto hjá löntakara, og sum er komin av innvunnari lön ella samsýning fyri arbeiði, all saman við tilskilan av navni og bústaði löntakarans. Har ið lönin er goldin av millummanni, og arbeiðsgevarin er ikki föður fyri at geva hesar upplýsingar, hvílir skyldan á millummanninum. Arbeiðsgevarin ella möguliga millummaðurin, er tí skyldugur, táið hann festir löntakaran, at krevja hann eftir navni og rettum bústaði. Landsstýrið kann döma hann, ið vanrökir hesa skyldu, í sekt.

2. stk. Öll almenn vald og stjórnir fyri peningastovnunum, tryggingarvirkjum, felögum, legátum og öðrum stovnunum eru skyldug at lata líkningarráðnum ókeypis í stuttum formi, sum kravt er, allar tær upplýsingar í starvi tess, og sum gjörligt er at geva í tó einans eftir avgerð landsstýrisins, táið tað er um fleiri ónevndar skattgjaldarar. Sonn skyldu hava sakförarar í viðurskiftum sínum við viðskiftafólk og klientar, og somuleiðis aðrir, sum hava í hondum figgjurevni í viðurskiftum hesum viðvíkjandi.

3. stk. Bankar og aðrir peningastovnanir og persónar, ið hava slíkan handil við almennum virðisskjölum, at teir eru skyldigir at halda bökur eftir lög, skulu, tá teir verða kravdir, geva líkningarráðnum tær upplýsingar um keyp og sölu av virðisskjölum, sum kunna vera til leiðbeiningar, táið skattur verður álagdur. Har ið keypari ella seljari er umboðaður av sakförara ella öðrum fulltrúa, hevur hesin skyldu at siga frá navni og bústaði hjá klienti sínum.

4. stk. Verksmiðjueigarar og heilsölumenn skulu, tá teir verða kravdir, geva líkningarráðnum upplýsingar um viðskifti sínt við einstakar nevndar viðskiftamenn ella útvegamenn, tó einans viðvíkjandi handli við slíkum vörum, sum keyparin ella útvegamaðurin ið spurt er um, selur ella framleiðir í vinnu ella virki sínum. Tað sama skulu aðrir atvinnumenn, táið landsstýrið ger av, at teir hava so miklan handil ella handla við ella framleiða slíka vöru, at teir eiga at verða settir javnt við hesar, ið frammanfyri eru nevndir.

72. gr.

1. stk. Dregur maður seg undan tí, at gera eftir kravi, ið er komið frá líkningarvaldunum samb. 62. og 71. gr., ger landsstýrið av, um hann er skyldugur til tess, og tað hevur heimild til, um tað gerst neyðugt at tvinga hann til at útinna hesa skyldu við at leggja á dagliga sekt.

2. stk. Letur maður ikki inn sjálvuppgávu yvir ogn sína í rettari tíð, soleiðis sum fyriskipað er í 35. gr., 5. stk. og 63. gr. 1. stk., ger hetta sjálvuppgávu hansara yvir innlökuna til onkis. Líkningarráðið broytir tá ta av tí kommunala líkningarvaldinum gjördu álíkning eftir reglunum í 39. gr.

73. gr.

1. stk. Í búgvi, sum skiftirétturin tekur til viðgerðar, skal skiftastjóri, áðrenn 2 mánaðir eru liðnir uftaná andlát, ókravdur upplýsa líkningarráðið um ognina, ið hin deyði lat eftir seg, táið hon er ikki minni enn 10.000 kr., og skal hann, táið kravt verður, geva tílíkar upplýsingar aftur at, sum kunnu fáast til vegar, fyri at fáa greiði á spurningunum, um sjálvuppgávurnar hjá hinum deyða hava verið rangar. Gerst tað neyðugt, hevur landsstýrið heimild til at leggja á dagsekt til at tvinga hann at útinna hesa skyldu.

2. stk. Áðrenn 2 mánaðir eru liðnir frá tí, at tær seinast kravdu upplýsingar eru fingnar, skal verða sagt búnum frá, at krav verður gjört í búnum sambart 79. gr. Fyrr enn áðurnevndu frestir eru úti, má búsviðgerðin ikki verða lokin, uttan so at líkningarráðið hevur váttað, at tílíkt krav verður ikki gjört. Verður ikki sagt búnum frá í rettari tíð, feltur samábyrgd arvinganna sambart 79. gr., 2. stk. burtur.

3. stk. Eisini skal skiftirætturin greiða líkningarráðnum frá innihaldinum, bæði í teimum tilsögnum um búskifti, sum arvingar senda inn, ið skifta sjálvir, og í teimum búsuppgerðum, sum eftirlivandi hjún, ið verða sitandi í óskiftum búgvi, skulu senda inn sambart regluni í kgl. boðhrævi nr. 468 frá 8. november 1921, 31. gr., um so er, at skuldleysur ognir í búnum eru meira enn 10.000 kr. Frágreiðingin, sum hann skal senda líkningarráðnum innan 2 mánaðir eftir tað, at arvatilsögnin ella búsuppgerðin er komin skiftirætti í hendi, skal, annaðhvört sum avskrift av tilsögnini og uppgerðini ella sum úrdrag úr teimum, geva upplýsingar um navni á hinum deyða, starv hansara og bústað, harumframt greiða frá arvaviðurskiftunum og geva greinligt yvirlit yvir ognir og skuldir í búnum.

74. gr.

Har ið líkningarvaldini sambart hesi lóg hava fingið rætt til at krevja upplýsingar, sum tey skulu nýta, tá skattur verður lagdur á, eigur landsskattanevndin sama rætt, táið hon viðger kærur.

13. kapitul.

Um revsing fyri at geva rangt upp o.a.m. og um eftirgjalding av skatti.

75. gr.

1. stk. Greiðir maður av svikalistum rangt frá, leggur burturúr ella gevur á annan hátt villleiðandi upplýsingar at fara eftir, táið skattskyldig inntöka hjá honum sjálvum ella hjá skattgjaldara, ið hann umboðar, skal verða mett til skatt, ella at nýta, táið skattur hansara sjálvs ella skattgjaldara, ið hann umboðar, sambart hesi lóg skal verða útroknaður, verður hann, annaðhvört hitt almenna hevur mist nakað av tí ella ikki, revsaður við sekt upp til 5 ferðir ta peningshædd, ið av svikum hansara er, ella um farið var eftir upplýsingunum, hevði verið undandrigin tí almenna. Men er hetta, ið frammanfyri er nevnt, einans gjört av stórum gáloysi, er sektin upp til 3 ferðir áðurnevndu peningshædd.

2. stk. Landsstýrið dømir sektina, uttan so at tað ella hin seki vil, at málið verður avgjört við rettargangi.

3. stk. Dómdur sektarpeningur sambart tí, ið frammanfyri er ásett, verður býtur millum teir kassar, ið hava rætt til skattin, eftir tí, sum hvör eigur av skattinum.

4. stk. Sekt sambart tí, ið frammanfyri er sagt, ber til at krevja úr deyðsbúgvi hansara, sum dómur var í sekt. Hevur hann, ið sektaður er, virkað fyri felag osfr., og hann ikki rindar sektina, ber til at krevja felagið osfr. eftir henni og, um tað gerst neyðugt, heinta hana inn við pauting.

76. gr.

1. stk. Tann, sum í starvi sínum hjálpir skattgjaldara at skriva sjálvuppgávu hansara til líkningarvaldini og undandregur ella roynir at undandraga tí almenna skatt, verður revsaður við hefti ella, um nókur avsakan er, við sekt. Hevur hann í hesum starvi bara sýnt stórt gáloysi, verður hann sektaður.

2. stk. Hann, sum annars við vilja veitir hjálp til at gera slíkt, sum nevnt er í 1. punktum í 75. gr., 1. stk. og hann, sum til nýlsu í eftirlitinum við skattaálíkningini, við vilja gevur rangar upplýsingar, ella sum við vilja hjálpir í hesum, verður revsaður við sekt, ella, er svikið serliga stórt, við hefti.

77. gr.

Í málum, har ið maður eftir 75. og 76. gr. má ætlast at koma undir revsing, er landsstýrinum heimilt at krevja, at lögreglan hjálpir líkningarvaldinum at fáá málið greitt.

78. gr.

1. stk. Hann, sum verður dómdur sekur í mishroli, sum rætt er um í 75. gr., skal umfram sektina, sum hann er ásett, gjalda aftaná tann skatt, sum hann hevur goldið ovlilið; tey felög osfr., sum umrødd eru í 11. gr. nr. 5 a) d), skulu haraftrat gjalda 6 % p.a. í rentu frá tí, at skattaárið, sum kravið geldur, gekk út.

2. stk. Sonn skyldu tit at gjalda skatt aftaná, sum er undandrigin, möguliga við rentu eins og nevnt er í 1. stk., hevur hvör tann, sum upplýst verður um, at hann hevur ikki verið skattaður av allari inntøku sínu, uttan at hann tó hevur gjört nakað til sakar, sum revsing er lögd við. Verður málið ikki við samtykki landsstýrisins avgjört við sátt og semjing, leggja dómstólarnir á, hvussu stóra skattaupphædd, hann skal gjalda aftaná. Táið renta av eftirkravinum verður roknað, skal möguligt eykagjald av tí sambart 11. gr. ikki vera lagt aftrat.

3. stk. Skattaeftirgjaldið ber til at innheinta við panting, og fyri henda eftirskatt geldur sami forgongurætturin sum fyri annan skatt.

4. stk. Eftirskatturin skal verða frádrigin í ti inntökuárinum, ið hann verður goldin.

79. gr.

1. stk. Kemur tað upp, aftaná at skattgjaldari er deyður, at hann hevur goldið ov lítlan inntökuskatt, tá skal altíð verða goldin tvíföld tann peningahædd, sum í vantar. Sama er, táið skattgjaldarin, meðan hann var á lívi, er søktur vegna eftirkrav eftir skatti, sum hann hevur goldið avfitið, men er deyður, áðrenn málið er lokið.

2. stk. Hesa áhyrgd, ið nevnd er í 1. stk. ber búgvið ella arvingarnir: arvingarnir tó einans í tann mun, teir hava tikið við arvi ella fingið arv greiddan frammanundan. Innanfyri hetta mark bera arvingarnir við ti undantaki, ið nevnt er í 73. gr., 2. stk. í síðstu málsgrein, samábyrgdina av ti, at skatturin verður goldin, og ber til at heinta hann inn við panting hjá teimum, um tað verður neyðugt. Lívir hjón eftir hin deyða, og figgjarevni tess ikki verða tikin upp í viðgerðina av búnum, tá ber til, um eftirskatturin ikki fæst goldin úr búnum ella frá arvingunum innanfyri tu vanligu pantingarfrest, at innheinta hann við panting úr ognunum hjá ti eftirlivandi hjúnunum í tann mun, kravið hevur sín uppruna frá skattaskeiði, táið hjúnini vórðu skattað saman.

3. stk. Dómstólarnir áseta tu peningshædd, ið skal verða goldin aftaná, um málið ikki við samtykki landsstýrisins verður avgjört við sátt og semjing.

4. stk. Tann skylda, ið sambart ti, ið frammanfyri er ásett, hvílir á búnum ella arvingunum, verður ikki skerd av innkallan til ognarar í búnum.

80. gr.

Tá viðurskiftini í stórum mæla fyri ti, soleiðis serliga tá trongd er, hevur landsstýrið heimild til at geva upp ella lækka eftirkrav, ið ásett er eftir 78. og 79. gr., somuleiðis eisini sektir og eykagjöld, ið álögd eru eftir reglunum í hesum kapitli. Viðvikjandi teimum eftirkrövum, sektum og eykagjöldum, ið falla til kommununna, hevur kommunustýrið sama heimild til at geva upp ella lækka.

14. kapitul.

Jarðaskattur.

81. gr.

Ta upphædd í peningi ella útreiðslum in natura, sum í bygdakommunnum hvör kommuna skal reiða út eftir teirri figgjarætlan, ið er nevnd í 21. gr. í lóg nr. 30 frá 28. februar 1872 um stýrið í bygdakommununum, liknar líkningarvaldið á fólkið í sókuini í einum lagi eftir markatali eins og eftir ogn og förimuni í ti hitfalli, sum landsstýrið ásetir fyri 3 ár í senn eftir uppskoti frá kommunnstýrinum.

Skattheintingin.

15. kapitul.

Kommunuskatturin.

82. gr.

1. stk. Kommunustýrið ræður sjálvt fyri, um tað innheintar kommunuskattirnar, ið lagdir eru á sambart líkningina, á tveimum ella fýra gjalddögum ella mánaðarliga (líknaðar sundur uppá 8, 10 ella 12 mánaðir). Ger tað av, at heinta skattirnar inn á tveimum gjalddögum, skal skatturin fyri fyrra og seinna hálvár falla til gjaldingar ávikavist 1. mai og 1. november. Men samtykkir tað at heinta skattirnar á 4 gjalddögum, skal skatturin fyri fyrsta ársfjórðing falla til gjaldingar 1. mai, fyri annan ársfjórðing 1. august, fyri triðja ársfjórðing 1. november og fyri fjórða ársfjórðing 1. februar. Og samtykkir kommunustýrið at innheinta skattirnar eina ferð um mánaðin, ger tað av, um ein tólvti partur skal verða goldin hvönn mánað ella ein tilsvarandi stórri partur í 10 ella 8 mánaðum, og eisini, hvörjir tveir, ávikavist fýra, mánaðir, ið skulu verða lagdir burturímillum; skatturin fellur til gjaldingar tann fyrsta í innheintingarmánaðinum.

2. stk. Skattgjaldararnir hava altið gjaldfrest til tann 3. í mánaðinum aftan á gjaldmánaðin.

3. stk. Tað stendur til kommunustýrið at gera av, um skattgjaldarar-

nir sknlu gjalda kommunustýrinum skattin ásetta tíð og á ávísum stað, ella um kommunustýrið skal heinta hann inn heima hjá skattgjaldaranum.

4. stk. Skattgjaldari, sum hevur ikki fast tilhald í kommununi, skal vísa kommunustýrinum á persón, búfastan í kommununi, sum skal inngjalda skattin fyri hann.

16. kapitul.

Landsskatturin.

83. gr.

Landsstýrið ger av nær landsskatturin fellur til gjaldingar eftir sonu reglum, sum settar eru í 82. gr. um innkrevjing av kommununskatti. Gjaldslovan innheintar skattin eftir reglum, sum landsstýrið fyrisetur.

17. kapitul.

Felagsásetingar.

84. gr.

1. stk. Hevur skattgjaldari ikki goldið skattin, áðrenn gjaldfresturin er úti, skal hann gjalda rentu av tí skatti, hann skyldar, ½ % fyri hvönn byrjaðan mánað eftir gjalddag.

2. stk. Skattin við afturatkomnum rentum er síðan roynt at heinta inn við panting eftir lógligari framferð. Har, ið maður hevur fingið gjaldfrest, er pantingarfrestin roknað at byrja frá tí degi, at skatturin skuldi verið goldin eftir tí givnu gjaldfrest.

85. gr.

1. stk. Er hin álíknaði skattur ikki goldin, áðrenn til her at krevja panting, kann innheintingarvaldið skrivliga snúgva sær til arbeiðsgevara hansara, ið skattin skyldar, ella, um skattgjaldarin er eftirlönaður, til grunnin tann, ið greiðir eftirlönina út, og krevja, at arbeiðisgevari

ella útgreiðari halda eftir so mikið av arbeiðislön skattgjaldarans ella av eftirlön hansara — her uppi í eisini av ti, sum hann fær goldið frammanundan av hesum lönveitingum — at tað rökkur at gjalda skattin við afturatkomnari revsirentu og útgjöldum. Hetta skulu teir gera fyrstu ferð,ið lön verður útgoldin eftir tað, at teir eru kravdir at halda lönina eftir, ella, um hetta ikki rökkur, tær næstu ferðir,ið lön verður goldin, til at tann skattur,ið er kravdur eftirhildin, er goldin. Tann peningur, sum er eftirhildin í einum álmanakkamánaði, skal verða avroknaður goldin innheintingarvaldinum fyri tann 15. í næsta mánaði. Á samsvarandi hátt er farið fram, táið eftirlönar- ella rentutrygging verður útgoldin. Somu skyldu sum arbeiðisgevarar til at halda lön eftir hava teir persónar, felög osfr., sum hjálpa til at útvega löntakarum arbeiði og sum avrokna við hann og rinda honum lönina, her uppií eisini forskot.

2. stk. Tó er onganlið loyvt at halda eftir meira enn fjórðing av arbeiðislön osfr. hansara,ið skattin skyldar, táið hetta er giftur skattgjaldari ella ógiftur skattgjaldari,ið hevur skyldu at uppihalda börnum, sum eru yngri enn 18 ár og búgva heinna, og ikki meira enn helming annars.

3. stk. Eisini skal arbeiðsgevari, áðreinn 14 dagar eru farnir, svara skrivligum fyrispurningum frá innheintingarvaldinum um, nær og hvussu nógvur peningur er útgoldin og eftirhildin av lön skattgjaldara í tænastu hansara, eftir tað at heitt var á hann, sum sagt er í 1. stk. Harumframt er tað skylda arbeiðsgevarans, táið skattgjaldari, sum hann er skyldugur at eftirhalda lön hjá fyri skatt,ið hesin skyldar, fer úr tænastu hansara, at siga innheintingarvaldinum frá hesum, áðreinn 5 dagar eru lidnir.

4. stk. Tann arbeiðsgevari ella eftirlönargrunnur ella tann tryggingarstovnur, sum ikki eftirheldur ella greiðir kravdan pening, sum fyriskipað er í 1. stk. steindur tilsvars fyri ti, sum hitt almenna av hesum missir.

5. stk. Verður landsskattur og kommunuskattur samstundis innheintaður við at eftirhalda í lön, so ber hetta ikki við sær, at tey mark, sum sett eru í 2. stk. í hesari grein verða hækkað.

6. stk. Verða tær skyldur,ið umröddar eru í hesi grein, úr lagi misröktar, verður hin seki sektaður.

7. stk. Táið skatturin verður kravdur inn hvönn mánað, nýtir innkrevjingarstovnurin bara, hvörja ferð eitt fjórðingsár er úti, at lata panta fyri tann skatt, sum er fallin til gjaldingar í fjórðingsárinum.

86. gr.

1. stk. Er ikki gjörligt, at innheinta skattin frá skattgjaldara, er loyvt innanfyri ta vanligu pantingarfrest at panta hjá konu hansara, táið

skatturin er álagdur fyri skattár, ið hjúnini vóru skattað saman, og somuleiðis er tá loyvt at krevja tvingað löneftirhald av hennara arbeiðslön osfr. sambart reglunum í 85. gr.

2. stk. Er ikki gjörligt at innheinta frá húsbóndanum tann skatt, ið er álíknaður honum, er loyvt at innheinta lann partin av skattinum, sum lutfallsliga fellur á inntöku, sum börn, ið eru skattað saman við húsbóndanum, hava vunnið inn, frá tí barni, sum avvarðar, í samsvari við reglunum í 1. stk.

87. gr.

1. stk. Deyðsbúgv og trotabúgv svara fyri skattaeftirstöðunum ávikavist hjá hinum deyða og hjá trotamanninum, táið tær eru fatnar til gjaldingar í teimum síðstu tveimum árunum undan andlát ella gjaldtrotinum. Henda skuldbinding verður ikki skerd av innkallan til ognarar í búnum.

2. stk. Fyri eldri skattaeftirstöðum svarar búgvið, um so er, at tann ella teir, ið bera ábyrgdina av búsviðgerðini, hava vitað um eftirstöðurnar, sama annaðhvört skuldainnkallan verður ella ikki.

88. gr.

1. stk. Har ið felag ella stovnan verður slitið, og ognin skift sundur millum parteigarar ella limir, uttan at nakar peningur verður lagdur burturfrá til at gjalda tann skatt, sum hvílir á felagsskapinum, skulu luttakarar ella limir í hesum felagsskapi vera skyldigir at gjalda skattin og bera samábyrgd av hesum, men tó einans fyri so mikið, sum teimum hevur lutast frá felagsskapinum.

2. stk. Um nú deyðsbúgv verður skift, og skiftið lokið, uttan at tann peningur, ið krevur til at greiða teir skattir, ið eru álagdir á búgvið, er lagdur burtur frá, tá bera arvingarnir samábyrgd av tí, at skattirnir verða goldnir. Bæði vanligir og serstakliga settir skiftstjórar standa tí almenna til svars fyri, at skatturin verður goldin til fulnar av búgvum, sum teir hava til viðgerðar.

89. gr.

1. stk. Eingin skattgjaldari kann koma sær undan skyldu sínt at rinda tann skatt, ið longu er fallin til gjaldingar, hvörki við at kæra yvir skattsetingina ella, um hann verður pantaður fyri skattin, við at mótmæla hjá pantifútanum, uttan so at vald, ið hevur heimild til tess, fyrst hevur gjört av, at broyting eigur at verða, ella at skattsetingin er gjörd av órættum ella er ógild.

2. stk. Har ið skattseting seinni verður broytt, verður tann peningshædd, sum skattgjaldarin skal rinda, rættað við at leggja aftrat ella

draga frá næstu ferð, skattur kemur til gjaldingar; táið tað gerst neyðugt, eisini við at gjalda aftur tað, ið inngoldið er, ella part av tí.

3. stk. Verður skattseting ella skattútrokning lækkað, eigur skattgjaldarin, annaðhvört skatturin er lækkaður av ávum hansara ella ikki, umfram krav til afturgjalding av skatti, ið hann hevur goldið ov mikið, eisini krav til 4 % í rentu p. a. av tí, ið hann hevur goldið ov mikið, roknað frá inngjaldsdegi.

18. kapitul.

Ymsir ásetingar.

90. gr.

1. stk. Líkningarvaldum, limum landsskattanevndarinnar og teimum valdum, sum skyldu hava at krevja og innheinta skattin, er bannað, undir ábyrgd eftir 152. gr. í almennari revsilóg, sbr. lógarkunngerð nr. 215 frá 24. juni 1939, at siga óviðkomandi frá nökrum tí, sum teir fáa at vita um inntöku- og ognarviðurskifti skattgjaldara og um tann áliknaða skattin, meðan teir rökja starv sítt sambart hesi lóg. Tað sama hevur gildi fyri tað hjálparfólk, sum arbeiðir hjá teimum.

2. stk. Teir sum hetta nertur, skulu, táið teir taka við starvi, skrivliga lova at halda hesa tagnarskyldu.

3. stk. Opinbering av tílíkum, sum eftir lóg ikki er loyvt at gera almannakunnugt, sbr. 47. gr. 2. stk., verður revsað við sektum. Ákærdur verður maður, bæði um skattgjaldarin ella um landsstýrið krevur tað.

91. gr.

Hevur kommunala líkningarvaldið ikki, áðrenn tær ásettu frestir eru lidnar, greitt úr hondum tað, ið henda lóg býður teimum at gera, er landsstýrinum heimilt at skuldbinda tey til tess og leggja við dagsekt fyri hvönn einstakan lim, sum ikki hevur fullgóða avsakan.

92. gr.

1. stk. Hvörjum tí manni, sum eftir greinunum 24, 2. stk., 38, 3. stk., 51, 4. stk., 71, 1. stk., 72, 1. stk., 73, 1. stk. og 91 verður dömdur í sekt, er

loyvt innan 14 dagar eftir, at hann hevur fingið boð um seklina, at krevja málið avgjört við lógsókn.

2. stk. Sektir eftir hesi lóg falla til landskassan, har ið annað ikki er ásett.

93. gr.

Fyri tann skyld, at persónar ella felög, sum eru skattskyldug eftir hesi lóg, eisini skuldu verið skrivað í skatt í öðrum ríki av sama inntöku, sum skattur er lagdur á í Föroyum, skal landsstýrinum vera heimilt at hjálpa til semingsgerð við annað ríki, til tess alvegis ella fyri ein part at komast undan hesi tvíföldu skattaálögu og til tess at játta tær broytingar í skattskyldunni eftir hesi lóg, sum til hetta törvast, um sama játtanir fáast afturímóti.

94. gr.

1. stk. Um persónar ella felög, sum eru skattskyldug eftir hesi lóg, eisini eru skattað aðrastaðni í kongarikinum av sama inntöku, sum skattur er lagdur á í Föroyum, tá skal landsstýrið hava heimild til at játta slíkar broytingar í skattskyldunni eftir áðurnevndu lógum, at tað kemst undan hesi tvíföldu skattaálögu, um samsvarandi játtanir fáast afturímóti.

2. stk. Landsstýrinum er eisini heimilt at seta reglur fyri, í hvat mát vald aðrastaðni í kongarikinum skulu kunna útinna tað eftirlit, ið umrött er í 12. kapitli.

95. gr.

Landsstýrið hevur heimild til, táið umstöðurnar almikið tala fyri tí, at geva eftir ella lækka landsskatt, sum er álíknaður eftir hesi lóg.

96. gr.

Kommunustýrinum er einans loyvt at geva eftir persónligan kommunuskatt í serligum förum, táið inntöka skattgjaldarans av sjúku, andláti, trongum hússetri, arbeiðsloysi ella öðrum líkum umstöðum hevur verið stóran mun minni enn tann inntökan, sum kommunuskatturin er líknaður eftir, og táið figgjarligu kor hansara annars mugu ætlast at vera til hindurs fyri, at hann fær goldið alt tað álíknaða skattgjaldið. Umsókn um at fáa skatt eftirgivnan skal verða send kommunustýrinum skrivliga, og avgerð um hetta skal - táið neyðturvuligar upplýsingar

eru fingnar til vegar — vera tikin á kommunustýrisfundi. Einans hendinga ferð er loyvt at geva eftir meira enn 2/3 av tí gjaldkomna skatti, sum umsókniu fatar um.

19. kapitul.

Nær ið lógin fær gildi.

Bráðfengisfyrimeli.

97. gr.

1. stk. Henda lóg kemur í gildi beinnavegin, og skattur sambart henni skal á fyrsta sinni verða lagdur á fyri skattárið 1963-64.

2. stk. Roknskaparárið hjá kommununum er frá 1. apríl 1963 at rokna tíðarskeiðið frá 1. apríl til 31. mars árið eftir.

3. stk. Tann mefing til kommunuskatt, ið er gjóved fyri árið 1962, skal eisini hava gildi fyri tíðina frá 1. januar 1963 til 31. mars 1964, soleiðis at teir skattgjaldarar, sum eftir teimum reglum, ið higartil hava verið í gildi eru skattskyldigir fyri hetta tíðarskeið, gjalda í kommunuskatti eina peningsbædd, ið samsvarar við tann skatt, ið er álagdur fyri árið 1962.

4. stk. Eftir tann 31. mars 1963 gera kommununurnar roknskap fyri tíðina frá 1. januar 1962 til 31. mars 1963.

98. gr.

1. stk. Í lóg fyri Føroyar nr. 30 frá 28. februar 1872 um stýrið í bygdakommununum verður í 21. gr., 1. málsgr. «sidste halvdel af december maaned» broytt til «sidste halvdel af marts maaned» og í 29. gr. 1. málsgr. «15. marts» broytt til «15. maj».

2. stk. Samstundis sum henda lóg kemur í gildi, ganga úr gildi:

1. Lóg fyri Føroyar nr. 76 frá 12. mars 1923 um kommunuskatt við broytingum sambart lóg nr. 46 frá 7. mars 1928, lóg nr. 36 frá 16. februar 1939, kunngerð nr. 62 frá 23. december 1942, kunngerð nr. 2 frá 11. mars 1947, kunngerð nr. 40 frá 27. december 1947, kunngerð nr. 11 frá 29. december 1947, lögtingslóg nr. 18 frá 31. august 1949, lögtingslóg nr. 21 frá 17. mars 1951, lögtingslóg nr. 71 frá 17. mars 1951, lögtingslóg nr. 71 frá 22. december 1951, lögtingslóg nr. 1 frá 26. mars 1953, gr. 2, 2. stk. í lög-

lingslóg nr. 5 frá 26. mars 1953, løgtingslóg nr. 6 frá 26. mars 1953, 1. gr. í løgtingslóg nr. 28 frá 20. november 1953, løgtingslóg nr. 4 frá 16. mars 1961, løgtingslóg nr. 11 frá 4. mai 1961 og løgtingslóg nr. 12 frá 4. mai 1961.

2. Lóg fyri Føroyar nr. 202 frá 15. mai 1939 um persónligan skatt til amtskommununna, við seinni broytingum.

3. Kunngerð nr. 69 frá 23. december 1911 um bráðfengis fyriskipanir fyri Føroyar um at stovna líkningarráð, við broytingum sambart kunngerð nr. 42 frá 11. december 1944.

99. gr.

1. stk. Øll mál viðvíkjandi skattgjaldi fyri skattaskeið framan undan skattaárinum 1963-64 og sakarábyrgd fyri upplýsingar, sum eru givnar, áðrenn henda lóg kom í gildi, skulu framvegis verða viðgjørd eftir teimum reglum, sum hava verið í gildi higar til.

2. stk. Tað, sum ásett er í 3. gr., 2. og 3. stk. smbr. 4. stk. hevur ikki gildi viðvíkjandi sölu ella avhending, ið fór fram fyri tann 1. apríl 1962.

3. stk. Verður nú tað, at reglan í 5. gr. 3. stk. um virðismetingina á vørum á goymslu osfr. ber við sær, at inntøka skattgjaldarans fyri fyrsta skattaárið, ið skattur verður lagdur á eftir hesi lóg, verður meira enn 20 % størri enn tað, ið inntøkan hevði verið, um hon var uppgjørd eftir teimum reglum, ið høvdu gildi higartil, tá skal tann partur av inntøkumunnum, sum gongur yvir 20 %, verða líkuaður sundur á hetta skattaári og tvey tey næstu, táið skattgjaldarin biður um hetta frammanundan 1. mars 1963.

100 gr.

Landsstýrið setir nærri reglur fyri, hvussu henda lóg skal verða framd og fær heimild til at gjalda tær útreiðslur, ið av hesum standast.

RED: 10 X



Nasjonalbiblioteket

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12